LANDSGRANNSKOÐANIN

FRÁGREIÐING
LATIN

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
»um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.«

MARS 2005

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo

1 INNGANGUR 5

2 FÍGGJARMÁL 7

2.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 7
2.2 FÍGGJARLÓGARMANNAGONGD (GL 1996/1 01-1) 11
2.2.1 TILKNÝTI TIL FÍGGJARLÓG, LANDSROKNSKAP O.A. 11
2.2.2 JÁTTANARSKIPANIN 12
2.3 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI (GL 2000/1 01-9) 13
2.3.1 UM TØRVIN Á AT ENDURSKOÐA ROKNSKAPARKUNNGERÐINA O.A. (GL 1996/1 01 –2) 13
2.3.2 ROKNSKAPARREGLUGERÐIR (GL 1997/1 01-5) 14
2.3.3 OGNARYVIRLIT (GL 2001/1 01-9) 15
2.3.4 "EGNAR" BÚSKAPARSKIPANIR - VANTANDI SAMSKIPAN OG STÝRING (GL 2001/1 01-9) 15
2.3.5 HØLISVIÐURSKIFTI/SMÁAR UMSITINGAREINDIR (GL 2001/1 01-9) 16
2.3.6 KT-TRYGD Á GJALDSTOVUNI (GL 1997/2 03 1-6) 17
2.3.7 LØNARUMSITING Á GJALDSTOVUNI (GL 1998/2 03 1-10) 19
2.4 FÍGGJARSTØÐAN 2003 20
2.4.1 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 20
2.4.2 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI O.A. 21
2.4.3 HØVUÐSTØL 22
2.4.4 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (GL 2003/3 01 2-5) 22
2.4.5 ÁOGN (GL 2001/3 01 3-6) 25
2.4.6 TØKUR PENINGUR (GL 2001/3 01 4-3) 26
2.4.7 SKULD (GL 2000/3 02 2-2) 28
2.5 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.A. 30
2.5.1 KASSAEFTIRLIT Á TOLL- OG SKATTSTOVU FØROYA (GL 2004/2 04 0-12) 30
2.5.2 ROKNSKAPAR- OG TRYGDARREGLUR (GL 1996/2 04 0-2) 31
2.5.3 INNANEFTIRLIT Í SAMBANDI VIÐ UMSITING AV SKATTI (GL 2000/2 04 2-2 OG 1999/2 04 3-3) 31
2.5.4 INNFLUTNINGSGJØLD (GL 2001/2 04 5-7) 32
2.5.5 SKRÁSETINGARGJALD (GL 2002/2 04 5-9) 33
2.5.6 FRAMLEIÐSLUAVGJALD (GL 1999/2 04 6-6) 36
2.5.7 FERÐAAVGJALD (GL 2002/2 04 6-8) 36
2.5.8 VEGSKATTUR (GL 2004/2 04 6-9) 36
2.5.9 INNKREVJING (GL 2001/2 04 9-1) 38
2.5.10 INNKREVJING AV VINNULÁNUM 39
2.5.11 KERVISSKOÐAN (GL 1996/2 04 9-2 OG GL 2005/2 04 9-4) 42
2.5.12 TRYGDARGRUNNURIN (GL 1998/2 09 1-2) 43
2.6 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR O.T. (GL 1998/2 17 1-2) 44
2.6.1 LÓGARGRUNDARLAG, EFTIRLØNARHUGTØK O.A. 44
2.6.2 SAMSKIPANARFRÁDRÁTTUR 48
2.6.3 JÁTTANAR- OG ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI 49
2.6.4 ÓHÓSKANDI BYGNAÐUR 53
2.7 HAGSTOVA FØROYA (GL 2003/2 03 9-10) 56

3 LØGMANSFYRISITINGIN 59

3.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 59
3.2 MENNINGARHJÁLP (GL 2003/2 02 1-2) 59

3.3 NORD ATLANTISK BRYGGE (GL 2003/2 02 1-2) 59
3.4 SAMSÝNING O.A. TIL LANDSSTÝRISMENN (GL 1998/2 02 9-2) 60
3.5 ALMENT UM STUDNINGSLÓGGÁVU OG STUDNINGSUMSITING (GL 1998/2 02 9-2) 60
3.6 SENDISTOVAN Í KEYPMANNAHAVN (GL 2000/2 02 2-4) 61

4 FISKIVINNA 63

4.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 63
4.2 SJÓVINNUFYRISITINGIN OG TRYGDARMIÐSTØÐIN (GL 2000/2 14 1-3) 64
4.2.1 SJÓVINNUFYRISITINGIN 64
4.2.2 TRYGDARMIÐSTØÐIN 65
4.3 FISKIVEIÐIEFTIRLIT/TYRLUTÆNASTA (GL 2003/2 14 2-3) 65
4.4 SJÓBJARGINGARSTØÐIN (GL 2004/2 14 2-4) 66
4.5 FISKIRANNSÓKNARSTOVAN (GL 2004/2 14 3-9) 66
4.5.1 ROKNSKAPARTØL/SAMANDRÁTTUR 66
4.5.2 ALMENT UM INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI 67
4.5.3 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI ANNARS 68
4.6 MAGNUS HEINASON (GL 2004/2 14 3-10) 69
4.7 LØNJAVNINGARSTOVAN (GL 2003/2 14 4-7) 69
4.7.1 EDV-VIÐURSKIFTI 69
4.7.2 MÁNAÐARLIGUR MINSTAFORVINNINGUR 69
4.7.3 SJÚKRATRYGD 70
4.7.4 FLUTNINGSSTUDNINGUR 70
4.7.5 TELEFONSTUÐUL 71
4.8 STUÐUL TIL GRANSKING, MENNING OG ROYNDIR (GL 2003/2 14 4-8) 71

5 VINNUMÁL 73

5.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 73
5.2 VANTANDI STJÓRNAN AV KUNNINGARTRYGD (GL 2001/1 02 0-2) 74
5.3 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (GL 2000/2 03 9-9) 75
5.4 MATRIKULSTOVAN (GL 2003/2 05 9-4) 76
5.5 ARBEIÐSEFTIRLITIÐ (GL 1997/2 09 2-1) 77
5.6 VINNUMÁLARÁÐIÐ (GL 2000/2 15 1-1) 78
5.6.1 VINNUMÁLARÁÐIÐ 78
5.6.2 KASSAEFTIRLIT Á FELAGSSKRÁSETINGINI 79
5.7 FERÐARÁÐ FØROYA (GL 2004/2 15 2-2) 79
5.8 ENDURGJALDSGRUNNUR ALIVINNUNNAR (GL 1998/2 15 3-2) 80
5.9 TYRLUTÆNASTAN (GL 1998/2 15 3-2) 81
5.10 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ (GL 2004/2 15 3-5) 81
5.10.1 LÓGARGRUNDARLAG 81
5.10.2 GRANNSKOÐAN AV EINSTØKUM MÁLUM/VIÐMERKINGAR 82
5.10.3 UMSITINGARÚTREIÐSLUR 82
5.11 LANDSVERK (GL 2002/2 16 1-2) 83
5.11.1 EDV-NÝTSLA 83
5.11.2 VIRKSEMI/INNTØKUR 84
5.11.3 INNANHÝSIS SKRÁSETINGAR/-ROKNSKAPUR 85

6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 87

6.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 87
6.2 FÓLKASKÚLIN (GL 1996/2 10 2-1) 91
6.3 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (GL 2001/2 10 9-5) 91
6.4 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (GL 2001/2 10 9-7) 91
6.5 FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR (GL 2000/2 10 6-5) 92
6.5.1 LÓGARGRUNDARLAG 92
6.5.2 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI 92
6.6 BÓKAMIÐSØLAN (GL 2000/2 10 6-5) 94
6.7 EFTIRÚTBÚGVING AV YRKISLÆRDUM (GL 2000/2 10 1-2) 94
6.8 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (GL 2003/2 10 1-3) 95
6.9 YRKISSKÚLAR OG AÐRIR SKÚLAR (GL 2000/2 10 3-4) 95
6.10 STUDENTASKÚLIN OG HF-SKEIÐIÐ Í EYSTUROYNNI (GL 2003/2 10 3-8) 96
6.11 STUDENTASKÚLIN OG HF-SKEIÐIÐ Í HOYDØLUM (GL 2003/2 10 3-9) 96
6.12 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (GL 2004/2 10 4-11) 97
6.13 FØROYA SJÓMANSSKÚLI (GL 2003/2 10 4-9) 97
6.14 SAMSKIPAN AV VIRKSEMINUM HJÁ SJÓMANSSKÚLUNUM (GL 2000/2 10 4-5) 98
6.15 UNDIRVÍSINGARSKYLDA HJÁ SKÚLASTJÓRUM (GL 2000/2 10 4-5) 98
6.16 FØROYA LÆRARASKÚLI 99
6.17 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (GL 2003/2 10 4-10) 100
6.18 ALTJÓÐA SKRIVSTOVAN (GL 2004/2 10 9-8) 100
6.19 ÚTBÚGVINGARSTUÐUL OG -LÁN (GL 2000/2 10 9-6) 100
6.20 FØROYA FORNMINNISSAVN (GL 2002/2 11 2-9) 101
6.21 FØROYA LANDSSKJALASAVN (GL 2003/2 11 2-10) 102
6.22 FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN (GL 2003/2 11 2-11) 102
6.23 HAVLÍVFRØÐILIGA ROYNDARSTØÐIN BIOFAR (GL 1999/2 11 2-5) 103
6.24 LISTASAVN FØROYA (GL 2002/2 11 2-8) 103
6.25 STUÐUL TIL MENTAN OG ÍTRÓTT (GL 2000/2 11 9-1) 104

7 OLJUMÁL 105

7.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 105

8 ALMANNAMÁL 107

8.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 107
8.2 ALMANNASTOVAN (GL 2004/2 07 1-5) 110
8.3 EDV-VIÐURSKIFTI Á ALMANNASTOVUNI (GL 2004/2 07 1-5) 110
8.4 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (GL 2000/2 07 2-5) 115
8.5 STUÐUL TIL UMSORGANARARBEIÐI FYRI PENSJÓNISTAR (GL 2002/2 07 2-7) 115
8.6 VIÐBÓT TIL ÁVÍSAR PENSJÓNISTAR (GL 2003/2 07 2-8) 117
8.7 AVLAMISVEITING (GL 2003/2 07 2-8) 118
8.8 ALMANNAPENSJÓNIR (GL 2004/2 07 2-8) 118
8.9 PERSÓNLIG VIÐBÓT TIL PENSJÓNISTAR (GL 2004/2 07 2-8) 121
8.10 SAMDØGURSSTOVNURIN RÓKIN (GL 2000/2 07 3-5) 122
8.11 DAGPENINGAÚTREIÐSLUR (GL 2000/2 07 3-6) 123

8.12 ANSINGARSAMSÝNING (GL 2002/2 07 3-7) 124
8.13 FORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2003/2 07 3-9) 125
8.14 STUÐUL TIL HEILIVÁG (GL 2003/2 07 3-9) 128
8.14.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI V.M. 128
8.14.2 UMSITING AV STUÐULI O.A. 128
8.15 BARNAFORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2004/2 07 3-10) 130
8.16 STUÐULSFÓLKASKIPANIN FYRI VAKSIN (GL 2004/2 07 4-18) 131
8.17 STOVNAR OG SAMBÝLI INNAN ELDRA- OG SERFORSORGINA (GL 2002/2 07 4-14) 132
8.17.1 LÓGARGRUNDARLAG UM STOVNSETAN OG RAKSTUR 132
8.17.2 FÍGGING AV BYGGIKOSTNAÐI 133
8.17.3 GJALD FYRI UPPIHALD 136
8.17.4 GJALD FYRI UMLÆTTING 136
8.17.5 ALMANNAPENSJÓN Á STOVNUM 137
8.17.6 GJALD FYRI UMLÆTTING OG HEIMAHJÁLP 138
8.18 HEIMARØKTIN OG ELDRARØKTIN Í SANDOYNNI (GL 2004/2 07 4-15) 138
8.18.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI OG ONNUR VIÐURSKIFTI 139
8.18.2 GJALD FYRI HEIMAHJÁLP 139
8.18.3 STEVNUMIÐ FYRI HEIMARØKTINA 140
8.18.4 ARBEIÐSREGLUGERÐ 140
8.18.5 ÁRSFRÁGREIÐING 141
8.18.6 LØNARUMSITING 141
8.18.7 SERLIGAR VIÐMERKINGAR UM ELDRARØKTINA Í SANDOYNNI 142
8.19 SERFORSORGIN (GL 2004/2 07 4-16) 142
8.19.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI OG ONNUR VIÐURSKIFTI 143
8.19.2 KUNNGERÐIR 143
8.19.3 LØNARUMSITING 144
8.19.4 VARD VERKSTØÐ 144
8.20 FØROYINGAR Á STOVNI Í DANMARK O.A. (GL 2004/2 07 4-16) 144
8.21 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (GL 2004/2 07 4-17) 146
8.21.1 LÁN/STUÐUL TIL AT KEYPA AVLAMISBILAR 147
8.21.2 VEGSKATTUR 147
8.21.3 LÁN TIL BÚSTAÐARBROYTINGAR 148
8.21.4 ALMENT UM HEIMILDARSPURNINGAR 150
8.22 ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ (GL 2003/2 07 1-4) 150

9 FAMILJU- OG HEILSUMÁL 151

9.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 151
9.2 SJÚKRAKASSAR (GL 2001/2 08 3-1) 157
9.3 HEILBRIGDIÐ OG BLÁKROSSHEIMIÐ (GL 1996/2 08 4-1) 157
9.4 KOMMUNULÆKNA- OG SKÚLALÆKNASKIPANIN (GL 2001/2 08 4-2) 158

10 LØGMÁL 161

10.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-10) 161
10.2 ÍTRÓTTAVEDDING (GL 2001/2 02 1-1) 161
10.3 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN (GL 2001/2 02 1-1) 162
10.4 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI HJÁ KOMMUNUNUM (GL 1996/2 02 3-1) 162

1 INNGANGUR

Yvirskipaðu reglurnar um løgtingsgrannskoðararnar og um grannskoðanina av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Tað er álagt løgtingsgrannskoðarunum at leggja landsroknskapin fyri tingið til samtyktar. Sambært grannskoðanarlógini byggir arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum á frágreiðingar frá roknskapargrannskoðanini. Roknskapargrannskoðanin verður útint av Landsgrannskoðanini og av løggildum og skrásettum grannskoðarum, sum sambært § 12 í grannskoðanarlógini skulu lata avvarðandi landsstýrismanni og síðani løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitið av grannskoðanini. Við støði í hesum frágreiðingum leggja løgtingsgrannskoðararnir landsroknskapin fyri tingið til samtyktar.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing sína, í sambandi við at Løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2003 fyri tingið til samtyktar.

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,

at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,

at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Fyri hvørt málsøki hava vit í frágreiðingini greitt frá um frávik ímillum játtan og nýtslu, og síðani hava vit tikið samanum úrslitið av grannskoðanini av stovnum og skipanum. Frágreiðingin er løgd fyri avvarðandi landsstýrismann, og vit hava tikið við møguligar viðmerkingar og fráboðanir um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til.

Í frágreiðingini hava vit eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti eru komin í rættlag, ið vórðu umrødd í seinasta frágreiðing okkara 26. mars 2004.

Tórshavn, 11. mars 2005

Leivur Harryson

2 FÍGGJARMÁL

2.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Vísandi til landsroknskapin 2003 er meirnýtsla á summum kontum.

t.kr.

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	Meirnýtsla
Toll- og Skattstova Føroya (rakstrarjáttan)	59.184	59.864	680
Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan)	-	1.792	1.792
Umsiting av Trygdargrunninum (rakstrarjáttan)	100	216	116

3.15.1.04. Toll- og Skattstova Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 59.184 t.kr. Meirnýtslan er 680 t.kr. Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 59.684 t.kr. netto. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin lækkað 500 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skal hetta *"síggjast sum ein fyrsti rationaliseringsvinningur frá tollautomatiseringini."*

Spurdur, hvussu komið varð fram til júst hesa upphædd, havandi í huga meirnýtsluna við árslok, greiddi landsstýrismaðurin í januar 2005 frá, at í september 2003 varð mett, at 500 t.kr. fóru at vera í minninýtslu. Sambært landsstýrismanninum kann tað vera trupult hjá einum stórum stovni sum Toll- og Skattstovu Føroya at raka júst ta upphædd, ið er játtað á fíggjarlógini, og tí verður miðað ímóti heldur at hava ein minninýtslu, enn eina meirnýtslu. Tað eydnaðist tó ikki í 2003.

Sambært landsstýrismanninum kom ein skannari til tolleftirlitið, ið var bílagdur í 2002, ikki fyrr enn í 2003. Hetta hevði við sær eina meirútreiðslu, 240 t.kr., í 2003 og somu minninýtslu í 2002. Harafturat vóru øktar útreiðslur 382 t.kr. til m.a. Elektron, orkukeyp, postgjøld og óvæntaðar viðlíkahaldsútreiðslur.

3.15.1.23. Umsiting av ogn og skuld (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini var eingin játtan. Meirnýtslan er 1.792 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan ikki um nakra veruliga meirnýtslu, men munurin stavar frá broyttari roknskapermannagongd. Hesar útreiðslur eru undanfarin ár skrásettar sum útreiðsla á høvuðskontu 20.50.1.01. Rentur at gjalda.

Talan er um samsýning til Landsbankan fyri at røkja lán landskassans. Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Landsbankan 21. november 1998 er samsýningin ¼ promillu av ríkislánum og ½ promillu av øðrum lánum. Provisiónin verður roknað út frá lánssaldu við árslok og fellur til gjaldingar í fyrsta ársfjórðingi árið eftir.

Landið fær í síðsta enda lut í yvirskoti Landsbankans, og vit spurdu landsstýrismannin, um tað samanumtikið var nøkur meining í hesari samsýning. Landsstýrismaðurin kunnaði í januar 2005 um, at gjørt er av at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman til ein stovn, ið skal standa á fíggjarlógini, og tí verður tað ikki aktuelt við hesum gjaldi í framtíðini.

Sambært ársroknskapi Landsbankans 2003 vóru starvsfólka- og rakstrarútreiðslurnar um 6,8 mió.kr. Hesar útreiðslur verða fíggjaðar av nettorentuinntøkunum, sum vóru um 28

mió.kr. Harafturat er talan um "provisiónir" 1,1 mió.kr., m.a. frammanfyri umrødda umsiting-argjald. Ársúrslit Landsbankans 22 mió.kr. verður í 2003 býtt soleiðis:

Tiltaksgrunnur 20%	4,4 mió.kr
Niðurskrivan av ábyrgdarskjali	8,8 mió.kr
Landskassans partur	8,8 mió.kr.
	22,0 mió.kr.

Landskassans partur verður inntøkuførdur á høvuðskontu 20.50.2.07.

Vit spurdu landsstýrismannin, hvussu stórur partur av rakstrarútreiðslum Landsbankans verður nýttur til at umsita lánini, ið eru nevnd í sáttmálanum, og um hesar útreiðslur samsvara við ta samsýning, ið landskassin rindar.

Landsstýrismaðurin kunnaði í januar 2005 um, at Landsbankin hevur ikki nakra tíðarskráseting, men hevur mett, at umleið 0,88 av tilsamans 9,35 ársverkum, verður nýtt til lánsumsiting. Sambært landsstýrismanninum er samsýningin stór í mun til, hvat tað kostar bankanum at umsita landskassans lán.

3.21.7.11. Umsiting av Trygdargrunninum (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 100 t.kr. Meirnýtslan er 116 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at umsitingin flutti til Tvøroyrar. Í tí sambandinum er ein neyv uppgerð av umsitingarútreiðslunum gjørd.

Minninýtsla

Á flestu kontum er bert talan um smærri frávik. Niðanfyri verður greitt frá summum teirra.

3.11.1.03. Fíggjarmálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7.880 t.kr. Minninýtslan er 488 t.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga játtaðar 7.380 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin hækkað 500 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skal upphæddin nýtast *"til framhaldandi arbeiðið við rationalisering av almenna bygnaðinum."*

Sambært landsstýrismanninum ætlaði, hann saman við landsstýrismanninum í almannamálum, at nýta upphæddina til rationaliseringstiltøk á almannaøkinum. Eykajáttanarlógin varð ikki samtykt fyrr enn í november 2003. Samgonguslit varð beint aftaná, og rationaliseringsátakið kom tí ongantíð veruliga í gongd.

3.21.7.10. Útgjald úr Trygdargrunninum.

Á fíggjarlógini var ein útreiðslujáttan 300 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2003 eru útreiðslurnar 22 t.kr. og inntøkurnar 2.059 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um skeiva skráseting av rentuinntøkum. Rentuinntøkurnar skuldu av røttum verið skrásettar á høvuðskontu 20.50.2.01. Rentuinntøkur av innistandandi.

Inntøkur

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlógini og roknskapartøl fyri inntøkur í 2003.

mió.kr.

	20.52.1 Skattainntøkur	Játtanin	Roknskapur	Meir-/minni
01	Vanligur landsskattur	1.439,5	1.358,6	-80,9
06	Kolvetnisskattur, persónar	10,0	4,0	-6,0
07	Felagsskattur	105,0	123,7	18,7
08	Kolvetnisskattur, feløg	-	3,1	3,1
10	Vinningsbýtisskattur	-	-1,1	-1,1
11	Kapitalvinningsskattur	78,5	51,6	-26,9
13	Avgjald av kapitaleftirlønum	10,0	8,2	-1,8
19	Rentuskattur	-	-0,3	-0,3
25	Arvaavgjald	3,0	3,9	0,9
28	Gjald til barsilsskipan	29,0	29,0	-
	Tilsamans	**1.675,0**	**1.580,7**	**-94,30**

Størstu frávikini eru "Vanligur landsskattur", "Kapitalvinningsskattur" og "Kolvetnisskattur, persónar", ávikavist 80,9 mió.kr., 26,9 og 6 mió.kr. lægri, enn mett varð. "Felagsskattur" er 18,7 mió.kr. hægri enn mett varð.

Upprunaliga var "Vanligur landsskattur" mettur til 1.545,5 mió.kr. á fíggjarlógini. Á eykajáttanarlógini mars 2003-2 vórðu inntøkurnar lækkaðar 52 mió.kr., av tí at skattastigar vórðu lækkaðir og inntøkumørk hækkað í skattaásetingarlógini.

Á eykajáttanarlógini september 2003 vórðu inntøkurnar lækkaðar 54 mió.kr., vísandi til nógv versnaðu búskaparligu útlitini: Ali- og rækjuvinnurnar vóru í stórari kreppu, fiskaprísirnir vóru á einum lægri støði, og harafturat komu avleiðingarnar av drúgva verkfallinum á vári 2003.

Orsøkin til stóra munin á "Kapitalvinningsskattur" er, at vinningsbýtisskattur ikki er roknaður av "Útluting frá Fíggingargrunninum", sum gjørt var árini frammanundan.

Upprunaliga var "Felagsskattur" mettur til 120 mió.kr. á fíggjarlógini. Á eykajáttanarlógini september 2003 vórðu inntøkurnar lækkaðar 15 mió.kr., vísandi til kreppuna í alivinnuni og lækkaðu fiskaprísirnar.

mió.kr.

	20.52.2 Avgjøld og tollur	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Meirvirðisgjald	936,0	968,0	32,0
04	Tollavgjald	30,0	33,6	3,6
07	Punktgjald	170,0	158,5	-11,5
10	Lønhæddargjald	11,0	11,9	0,9
13	Brennioljugjald	65,0	59,8	-5,2
16	Framleiðsluavgjald	16,0	18,0	2,0
19	Skrásetingargjald	75,0	75,7	0,7
22	Vegskattur (vektgjald)	46,0	48,6	2,6
25	Ferðaavgjald	10,0	11,1	1,1
28	Umhvørvisavgjald á smyrjiolju	2,5	2,2	-0,3
	Tilsamans	**1.361,5**	**1.387,4**	**25,9**

Størstu frávikini eru "Meirvirðisgjald" og "Punktgjald", sum eru ávikavist 32,0 mió.kr. hægri og 11,5 mió.kr. lægri enn ætlað.

Upprunaliga var "Skrásetingargjald" mett til 88 mió.kr. á fíggjarlógini. Á eyka-játtanarlógini september 2003 vóru inntøkumetingarnar lækkaðar 13 mió.kr.

mió.kr.

	20.52.3 Ymiskar inntøkur	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992	47,5	72,6	25,1
04	Útluting frá almennum partafeløgum	3,0	3,0	-
10	Aðrar inntøkur	3,5	5,3	1,8
	Tilsamans	**54,0**	**80,9**	**26,9**

Á fíggjarlógini var útlutan úr Fíggingargrunninum mett til 47,5 mió.kr. Sambært landsroknskapinum 2003 varð útlutingin 72,6 mió.kr. Orsøkin til stóra munin er, at vinningsbýtisskattur ikki er drigin frá, sum gjørt er árini frammanundan.

t.kr.

	20.52.3.10 Aðrar inntøkur	Játtan	Roknskapur	meir-/minni
01	Loyvisgjald	50	-	-50
02	Skeinkiloyvi, avgjald	65	45	-20
04	Navnaprógv	10	11	1
05	Bøtur	185	222	37
06	Happadrátturin, avgjald	200	-	-200
07	Burturlutingargjald	1.000	1.097	97
09	Løggilding av el-innleggjarum, avgjald	70	107	37
10	Avgj. av vinningi v/sølu av virðisbrøvum	-	1.325	1.325
11	Víddargjald	1.920	2.107	187
12	Nýtslugjald (royalties, oljugjøld)	-	420	420
60	Óvanligar inntøkur	-	-44	-44
	Tilsamans	**3.500**	**5.290**	**1.790**

Størstu frávikini eru "Avgjald av vinningi v/sølu av virðisbrøvum" og "Nýtslugjald (royalties, oljugjøld)", ávikavist 1.325 t.kr. og 420 t.kr. hægri enn ætlað.

Á fíggjarlógini var eingin játtan á undirkontu 20.52.3.10.10. "Avgj. av vinningi v/sølu av virðisbrøvum". Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er undirkontan løgd niður og flutt til høvuðskontu 50.52.1.11. "Kapitalvinningsskattur". Sambært landsstýrismanninum er talan um inntøkur, sum sambært skiftisreglunum í nýggju kapitalvinningslógini verða viðgjørdar eftir "gomlu" reglunum, og tískil eru skrásettar á tær gomlu konturnar.

Á fíggjarlógini var eingin játtan á undirkontu 20.52.3.10.12. "Nýtslugjald (royalties, oljugjøld)". Sambært landsstýrismanninum hevur ætlanin leingi verið at skilt inntøkur frá oljuvinnuni út. Tá ið inngjaldingar komu, og eingin undirkonta var til endamálið, varð gjørt av at stovna undirkontuna, ístaðin fyri at upphæddin endaði sum ógreinað á undirkontu 60. Óvanligar inntøkur.

mió.kr.

	20.54.1. Heildarveiting o.t.	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Heildarveiting o.t.	629,7	629,8	0,1
03	Eftirgeving av ríkislánum	-	1,9	1,9
	Tilsamans	**629,7**	**631,7**	**2,0**

Á fíggjarlógini var eingin játtan á høvuðskontu 20.54.1.03. "Eftirgeving av ríkislánum". Talan er um eitt studningslán frá Hypotekbankanum til Spesialskúlan. Eftir drúgt brævaskifti hevur Gjaldstovan staðfest, at Hypotekbankin ikki kennist við lánið. "Socialministeriet" hevur slept kravinum, og tinglýsingin hevur avlýst pantini.

2.2 Fíggjarlógarmannagongd (GL 1996/1 01-1)

2.2.1 Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap o.a.

Síðani fyrst í nítiárunum hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at virksemið hjá fleiri almennum stovnum/grunnum er ikki við á fíggjarlógini, og at grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan eru ikki hildnar.

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti".

Niðurstøðan í álitinum er, at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið fleiri landsstovnar og –grunnar ikki verða tiknir við á fíggjarlógina og í landsroknskapin, og eisini er tað í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið roknskapirnir hjá hesum grunnum/stovnum ikki verða lagdir fyri Løgtingið.

Álitið vísir, hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir. Fyri flestu landsstovnar og -grunnar merkir tað, at alt virksemið verður at taka við á fíggjarlógina og í landsroknskapin. Tó er møguligt í heilt serligum førum at hava landsvirksemi uttanfyri fíggjarlógina. Í teimum førum skal roknskapurin tó altíð verða lagdur fyri Løgtingið sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini.

Í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) vórðu niðurstøðurnar í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum umrøddar, og Løgtingið samtykti 12. mars 2002 at heita á løgmann um at síggja til, at stýrisskipanarlógin í framtíðini fór at verða hildin, soleiðis:

at allir stovnar/grunnar, sum skulu við á fíggjarlógina, komu við á fíggjarlógina 2003,

at allir almennir roknskapir, sum koma undir § 45, stk. 4, verða lagdir fyri tingið fyri 1. juli 2002, galdandi fyri roknskapir frá fíggjarárinum 2001.

Í juni 2002 kunnaði løgmaður um, at álitið frá Fíggjarmálaráðnum varð lagt fram og gjøgnumgingið á landsstýrisfundi 11. desember 2001. Har varð avrátt at gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum. Løgmaður vísti eisini til eitt yvirlit yvir stovnar/grunnar, sum skuldu við á fíggjarlógina 2003.

Í skrivi til løgmann 15. november 2002 gjørdu vit vart við, at eingin av stovnunum/-grunnunum, sum vórðu nevndir í yvirlitinum, vóru við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, og at heldur eingin lógarbroyting var samtykt, sum heimilaði, at virksemið hjá teimum varð hildið uttanfyri fíggjarlógina. Vit vístu á, at okkum kunnugt vórðu ikki allir roknskapir lagdir fyri tingið samsvarandi ásetingunum í stýrisskipanarlógini. Heitt varð á løgmann um at kunna seg neyvari um hesi viðurskifti.

Í svari 12. desember 2002 helt løgmaður, at støðan als ikki var nøktandi. Tað var serliga harmiligt, tá ið Fíggjarmálaráðið sjálvt longu í november 2001 hevði gjørt vart við, at mannagongdirnar vóru í stríð við stýrisskipanarlógina. Fyri at hetta álvarsmál ikki skuldi fara aftur við borðinum, hevði tað, sum áður greitt frá, verið fyri á landsstýrisfundi í desember 2001. Har varð gjørt av, at hvør landsstýrismaður beinanvegin skuldi gjøgnumganga landsstovnar á sínum øki, gera neyðugu broytingarnar samsvarandi álitinum og greiða møguligar ivaspurningar í samráð við Fíggjarmálaráðið. Og tá ið løgmaður í juni 2002 skrivliga hevði mint landsstýrismenn á málið, helt hann seg hava alla grund til at halda, at teir fóru at greiða viðurskiftini uttan drál.

Sambært Løgmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum arbeiddu arbeiðsbólkar við heimildarspurningunum, og miðaðu ímóti at fáa viðurskiftini hjá summum grunnum endaliga avgreidd í tingsetuni. Viðurskiftini hjá øðrum grunnum fóru eftir ætlan at verða liðug at avgreiða á ólavsøku 2003. Løgmaður hevði tikið hesa arbeiðsætlan til eftirtektar. Vísandi til tey serliga truplu viðurskifti, tá ið talan er um grunnar, sum eisini arbeiðsmarknaðurin varðar av, helt løgmaður seg hava tikið stig til at loysa hetta álvarsmál forsvarliga.

Málið varð eisini viðgjørt á fundi við løgtingsgrannskoðararnar 31. januar 2003, har løgmaður m.a. helt, at í seinasta lagi 1. september 2003 mátti Landsstýrið taka endaliga støðu til ognarrætt og framtíðar tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap, soleiðis at neyðugar broytingar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 og aðrar lógarbroytingar kundu verða framdar fyri árslok 2003. Henda tíðarætlan helt ikki.

Í januar 2004 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at miðfyrisitingin hevði arbeitt við málinum í 2003. Arbeiðið var skipað í samstarvi millum stjórnarráðini, har Løgmálaráðið og Fíggjarmálaráðið, hvør á sínum fakøki, hava ráðgivið um møguligar loysnir. Uppskot til loysnir vórðu løgd fyri á landsstýrisfundum í november 2003. Málið kom tó ikki víðari, av tí at val varð skrivað út 5. desember 2003.

Í desember 2004 kunnaði løgmaður um, at á fundi 30. november 2004, har bæði landsstýrismenn og aðalstjórar vóru við, varð gjørt av, at Fíggjarmálaráðið skuldi taka stig til at gjøgnumganga og finna hóskandi loysnir fyri teir einstøku grunnarnar/stovnarnar saman við avvarðandi stjórnarráðum. Uppskot um loysnir verða síðani at leggja fyri aftur á landsstýrisfundi, so at hvør landsstýrismaður kann taka endaliga avgerð í sínum málum. Løgmaður fylgir við gongdini til tess at tryggja, at komið verður á mál.

2.2.2 Játtanarskipanin

Í mai 1995 gjørdu Grannskoðanardeild Landskassans, Føroya Gjaldstova og Fíggjar- og Búskapardeildin eitt felags tilmæli um at broyta játtanarskipanina, og á fundi 10. mai 1995 tóku Landsstýrið og Fíggjarnevndin undir við, at arbeiðið skuldi halda fram við støði í hesum tilmæli. Í tilmælinum varð m.a. nomið við nakrar av høvuðstrupulleikunum í táverandi skipan:

- fíggjarlógaruppsetingin gav ikki eitt nóg greitt og fullfíggjað yvirlit yvir tað almenna virksemið, og gav ikki eina fullfíggjaða mynd av útreiðslum og inntøkum landskassans,
- virksemið hjá fleiri almennum stovnum var ikki við á fíggjarlógini,
- innihald og endamál við játtanunum var ikki nóg væl lýst,
- politisk og umsitingarlig ábyrgd kundi ikki í nóg stóran mun staðfestast, av tí at formligar reglur vantaðu í umsitingini av fíggjarjáttanum.

Skotið varð upp at royna meginreglurnar í tí skipan, ið verður nýtt í Danmark:

- játtanir á hvørjari grein verða bólkaðar eftir endamáli, soleiðis at fíggjarlógin gevur eina greiðari og meira skipaða mynd av almenna virkseminum,
- útgreiningin av játtanunum verður standardiserað,
- játtanirnar verða býttar upp í ymisk játtanarsløg, og reglur fyri ábyrgdum og skyldum hjá umsitingini, fyri hvørt játtanarslagið, verða ásettar í einari budgettvegleiðing,
- talan verður um eina bruttoskipan, har inntøkur og útreiðslur verða játtaðar hvør sær.

Mælt varð til beinanvegin at gera uppskot til endamálsuppbýti á fíggjarlógini, og leggja uppskotið fyri Fíggjarnevndina til góðkenningar. Uppskotið skuldi verða gjørt við støði í fíggjarlógini fyri 1995. Somuleiðis skuldi ein budgettvegleiðing verða løgd fyri Fíggjarnevndina at góðkenna, sum m.a. skuldi lýsa fíggjarlógaruppseting, játtanarslag, viðmerkingar, játtanar-

ásetingar o.a., so greitt er, hvørjar heimildir, skyldur og hvørja ábyrgd umsitingin fær við játtanunum.

Mannagongdin at broyta fíggjarlógararbeiðið, sum breið politisk semja var um í mai 1995, varð tó ikki fylgd, og Løgtingið og Fíggjarnevndin fingu ongantíð veruliga høvi at taka støðu til broyttu fíggjarlógaruppsetingina og til meginreglurnar í nýggju skipanini. Arbeiðið við at gera eina fullfíggjaða budgettvegleiðing varð heldur ongantíð fullført, og tí hevur stórur ivi verið um fleiri grundleggjandi hugtøk í nýggju játtanarskipanini.

Fíggjarmálaráðið hevur seinastu árini arbeitt við at dagføra játtanarskipanina og loysa ivamálini, uttan tó at koma á mál.

Í september 2004 helt Fíggjarmálaráðið, at semja var í landsumsitingini um eina nýggja játtanarskipan, ið ætlanin var at lýsa sum rundskriv frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Uppskotið til rundskriv varð sent Løgtingsins umsiting til viðmerkingar. Umsitingin boðaði frá, at hon kundi ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í rundskrivinum, og var av tí áskoðan, at rættast var at gera eina játtanarlóg.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í oktober 2004 segði Fíggjarmálaráðið seg einki hava ímóti, at gjørd verður ein játtanarlóg ístaðin fyri rundskriv. Tvørturímóti heldur ráðið, at nógv hevði verið vunnið, um hetta kann gera, at semja verður millum landsumsitingina og løgtingsumsitingina um játtanarreglurnar.

Fíggjarmálaráðið heitti samstundis á Fíggjarnevndina um at taka verandi játtanarskipan við í áliti til uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2005, soleiðis at hon eisini kann verða galdandi fyri 2005.

Í februar 2005 legði Fíggjarnevndin fram uppskot til samtyktar (Lm. nr. 38/2004) um, at formansskapur Løgtingsins setir ein serkønan arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, ið skal áseta treytir og mannagongdir fyri játtanum. Í arbeiðsbólkinum verða sjey limir. Fíggjarmálaráðið tilmælir tríggjar limir, umsitingin hjá Løgtinginum tveir og Landsgrannskoðanin ein. Formaðurin í arbeiðsbólkinum skal ikki hava tilknýti til Landsstýrið ella Løgtingið. Løgtingið samtykti uppskotið 1. mars 2005.

2.3 Roknskaparviðurskifti (GL 2000/1 01-9)

2.3.1 Um tørvin á at endurskoða roknskaparkunngerðina o.a. (GL 1996/1 01 –2)

Vit hava áður í frágreiðingum mælt Fíggjarmálaráðnum til at endurskoða roknskaparkunngerðina. Í 2003 høvdu vit aftur eitt ávíst samskifti við Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna um spurningin. Vit vístu m.a. á:

- *at* smærri ógreidleikar í kunngerðini frá 1996 áttu at verið rættaðir,
- *at* kunngerðin og rundskrivið um roknskaparreglugerðir kundu verið samskipað,
- *at* danska kunngerðin, sum var fyrimynd fyri føroysku kunngerðini, og eisini danska lógin/kunngerðin um bókhald á vinnuliga økinum eru broyttar fleiri ferðir,
- *at* kunngerðin kundi verið lagað til landsstovnar/-grunnar við leysari tilknýti til fíggjarlóg/landsroknskap,
- *at* í sambandi við at nýtt regluverk um KT-trygd verður sett í verk, verður helst neyðugt at dagføra roknskaparkunngerðina og roknskaparrundskrivið,
- *at* Fíggjarmálaráðið hevur heimild at áleggja stovnum at nýta innanhýsis roknskapir, sum skulu geva grundarlag fyri at lýsa endamál, virksemi, framleiðslu, produktivitet o.a. Tað hevur Fíggjarmálaráðið ongantíð gjørt, og í roknskaparrundskrivinum er einki ásett um "innanhýsis roknskapir",
- *at* ætlanin við einari játtan, endamálið, uppgávan, virksemið o.a. er ofta ikki nóg væl lýst,

at undir viðmerkingunum til fíggjarlógina er stórur tørvur á at allýsa fleiri hugtøk, ikki minst "virksemisyvirlit".

Eftir okkara tykki er á flestu stovnum tørvur á einum virknari innaneftirliti (í víðari merking), sum umframt at tryggja, at roknskapurin er rættur og álítandi, eisini skal hava til endamáls at tryggja, at virksemið/raksturin er málsøkin og effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

Vit hava víst á, at sokallaða COSO-frágreiðingin[1] frá 1992 og INTOSAI-vegleiðingin[2] kundu givið okkum íblástur og vegleiðing, sum tær hava givið øðrum, t.d. norska fíggjarmálaráðnum, ið hevur endurskoðað sítt "reglement for økonomistyring".

Í COSO-frágreiðingini verður innaneftirlitið lýst sum tey tiltøk, ið leiðsla og starvsfólk seta í verk og fremja, fyri at røkka málunum:

1. at raksturin er málsøkin og effektivur,
2. at roknskapurin er rættur og álítandi, og
3. at lógir og reglur verða hildnar.

Sambært COSO-frágreiðingini er innaneftirlitið sett saman av 5 liðum, sum tó eru nær tengd hvør at øðrum:

Eftirlitsumhvørvi

Váðameting

Eftirlitsvirksemi

Upplýsingar og samskifti

Umsjón

Ein dagførd/broytt roknskaparkunngerð kundi verið nýtt bæði sum kveikari og koyril til at seta í verk eitt tílíkt átak.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan halda eisini tørv vera á at dagføra roknskaparkunngerðina og rundskrivið. Fíggjarmálaráðið ásannar, at krøv ongantíð eru sett til skrásetingar av t.d. framleiðslu og tíðarnýtslu í innanvirkis roknskapum, samsvarandi § 7 í kunngerðini. Fíggjarmálaráðið ætlar, at skrásetingar av hesum slag skulu verða raðfestar høgt í rationaliseringunum á almenna økinum komandi árini.

Í november 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Gjaldstovan arbeiðir við at dagføra roknskaparkunngerðina. Víst verður á, at nógv er hent á økinum, síðani kunngerðini varð sett í gildi, og neyðugt er at taka støðu til nøkur grundleggjandi viðurskifti.

2.3.2 Roknskaparreglugerðir (GL 1997/1 01-5)

Í § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 og í § 4, stk. 2, í K. nr. 114/1996 er álagt landsumsitingini og landsstovnunum at gera og dagføra eina reglugerð fyri sínum roknskaparhaldi. Í februar 2001 sendi Fíggjarmálaráðið út rundskriv við vegleiðing til roknskaparreglugerðir. Sambært rundskrivinum skuldu allar roknskaparreglugerðir vera góðkendar í seinasta lagi 31. desember 2001. Ikki allir stovnar hava fingið viðurskifti síni í rættlag.

Sambært punkti 1.1 í rundskrivinum skal stovnsleiðarin lata Føroya Gjaldstovu og roknskapargrannskoðanini roknskaparreglugerðina til kunningar. Fleiri aðalráð hava ikki enn góðkent allar reglugerðirnar.

---

[1] COSO (The Committee of Sponsoring Organizations of the Treadway Commission): Internal Control -Integrated Framework (Intern kontrol - et integrert rammeverk, COSO-rapporten (norsk týðing).

[2] INTOSAI (International Organization of Supreme Audit Institutions) er ein altjóða felagsskapur fyri ríkisgrannskoðanir í londum, sum eru limir í ST.

Í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin 2001 (Lm. nr. 71-6/2002) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at tryggja, at reglurnar verða hildnar.

Landsgrannskoðanin hevur heitt á Gjaldstovuna um at gera støðuna upp 31. desember 2004:

1. hvussu nógvar roknskaparreglugerðir (stovnsnummur) skulu verða gjørdar: 535
2. hvussu nógvar roknskaparreglugerðir (stovnsnummur) Gjaldstovan hevur fingið til kunningar: Umleið 100 roknskaparreglugerðir, ið fevna um 324 stovnsnumrum.

Gjaldstovan hevur sostatt ikki fingið avrit av øllum roknskaparreglugerðum, og tað kundi bent á, at allar eru ikki gjørdar og góðkendar.

2.3.3 Ognaryvirlit (GL 2001/1 01-9)

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at ognaryvirlit skulu verða gjørd fyri innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu tey m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir vístá, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í sambandi við vitjanina á stovnum í 2004 hava vit aftur staðfest, at fleiri stovnar framvegis ikki hava eitt dagført yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í desember 2002 sendi Fíggjarmálaráðið skriv til allar stovnsleiðarar um at skráseta størri almennar ognir. Í skrivinum stóð, at sjøtul nú fór at verða settur á verkætlanina at fáa skrásett ognirnar hjá landinum og at taka upplýsingarnar við í landsroknskapin.

Í februar 2004 kunnaði Gjaldstovan um, at verkætlanin var seinkað umleið eitt ár, men at EDV-skipanin, sum er partur av búskaparskipanum landsins, er liðug. Ætlanin var at byrja at skráseta í mars 2004 og at taka upplýsingar úr ognaryvirlitinum við í landsroknskapin fyri 2004. Hendan ætlan helt ikki, men í november 2004 vórðu allir almennir stovnar bidnir um at senda Gjaldstovuni upplýsingar um at skráseta støðisogn, t.v.s. bygningar, størri EDV-útbúnað, innbúgv og aðrar størri ognir.

2.3.4 "Egnar" búskaparskipanir - vantandi samskipan og stýring (GL 2001/1 01-9)

Høvuðsendamálið við Ll. nr. 33 frá 24. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." var, at Landsstýrið við lóg útvegaði sær heimild at áseta reglur og krøv, fyri at loysa teir mongu trupulleikar á roknskaparøkinum, ið tá vóru.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið varð m.a. vístá, at stóru rembingarnar í føroysku umsitingini í sjeyti og áttati árunum førdu til EDV-umleggingar, bygnaðarbroytingar, broytt roknskaparhald o.a. Trupulleikin var, at nógvu broytingarnar fóru fram uttan grundleggjandi meginreglur um bygnað, dátustreymar, ábyrgd, heimild o.s.fr.

Við heimild í § 3 í lógini lýsti Landsstýrið 22. august 1996 K. nr. 114 "um roknskaparhald landsins o.a." Roknskaparkunngerðin, og eisini játtanarskipanin, leggja upp til, at Fíggjarmálaráðið skal vera ein virkin, leiðandi og samskipandi myndugleiki, sum tryggjar, at búskaparskipanirnar eru tryggar, at neyvar játtanar- og roknskaparreglur verða ásettar, at ivamál um játtanar- og roknskaparviðurskifti verða loyst o.s.fr.

Sambært § 4, stk. 3, í roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta búskaparskipanir landsins. Sambært § 4, stk. 4, skal Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan gera eina ætlan fyri, hvussu teir stovnar verða tiknir við, sum tann dagin, kunngerðin kemur í gildi (1. januar 1997), liggja uttanfyri búskaparskipanum landsins. Sambært § 4, stk. 5, kann Fíggjarmálaráðið eftir umsókn loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at skipanin lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðar-

krøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri búskaparskipanir landsins, og at ein skrivlig rakstraravtala verður gjørd millum Føroya Gjaldstovu og viðkomandi stovn, sum neyvari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.ø.

Vit hava áður víst á, at hesar reglur als ikki hava verið hildnar, hóast talan er um stórar og umfatandi skipanir. Vantandi samskipan og stýring hava helst fört til ov nógvar "egnar búskaparskipanir", m.a. tí at stovnar ofta halda seg hava ein heilt serligan tørv. Fleiri broytingar og tillagingar verða gjørdar í EDV-skipanunum, uttan at Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan frammanundan fær nakað at vita.

Landsgrannskoðanin heldur, at trupulleikarnir, sum Landsstýrið vísti á í 1994 í viðmerkingum til lógaruppskotið, ikki eru loystir, men eru kanska meira álvarsligir í dag. Krøvini til KT-, lønar- og roknskaparskipanir eru munandi herd, tí váðin er munandi størri. Tí er tað í dag munandi dýrari, og tað bindur størri arbeiðsorku at tryggja allar tær mongu "óneyðugu" búskaparskipanirnar móti teimum vaksandi váðunum.

Í uppskoti til samtyktar í apríl 2004 frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. 56-6/2003) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at gera eina ítøkiliga langtíðarætlan fyri, hvussu trupulleikarnir verða loystir.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið seinastu árini hevur gjørt hinum aðalráðunum greitt, at tað verður ikki góðtikið, at stovnsettar verða egnar búskaparskipanir, uttan at tær verða góðkendar av Føroya Gjaldstovu, sum ásett í roknskaparkunngerðini.

Sambært landsstýrismanninum tykist sum ásetingarnar í roknskaparkunngerðini nú verða hildnar, men eftir stendur, at tað finnast fleiri eldri "egnar búskaparskipanir", sum ongantíð eru góðkendar av Gjaldstovuni. Landsstýrismaðurin heldur, at tað hevði verið skilagott við einari skynsamari langtíðarráðlegging at leggja niður fleiri av teimum smærru búskaparskipanunum, og í staðin nýta búskaparskipanir landsins í størri mun. Fíggjarmálaráðið hevur reist spurningin mótvegis hinum aðalráðunum.

Landsstýrismaðurin hevur eisini kunnað um, at viðvíkjandi skipanini hjá Almannastovuni hevur Gjaldstovan ongan møguleika at manna eina uppgávu at seta krøv til og góðkenna skipanina í dag.

Viðvíkjandi innkrevjingarskipanini fara Toll- og Skattstovan og Gjaldstovan at arbeiða fyri at loysa spurningin um tíðaravmarking og automatisering av markamótum.

Landsstýrismaðurin er ikki í iva um, at tað er skilagott av savna saman, bæði hvat KT-skipanum og bygnaði viðvíkur. Fyri at tílíkar broytingar skulu hepnast, krevjast fleiri fyritreytir:

1. peningur skal setast av til umleggingina (tað verður dýrari, áðrenn tað verður bíligari),
2. játtan skal flytast frá fleiri umsitingareindum til ta umsitingareindina, ið skal hava uppgávuna í framtíðini,
3. politisk semja skal fáast um broytingarnar,
4. broytingarnar skulu hava undirtøku í umsitingini.

Fíggjarmálaráðið er í ferð við at kanna, um undirtøka er fyri at fara undir tílíkar samanleggingar, og hvussu tær kunnu verða fíggjaðar.

2.3.5 Hølisviðurskifti/smáar umsitingareindir (GL 2001/1 01-9)

Vit hava mælt til at kanna, um tað ikki hevði loyst seg at savna stovnar/grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nýmótans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og loysa starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.

Í uppskoti til samtyktar í februar 2003 frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin 2001 (Lm. nr. 71-6/2002) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at kanna hesi viðurskifti nærri.

Í januar 2004 boðaði Fíggjarmálaráðið m.a. frá, at fyrimunirnir eru so eyðsýndir, at ikki skuldi verið neyðugt við nakrari kanning, fyri at fáa tað staðfest.

Í november 2004 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at í sambandi við arbeiðið við løgtingsfíggjarlógini 2005 bað Fíggjarmálaráðið aðalráðini koma við ítøkiligum uppskotum, til tess at fremja sparingar, t.d. strukturbroytingar, digitaliseringstiltøk ella onnur tiltøk. Fíggjarmálaráðið ásannar, at striltið hevur gingið at fáa nøkur ítøkilig uppskot. Til tess at skumpa undir, varð sett í verk ein "brainstorming", har øll aðalráð vóru við, umframt trý umboð frá vinnulívinum. Landsstýrismaðurin vísti til eina fyribils frágreiðing við mongum hugskotum hjá umsitingini at arbeiða víðari við. Av ítøkiligum átøkum vísir landsstýrismaðurin á:

- samanlegging av maskinmeistara- og sjómansskúlanum
- samanlegging av útvarpi og sjónvarpi
- samanlegging av landsbanka og hagstovu
- størri bygnaðarbroytingar á Toll- og Skattstovuni

Í februar 2003 boðaði løgmaður m.a. frá, at hann var púra samdur í, at tilvildin ofta ræður, tá tað snýr seg um at útvega hølir til almennu umsitingina. Eitt av málunum við bygnaðarbroytingunum á sinni var júst at integrera myndugleikar á einstøkum økjum vertikalt, júst fyri at fáa meira tyngd og dygd í myndugleikan. Hetta hevur tó bert partvíst eydnast, og tá trý ráð nú eru sett á stovn aftrat, gerast eindirnar, alt annað líka, upp aftur smærri.

Í desember 2004 kunnaði løgmaður um, at ongar broytingar eru gjørdar at samskipa og leggja til rættis hølisviðurskiftini hjá tí almenna. Tó er avrátt at arbeiða við spurninginum, so at betri skil og yvirlit fæst á hesum øki. Hetta Landsstýrið hevur lækkað talið av stjórnarráðum úr níggju niður í sjey. Sostatt er talið av umsitingarligum eindum í miðfyrisitingini minkað, og umsitingarligu eindirnar vaksnar samsvarandi.

Sambært løgmanni verður alla tíðina arbeitt við at betra um samstarvið millum allar myndugleikarnar, og við at fremja felags loysnir, har tað eru fyrimunir. Dømi um hetta er:

- Arbeitt verður við førleikamenning fyri leiðarar, nevnd leiðsluframtøk. Eitt av málunum er at skapa felags loysnir til tess at fullnýta fyrisitingarliga tilfeingið. Hetta tiltak byrjar eftir ætlan á vári 2005.
- Ein nýggj skipan "verkgongdarskipan" varð tikin í nýtslu fyrst í juli 2004. Har verða kreditorfakturarnir elektroniskt sendir teimum, sum skulu kontera, góðkenna og leysgeva teir. Ætlanin hjá Gjaldstovuni er, at kreditorfakturar skulu ikki longur verða sendir stovnunum, men í staðin skulu teir verða sendir beinleiðis til Gjaldstovuna, við tilvísing til stovnin, ið varðar av útreiðsluni. Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at hetta tiltak fremur sparingar, um 2 mió.kr.
- Løgmansskrivstovan, Innlendismálaráðið og Mentamálaráðið eru í felag farin undir at samskipa telefonmóttøkuna, bæði tøkniliga og viðvíkjandi starvsfólki.
- Arbeiðið er sett í gong at fremja felags loysnir innan KT og á KT-trygdarøkinum.

2.3.6 KT-trygd á Gjaldstovuni (GL 1997/2 03 1-6)

Í 1997 fóru Landsgrannskoðanin og Gjaldstovan, saman við serkønari grannskoðarahjálp, undir at gjøgnumganga KT-trygdina á Føroya Gjaldstovu, við støði í grannskoðanarvegleiðingum.

Í juli 1998 vístu vit á, at á fleiri týðandi økjum var KT-trygdin ikki nøktandi. Vit mæltu til at seta í verk tiltøk fyri at bøta um trygdina, og at seta í verk ein skjalprógvaðan trygdarpolitikk, sum skuldi verða útgreinaður og skipaður við nágreiniligum trygdarreglugerðum.

Í mars 2000 gjørdu vit vart við, at komið var ikki á mál við trygdarpolitikkinum.

Við støði í m.a. frágreiðingini frá 1998 gjøgnumgingu vit aftur í 2001, saman við serkønari grannskoðarahjálp, KT-trygdina. Í juli 2002 varð ein frágreiðing latin landsstýrismanninum. Gjaldstovan fór saman við serfrøðingum undir at gera eina váðameting og ein trygdarpolitikk

Í februar 2004 kunnaði Gjaldstovan um, at dagligu uppgávurnar á KT-trygdarsíðuni vóru skipaðar í einum EDV-trygdarráði. M.a. verða broytingar, feilir, hóttanir o.a. tiknar upp í ráðnum.

Í august 2004 varð KT-trygdarskipan (ein ISMS - Information Security Management System) formliga sett í verk á Gjaldstovuni. Hon skal lúka krøvini í British Standard BS 7799-2. Skipanin skal halda skil á og fylgja við øllum tí eftirlitsvirksemi, sum fer fram á stovninum sambært roknskaparreglugerðini, KT-trygdarforskriftum o.ø. Skipanin lýsir m.a., hvørji eftirlit starvsfólkini hava ábyrgd av, nær tey skulu verða framd, og um/nær tey eru framd, og hvat úrslitið er.

Fyri 1. september 2004 skuldu krøvini í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" (trygdarkunngerðini) verða lokin. Fyri at staðfesta, at KT-trygdin var á nóg høgum stigi, hjá teimum stovnum, sum hava beinleiðis samband (on-line) við búskaparskipanir landsins, soleiðis at trygdin í búskaparskipanum landsins ikki kemur í vanda, bað Gjaldstovan um at fáa eina leiðsluváttan frá stovnsleiðarunum fyri 1. september 2004.

8 mánaðir seinni hevur Gjaldstovan bert fingið onkrar leiðsluváttanir, og Gjaldstovan ivast í virðinum í summum teirra. Gjaldstovan er komin til ta niðurstøðu, at hon kann ikki byggja KT-trygdina í búskaparskipanum landsins á trygdina hjá stovnunum, sum eru íbundnir DNL.

Sambært serfrøðingum er einasta gongda leið, at Gjaldstovan tryggjar búskaparskipanir landsins, sum høvdu stovnarnir samband við skipanina um alnótina. Tað merkir, at trygdin má verða stýrd sentralt í búskaparskipanum landsins. Gjaldstovan er tí farin undir eina serliga loysn, sum skal gera tað møguligt at hava atgeingi beinleiðis frá opna alnetinum, uttan at tryggleikin í búskaparskipanum landsins kemur í vanda. Tríggir stovnar royna loysnina í løtuni: Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið, Fiskivinnuskúlin og Føroya Blindastovnur.

Gjaldstovan vísir eisini á, at tað er ein stórur ótryggleiki, at fólk ikki eru nóg ansin í umsitingini av loyniorðum. Støðan gerst truplari av, at fólk í hesum talgildu tíðum ofta umsita eini 20-30 loyniorð á arbeiðsplássinum og heima. Tá ið skipanirnar krevja, at fólk broyta loyniorð t.d. 3. hvønn mánað, verður úrslitið ein stór fløkja, og tí er "einasta loysn", at fólk skriva loyniorðini niður.

Umsitingin av niðurskrivaðu loyniorðunum er ofta tilvildarlig, og tí verður trygdin í skipanunum sett í váða, og fólk, sum ikki hava formliga heimild, kunnu fáa atgongd til skipanirnar hjá Gjaldstovuni. Gjaldstovan hevur tí gjørt av at seta í verk eina skipan við "single sign-on" til tær sentralu skipanirnar hjá Gjaldstovuni. T.v.s. at fólk bert skulu minnast eitt loyniorð. Talan er um størri verkætlan, sum tøkniliga er sera krevjandi, og sum ætlandi fer at taka eini 2 ár.

Annars hevur Gjaldstovan greitt frá at:

- Við stuttum millumbilum verða allar broytingar í búskaparskipanum landsins avritaðar til eina eyka maskinu, sum stendur í einum øðrum bygningi.
- Nároyndarumhvørvið er stovnað á einari sjálvstøðugari maskinu.
- Um ársskiftið 2004/05 varð váðagreiningin av skipanum hjá Gjaldstovuni dagført.

2.3.7 Lønarumsiting á Gjaldstovuni (GL 1998/2 03 1-10)

Lønarstovan á Gjaldstovuni umsitur og rindar út lønir hjá nógvum landsstovnum. Í sambandi við lønargrannskoðan, sum vit hava gjørt á stovnunum, hava vit eisini kannað, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. í lønarskipanini á Gjaldstovuni. Hesar stakroyndir bendu á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. í lønarskipanini vóru rættar.

Góðkenning av lønargrundarkortum

Einaferð um árið sendir lønarstovan á Gjaldstovuni øllum stovnsleiðarum lønargrundarkortini hjá starvsfólkunum at góðkenna. Stovnsleiðarin skal kanna, um samsvar er millum formligu setanarviðurskiftini og tær í lønarskipanini skrásettu upplýsingar, herímillum starvsbólk, lønartalvu, aldursviðbót og lønarbrøk. 20 stovnsleiðarar góðkendu ikki lønargrundarkortini í 2001. Vit mæltu tá Gjaldstovuni til at seta í verk eina mannagongd, sum tryggjar, at viðurskiftini verða kannað so hvørt, og at avvarðandi aðalráð verða kunnað um úrslitið.

Í mars 2002 vórðu grundarkortini aftur send út. Sambært Gjaldstovuni eru flestu grundarkortini komin innaftur góðkend.

Í mars 2003 vórðu grundarkortini ikki send út. Sambært Gjaldstovuni er tað tí, at farið er yvir til nýggja lønarskipan. Tað at stovnsleiðarar við millumbili skulu góðkenna lønargrundarkortini, heldur Landsgrannskoðanin vera ein týðandi eftirlitsskipan, sum hevur stórt próvviði.

Í juni 2004 skrivaði Gjaldstovan út nýggj lønargrundarkort. Stovnarnir skulu kannað eftir, um samsvar er millum skrásettu upplýsingarnar og formligu setanarviðurskiftini. Er ósamsvar, skal stovnurin skrivliga gera vart við tað. Í mars 2005 greiddi Gjaldstovan frá, at 60 lønargrundarkort vóru komin aftur við viðmerkingum, broytingum og feilum.

Lønarútreiðslur stemmaðar av við Toll- og Skattstovu Føroya

Einaferð um árið rindar Gjaldstovan Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Trygdargrunninum kravdu gjøldini. Tá stemmar Lønarstovan lønarútgjaldingarnar av við yvirlit frá Toll- og Skattstovu Føroya. Í juni 2003 var avstemmanin fyri 2002 liðug. Lønarstovan skjalprógvar avstemmanirnar.

Í mars 2005 greiddi Gjaldstovan frá, at lønarútgjaldingarnar 2003 eru stemmaðar av millum felags lønarskipanina og Toll- og Skattstovu Føroya. Hóast lagt varð um til nýggja skipan, stemmaðu skipanirnar við hvørja aðra. Lønarstovan hevur skjalprógvað avstemmanina.

Nýggj lønarskipan

Í juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein felags lønarskipan fór at verða tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/2002, og á vári 2004 skuldu allar almennar lønir, og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum lønir, uttan undantak fara um hesa skipan. Í ávísum førum kundu egnar forskipanir verða nýttar, t.d. í sambandi við útbúgvingarstuðul o.l. Gjaldstovan skuldi ikki skráseta lønir; tað skulu aðalráðini/stovnarnir gera. Í frágreiðingum okkara frá 2003 og 2004 gjørdu vit vart við, at vit ivaðust í, um tað var skilagott at miðfirra lønarumsitingina. Vit mæltu til at kanna fyrimunir og vansar við einari felags umsiting av lønum o.t. hjá øllum landsstovnum/-grunnum, og hjá sjálvsognarstovnum o.ø., sum fáa studning ella inntøkur sambært lóg.

Landsstýrismaður kunnaði í august 2002 um, at lønarverkætlanin var nógv seinkað, og í desember 2002 varð nýggja felags lønarskipanin so smátt tikin í nýtslu.

Arbeiðið at flyta løntakarar úr gomlu lønarskipanini yvir í nýggju skipanina var ikki liðugt fyrr enn í januar 2004. Gjaldstovan vísti í februar 2004 á, at skipanin var ikki liðug, og at tað kravdi nógva orku at víðka skipanina við nýggjum brúkarum/stovnum.

Í mars 2005 hevur Gjaldstovan greitt frá, at allur fólkaskúlin er lagdur um til nýggju lønarskipanina, tvs. at allir lærarar í fólkaskúlanum fáa løn um nýggju skipanina. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur set ein verkætlanarbólk at fyriskipa umleggingina á teirra øki. Gjaldstovan vísir eisini á, at lønarøkið er eitt so stórt økið við nógvari servitan, at skal nakað munagott verða gjørt, fyri at fáa allar almennar lønir avgreiddar einsháttað í somu skipan, er neyðugt at fremja ávísar bygnaðarbroytingar, og at savna fólk við serkunnleika á lønarøkinum í eina eind.

2.4 Fíggjarstøðan 2003

2.4.1 Góðkenningarmannagongdir

Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini er álagt stovnsleiðarum mánaðarliga at góðkenna játtanarroknskapin mótvegis aðalráðunum. Á serligum góðkenningarskjali skal stovnsleiðarin sambært pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum m.a. vátta:

> *"at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, herímillum at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum; at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp; at samsvar er millum búskaparskipanir landsins og egnar búskaparskipanir, at alt er stemmað av, sum ásett í roknskaparreglugerðini, og at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar. Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok. Í átekningini skal verða kunnað um møgulig viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Tá ið játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytisskeiðið (ársroknskapurin) er góðkendur, skal Gjaldstovan hava avrit av góðkenningarskrivinum."*

Greinaroknskapurin

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok á serligum góðkenningarskjali at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálaráðnum.

Greinaroknskapurin er ein samandráttur av játtanar/mánaðarroknskapunum undir einari grein. Aðalstjórarnir skulu vegna landsstýrismannin m.a. vátta, at játtanarroknskapirnir, ið liggja undir greinaroknskapinum, allir eru góðkendir av stovnsleiðarum sambært galdandi reglum.

Á góðkenningarskjalinum skulu aðalstjórarnir kunna Fíggjarmálaráðið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligar feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt.

Í 2004 hava øll aðalráðini hildið reglurnar, men onkur aðalráð halda ikki tíðarfreistina.

Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapurin, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.

Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum og skrásetir, so hvørt stovnarnir hava sent oyðubløðini inn. Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni eru 509 stovnsnummur í landsroknskapinum 2003. Góðkenningarskjøl fyri 121 stovnsnummur eru ikki send inn. Almanna- og Heilsumálaráðið varðar av 56 teirra, Løgmálaráðið varðar av 11 og Løgmansskrivstovan av 11. Gjaldstovan hevur ikki rykt eftir skjølunum, sum undanfarin ár, tí hon heldur, at stovnarnir áttu at kent mannagongdina. Lands-

grannskoðanin heldur talan vera um ein sera týðandi part av innaneftirlitinum, og at Gjaldstovan átti at tryggja sær avrit av øllum góðkenningarskjølum.

Á umleið 30 góðkenningarskjølum eru viðmerkingar. Sambært Gjaldstovuni eru flestu viðmerkingar um mál av lítlum týdningi. Í onkrum føri er talan um tíðaravmarkanarfeilir, tí Gjaldstovan og stovnar við egnari búskaparskipan nýta ymiskan uppgerðarhátt. Í flestu førum er talan um smávegis rættingar, vantandi skrásetingar og um meira- og ella minninýtslu.

Broyting av skjalamannagongdum

Stórar broytingar eru hendar í skjalamannagongdunum seinnu árini. Flest allar telefonrokningar, bæði frá Føroya Tele og Kalli, verða við fílu sendar Gjaldstovuni, sum lesur fílurnar inn í búskaparskipanir landsins. Skipanin fevnir tó ikki um rokningar fyri internetnýtslu.

Í 2004 fór Gjaldstovan undir at ljóslesa kreditorfakturar inn í búskaparskipanir landsins. Ætlanin er at fáa allar stovnar at nýta sonevndu "verkgongdarskipanina", har kreditorfakturarnir elektroniskt verða sendir teimum, sum skulu kontera, góðkenna og leysgeva teir. Ætlanin hjá Gjaldstovuni er, at kreditorfakturar skulu ikki longur verða sendir stovnunum, men at teir í staðin skulu verða sendir beinleiðis til Gjaldstovuna, við tilvísing til stovnin, ið varðar av útreiðsluni. Gjaldstovan arbeiðir við at menna eina loysn, átøka hesari skipan, til tær útreiðslur, sum taka støði í innanhýsis skjølum, t.d. studningur, endurgjøld o.a. Skipanin verður í næstum nároynd á Gjaldstovuni.

2.4.2 Avstemman av fíggjarstøðuni o.a.

Í 2001 menti Gjaldstovan eina skipan við kekklistum, ið verða fyltir út í sambandi við at mánaðarroknskapirnir verða gjørdir. Ein kekklisti er fyri roknskaparhaldið og ein er fyri EDV-økið. Ábyrgdarfólk á økjunum vátta, at avstemmanir/eftirlit eru gjørd. Liggja mál óavgreidd, skal verða víst á, hvat verður gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, og nær tey fara at koma í rættlag.

Áðrenn mánaðarroknskapirnir verða sendir stovnunum, gjøgnumgongur Gjaldstovan allar kekklistar og fíggjarstøður viðvíkjandi stovnunum. Stovnsleiðslurnar verða gjørdar varugar við viðurskifti, ið skulu verða fingin í rættlag. Við hesi mannagongd er "ruddað upp" í nógvum gomlum munum, og skipanin við kekklistum hevur havt við sær, at nógvar feilbókingar og munir verða rættaðar so hvørt. Avstemmanararbeiðið er miðvíst og væl skipað, og leiðslan raðfestir arbeiðið høgt.

Í hesum sambandi kunnu vit nevna, vísandi til BS 7799-2, at Gjaldstovan er við at menna eina ISMS-skipan (Information Security Management System) til at halda skil á og fylgja við øllum tí eftirlitsvirksemi, sum fer fram á stovninum sambært roknskaparreglugerðini, KT-trygdarforskriftum o.ø. Skipanin lýsir m.a., hvørji eftirlit starvsfólkini hava ábyrgd av, nær tey skulu verða framd, og um/nær tey eru framd, og hvat úrslitið er.

Í sambandi við gjøgnumgongdina í landsroknskapinum 2003 av roknskaparpostum í fíggjarstøðuni hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

2.4.3 Høvuðstøl

Í talvuni niðanfyri er ein samandráttur av fíggjarstøðuni við árslok 2001-2003.

mió.kr.

	2003	2002	2001
Aktiv			
Kapitalinnskot	1.531	1.492	1.452
Virðisbrøv	381	328	272
Útlán	352	347	365
Áogn o.a.	380	458	568
Tøkur peningur	2.260	2.762	2.639
Aktiv, tilsamans	**4.904**	**5.387**	**5.296**
Passiv			
Skuld	4.383	5.001	5.170
Útjavnanarkonta/eginogn	521	386	126
Passiv, tilsamans	**4.904**	**5.387**	**5.296**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við á fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

2.4.4 Fíggjarligur útbúnaður (GL 2003/3 01 2-5)

Kapitalogn í landsfyritøkum

t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	1.530.999	1.492.390	1.451.833

Í 2003 fevnir roknskaparposturin bert um Fíggingargrunnin frá 1992. Kapitalognin svarar til "eginognina" hjá hesum grunni. Sambært endaliga roknskapinum hjá Fíggingargrunninum er eginognin um 3 mió.kr. lægri, enn roknað varð við í landsroknskapinum.

Eingin allýsing finst av hugtakinum "landsfyritøka", og at júst hesin grunnur er eftir í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Í uppskotum til samtyktar hevur Løgtingið í nógv ár mælt landsstýrismanninum til at fáa greiðu á hesum roknskaparposti.

Gjaldstovan heldur, at grunnurin skal verða tikin við í fíggjarstøðuna hjá landinum, tí talan er um ein "grunn", sum er soleiðis skipaður løgfrøðiliga, at tað er Landsstýrið, ið eigur "grunnin". Gjaldstovan heldur kanska heitið "kapitalogn í landsfyritøkum" ikki vera beinrakið, men at eginognin hjá Fíggingargrunninum skal verða tikin við sum "fíggjarligur útbúnaður".

Virðisbrøv

t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	380.443	328.411	271.701

Størsti vøksturin frá 2002 til 2003 stavar frá partapeningi, sum Landsstýrið setti í p/f Vágatunnilin, 20 mió.kr., P/F Fiskaaling 2,5 mió.kr., og keypsskála skrásettum virðisbrøvum hjá Postverki Føroya.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2003 Upphædd	2002 Upphædd	2001 Upphædd	Til skjals á Gjaldstovuni	Ikki til skjals
P/f Skipafelagið Føroyar	70	70	70	x	
P/f Føroya Banki	1	1	1	x	
P/f Flogsamband	1.521	1.521	1.511	x	
P/f Fiskaaling	2.635	175	175	x	
P/f Tvøroyrar Flakavirki	820	820	820	x	
Sp/f Vedding	20	20	20		x
L/f Skopunar Útróðrarfelag	50	50	50		x
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	x	
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	x	
P/f Smyril Line	2.760	2.760	2.760	x	
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	x	
P/f Atlantic Airways	75.000	75.000	75.000	x	
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	x	
P/f Norðoyatunnilin	62.500	62.500	30.000	x	
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	4.200	-	x	
P/f Vágatunnilin	120.300	100.300	80.300	x	
Partabrøv tilsamans	**350.871**	**328.411**	**271.701**		
Keypsskála skrásett virðisbrøv, Postverk Føroya	29.572	28.441	-		
Virðisbrøv tilsamans	**380.443**	**356.852**	**271.701**		

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey eru keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera tó ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Landið eigur allan partapeningin í 6 feløgum: p/f Føroya Lívstrygging, p/f Atlantic Airways, p/f Føroya Tele, p/f Vágatunnilin, p/f Norðoyatunnilin og p/f Fiskaaling.

Í landsroknskapinum 2003 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum, og gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum. Til samanberingar er "innara virðið" sambært ársroknskapinum hjá 10 av feløgunum í yvirlitinum tilsamans um 680 mió.kr., sí yvirlitið niðanfyri:

t.kr.

	Keypsvirðið	Innaravirðið
P/F Føroya Lívstrygging	500	74.252
P/F Flogsamband	1.521	3.725
P/F Fiskaaling	2.635	2.729
P/F Føroya dátusavn	200	224
P/F Smyril Line	2.760	6.632
P/F Atlantic Airways	75.000	113.975
P/F Føroya Tele	77.948	294.233
P/F Vágatunnilin	120.300	119.609
P/F Norðoyatunnilin	62.500	61.275
P/F Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	3.855
Partabrøv, tilsamans	**347.564**	**680.508**

Sum víst á í yvirlitinum, er keypsvirðið í nógvum førum munandi lægri enn innara virðið. Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar hava vit mælt til at endurskoða verandi roknskaparreglur og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið.

Av teimum feløgum, landið hevur sett partapening í, rindaðu p/f Atlantic Airways og p/f Føroya Tele vinningsbýti fyri roknskaparárið 2003, ávikavist 1 mió.kr. og 11 mió.kr.

Ultimo 2003 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 2.635 t.kr. í partabrøvum í p/f Fiskaaling. Sambært roknskapinum hjá p/f Fiskaaling er partapeningurin í felagnum 2.959 t.kr. Vit hava fleiri ferðir heitt á Vinnumálaráðið um at greina hesi viðurskifti.

Ultimo 2003 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 820 t.kr. í partabrøvum í p/f Tvøroyrar Flakavirki. Fiskimálaráðið kunnaði í september 2003 um, at felagið er strikað í partafelagsskrásetingini. Vit hava mælt Fiskimálaráðnum til at bóka burtur partabrøvini, sum eru skrásett í landsroknskapinum. Partabrøvini eru framvegis ikki bókað burtur.

Ultimo 2003 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 50 t.kr. í lutabrøvum í L/f Skopunar Útróðrarfelag. Fiskimálaráðið kunnaði í september 2003 um, at peningurin upprunaliga varð settur í felagið í 1968, og at felagið varð umskipað/endurreist í 1993, eftir at virksemið í felagnum var steðgað upp. Vit hava mælt Fiskimálaráðnum til at fáa greiðu á, um innskotið er mist.

Rentu- og avdráttarfrí lán

t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	189.703	170.573	178.411

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997. Í sambandi við góðkenningina av greinaroknskapinum fyri september 2003 gjørdi Mentamálaráðið vart við, at saldan "lán til sjálvsognarstovnar" ikki var rætt, tí um 35,1 mió.kr. vóru veittar stovnum undir Mentamálaráðnum í rentu- og avdráttarfríum lánum, sum ikki vóru skrásett í fíggjarstøðu landsins. Talan er um yvirtøku av lánum frá danska statinum til Føroya Handilsskúla og til teknisku skúlarnar í Tórshavn og í Klaksvík. Lánini eru síðani tikin við í landsroknskapin 2003.

Útlán t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Áogn landskassans	418.571	441.524	448.800
Sett av	-256.023	-265.233	-262.060
Sambært roknskapinum	162.548	176.291	186.740

Talan er m.a. um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk lán innan fyri vinnumál, serlán, kurslán og stuðulslán, umframt likviditetslán, sum verða umsitin av Realinum.

Sett er av ímóti tapi. Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum er sett til kr. 0. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Lækkingin frá 2002 til 2003 stavar í høvuðsheitum frá broytingum í gjaldførislánum, afturgjald av lánum til heilsumál, afturgjald av láni til Húsalánsgrunnin og afturgjald av veðhaldsútláni til IRF.

2.4.5 Áogn (GL 2001/3 01 3-6)

Goymslur t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	27.296	27.961	24.564

Talan er um vørugoymsluna hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum Landsins og Postverki Føroya.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Áogn landskassans	300.356	292.554	345.097
Sett av	-126.149	-111.421	-108.017
Sambært roknskapinum	174.206	181.133	237.080

Seinastu mongu árini hava vit víst á, at samsvar er ikki millum skattadebitorarnar hjá persónum og feløgum sambært skattaskipanunum og høvuðsbókhaldið/landsroknskapin. Sum víst á niðanfyri, eru hesir trupulleikar nú loystir, og Gjaldstovan hevur kunnað um, at í landsroknskapinum fyri 2004 verður viðmerkingin, um at skattadebitorarnir hjá persónum ikki stemma millum skattaskipanirnar og landsroknskapin, strikað.

Persónsskattur

Í februar 2004 kunnaði Toll- og Skattstovan um, at komið var á mál við at stemma av persónsskattin millum persónsskattaskipanirnar og landsbókhaldið. Persónsskatturin var stemmaður av allar mánaðirnar í 2003, og eingin nýggjur munur varð staðfestur. Vit eru kunnað um, at í september 2004 vóru seinastu rættingarnar framdar.

Í dag er avstemmanin skipað soleiðis, at Toll- og Skattstovan hvønn mánað stemmar persónsskattin av við at samanbera partsskattaskipanina "DK-skránna" við "GB-skipanina", sum er millumliðið millum skattaskipanirnar og fíggjarstýringarskipan landsins (FSL). Gjaldstovan stemmar hvønn mánað DK-skránna av við FSL. Toll- og Skattstovan heldur hesa mannagongd veita trygd fyri, at "GB-skipanin" og FSL bóka somu upphæddir. Koma partarnir fram á munir, boða teir hvør øðrum frá, og feilirnir verða rættaðir beinanvegin.

Partafelagsskattur

Toll- og Skattstovan boðaði í februar 2004 frá, at hon í mars 2004 saman við Gjaldstovuni fór at gjøgnumganga avstemmanina av partafelagsskatti. Toll- og Skattstovan helt seg hava tamarhald á viðurskiftunum millum skipanirnar, og eingir nýggir munir vóru íkomnir, sum tey ikki vistu, hvaðani teir komu.

Í februar 2005 hevur Toll- og Skattstovan kunnað um, at hon miðar ímóti, at fyri 1. apríl 2005 skal vera komið á mál við at stemma av partafelagsskattin millum felagsskattaskipanirnar og landsbókhaldið.

Skipanirnar eru nú stemmaðar av, og munirnir um 4 mió.kr. eru inntøkuførdir í roknskapinum fyri 2004.

Tíðaravmarkan

Gjaldstovan hevur aftur í 2004 víst á trupulleikan, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki kunnu handfara tíðaravmarkanir. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkumar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu "a jour" Toll- og Skattstovan er við bókingum.

Sambært Toll- og Skattstovuni eru ongar ætlanir um tøkniligar broytingar av bókhaldsskipanini, men dentur verður lagdur á at vera "a jour" við árslok.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	178.668	248.439	306.543

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Landsverkfrøðinginum, Strandferðsluni, sjúkrahúsunum og øðrum stovnum. "Aðrir skuldarar" er m.a. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað, fyri at geva eina rætta mynd. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá Toll- og Skattstovu Føroya, kommunum o.a.

Í seinastu frágreiðing í mars 2004 vístu vit á, at millumrokningar hjá innkrevjingarskipanini hjá Toll- og Skattstovuni stemmaðu ikki. Serliga hevur talan verið um inngjøld til sjúkrakassakrøv, sum skulu verða avroknað til kommunurnar. Toll- og Skattstovan fór í 2003 undir at avrokna inngjøldini til kommunurnar. Við árslok 2003 vóru 4,3 mió.kr. bókaðar á millumrokning, og við árslok 2004 3,4 mió.kr.

Lækkingin frá 2002 til 2003 stavar í høvuðsheitum frá, at áogn hjá peningastovnum er lækkað frá uml. 86 mió.kr. í 2002 til uml. 26 mió.kr. í 2003.

2.4.6 Tøkur peningur (GL 2001/3 01 4-3)

Inniogn í Landsbankanum t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	1.820.143	2.412.372	2.320.902

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya" er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum", skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan. Vit hava fleiri ferðir áður víst á, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum.

Vit hava eisini gjørt vart við, at fleiri landsstovnar/-grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum, og í uppriti í mars 2004 hevur Gjaldstovan m.a. víst á, at hóast tað er ásett í § 15 í roknskaparkunngerðini, at allar útgjaldingar skulu fara ígjøgnum búskaparskipanir landsins, fara um 3 mia.kr., útivið helvtin av øllum útreiðslum o.ø., sum eru heimilaðar á fíggjarlógini, uttanum búskaparskipanir landsins. Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin, at neyðugt er at støða verður tikin til málið, og at neyðugt er fáa gjørt greiðar lógar- og umsitingarkarmar á hesum øki.

Gjaldstovan vísti á, at tað er ógreitt, hvat átti at staðið í Landsbankanum, og tí er eisini ógreitt, hvussu nógv Landsstýrið kann brúka av almennum gjaldføri, uttan at fara út á lánimarknaðin ella at broyta lógina. Í uppritinum vísti Gjaldstovan eisini á, hvussu bøtt kann verða um stýringina av landsins gjaldføri, og hon mælti m.a. til:

- *at* seta tiltøk í verk, so at stovnar ikki sjálvir liggja við gjaldføri, men flyta tað í Landsbankan, sum so kann hava gjaldførið standandi í peningastovnunum, verður tað neyðugt,
- *at* staðfesta eitt nógv greiðari ábyrgdar- og myndugleikabýti millum landsstovnar, Gjaldstovuna og Landsbankan,
- *at* seta í verk eina virknari, nútímans gjaldførisstýring, sum hevði fört til hægri rentuinntøkur
- *at* útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni verður ein miðdepil í almennu gjaldførisstýringini, so sum ætlanin var upprunaliga.

Í skrivi í mars 2005 vísir Landsbankin á, at um tilmælini hjá Gjaldstovuni verða fylgd, fáa Gjaldstovan og Landsbankin ein virknari og greiðari leiklut í stýringini av almenna gjaldførinum.

Í fleiri uppskotum til samtyktar seinastu árini um at góðkenna landsroknskapirnar hava løgtingsgrannskoðararnir vístá, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" í lógini "um Landsbankan" og í lógini "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" eru ógreið. Løgtingsgrannskoðararnir hava aftur mælt landsstýrismanninum til at fáa greiðu á hesum viðurskiftum.

Sambært skrivi í mars 2005 tekur Landsbankin undir við, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" verða neyvari nágreinað.

Í januar og september 2002 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" fóru at verða lýst neyvari í uppskoti til broyting í lóg "um Landsbankan", sum fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2002.

Í februar 2003 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at arbeitt varð við at seta ein óheftan arbeiðsbólk at endurskoða alla lóggávuna viðvíkjandi Landsbankanum og at koma við tilmæli um framtíðar bygnað. Landsgrannskoðanini kunnugt varð eingin arbeiðsbólkur settur.

Í november 2004 greiddi landsstýrismaðurin frá, at trupult hevur verið at fingið semju um, hvønn status Landsbanki Føroya skal hava, og trupulleikin er ein partur av ósemjuni um, hvat tilknýti grunnar og landsstovnar skulu hava til landsroknskapin og løgtingsfíggjarlógina. Landsstýrismaðurin vísti á, at júst støðan hjá Landsbankanum verður nýtt sum grundgeving fyri, hví grunnar og landsstovnar ikki skulu verða tiknir við í landsroknskapin og á løgtingsfíggjarlógina.

Landsstýrismaðurin vísti í november 2004 á, at hann hevur gjørt av at leggja Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya saman í ein stovn, og at stovnurin skal vera á løgtingsfíggjarlógini. Ætlanin er at taka av lógirnar "um Landsbanka Føroya" og "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum", og nýggj lóg skal verða gjørd, har reglur fyri umsiting av gjaldføri verða ásettar.

Banka-, giro- og kassapeningur t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	439.937	350.112	318.097

Sambært landsroknskapinum 2003 er "banka-, giro- og kassapeningur", sum við árslok stendur á bók ella er í kassa, støðugt vaksin, frá um 183 mió.kr. í 1999, til 440 mió.kr. í 2003. Tað kundi bent á, at gjaldførisstýringin hjá landskassanum og teimum stovnum, ið hava egnan likviditet, ikki er nóg neyv. Gjaldstovan umsitur um 162 mió.kr. ella 38% av hesi upphædd.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan í áravís vístá, at landsstovnar/-fyritøkur (t.d. Útvarp Føroya, Apoteksverkið, Húsalánsgrunnurin, Trygdargrunnurin og Rúsdrekkasøla Landsins) hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Gjaldstovan hevur sett spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin tað vera óheppið, at landsins peningur ikki verður umsitin á ein meira skipaðan hátt. Landsbankin setir spurningin, um tað átti at verið ásett í lóg, at umsitingin av almennum peningi verður røkt á besta hátt, t.d. við einum samstarvi og ábyrgdarbýti millum Gjaldstovuna og Landsbankan, har útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni er miðdepilin í almennu gjaldførisstýringini, og fíggjarumsitingin í Landsbankanum umsitur uppsparda peningin, eins og Landsbankin umsitur gjaldføri landskassans. Ístaðin fyri at hópurin av almennum krónum standa spjaddar á ymiskum bankakontum til sera lága rentu, kundi peningurin verið settur í virðisbrøv e.a. til eina munandi betri rentu.

Harafturat vísir Landsbankin á, at fastar og nøktandi mannagongdir eru, tá Gjaldstovan flytir gjaldføri millum Landsbankan og "privata bankakervið", og tá Toll- og Skattstovan flytir pening inn á kontu í Landsbankanum, men at mannagongdirnar eru ikki nøktandi, tá aðrir stovnar flyta pening úr Landsbankanum.

Fleiri landsstovnar hava egnar banka- og girokontur. Síðani roknskaparkunngerðin kom í gildi, er talið á banka- og girokontum, sum liggja uttanfyri landsbókhaldið, nógv minkað. Vit hava áður vístá, at onkrir smáir stovnar stemmaðu ikki sínar kassa- og peningastovnskontur regluliga av við landsbókhaldið, og at fleiri kassa- og peningastovnskontur vóru skrásettar við negativari saldu í landsbókhaldinum. Í dag eru viðurskiftini so at siga komin í rættlag.

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar/-grunnar, við leysum/ivasomum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

2.4.7 Skuld (GL 2000/3 02 2-2)

Innanlandsskuld, langfreistað t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	1.609.162	401.318	405.834

Størstu upphæddirnar í 2003 eru 3 nýggj brævalán ("2003-04 750 mió.kr., "2003-06" 375 mió.kr. og "2003-08" 375 mió.kr.), tilsamans navnvirði 1.500 mió.kr., lán úr Íleggingargrunninum 99 mió.kr., og lántøka hjá Postverki Føroya, sum nú er við í fíggjarstøðu landsins, 5,2 mió.kr. Harafturat er talan um íløgugrunnar og bundna uppsparing.

Landsbanki Føroya umsitur lánsskuld landskassans og ger á hvørjum ári upp tíðaravmarkaðu rentuna. Broytingin frá 2002 til 2003 stavar frá, at í 2003 vórðu brævalán frá 2002, tilsamans 300 mió.kr., goldin aftur, og 3 nýggj brævalán, tilsamans 1.500 mió.kr., vórðu seld.

Í seinastu frágreiðing mælti Landsgrannskoðanin til at viðgera spurningin, um tað er skilagott at nýta orku og pening at skriva út brævalán, samstundis sum landið hevur tøkt gjaldføri.

8. mai 2003 lat Landsbankin Fíggjarmálaráðnum drúgva frágreiðing, ið grundgav fyri, hví tað er skilagott at skriva út lánsbrøv. Í frágreiðingini verður m.a. víst á, at útgáva av lánsbrøvum tænir fleiri endamálum:

at stuðla uppundir at fáa ein virknan virðisbrævamarknað,

at undir røttu marknaðarumstøðum kann landskassin útvega sær lán við lægri rentu,

at Landsstýrið fær betri tekin um álit frá marknaðinum við at taka lán til marknaðarkor, og at lántøka á fíggjarmarknaðinum førir til, at framtíðar landsstýri verða stuðlað til at føra ein skilagóðan fíggjar- og búskaparpolitikk.

Uttanlandsskuld, langfreistað t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	2.197.045	4.098.148	4.242.923

Talan er um 2 lán, sum stava frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Annað lánið er 4.024 mió.kr. Hitt lánið er 500 mió.kr., og er sambært avtaluni rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: "Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer." Lánini samsvara við lánsavtalur og onnur uttanhýsis skjøl.

Í november 2003 umfíggjaði Landsstýrið skuldina til danska statin við at rinda ein eykaavdrátt 1,7 mia.kr. av "4 milliard-láninum". Umleggingin varð fíggjað við 0,5 mia.kr. av gjaldføri landskassans í Landsbankanum, og við at Landsstýrið skrivaði út 1,2 mia.kr. í lánsbrøvum.

Harafturat kemur eitt stuðulslán frá Hypotekbankanum til Spesialskúlan. Lánið kr. 1.865.561 er ikki niðurskrivað ella goldið aftur seinastu nógvu árini, og sambært landsroknskapinum 2003 er eingin renta tilskrivað. Í februar 2004 boðaði Gjaldstovan frá, at "Socialministeriet" hevur slept kravinum, og tinglýsingin hevur avlýst pantini. Lánið er avskrivað í landsroknskapinum fyri 2003.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	925.519	447.906	440.863

Talan er um brævalánið "2003-04" 750 mió.kr., árliga avdráttin av láninum til donsku ríkisstjórnina og lánið frá Íleggingargrunninum, 99 mió.kr.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld) t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Sambært roknskapinum	576.959	501.646	520.856

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Útjavnanarkonta t.kr.

Ár	2003	2002	2001
Salda 1. januar	499.313	121.964	-841.342
RLÚ-úrslit	22.493	190.656	697.166
Ymiskar broytingar	-1.028	73.953	270.435
Salda 31. desember	**520.778**	**386.572**	**126.258**

At saldan á útjavnanarkontuni primo 2003 ikki stemmar við salduna ultimo 2002, er í høvuðsheitum tí, at fíggjarstøðan hjá Postverki Føroya er tikin við í landsroknskapin 2003.

"Ymiskar broytingar" fevna um broytingar á fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingar av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøka av grunnum, úrslit hjá internum grunnum, broytingar í avsetingum, mótbókingar til útlánsroknskap og mótbókingar til kapitalinnskot. Vit hava við stakroyndum kannað grundarlagið undir bókingunum; einki var at viðmerkja.

Útjavnanarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., verða ikki virðismett í roknskapinum. Útjavnanarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

2.5 Umsiting av skatti, avgjøldum o.a.

2.5.1 Kassaeftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya (GL 2004/2 04 0-12)

Í seinastu frágreiðingini vístu vit á, at mannagongdirnar á kassaøkinum ikki altíð samsvaraðu við roknskaparreglugerðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Landsstýrismaðurin hevur í november 2004 boðað frá, at Stýrið hevur álagt øllum økisstjórum at seta tiltøk í verk, so at 1. januar 2005 skuldu mannagongdirnar á kassaøkinum samsvara við roknskaparreglugerðina. Eisini hevur Stýrið broytt nakrar reglur.

Eins og árini frammanundan hava vit verið ófráboðað á kassaeftirliti í øllum økjunum á Toll- og Skattstovu Føroya. Allastaðni var samsvar ímillum upptalda kassapeningin og bókhaldið eftirlitsdagin, og samsvar var eisini ímillum bókhaldið og kontuavritini frá peningastovnunum.

Vit kannaðu eisini, um samsvar var ímillum tað, sum økini sambært bókhaldinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki høvdu avroknað við Føroya Gjaldstovu, og tað, sum deildirnar høvdu standandi inni á peningastovnskontu. Í tveimum økjum vóru munir. Í øðrum økinum er munurin rættaður, og í hinum verður arbeitt við at finna feilin.

Toll- og Skattstova Føroya hevur ásett hámark á peningastovnskontum, og tá farið er upp um hámarkið, skal peningurin setast í Landsbankan. Eitt øki hevði gjørt sjálvvirkandi flytingar frá peningastovnskontum til Landsbankan. Í seinastu frágreiðing mæltu vit Stýrinum til at fara yvir til sjálvvirkandi flytingar í øllum økjunum. Økið, sum hevur brúkt hesa skipan, hevur nú tikið hana av, tí skipanin hevði við sær, at peningastovnskonturnar komu í "tekniskt" trot, t.v.s., at peningur, sum verður fluttur av kontuni, fær virðið sama dag, meðan peningur, sum kemur inn á kontuna, fær virðið dagin eftir. Peningastovnarnir hava kravt 54 t.kr. í morarentu í 2004. Vit hava heitt á Stýrið um at fáa eina smidliga sjálvvirkandi flyting av øllum yvirskotsgjaldføri uttan henda stóra eykakostnað.

Tá hetta málið eisini snýr seg um gjaldføri landskassan, hava vit eisini mælt Stýrinum til at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið.

2.5.2 Roknskapar- og trygdarreglur (GL 1996/2 04 0-2)

Vit hava í áravís í frágreiðingum okkara víst á, at roknskapar- og trygdarreglurnar vóru ógreiðar, og vit hava mælt til at endurskoða reglurnar.

Í desember 2002 varð ein samlað roknskaparreglugerð, galdandi frá 2003 fyri Stýrið og øll økini, løgd út á intranetið hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Roknskaparreglugerðin er góðkend av Fíggjarmálaráðnum.

Ásett er, at í roknskaparreglugerðini skal verða greitt frá um skipanina av roknskaparverkinum og fyriskipan av roknskaparuppgávunum á stovninum, herímillum upplýsingar um ábyrgdar- og heimildarbýti og tær reglur, sum skulu verða fylgdar í sambandi við útinnan av roknskaparuppgávunum. Harafturat eru reglur fyri, hvørji innanhýsis eftirlit skulu verða gjørd, og hvussu tey skulu verða skjalprógvað.

Í 2003 fóru vit undir at gjøgnumganga mannagongdir, innaneftirlit, roknskaparreglugerðir o.a. í sambandi við umsiting av persónsskatti og felagsskatti. Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um, at vit, eins og í undanfarnum kanningum av roknskapar- og trygdarreglum, vóru komin fram á, at fleiri týðandi eftirlitslistar verða ikki skrivaðir út, og at mannagongdir og innanhýsis eftirlit eru ikki nóg væl lýst í roknskaparreglugerðini. Niðanfyri hava vit greitt gjøllari frá um grannskoðan okkara.

2.5.3 Innaneftirlit í sambandi við umsiting av skatti (GL 2000/2 04 2-2 og 1999/2 04 3-3)

Landsgrannskoðanin fór í 2003 undir at grannskoða innaneftirlitið á Toll og Skattstovu Føroya í sambandi við umsiting av skatti, og í 2003 og 2004 hava vit vitjað øll økini. Í byrjanini høvdu vit sakkøna hjálp, sum legði okkum lag á og tók lut á fyrstu fundunum.

Arbeiðið hevur verið sera tíðarkrevjandi, og tá vit høvdu vitjað í øllum økjum, valdu vit at avmarka arbeiðið og kanna mannagongdirnar neyvari í Streymoyar Øki. Í frágreiðing okkara hava vit tó samanborið mannagongdirnar í Streymoyar Øki við hini økini, í tann mun vit hava spurt um somu mannagongdir.

Frágreiðing okkara, saman við fylgiskjølunum, er ætlað at lýsa innaneftirlitið í sambandi við umsitingina av skatti og geva eina ábending um, í hvønn mun reglurnar verða fylgdar, og í hvønn mun reglurnar eiga at verða broyttar/dagførdar.

Vit hava umrøtt frágreiðingina við umboð fyri Stýrið og Streymoyar Øki. Ætlanin er, at frágreiðingin kann verða brúkt sum liður í arbeiðinum at endurskoða og bøta um roknskaparreglugerðina og innaneftirlitið sum heild. Landsgrannskoðanin hevur í hesum sambandi boðið sær til at stuðla uppundir arbeiðið við støði í frágreiðingini við fylgiskjølum.

Ein treyt fyri at innaneftirlitið kann virka er, at leiðslan hevur sett sær mál. Í Ll. nr. 169/1997, um Toll- og skattafyrisiting, eru ásetingar um yvirskipaðu leiðsluna av Toll- og Skattstovu Føroya. Í frágreiðingini hava vit m.a. víst á, at landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur fyri virkseminum hjá Toll- og Skattaráðnum. Toll- og Skattaráðið hevur ikki ásett stevnumið, sum Toll- og Skattstovan skal arbeiða eftir. Vit hava ikki fingið staðfest, hvørjar árligar virkisætlanir Stýrið ger, og hvørji eftirlit eru við, at virkisætlanirnar verða fylgdar.

Fíggjarmálaráðið vísir í mars 2005 á, at ætlanin er at endurskoða lógina og skipanina við einum Toll- og Skattaráði.

Í frágreiðing okkara verður m.a víst á, at roknskaparreglugerðin í fleiri førum er ógreið og onkrum førum mótsigandi, tá tað snýr seg um eftirlitsvirksemi viðvíkjandi umsiting av skatti. Fleiri reglur og mannagongdir, ið víst verður til, eru "ein leivd frá farnari tíð". Tað er helst tí, at roknskaparreglugerðin, við tilvísingum, og leiðbeiningin til vinnuskránna verða lítið brúktar av starvsfólkunum.

Har eftirlitsvirksemi er ásett í roknskaparreglugerðini, verða eftirlit í nógvum førum ikki framd sum ásett. Á fleiri umsitingarøkjum er einki eftirlitsvirksemi ásett í roknskaparreglu-

gerðini e.l., men hóast tað, hava vit sað, at tað fara fram onnur skilagóð eftirlit. Flestu eftirlit verða tó ikki skjalprógvað.

Nógvar grundir kunnu verða til, at innaneftirlitið ikki virkar nóg væl, t.d. at:

- eftirlitsmál ikki eru ásett,
- eingin váðameting er gjørd,
- eftirlitsmálini eru ikki hóskandi ella nóg væl greinað,
- starvsfólk eru ikki nóg væl kunnað um, hvat tey skulu gera,
- starvsfólk eru ikki nóg væl kunnað um, hvussu arbeiðið skal verða skjalprógvað,
- eru feilir, vita starvsfólk ikki, hvørjum tey skulu boða frá,
- leiðslan raðfestir ikki innaneftirlitið nóg høgt o.s.fr.

Vit hava mælt til at broyta hugburð og mannagongdir, tá ræður um innaneftirlit, t.d. samsvarandi hugburðinum aftanfyri COSO-frágreiðingina e.l. Vit hava eisini mælt til at eyðmerkja innaneftirlitini, og at hugsa um at seta í verk mannagongdir við t.d. kekklistum. Tað kunnu verða vikulistar, mánaðarlistar e.a., sum kunnu vera eitt amboð hjá leiðsluni/ Stýrinum at hava eftirlit við, at innaneftirlitini verða framd.

Vísandi til at Gjaldstsovan er í ferð við at menna eina eina ISMS-skipan til at halda skil á og fylgja við øllum tí eftirlitsvirksemi, sum fer fram á stovnum sambært roknskaparreglugerðini, KT-trygdarforskriftum o.ø., hava vit mælt til, at Toll- og Skattstova Føroya verður við til at menna skipanina og laga hana til egnan tørv.

Samanumtikið er tað tó okkara fatan, at skattaskipanirnar virka væl, og at nógvar sjálvvirkandi mannagongdir og reglulig kunning til skattgjaldarar, arbeiðsgevararnar og kommunurnar um skrásettar upplýsingar í stóran mun tryggja, at skrásetingarnar eru rættar.

So at siga ongar kærur ella viðmerkingar koma frá skattgjaldarum í sambandi við, at skattalistin hvørt ár liggur frammi til alment eftirlit. So at siga ongar viðmerkingar verða latnar Toll- og Skattstovuni í sambandi við, at kommunurnar fáa yvirlit yvir inntøkur og frádráttir hjá skattgjaldarunum í kommununi. At skattgjaldarin o.o. hava so gott høvi at gera vart við møguligar skeivleikar, verður roknað sum eitt sera munadygt eftirlit. At so fáar rættingar og viðmerkingar eru til skrásetingarnar bendir á, at tær upplýsingar, sum eru skrásettar, sum heild eru rættar.

2.5.4 Innflutningsgjøld (GL 2001/2 04 5-7)

Í august 2004 komu vinnuligir kontantkundar við í skipanina at tollavgreiða sjálvir. Í februar 2004 mæltu vit til, at Toll- og Skattstova Føroya vendi sær til Gjaldstovuna, m.a. vísandi til § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini, fyri at tryggja, at broytta skipanin frá byrjan lýkur tey krøv, ið eru ásett viðvíkjandi trygd, gjalding og bókhaldi. Í februar 2005 spurdu vit Stýrið, um Toll- og Skattstova Føroya hevur havt samskifti við Gjaldstovuna um skipanina. Vit hava einki svar fingið.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár gjørt teldukanningar (QMF) av tollskrásetingum, har vit av royndum vita, at stórir feilir kunnu koma fyri. Í frágreiðingunum í 2003 og 2004 hava vit vístá, at nú innflytarar sjálvir eru farnir at tollavgreiða, átti Toll- og Skattstova Føroya sjálv javnan at gjørt tílíkar teldukanningar. Í februar 2005 spurdu vit Stýrið, um Toll- og Skattstova Føroya ger QMF-tollkanningar. Vit hava einki svar fingið. Í 2004 hava vit gjørt kanningar, og vit eru aftur komin fram á stórar feilir. Vit hava boðað avvarðandi øki frá feilunum og enn einaferð mælt til, at Toll- og Skattstovan sjálv ger tílíkar kanningar.

2.5.5 Skrásetingargjald (GL 2002/2 04 5-9)

Vit hava í 2004 grannskoðað umsitingina av "skrásetingargjaldi" í Streymoyar øki, og vit sendu Stýrinum frágreiðingina í september 2004.

Lógargrundarlag

- Ll. nr. 175 frá 18. desember 1992 "um skrásetingargjald á motorakførum v.m." við seinni broytingum,
- K. nr. 21 frá 19. februar 2003 "um skráseting av motorakførum",
- K. nr. 15 frá 27. februar 1996 "um skrásetingargjald á motorakførum sum flytigóðs",
- K. nr. 104 frá 3. november 1989 um "Bilvrakgrunnin", seinast broytt við K. nr. 121 frá 20. juni 1997.

Í § 15 í lógini stendur, at innflutt brúkt akfør skulu niðurskrivast prosentvís av "meinlíkum nýggjum akfari". Sambært Toll- og Skattstovu Føroya hevur Toll- og Skattaráðið góðkent, at við "einum meinlíkum nýggjum akfari" verður meint við útveganarprísin, tá akfarið var nýtt, t.d. fyri 10 árum síðani. Vit hava biðið Stýrið um avrit av góðkenningini frá Toll- og Skattaráð Føroya.

Í § 18, stk. 2, í lógini verður Landsstýrinum *"heimilað við kunngerð at seta nærri reglur fyri, hvussu skrásetingargjaldið skal ásetast við atliti til aldur á akfarinum, meirvirðisgjald av søluvirðinum o.a."* Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett neyvari reglur í kunngerð. Toll- og Skattstova Føroya má tí brúka sjálvgjørdar niðurskrivingarreglur, tá neyðsendarakfør og lík-vognar, sum einki skrásetingargjald hava goldið, verða umskrásettir til aðra nýtslu. Vit hava mælt til at áseta reglur sambært § 18, stk. 2.

Í § 20 verður Landsstýrinum heimilað at áseta eitt gjald fyri burturbeining, sum verður rindað í landskassan við fyrstu skráseting av akfarinum. Neyvari reglur um útgjalding fyri burturbeining av akførum verða ásettar av Føroya Landsstýri. K. nr. 104/1989 við seinni broytingum, um bilvrakgrunnin hevur ikki heimild í galdandi lóg. Vit hava mælt til at fáa formligu viðurskiftini í rættlag og at dagføra reglurnar.

Einki skrásetingargjald er á prutlum við motorstødd 50 cm^3 ella minni, sum koyra í mesta lagi 30 km/tíman. Í § 1 í lógini er ásett, at fyri motorakfør, sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á eitt virðisgjald. Í 2002 vórðu prutl skrásetingarskyldug. Prutl eru ikki beinleiðis nevnd, men heldur ikki undantikin í lógini um skrásetingargjald á motorakførum. Eftir okkara tykki hevði tað verið greiðari, um prutl vóru undantikin í lógini. Vit hava biðið Stýrið um teirra viðmerkingar.

EDV-skipanir

Skrásetingargjaldið og burturbeiningargjaldið verða avgreidd í akfarsskipanini, sum er ein út-rokningarskipan. Tó verður akfarsskipanin ikki brúkt í øllum førum, men í staðin fyri verður skrásetingargjaldið og burturbeiningargjaldið roknað út manuelt. Vit hava mælt til, at alt skrásetingargjald og burturbeiningargjald í øllum førum verður skrásett í akfarsskipanini.

Grannskoðan av rokningum

Vit hava tilvildarliga valt út nakrar skrásetingargjaldsrokningar úr akfarsskipanini, fyri at tryggja okkum at avgjaldsgrundarlagið, slagið av akfari, møgulig áramálsniðurskriving o.a. var rætt tøppað í akfarsskipanina. Eisini hava vit kannað, um rokningarnar vóru roknaðar rætt út. Einki var at finnast at.

MVG av skrásetingargjaldi

Soleiðis sum lógin verður umsitin, leggur Toll- og Skattstova Føroya MVG omaná skrásetingargjaldið, tá talan er um privatar innflytarar. Toll- og Skattstova Føroya leggur ikki MVG omaná skrásetingargjaldið, tá bilforhandlari skrásetir eitt akfar. Toll- og Skattstova Føroya vísir í hesum sambandi á, at í mun til privat fólk er bilforhandlarin MVG-skrásettur, og leggur MVG oman á samlaða søluprísin, íroknað skrásetingargjaldið.

Í viðmerkingunum til uppruna MVG-lógina í 1992, í MVG-handbókini og í leiðbeining til MVG, sum Toll- og Skattstova Føroya gav út í 1992, stendur, at skrásetingargjaldið er undantikið MVG. § 7, stk. 2, í MVG-lógini er ikki broytt. Í viðmerkingunum til uppskot til broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald (Lm. nr. 94/1999) stendur, at MVG skal verða roknað av skrásetingargjaldinum. Sostatt kann sigast, at tulkingin av MVG-lógini er broytt sambært viðmerkingunum í einum lógaruppskoti um broyting av aðrari lóg. Vit hava gjørt vart við, at tað er ikki góður lóggávusiður.

Tað kann eisini verða nevnt, at Toll- og Skattstova Føroya í onkrum føri tulkar MVG-lógina øðrvísi, eftirsum MVG ongantíð hevur verið roknað av skrásetingargjaldinum, tá hýruella skúlavognar, við tinglýstum panti, verða umskrásettir til persónvognar. Vit hava víst á, at skal MVG verða goldið av skrásetingargjaldi, skal MVG eisini verða roknað, tá hýruvognur verður umskrásettur til persónvogn.

Vit hava mælt til at taka spurningin upp, so ongi ivamál verða um MVG av skrásetingargjaldinum. Stýrið boðaði í februar 2005 frá, at løgfrøðingar í Stýrinum kanna spurningin.

MVG av burturbeiningargjaldi

Toll- og Skattstova Føroya leggur MVG omaná burturbeiningargjaldið, tá talan er um privatar innflytarar. Toll- og Skattstova Føroya leggur ikki MVG omaná burturbeiningargjaldið, tá ið ein bilforhandlari skrásetir eitt akfar. Toll- og Skattstova Føroya vísir í hesum sambandi á, at í mun til privat fólk er bilforhandlarin MVG-skrásettur og krevur upp MVG, tá bilurin verður seldur, t.v.s. í síðsta søluliðinum.

Av sølusáttmálum frá trimum bilforhandlarum gongur fram, at teir ikki rokna sølu-MVG av burturbeiningargjaldinum, men av søluprísinum uttan burturbeiningargjald. Hetta kundi bent á, at ikki allir bilforhandlarar krevja upp MVG í síðsta søluliðinum. Vit hava mælt til at taka spurningin upp, so ongi ivamál verða um MVG. Stýrið boðaði í februar 2005 frá, at løgfrøðingar í Stýrinum kanna spurningin.

Vøruvognar

Í § 5 stendur, at fyri vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar er avgjaldið 30% av avgjaldsskylduga virðinum. Í § 8 stendur, at fyri last- og vøruvognar er avgjaldið 15% av avgjaldsskylduga virðinum fyri akfør við totalvekt 3.500 kg. og minni.

Formliga er tað keyparin, sum avgreiðir skrásetingargjaldið, og á "fráboðan til sýn og/ella skráseting av akførum" er ásett hvat slag av akfari, talan er um. Vit kannaðu, hvør váttar, hvat slag av bili talan er um. Av sjey vøruvognum hevði Bileftirlitið bert í einum føri váttað, hvat slag av bili talan var um. Allir sjey vøruvognarnir vóru avgreiddir eftir § 8 við 15%.

Fleiri vøruvognar og persónvognar í dag líkjast, og tí kann ivi vera um, hvørt teir skulu rinda 15% ella 30%. Vit hava mælt til at áseta greiðar reglur á hesum øki og at umhugsa, um ikki Bileftirlitið í øllum førum eigur at vátta, hvat slag av vøruvogni, talan er um.

Vøruvognar umskrásettir til persónvogn

Um vøruvognur verður broyttur til persónvogn áðrenn 8 ár frá skrásetingardegnum, skal skrásetingargjald, svarandi til munin ímillum persónvogn og vøruvogn, verða latið landskassanum.

Vit hava gjørt vart við, at:

- rokningin/kvittanin er ikki útgreinað í skrásetingargjald, MVG og burturbeiningargjald, so gjaldarin veit ikki, hvat hann rindar fyri,
- MVG verður ikki bókað á rætta kontu, men á kontu fyri skrásetingargjald,
- MVG verður goldið tvær ferðir av skrásetingargjaldinum av vøruvognum,
- burturbeiningargjald, sum verður afturgoldið, tí goldið er ov nógv, verður ikki bókað á kontuna "Burturbeiningargjald",
- skrásetingargjaldið verður ikki tøppað í AK-skipanina, men manuelt roknað út.

Í roknskaparreglugerðini finst eingin vegleiðing sum sigur, hvussu starvsfólk skulu rokna skrásetingargjaldið út. Vit hava biðið Stýrið um viðmerkingar.

Gjald fyri umskráseting við eigaraskifti

Hvørki Trygginarfelagið ella Bileftirlitið krevja longur, at gjald kr. 600 skal verða goldið, áðrenn umskráseting við eigaraskifti kann fara fram. Tí er sannlíkt, at ikki øll rinda gjald fyri umskráseting við eigaraskifti, hóast tað er ásett í § 19 í lógini. Vit hava mælt til at seta í verk eina mannagongd, sum tryggjar, at gjaldið í øllum førum verður rindað.

Burturbeiningargjald av flytigóðsbilum

Toll- og Skattstova Føroya krevur ikki burturbeiningargjald av akførum, flutt inn sum flytigóðs. Toll- og Skattstova Føroya heldur, at bilar, sum verða fluttir inn sum flytigóðs, skulu verða avgjaldsfríir. Vit hava vístá, at eigararnir fáa eitt "innlatingargjald" goldið út, tá bilarnir verður burturbeindir. Vit hava tí mælt til at greiða spurningin, um burturbeiningargjald skal krevjast av bilum, sum koma til landið sum flytigóðs.

Roknskaparreglugerð um skrásetingargjald o.t.

Í roknskaparreglugerðini stendur einki um, hvussu skrásetingargjaldið skal roknast út, um MVG skal leggjast omaná ella ikki, í hvørjari skipan skrásetingargjaldið skal verða skrásett o.a. Eftir okkara tykki er roknskaparreglugerðin ikki nøktandi. Vit hava mælt til at endurskoða roknskaparreglugerðina og lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi skrásetingargjaldinum.

1. oktober 2004 flutti umsitingin av skrásetingargjaldinum til Bileftirlitið.

Gjald fyri burturbeining av bilum

Í 2004 hava vit grannskoðað "Gjald fyri burturbeining av bilum".

Eitt serligt burturbeiningargjald kr. 1.500 ella kr. 3.000, alt eftir stødd, verður goldið landskassanum saman við skrásetingargjaldinum, fyri at tryggja burturbeining av bilvrakinum. Eigarin av bilinum fær afturgoldið kr. 1.000, tá ið bilvrakið verður latið góðkendum vrakmóttøkuplássi. Móttøkuplássið fær síðani burturbeiningargjaldið afturgoldið frá Føroya Gjaldstovu.

Gjald fyri burturbeining av bilum verður bókað á somu høvuðskontu sum skrásetingargjaldið, og er heimilað í somu lóg. Kunngerðin um burturbeining av akførum hevur ikki heimild í galdandi lóg um skrásetingargjald, og kunngerðin er í fleiri førum ótíðarhóskandi. Vit hava mælt til, at kunngerðin verður broytt, soleiðis at hon fær heimild í galdandi lóg um skrásetingargjald og verður gjørd meira tíðarhóskandi.

Eingin játtan er til útreiðslurnar, og vit hava mælt til, at peningur verður játtaður á løgtingsfíggjarlógini til burturbeining av akførum. Gjaldstovan rindar rokningarnar frá móttøkuplássum og fylgir teimum vanligu mannagongdunum á roknskaparøkinum.

Vit hava mælt til at kanna, hvussu tað kann koma fyri, at akfør eru í "umfari", aftaná at Gjaldstovan hevur goldið góðkendari vrakmóttøkustøð innlatingar- og burturbeiningargjald, og vrakmóttøkustøðin hevur skrivað undir, at bilvrakið er burturbeint. Føroya Gjaldstova hevur í februar 2005 boðað okkum frá, at talan er um 3 bilar. Gjaldstovan hevur sett vrakmóttøkustøðini fyrispurning um hetta.

2.5.6 Framleiðsluavgjald (GL 1999/2 04 6-6)

Í frágreiðingum í februar 2002 og í februar 2003 umrøddi Landsgrannskoðanin m.a., at eftirlitið við framleiðslugjaldinum var ikki nóg væl greinað í roknskaparreglugerðini.

Stýrið skuldi saman við økisskrivstovunum kanna framleiðslugongdina neyvari og eftirsíðan áseta reglur í roknskaparreglugerðini.

Í februar 2005 boðaði Stýrið frá, at arbeiðið er ikki liðugt enn.

2.5.7 Ferðaavgjald (GL 2002/2 04 6-8)

Í seinastu frágreiðing í mars 2004 umrøddu vit, at Toll- og Skattstova Føroya hevði bøtt um flest allar veikleikar í umsitingini av ferðaavgjaldinum, sum vit høvdu víst á.

Vit gjørdu vart við, at sambært § 2 í Ll. nr. 37/1988 "um ferðagjald" við seinni broytingum skuldi landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur viðvíkjandi inngjøldum. Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2004 frá, at hann um stutta tíð fór at áseta reglurnar í kunngerð. Í februar 2005 hevur Stýrið boðað frá, at teir halda lógina vera so greiða, at ikki er neyðugt at gera nakra kunngerð.

Vit vístu eisini á, at í roknskaparreglugerðini vóru ongar reglur viðvíkjandi ferðaavgjaldi, og vit høvdu mælt Stýrinum til at endurskoða roknskaparreglugerðina. Okkum kunnugt er tað ikki gjørt.

Vit mæltu til, at serliga góðkenningarskjalið (EK 76.0) verður nýtt, tá mánaðarroknskapurin verður váttaður mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Hetta fyri at tryggja at allir partar eru greiðir yvir, hvat ein góðkenning merkir. Í februar 2005 kunnaði Stýrið um, at góðkenningarskjalið bert hevur verið brúkt við ársenda, men nú er ætlanin eisini at brúka tað hvønn mánað.

2.5.8 Vegskattur (GL 2004/2 04 6-9)

Vit hava í 2004 grannskoðað umsitingina av vegskatti á Bileftirliti Føroya.

<u>Lógargrundarlag</u>

- Ll. nr. 38 frá 31. mars 1982 "um vektgjald á motorakførum v.m." við seinni broytingum,
- K. nr. 46 frá 12. juli 2004 "um ellisakfør" og
- K. nr. 14 frá 10. februar 1998 "um motorakfør og viðfestar vognar, 12.000 kg. totalvekt ella meira, ið verða skrásettir til uttanlandsflutning".

<u>Akfør, ið ikki skulu rinda vektgjald</u>

Sambært § 1 lógini skulu øll skrásetingarskyldug motorakfør rinda vektgjald. Í §§ 11 og 13 a eru tey akfør nevnd, sum ikki skulu rinda vektgjald, herímillum neyðsendarakfør, ellisakfør o.o. Harafturat eru líkvognar og prutl skrásett soleiðis í akfaraskránni, at tey ikki skulu rinda vektgjald. Ivasamt er, um heimild er fyri hesi undantøku.

EDV-skipanir

Í sambandi við umsitingina av vektgjaldinum nýtir Bileftirlitið og Gjaldstovan hesar EDV-skipanir

- Akfaraskráin: í hesi skipan verða upplýsingar um akfør og akfarseigara skrásett.
- Vegskattaskipanin (FSL-vegskatt): í hesi skipan verða vegskattakrøvini tilskrivað, og skuldaraumsitingin fer fram í skipanini.
- Bilbasan: skipanin er ein forskipan til vegskattaskipanina, og hon skilir frá, hvørjar upplýsingar í akfaraskránni skulu latast vegskattaskipanini, t.d. vektgjaldskota, eginvekt og drívmegi.
- Kassaskipanin: í hesi skipan verða inngjøld/inntøkur skrásett. Upplýsingarnar verða lisnar inn í FSL-FIGS.
- FSL-FIGS (inngjaldsskipan): í hesi skipan verða inn- og útgjøld, avskrivingar o.a. bókað. Skipanin hevur markamót við vegskattaskipanina og kassaskipanina.

Roknskaparreglugerð fyri Bileftirlit Føroya og Vektgjald

Bileftirlit Føroya hevur gjørt eina roknskaparreglugerð, sum fevnir um stovnsnummar 109120, "Bileftirlit Føroya" og stovnsnummar 128401, "Vektgjald". Roknskaparreglugerðin fyri stovnsnummar 128401 "Vektgjald" er 1. november 2002 góðkend av Fíggjarmálaráðnum. Stjórin hevur greitt frá, at reglugerðin verður dagførd um ársskiftið 2004/2005.

Í pkt. 10 í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir eru ávís krøv til skrivligar lýsingar av egnum EDV-skipanum. Vit halda ikki, at roknskaparreglugerðin lýkur hesi krøv. Vit hava mælt til at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum kunnað um, at arbeiðið við at skjalfesta EDV-skipanirnar hjá stovninum hevur verið drúgvari enn væntað, men arbeiðið verður ætlandi liðugt í 2005. Síðani verður farið undir at gera brúkaravegleiðingar.

Skráseting av akførum

Í akfaraskránni verða skrásett nýggj akfør, og brúkt akfør verða umskrásett í sambandi við eigaraskifti.

Akfaraumsitingin kannar, at eitt serligt oyðublað er rætt fylt út. Tá akfarseigari ella bilasøla hava rindað skrásetingargjald, vektgjald o.a., verða dáturnar á oyðublaðnum tøppaðar í akfaraskránna. Akfarseigari ella bilasøla fáa síðani nummarspjaldrið útflýggjað, og skrásetingarskjal verður skrivað úr akfaraskránni.

Viðmerkingar

Vit valdu tilvildarliga út 10 akfør fyri at kanna, um tey vóru rætt skrásett í akfaraskránni. Vit kannaðu, um:

- upplýsingarnar vóru rætt skrásettar í akfaraskránni við atliti at vektgjaldskotu, eginvekt og drívmegi.
- upplýsingarnar úr akfaraskránni vóru rætt førdar yvir í "vegskattaskipanina", via "bilbasan".

Vit samanbóru skrásettu upphæddirnar í vegskattaskipanini, hvussu nógv akførini skuldu rinda í vektgjaldi, við gjaldskránna í vegskattalógini. Niðurstøðan var, at øll 10 akførini vóru skrásett við røttum vektgjaldi.

Skráseting av inntøkum

Í vegskattaskipanini verður vektgjaldið tilskrivað, umframt áminningargjøld og klippiáminningar. Í tí sambandinum verður ein kekklisti nýttur til at tryggja, at mistøk ikki verða gjørd.

Skráseting av inn- og útgjøldum o.a.

Í FSL-FIGS verða skrásett inngjøld á peningastovnskontur fyri vegskatt, avskrivingar av krøvum, útgjøld frá vegskattaskipanini og inntøkur/inngjøld frá kassaskipanini hjá Bileftirlitinum. FSL-FIGS hevur markamót til vegskattaskipanina, og inngjøld, útgjøld, avskrivingar o.a. verða flutt til vegskattaskipanina, har skuldarin verður góðskrivaður ella skuldskrivaður.

Vit hava gjøgnumgingið journalir og samanborið tær við undirliggjandi skjøl. Journalirnar eru góðkendar sambært ásetingunum í roknskaparreglugerðini, og neyðug undirskjøl eru. Samanumtikið halda vit, at kassa- og peningastovnsøkið er væl umsitið, bæði tá ræður um skráseting og eftirlit.

Eftirstøður og innkrevjing

Sambært yvirliti frá stovninum vóru eftirstøðurnar av vegskatti um 245 t.kr., áðrenn nýggj vegskattakrøv vórðu tilskrivað í november/desember 2004. Stovnurin sendir akfarseigarum 2 áminningar, og síðani fær løgreglan boð um at klippa pláturnar. Akfarseigarin fær eitt nýtt krav. Um nýggja kravið ikki verður goldið, verður tað í mars/apríl mánaði árið eftir sent fútarættinum at heinta inn. Samanumtikið halda vit, at innheintanin av vegskatti er virkin.

Roknskapargóðkenning

Stovnurin nýtir kekklistar í sambandi við koyringar í vegskattaskipanini og í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni. Samanumtikið halda vit, at tað tryggjar, at ætlaðu eftirlitini verða framd og harvið, at rakstur og fíggjarstøða eru rætt.

2.5.9 Innkrevjing (GL 2001/2 04 9-1)

Í frágreiðingum okkara hava vit fleiri ferðir vístá, at nýggja innkrevjingarskipanin (IK-skipanin), sum kom í 2000, fekst at virka væl fyri tey krøv, sum Toll- og Skattstovan frammanundan varðaði av og kendi til, og sum heild er innkrevjingin helst munandi betri, enn hon var í 1994, tá ið eingin innkrevjingarskipan var. Tó eru nakrir yvirskipaðir trupulleikar, og teir somu á fleiri økjum:

1. Framvegis verða innkrevjingarviðurskiftini hjá sama borgara loyst í ymiskum skipanum. Fallin krøv í debitor- og lánsskipanini á Gjaldstovuni og í debitor- og lánsskipanum hjá landsstovnum, sum liggja uttanfyri Gjaldstovuna, verða í flestu førum send beinleiðis til sakførara, uttanum innheintingina á Toll- og Skattstovuni. Innkrevjingin verður ikki loyst sum ein sergrein. Tí mega landsstovnar hvør í sínum lag stíla fyri innkrevjing.
2. Markamótið millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna er framvegis ógreitt. Í tann mun markamótið er vorðið greiðari, er tað tí, at einki markamót er millum skuldarar í skipanunum hjá teimum báðum stovnunum.
3. Eingin lóg er gjørd um innkrevjing av almennum krøvum.
4. Innkrevjingin er ikki samskipað við høvuðsbókhaldið, og sloppið er ikki undan nógvum óneyðugum bókingum, feilum og millumrokningum.

Í skrivi í desember 2004 vísir landsstýrismaðurin á:

ad. 1. at ásannast má, at tað helst eru onnur krøv, ið tað hevði verið skilagott at lagt inn í IK-skipanina, t.d. útvarps- og sjónvarpsgjøld, men hinvegin er tað neyvan skilagott at leggja krøv fyri sølu av vørum og tænastum inn í IK-skipanina,

ad. 2. at Fíggjarmálaráðið í desember 2004 hevur havt fund við leiðslurnar á Føroya Gjaldstovu og Toll- og Skattstovu Føroya, og at tær hava lovað at fáa rættað tað, sum er ógreitt í markamótinum millum Toll- og Skattstovu Føroya og Føroya Gjaldstovu, t.d. barnapeningur og sjúkrakassagjøld,

ad. 3. at ásannast má, at tørvur er á tílíkari lóg, og Fíggjarmálaráðið hevur eisini eina nýggja innkrevjingarlóg á sínum løglista, men í løtuni eru onnur lógaruppskot á hesum lista raðfest hægri,

ad. 4. at leiðslurnar á báðum stovnunum hava lovað at tryggja eina betri samskipan millum innkrevjing og høvuðsbókhaldið.

Í skrivinum í desember 2004 vísir landsstýrismaðurin eisini á, at tað tykist sum IK-skipanin virkar væl fyri tey krøv, sum Toll- og Skattstovan sjálv varðar av, og at leiðslan á Toll- og Skattstovuni sigur, at skipanin eisini virkar væl fyri onnur krøv, ið hon krevur inn, t.d. krøv hjá Stuðulsstovninum.

Brúkaraleiðbeiningar

Í seinastu frágreiðing vístu vit eisini á, at brúkaravegleiðingarnar o.t. vóru ikki nøktandi, og brúkararnir høvdu ikki neyðugan kunnleika til teir møguleikar, sum eru í IK-skipanini. Fyri at bøta um hetta fór Menningardeildin á heysti 2001 undir at skriva eina nágreiniliga brúkaravegleiðing, umframt eina vegleiðing um innkrevjingarmannagongdir mótvegis brúkarum og stovnum. Roknskaparreglugerðin hjá Toll- og Skattstovuni er løgd út á intranetið hjá Toll- og Skattstovu Føroya, og "Leiðbeining til IK-skipanina" er fylgiskjal til roknskaparreglugerðina.

Leiðarin á Menningardeildini hevur kunnað um, at nú eru fleiri hentleikar tøkir í IK-skipanini, m.a. eru gjørdar áminningarskipanir um fyrning og panting umframt aðrar ábøtur, sum lætta um arbeiðsgongdirnar. Hesar mannagongdir eru lýstar í roknskaparreglugerðini.

Sum gjøllari greitt frá niðanfyri, hevur innanhýsis kervisskoðarin á Elektron hevur í 2004 latið úr hondum eina frágreiðing um skoðan av innkrevjingarskipanini. Kervisskoðarin sigur m.a. í niðurstøðuni, at trygdar- og eftirlitsstøðið í sjálvari telduskipanini virkar nøktandi, men at ábøtur eiga at verða gjørdar. Telduskipanin tryggjar ikki rætta málsviðgerð, og tí eigur leiðslan at seta í verk munadyggar mannagongdir og eftirlitsskipanir at tryggja rætta málsviðgerð. Kervisskoðarin mælir eisini til at seta í verk dupultgóðkenning, tá broytingar eru í stamdata, og at atgongd at broyta kontunummur verður avmarkað mest møguligt.

2.5.10 Innkrevjing av vinnulánum

Landsgrannskoðanin hevur í áravís umrøtt innkrevjingina av vinnulánum. Nú lógaruppskot um umskipan av vinnulánum (Lm. nr. 19/2004) væntandi verður samtykt á Løgtingi, hava vit loyvt okkum at gera ein samandrátt av nøkrum av tí, sum er fört fram í hesum máli seinastu 10 árini.

Grannskoðanarfrágreiðing, apríl 1994

Viðvíkjandi veðhaldum/veðhaldsútleggum, serlánum, stuðulslánum og kredittum til vinnulívið annars, er tað landsstýrið, sum primert hevur/hevur havt ábyrgdina av at fylgja við gongdini og at geva Gjaldstovuni boð um skráseting, bókingar, hvørji stig skulu takast viðvíkjandi innkrevjing, avskriving v.m.

Búskapardeildin metir í hesum sambandi, at tað er týdningarmikið at strika undir, at innkrevjingarfulltrúin bert er ein persónur, sum í tíðarskeiðinum 1991-1993 hevði havt úr at gera við fáa skil á teimum mongu effektivu veðhaldunum uppá uml. 0,5 mia.kr.

Landsstýrið hevur í nógvum førum ikki givið boð um eina »effektiva« innkrevjing, og í fleiri førum givið boð um at steðga innheintingum, tvingsilssølum, sum stig annars vóru tikin til.

Nógv hava framvegis eina fatan av, at afturgjalding av ávísari almennari skuld/eftirstøðum kann koma í síðstu rød, uttan at hetta fær stórvegis avleiðingar, og skip og virkir hava m.a. av hesi orsøk kunna hildið áfram, hóast tey hava verið »konkursbúgvin« í fleiri ár. Hetta hevur verið og er kappingaravlagandi, og tey vinnuvirki/skip, ið hava roynt at hildið sínar skyldur ella ikki havt landskassalán ella lán við landskassaveðhaldi, hava verið fyri vanbýti.

Grannskoðanarfrágreiðing, desember 1997

Ábyrgdin og heimildin hjá innkrevjingarfulltrúanum hevur verið ógreið, eisini í mun til Gjaldstovuna; nóg stór orka hevur ikki verið at umsita og røkja øll hesi mongu lán og veðhaldsútlegg; skráseting av skjølum og dagføring av upplýsingum, sum hava týdning fyri innkrevjingina, hevur ikki verið nøktandi; frá fyrstan tíð hevur eingin eintýðug identifikatión verið av skuldarunum o.s.fr.

Nøkur vinnulán verða kravd inn av Gjaldstovuni m.a. við mótrokning ella við avtalum, sum gjørdar eru við skuldarar; men fleiri partsreiðarí eru ongantíð individualiserað. Umframt partsreiðarí, hava nógvir einstaklingar eisini staðið skrásettir við lánum og veðhaldsútleggum/falnari skuld í nógv ár, uttan at stig eru tikin til innkrevjing. Talan hevur tí verið um eina tilvildarliga og sera ymiska viðgerð av borgarum á hesum øki.

Grannskoðanarfrágreiðing, mars 2000

Skrásetingin av vinnulánum hevur verið ófullfíggjað, og talan hevur verið um eina tilvildarliga og sera ymiska viðgerð av borgarum á hesum øki. Í 1997 var ábyrgdin av innkrevjingini av vinnulánum flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini til Gjaldstovuna, og er nú flutt til Toll- og Skattstovu Føroya. Í juli 1999 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya var í gongd við eina gjølla gjøgnumgongd av vinnulánum við tí endamáli at krevja tað inn, sum til ber.

Grannskoðanarfrágreiðing, mars 2001

Steðgur kom í, tá starvsfólk, sum sat við málinum, fór úr starvi. Í løtuni er eingin skipað mótrokning. Toll- og Skattstova Føroya ansar eftir, at lánini ikki fyrnast, men tað verður tó ikki gjørt á ein skipaðan hátt. Vandi er fyri, at mál detta burtur ímillum. Eitt fólk við royndum á økinum er nú sett at gjøgnumganga vinnulánini av nýggjum. Ætlanin er eisini, at vinnulánini, sum frálíður, skulu leggjast inn í nýggju innkrevjingarskipanina.

Grannskoðanarfrágreiðing, februar 2002

Toll- og Skattstovan boðaði í februar 2002 frá, at í samráð við Fiskimálastýrið, sum "eigur" flest øll vinnulán, vóru øll vinnulán í desember 2001 send sakførara, so hann kundi meta um, hvørt tað varð møguligt at fáa nakað aftur av lánunum. Sakførarin hevur í januar 2002 givið Toll- og Skattstovuni eina samlaða meting. Hann vísir á, at flestu partafeløgini millum skuldararnar eru strikað, og í øðrum førum vanta neyðug skjøl. Viðvíkjandi teimum málum, sum í løtuni eru til innheintingar, er niðurstøðan, "at nakað kann væntast at koma inn afturat, partvíst tí vit umsita avdráttarskipanir, og partvíst tí trygd er fingin. Viðvíkjandi teimum málum, sum ikki eru komin til innheintingar, verður nokk eisini møguligt at fáa nakað inn. Men størsti parturin fer uttan iva at enda úrslitaleyst og verður ongantíð goldin." Toll- og Skattstovan fer at mæla landsstýrismanninum til at krevja inn tað, sum á nakran hátt er møguligt.

Grannskoðanarfrágreiðing, februar 2003

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin m.a um:

- *at ein skrivari í Stýrinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya nýtir part av síni arbeiðstíð til at finna øll neyðug skjøl fram í hvørjum máli. Hetta vísir seg ofta at vera trupult, tí summi lán hava fleiri aðalráð/landsstýrismenn havt "undir hond".*
- *at lánini verða gjøgnumgingin, og í hvørjum føri sær verða krøvini gjørd upp av nýggjum, men arbeiðið gongur spakuliga, tí eingin arbeiðir burturav við at taka sær av hesum lánum.*

- *at Toll- og Skattstovan skipar fyri, at lánini verða løgd í IK-skipanina so hvørt, sum tey verða fráboðað móttakaranum. Fundur er avtalaður við Føroya Gjaldstovu og Menningardeildina á Toll- og Skattstovuni um at finna eina fasta mannagongd.*
- *at viðvíkjandi mótrokning hevur Toll- og Skattstovan biðið landsstýrismannin um loyvi til at lata vera við at mótrokna í vanligum útgjaldingum.*
- *at Toll- og Skattstovan helt mannagongdina taka ov nógva arbeiðsorku í mun til tær upphæddir, ið komu inn.*

Grannskoðanarfrágreiðing, mars 2004

Toll- og Skattstovuna kunnaði í mars 2004 um,

- *at innheintingin hevur trupult við at finna fram skjøl, tí tey kunnu verða send til sakførara til innheintingar ella eru í varðveitslu hjá øðrum aðalráðum. Einki samlað yvirlit er, sum vísir, hvussu nógv vinnulán eru send til innheintingar hjá sakførarum, og innheintingin veit ikki, um aðalráð hava sent vinnulán til innheintingar hjá sakførara,*
- *at eingin skipað gjøgnumgongd er av vinnulánum. Gjaldstovan sendir saldulista mánaðarliga til Toll- og Skattstovuna. Á seinasta saldulista frá mars 2004 eru 400 vinnulán, sum innkrevjingin skal taka sær av. Málsviðgerðin tekur tíð, og eingin er burturav settur til at taka sær av vinnulánum,*
- *at eingi vinnulán eru løgd í IK-skipanina. Eingin fundur hevur verið millum Gjaldstovuna og Toll- og Skattstovuna um at skipa mannagongdir um innkrevjing,*
- *at Gjaldstovan mótroknar ikki í útgjøldum. Okkum kunnugt hevur landsstýrismaðurin ikki tikið støðu til mótrokning í vanligum útgjøldum,*
- *at einki skipað eftirlit er við fyrning,*
- *at ætlanir hava verið um at seta í verk eina skipaða innheintan av vinnulánum, men tað er ikki gjørt,*
- *at arbeiðið er merkt av, at innheintan av vinnulánum ikki er raðfest serliga høgt.*

Grannskoðanarfrágreiðing, mars 2005

Í november 2004 vísti landsstýrismaðurin til skriv frá Toll- og Skattstovu Føroya, har greitt verður frá,

- *at* Toll- og Skattstovan hevur roynt at funnið fram til upprunaskjølini bæði, í ráðum, hjá stovnum og advokatum. Gjaldstovan hevur ein part av skjølunum, og saman við Gjaldstovuni verða tey skjølini fingin til vega, samstundis sum Gjaldstovan letur Toll- og Skattstovuni ein dagførdan lista yvir lánini hvønn mánað, og bókar tey gjøld, ið eru kravd inn. Hetta er tann skipaða mannagongdin, sum Toll- og Skattstovan hevur við Gjaldstovuna,
- *at* Toll- og Skattstovan hevur valt ikki at leggja vinnulán i IK-skipanina, tí ivi kann verða reistur um kravið,
- *at* vinnulánini eru løgd til samskiparan, sum fyrst og fremst skal finna útav, hvørji ráð, hvørjir stovnar ella advokatar hava lánsskjølini. Hetta er ein umfatandi uppgáva, sum Toll- og Skattstovan hevur havt lítla arbeiðsorku til,
- *at* ongantíð hevur eitt fólk burturav kunnað tikið sær av uppgávuni. Aðrar uppgávur hava verið tiknar framum. Uppgávan er tí ofta komin í aðru rað, uttan at hon tó nakrantíð heilt er steðgað.

2.5.11 Kervisskoðan (GL 1996/2 04 9-2 og GL 2005/2 04 9-4)

Avtala um kervisskoðan

Á fundi í mai 1997 boðaði leiðslan á Elektron frá, at tað ikki var nakar trupulleiki, at Toll- og Skattstovan eisini fekk eina váttan frá kervisskoðanini um, at generellu EDV-kontrollarnir vóru í lagi. Tó varð hildið, at serligar ásetingar/avtalur máttu verða gjørdar viðvíkjandi skoðanini, bæði tá ráddi um Toll- og Skattstovu Føroya og aðrar almennar EDV-skipanir.

Síðani hava partarnir arbeitt við málinum, og í mai 2004 varð ein avtala góðkend, og P/F Elektron, innanhýsis kervisskoðarin á Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og Toll- og Skattstova Føroya skrivaðu undir avtaluna.

Avtalan fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki teir partar, sum eru á Toll- og Skattstovu Føroya, so sum brúkaraumsiting, mannagongdir og annað, sum eru neyðugt fyri ein tryggan og munagóðan rakstur. Átekningar frá kervisskoðaranum og grannskoðaranum á Elektron eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir annars á Toll- og Skattstovu Føroya eru tryggar.

Kervisskoðarin skal árliga:

- skoða eina ávísa brúkaraskipan,
- kanna tey øki innan fyri alment KT-eftirlit, sum ikki eru fevnd av árligu skoðanini av skipanini hjá peningastovnunum,
- halda skil á óloystum tilmælum frá kervisskoðanini,
- halda kervisyvirlitið við líka.

So hvørt eitt øki er skoðað, skal ein frágreiðing verða send Toll- og Skattstovu Føroya.

Harafturat skal kervisskoðarin gera eina ársfrágreiðing, sum grannskoðarin hjá P/F Elektron skal vátta.

Í ársfrágreiðingini skal vera:

- yvirlit yvir tað, sum er skoðað í árinum,
- niðurstøðurnar hjá kervisskoðaranum,
- ein uppgerð yvir ikki loyst tilmæli,
- úrslitið og viðmerkingar til ta almennu KT-trygdina,
- grannskoðaraváttan frá kervisskoðaranum og frá grannskoðaranum hjá Elektron.

Til skoðanina er sett av seks arbeiðsvikur, meirarbeiði verður gjørt eftir rokning.

Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2004 hevur Toll og Skattstova Føroya útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frágreiðingum, tær eru:

- "Årsrapport fra Systemrevisionen 2004"
- "Generelle IT-kontroller 2004"
- "Revision af innkrevjingarskipanin, 2004" (serfrágreiðing fyri 2004)

Fyri árið 2003 var serfrágreiðingin "Revision af eToll, 2003".

Tá ið vit lesa frágreiðingarnar frá kervisskoðaranum, skulu vit m.a. hava í huga, at:

- frágreiðingarnar snúgva seg bert um tann partin av KT-kervinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya, sum verður umsitin av Elektron, ikki um partin sum Toll og Skattstovan sjálv hevur beinleiðis ábyrgdina av,
- niðurstøðurnar hjá kervisskoðaranum eru allar treytaðar av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya eru nøktandi,

- tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar, eToll og innkrevjingarskipanin, eru millum tær nýggjastu skipanirnar, og tískil millum tær tryggastu og frægast skjalfestu,
- skattaskipanin, sum er tann elsta og týdningarmesta skipanin hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Elektron, er ikki skoðað.

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er, at roknskapargrannskoðanin kann líta á, at dátu-, kervis- og rakstrartrygdin á Elektron er álítandi.

Við árslok 2004, vóru 12 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár, tvs. frá 2003 ella eldri.

Kervisskoðarin er ikki nøgdur við, at tað eru so mong, gomul óavgreidd tilmæli.

Til tað kunnu vit viðmerkja, at, av teimum sjey tilmælunum frá 2000, eru framvegis fýra óavgreidd. Eitt av teimum óavgreiddu tilmælunum er skjalfestingin av skattaskipanini, sum kervisskoðarin øll árini hevur sagt hava høga raðfesting.

Um frágreiðingina frá kervisskoðanina fyri árið 2000 skrivaðu vit í okkara frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002:

> *"Um skjalfestingina av skattaskipanini verður millum annað sagt í frágreiðingini, at hon ikki er á einum slíkum støði, at hon "gevur fólki við rímiligum EDV-kunnleika møguleika fyri at finna útav, hvussu skipanin er bygd upp". Víst verður eisini á, at í dag eru bert tvey eftir í starvi, sum vóru við at gera skipanina, og "um størri broytingar í framtíðini skulu verða gjørdar í skipanini, og hesi tvey ikki longur eru í starvi á Elektron, verður sera trupult at gera slíkar broytingar, tí onnur hava lítlan møguleika at fáa neyðuga vitan til vega um skipanina við at gjøgnumganga dokumentatiónina."*

Tá hevði landsstýrismaðurin hesa viðmerking: *"Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at Toll- og Skattstovan fer at biðja Elektron um at gera alla dokumentatiónina av nýggjum og at gera hetta í sambandi við umleggingina av skattaskipanina frá DL1 til relatiónsdátabasuna DB2, men hetta er ein stór uppgáva, sum tekur tíð."*

Nú er farið undir at flyta skattaskipanina frá DL1 til DB2. Á fundi við Fíggjarmálaráðið í februar 2005 fingu vit at vita, sum tað eisini stendur í Ársfrágreiðingini 2004, at ongar ítøkiligar ætlanir eru um at fara undir skjalfestingina av skattaskipanini, tí tað er ov kostnaðarmikið.

Í ársfrágreiðingini fyri 2003 skrivar kervisskoðarin, at skipanarskjølini til fleiri skipanir eru ófullfíggjað. Í 2004 sigur kervisskoðarin um sama evni, at skipanarskjølini til fleiri týdningarmiklar skipanir eru ófullfíggjað, og í summum førum eru eingi skipanarskjøl. Henda viðmerking hevur, eins og hon um skattaskipanina, fingið hægstu raðfesting.

Um innkrevjingarskipanina verður sagt í Ársfrágreiðingini fyri 2004, at roknskapargrannskoðanin kann taka støði í einari væl stýrdari skipan. Kervisskoðarin vísir tó á, at innkrevjingarskipanin er ein liðilig skipan, har málsviðgerarnir kunnu gera undantøk frá reglunum, sum annars eru ásettar í skipanini. Tí er neyðugt, at roknskapargrannskoðarin ger sær eina neyva meting av, um mannagongdirnar á Toll- og Skattstovu Føroya eru munadyggar, og serstakliga um leiðslan hevur neyðugt eftirlit við frávikum frá høvuðsregluni. Til innkrevjingarskipanina hevur kervisskoðarin 6 tilmæli, einki av teimum hevur hægstu raðfesting.

2.5.12 Trygdargrunnurin (GL 1998/2 09 1-2)

Í 2002 grannskoðaðu vit roknskaparviðurskiftini hjá Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir. Vit vístu á fleiri veikleikar og mæltu til ábøtur. Í 2002 varð umsitingin av Trygdargrunninum flutt til Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki. Virksemið hjá grunninum varð tikið við á fíggjarlógina 2003, og roknskapur grunsins varð lagaður til og tikin við í landsroknskapin 2003.

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar kunnaðu vit um, at Toll- og Skattstova Føroya arbeiddi við at tillaga roknskaparreglugerðina, og at ætlanin var, at útgjøldini skuldu fara um nýggju lønarskipanina á Gjaldstovuni.

Í februar 2005 kunnaði stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya um, at arbeiðið við reglugerðini er um at verða liðugt, og í mars 2005 hevur stjórnin kunnað um, at útgjøldini nú fara um lønarskipanina á Gjaldstovuni.

2.6 Tænastumannaeftirlønir o.t. (GL 1998/2 17 1-2)

Í 2004 hava vit kunnað okkum um, hvussu umsitingin av tænastumannaeftirlønum er skipað. Vit hava kannað eftirlønarmál og hava havt fundir og annað samskifti við starvsfólk á nøkrum stovnum og ráðum, ið dagliga hava ábyrgdina av at umsita eftirlønir:

- Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum,
- Mentamálaráðið,
- Almanna- og Heilsumálaráðið,
- Serstovnaøkið,
- Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar- og Suðuroyar Sjúkrahús,
- Føroya Gjaldstova.

2.6.1 Lógargrundarlag, eftirlønarhugtøk o.a.

Nógvir tænastumenn vórðu upprunaliga settir sum danskir tænastumenn, t.d. í heilsu-, almanna-, post- og skúlaverkinum. Tá landið yvirtók eitt málsøki ella stovn, "yvirtók" landið eisini í flestu førum tænastumenninar og harvið skylduna at rinda eftirløn, tað veri egineftirløn, hjúnafelagaeftirløn ella barnaeftirløn. Í teimum førunum er oftast avtalað, at danski staturin endurrindar føroyska landskassanum tann partin av eftirlønini, ið tænastumaðurin hevur vunnið sær fram til yvirtøkudagin. Í nøkrum førum er skipanin tó, at danski staturin rindar eftirlønina, og føroyski landskassin endurrindar statinum sín part. Eftirlønarøkið kann verða sera torskilt, m.a. tí at eftirlønin á fleiri økjum verður goldin við støði í gomlum donskum eftirlønarlógum og eftirlønartalvum.

Løgtingslóg um tænastumannaeftirløn

Ll. nr. 32/1971 "um tænastumannaeftirlønir" við seinni broytingum er høvuðslógin, sum aðrar lógir ofta vísa til.

Fyri at lýsa skipanina við tænastumannaeftirlønum, hava vit í talvuni sett upp, hvussu ein tænastumaður vinnur sær rætt til eftirløn, og hvussu eftirlønin verður roknað út. Í dømunum hava vit tikið støði í tænastumanni, sum er í lønarflokki 34. Til samanberingar hava vit eisini tikið við lønarflokk 38, umframt lønarflokk 40, sum er hægsti lønarflokkur.

Talva: Dømi um útrokning av eftirløn o.a.

Eftir-lønar-Ár	Eftir-lønar %	Lønar-Flokkur	Eftirlønar-gevandi mánaðarløn	Eftirløn			
				Um mánaðin	Um árið	Restlivitíð 13 ár eftir 67. ár	Kapitaliserað virði (13 ár/2½%)
(1)	(2)	(3)	(4)	(5)	(6)	(7)	(8)
1	2,5	34	31.324	783	9.397	122.164	103.211
5	12,5	34	31.324	3.916	46.986	610.818	516.057
10	25,0	34	31.324	7.831	93.972	1.221.636	1.032.113
15	32,5	34	31.324	10.180	122.164	1.588.127	1.341.747
20	40,0	34	31.324	12.530	150.355	1.954.618	1.651.381
25	47,5	34	31.324	14.879	178.547	2.321.108	1.961.015
30	53,0	34	31.324	16.602	199.221	2.589.868	2.188.080
37	60,0	34	31.324	18.794	225.533	2.931.926	2.477.072
37	60,0	38	43.435	26.061	312.732	4.065.516	3.434.798
37	60,0	40	51.050	30.630	367.560	4.778.280	4.036.985

Í (1) og (2) teigi sæst, hvussu tænastumaður vinnur sær rætt til eftirløn. Eftir einum ári hevur hann vunnið sær rætt til 2,5% av lønini í eftirløn. Næstu 9 árini vinnur hann sær eisini 2,5% um árið, og eftir 10 árum hevur hann vunnið sær rætt til 25 % av lønini í eftirløn.

Árini 11 – 26 vinnur hann sær 1,5% um árið, og árini 27 – 37 vinnur hann sær 1 % um árið. Eftir 37 árum er eftirlønin komin upp á 60 % av eftirlønargevandi lønini hjá tænastumanninum, sum er hámarkið.

Sum sæst í teigi (3) og (4), hava vit sum dømi valt ein tænastumann í lønarflokki 34, har mánaðarlønin er kr. 31.324.

Í teigi (5) og (6) sæst, hvussu stór eftirlønin er ávikavist um mánaðin og um árið. Tænastumaður í lønarflokki 34, ið hevur starvast í 37 ár, fær kr. 225.528 um árið í eftirløn.

Tær 2 niðastu reglurnar vísa, at tænastumenn í lønarflokki 38 og 40 fáa ávikavist kr. 312.732 og kr. 367.560 í eftirløn um árið.

Er tænastumaðurin 67 ár, fær hann gjald úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (kr. 10.920 um árið í 2005). Hann hevur eisini rætt til at fáa skattafríu grundupphæddina til fólkapensjón, sum í 2005 er kr. 50.028 um árið fyri støk, og fyri hjún kr. 39.756 fyri hvønn.

<u>Útrokning av árliga kostnaðinum av eftirlønarskylduni</u>

Í staðin fyri at seta fólk í tænastumannastarv og binda seg til at rinda eftirløn, tá tey fara úr starvi, hevur landsstýrið seinnu árini gjørt lønarsáttmálar við nógv fakfeløg, har landskassin rindar starvsfólkunum eitt ávíst % av eftirlønargevandi lønini, sum fer í eina felags (kollektiva) eftirlønarskipan, sum tryggingarfelag stendur fyri. Eftirlønargjaldið, ið landskassin rindar, er ymiskt alt eftir sáttmálanum við Fíggjarmálaráðið, t.d.:

Føroya Lærarafelag 16 %

Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara 15 %

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya 15 %

Starvsmannafelagið 10 %

Postfelagið 7 % (Komin í starv eftir 1. mars 1999: 12,5 %)

Eftirlønargjaldið verður útreiðslufört sum ein lønarútreiðsla hjá avvarðandi stovni. Tá starvsfólk fara úr starvi, er landskassin leysur av eftirlønarskylduni, og starvsfólkini fáa sína eftirløn frá tryggingarfelagnum.

Tá tænastumaður fer frá við eftirløn, "hongur" landskassin uppá eina skyldu at rinda honum eftirløn, so leingi hann livir, og síðani eftirløn til møguligan eftirsitandi hjúnafelaga og børn.

Til ber at rokna út, út frá ávísum fortreytum, hvussu nógv ein framtíðar eftirlønarskylda hjá landskassanum veksur fyri hvørt ár, sum tænastumaður er í starvi. Hesin kostnaður svarar t.d. til tað, sum eitt tryggingarfelag, út frá aktuarútrokningum, fortreytum um rentu o.a., vil krevja frá landinum um árið fyri at yvirtaka eftirlønarskylduna.

Sum víst á í teigi (2) í talvuni "kosta" tey fyrstu 10 árini mest, tí tá vinnur tænastumaðurin 2,5% í eftirløn um árið. Tess yngri ein tænastumaður er, bíligari er árliga eftirlønarskyldan, tí skyldan at rinda pengarnar liggur longri frammi í tíðini enn hjá einum eldri tænastumanni.

Vit kunnu lýsa árliga kostnaðin við einum dømi, har 40 ára gamal tænastumaður í 34. lønarflokki eftir einum ári hevur vunnið sær rætt til 2,5 % av lønini í eftirløn. Vísandi til teig (6) í talvuni, svarar tað í dag til kr. 9.397 um árið. Siga vit, at hann livir 13 ár, eftir at hann hevur fylt 67 ár, verður eftirlønin, vunnin hetta eina árið, kr. 122.164, sum víst í teigi (7). (Í Føroyum er restlivitíðin hjá 40 ára gomlum mannfólki 38 ár og hjá konufólki 42 ár. Velja vit at ganga út frá einum miðaltali, verður 40 ára gamal tænastumaður 80 ár, og livir 13 ár eftir at hann hevur fylt 67 ár.)

Skal landkassin keypa seg leysan av hesari eftirlønarskyldu og lata eitt tryggingarfelag yvirtaka hana, skal landskassin rinda minni enn kr. 122.164, tí tryggingarfelagið kann vinna sær rentu av peninginum við t.d. 2,5 % um árið. Í teigi (8) hava vit roknað út, hvørja upphædd landskassin skuldi rinda tryggingarfelagnum, um landskassin keypti seg leysan frá skylduni, tann dagin tænastumaðurin fyllir 67 ár og fer frá við eftirløn. Hetta er gjørt á tann hátt, at árliga eftirlønin kr. 9.397 í 13 ár, hvørt ár er afturdiskonterað við 2,5 %. Tað gevur kr. 103.211.

Eftirsum tænastumaðurin í dømi okkara er 40 ára gamal, og vit rokna við, at hann fer frá 67 ára gamal, ganga 27 ár, áðrenn tryggingarfelagið byrjar at rinda honum eftirløn. Landskassin skal tí rinda væl minni enn kr. 103.211, tí tryggingarfelagið kann vinna sær rentu av peninginum hesi 27 árini við t.d. 2,5% um árið. Út frá hesum fortreytum svarar eftirlønarskyldan, sum tænastumaðurin hetta eina árið hevur vunnið sær, til eitt roknað eftirlønargjald uppá kr. 52.989.

Sum víst í teigi (4) er mánaðarlønin kr. 31.324, svarandi til kr. 375.888 um árið (12 x 31.324). Roknaða eftirlønargjaldið kr. 52.989 svarar til umleið 14,1 % av árslønini.

Skuldi eitt tryggingarfelag átikið sær eftirlønarskylduna, hevði roknaða eftirlønargjaldið óivað verið hægri, m.a. vísandi til at umsitingargjald til tryggingarfelagið, sannlíkindini fyri hjúnafelagaeftirløn, barnaeftirløn, avlamni og uppsøgn ikki eru tikin við í útrokningarnar. Sum greitt frá í byrjanini, endurrindar danski staturin í fleiri førum ein part av eftirlønini, og tað minkar um partin, ið landskassin skal rinda. Skuldi eitt tryggingarfelag átikið sær skyldurnar, hevði landsstýrið helst avtalað at rindað eitt árligt gjald, sum vildi verið javnað á hvørjum ári, m.a. í sambandi við at eftirlønirnar hækka.

Dømið byggir á eina rentu 2,5 %. Um peningurin kastar meira av sær (bonus), fær landskassin henda "vinning", eftirsum talan er um eina tilsagnarskipan, t.v.s eina eftirlønarskipan, har ein tænastumaður í lóg hevur fingið tilsøgn um eina ávísa eftirløn.

<u>Um útrokning av samlaðu eftirlønarskylduni</u>

Í teigi (7) sæst, at ein tænastumaður í 34. lønarflokki við 37 ára eftirlønaraldri fær kr. 225.528 um árið í egineftirløn, ella samanlagt kr. 2.931.864, um hann livir 13 ár, eftir hann hevur fylt 67 ár, og eftirlønin er óbroytt. Men henda upphædd svarar ikki til veruligu samlaðu eftirlønar-

skylduna hjá landskassanum, sum er minni, tí eftirlønin verður ikki rindað í einum, men verður rindað hvønn mánað, so leingi hin eftirlønti livir.

Samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum, tann dagin ein 67 ára gamal tænastumaður í lønarflokki 34 fer frá, kann roknast út sum tann upphædd, ið landskassin skal rinda einum tryggingarfelag fyri at átaka sær eftirlønarskylduna. Afturdiskontera vit árligu eftirlønaruppháddina kr. 225.528 komandi árini (í hesum dømi 13 ár) við einari rentu 2,5%, gevur henda útrokning eina kapitaliseraða eftirlønarskyldu, sum er kr. 2.477.019, sum víst í teigi (8). Er talan um lønarflokk 38 ella 40 er kapitaliseraða eftirlønarskyldan, sum víst í teigi (8), ávikavist um 3,4 og um 4 mió.kr.

Eftirlønarskeiðið kann sjálvandi verða bæði longri og styttri. Hevur tænastumaður 10 ár í eftirlønaraldri, kann hann fara frá 60 ára gamal, og tað kann økja munandi um eftirlønartíðarskeiðið og harvið um eftirlønarskylduna. Eftirlønartíðarskeiðið kann eisini verða longt, um tænastumaður hevur hjúnafelaga, ið livir longri enn hann. Doyr tænastumaður, fær hjúnafelagin 74% av egineftirlønini í hjúnafelagaeftirløn, og børn hava rætt til barnaeftirløn, til tey fylla 21 ár.

Dømi um aðrar eftirlønarlógir

Tað finnast tænastumenn o.t., ið hava "verri" skipanir, enn hana, sum er víst í talvuni frammanfyri. Eitt dømi er nýggja lógin um eftirløn til handilsskúlalærarar (Ll. nr. 16/2004), har lærararnir vinna sær 1,75% (samanborið við 2,5%) av lønini í eftirløn um árið tey fyrstu árini. Eftir 37 árum hava teir vunnið sær 57% (samanborið við 60%), og hjúnafelagaeftirlønin er 71% (samanborið við 74%) av eftirlønini.

Tað finnast eisini eftirlønarskipanir, sum eru munandi betri, t.d. hjá løgtingsmonnum og landsstýrismonnum.

Hægsta egineftirlønin hjá løgtingsmanni er 60% av eftirlønargevandi lønini í 34. lønarflokki (kr. 225.528 í eftirløn um árið). Henda eftirløn verður veitt, tá løgtingsmaður hevur havt sæti á tingi í 16 ár ella meira (samanborið við 37 ár). Fyrsta árið til og við 8. árið telja 4,5% stig (samanborið við 2,5%), og 9. til 16. árið telja 3% stig.

Hægsta egineftirlønin hjá løgtingsformanni er 60% av eftirlønargevandi lønini í lønarflokki 40 (kr. 367.560 í eftirløn um árið). Hon verður veitt, tá løgtingsformaður hevur verið formaður í 8 ár ella meira. Fyrsta til og við 4. árið telja 9% stig, og 5. til og við 8. árið telja 6% stig.

Egineftirlønin hjá fyrrverandi landsstýrismonnum verður roknað sum partur av hægstu eftirløn í tí lønarflokki, sum landsstýrismaðurin varð løntur í. Landsstýrismenn eru í dag í lønarflokki 38. Árini telja soleiðis:

0 til 1 ár 0%
1 til 3 ár 20%
3 til 5 ár 40%
5 til 7 ár 50%
yvir 7 ár 75% av 312.732 = kr. 234.549 í eftirløn um árið.

Landsstýrismaður, sum bæði hevur verið landsstýrismaður og løgmaður, fær eftirløn sum løgmaður (í lønarflokki 40). (75% av 367.560 = kr. 275.670 í eftirløn um árið).

Hevur løgtingsmaður rætt til egineftirløn sum løgtingsformaður, landsstýrismaður, fólkatingsmaður, borgarstjóri, tænastumaður landsins, statstænastumaður, frá statsstuðlaðum eftirlønarkassa ella aðra tænastumannalíknandi eftirløn, kann samlaða egineftirlønin ikki fara upp um hægstu egineftirlønina, sum kann fáast sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir (lønarflokkur 40).

Fyrivarni

Sum víst á frammanfyri, er útrokningin og metingin av eftirlønarskyldum sera torgreið. Endamálið við útrokningum okkara er at vísa nøkur einføld dømi fyri at lýsa ymisk hugtøk viðvíkjandi eftirlønum og skyldum, ið verða umrødd seinni í frágreiðingini. Vit vilja gera vart við, at hesi dømi skulu verða nýtt við stórum fyrivarni, vísandi til tey nógvu frábrigdini og sera ymisku fortreytirnar, ið gera seg galdandi.

2.6.2 Samskipanarfrádráttur

Lógargrundarlag

Við Ll. nr. 32 frá 5. juli 1971 "um tænastumannaeftirlønir" varð samskipanarfrádráttur settur í gildi fyri tænastumannaeftirlønir. Endamálið við samskipanarfrádráttinum var at minka nakað um tænastumannaeftirlønina hjá teimum, sum eisini fingu fólkapensjón. Samskipanarfrádrátturin varð drigin frá tænastumannaeftirlønini og varð roknaður sum 2% av grundupphæddini í fólkapensjónini fyri hvørt eftirlønarár, tó í mesta lagi 74 %, ið svarar til 37 ár.

Við Ll. nr. 24 frá 14. mars 1997 "um broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir" varð samskipanarfrádrátturin strikaður, og útrokningargrundarlagið fyri eftirlønirnar varð broytt, so eftirlønirnar lækkaðu samsvarandi.

Umsiting

Hóast ásetingarnar eru strikaðar, verður samskipanarfrádráttur framvegis roknaður í nøkrum førum. Talan er um umleið 15 mál á Landssjúkrahúsinum, 4 á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, umleið 80 mál hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum og 91 eftirlønarmál hjá lærarum, ið Lønarstovan í Mentamálaráðnum umsitur.

Málini í Mentamálaráðnum verða roknað við samskipanarfrádrátti vísandi til Lov nr. 474 af 10. juni 1997 "om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne". § 4, stk. 1, í lógini ásetir, at tær donsku eftirlønarlógirnar, ið vóru í gildi 30. juni 1997, framvegis skulu galda fyri teir lærarar, ið vóru farnir frá við eftirløn 30. juni 1997. Við støði í hesum lógum verður samskipanarfrádráttur framvegis roknaður.

Vísandi til nýggju lógarásetingarnar skuldu málini á Landssjúkrahúsinum og í Fíggjarmálaráðnum í 1997 verið umroknað eftir § 37, og persónligar viðbøtur skuldu verið veittar í hesum sambandi.

Í sambandi við umrokningina í 1997 gjørdu Lønardeildin á Landssjúkrahúsinum og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum av ikki at broyta skrásetingarnar í lønarskipanunum, tí útgjøldini fóru at vera óbroytt. Hildið varð eisini, at skrásetingarnar í lønarskipanini vóru greiðari, um samskipanarfrádrátturin varð skrásettur heldur enn ein nýggj persónlig viðbót. Er samskipanarfrádrátturin framvegis skrásettur, er tað lættari at broyta eftirlønina eftir "higartil galdandi reglum", um t.d. broytingar verða í grundupphæddini í fólkapensjónini hjá eftirlønarmóttakaranum.

Tað hevur stóran týdning at fylgja við, nær hesi mál fara at fáa eina hægri eftirløn eftir nýggju útrokningarreglunum.

Grundupphæddin í fólkapensjónini hjá pensjónisti kann verða broytt, um upphæddin verður javnað, ella um hjúnastøðan verður broytt. Síðani 1. februar 1999 er grundupphæddin ikki javnað. Árliga grundupphæddin fyri støk er kr. 50.028, og fyri hjún kr. 39.756 fyri hvønn.

Verður grundupphæddin broytt, eigur tað at ávirka samskipanarfrádráttin í sama mánaði. Tí er neyðugt við einum ávísum samskifti millum Almannastovuna og stovnarnar, ið umsita eftirlønir, soleiðis at stovnarnir verða kunnaðir, um grundupphæddin verður broytt í fólkapensjónini hjá einum tænastumanni ella hjá einum, ið fær hjúnafelagaeftirløn. Eisini hevur tað týdning, at umsitingarstovnarnir fáa boð, um eftirløntur tænastumaður seinni fær fólkapensjón.

Viðmerkingar/tilmæli

Annaðhvørt ár biður Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum Almannastovuna um yvirlit yvir fólkapensjónsupphæddirnar hjá teimum tænastumonnum, ið tey umsita. Sambært Lønardeildini hava verið ov nógv mál, har samskipanarfrádrátturin ikki var rættur. Tá eftirlitið í 1999 varð framt fyrstu ferð, var samskipanarfrádrátturin skeivur í umleið øðrum hvørjum máli. Lønardeildin ivast í, um aðrir stovnar, ið umsita eftirlønir, hava tílík eftirlit við samskipanarfrádráttinum.

Vit hava mælt til at bøta um og samskipa innaneftirlitið á hesum øki. Vit ætla við stakroyndum at kunna okkum gjøllari um mál, har talan er um samskipanarfrádrátt.

2.6.3 Játtanar- og roknskaparviðurskifti

Umframt eftirløn til tænastumenn er talan um starvsbólkar, ið fáa eftirløn sum tænastumenn, t.d. løgtings- og landsstýrismenn. Tvær nýggjar játtanir eru til ávikavist Postverk Føroya og Føroya Handilsskúla, og niðanfyri hava vit tí greitt gjøllari frá hesum játtanum.

Ymiskir bókingarhættir í roknskapinum

Ymiskt er, hvar á fíggjarlógini eftirlønarútreiðslur verða játtaðar:

- eftirlønarútreiðslur til fyrrverandi tænastumenn á flest øllum stovnum verða bókaðar undir "§ 3 Fíggjarmál", og ikki undir teimum málsøkjum/virksemisøkjum, har hesi fólkini hava starvast.
- eftirlønarútreiðslur hjá fyrrverandi starvsfólkum t.d. í heilsuverkinum verða bókaðar á høvuðskontu, sum liggur undir virksemisøkinum "Sjúkrahúsverkið v.m.", undir málsøkinum "Heilsumál" á § 8 Almanna- og Heilsumál.
- eftirlønarútreiðslur hjá fólkaskúlalærarum verða bókaðar undir virksemisøkinum "Fólkaskúlin v.m." á § 7 Útbúgving og gransking o.a.
- eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn verður bókað undir málsøkinum "Løgtingið" á § 1.

Vit hava ikki fingið nakra nøktandi frágreiðing um, hví eftirlønarútreiðslur verða bólkaðar so ymiskt.

Endurrindan frá danska ríkinum

Danski staturin endurrindar sín part av egineftirløn, hjúnafelagaeftirløn, barnaeftirløn og barnaískoytiseftirløn o.a. Endurgjaldsavtalur við statin eru m.a. galdandi fyri tænastumenn og tænastumannalíknandi størv, sum vóru í starvi, tá stovnar teirra vórðu yvirtiknir, t.d. fólkaskúlin, Postverk Føroya, statshospitalið, Serforsorgin, Læraraskúlin, Føroya Handilsskúli, Tekniski Skúli í Tórshavn, Tekniski Skúli í Klaksvík.

Í 2005 endurrindar danski staturin 14,2 mió.kr. fyri læraraeftirlønir. Talan er um tann partin av eftirlønini, sum tænastumenninir hava vunnið sær, áðrenn teir "vórðu yvirtiknir". Hetta endurgjald verður tikið við í roknskapinum undir § 20 "Inntøkur" undir málsøkinum "Heildarveiting o.t.", høvuðskonta 20.54.1.01.

Onnur endurgjøld frá danska statinum verða ikki bókað á henda hátt, men verða bókað á teimum kontum, har eftirlønin verður útreiðsluførd.

Roknskapurin er ikki heilt rættur, tí endurgjøld frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum eru ikki komin við í roknskapin. Orsøkin er m.a. samskiftistrupulleikar síðani 2000 millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvar fyrsta endurgjaldsuppgerðin um 1,7 mió.kr., fyri tíðarskeiðið 1. januar 1977 – 30. juni 2000, skuldi sendast. Fyrst í 2005 er greiða fingin á hesum spurningi, og danskir myndugleikar viðgera nú uppgerðina. Sjúkrahúsverkið

roknar við, at ein uppgerð fyri tíðarskeiðið 1. juli 2000 – 31. desember 2004 liggur um einar 1,3 mió.kr. Sostatt er tilsamans talan um einar 3 mió. kr, sum ikki eru bókaðar.

Árliga eftirlønarskyldan sæst ikki í roknskapinum

Landsroknskapurin vísir ikki, hvørjar eftirlønarskyldur Landsstýrið árliga hevur átikið sær. Tískil sæst hesin parturin av útreiðslunum av tænastumannaeftirlønarskipanini ikki aftur í roknskapinum. Í fleiri av grannalondum okkara verða framtíðar eftirlønarskyldur til tænastumenn á hvørjum ári útreiðsluførdar á teimum stovnum, har teir starvast.

Í skrivi 27. september 2004 til landsstýrismannin í fíggjarmálum hevur Gjaldstovan gjørt vart við, at meginreglan verður ikki fylgd um at staðfesta eftirlønarskylduna sum eina "leypandi" útreiðslu í roknskapinum, sum tað eitt nú verður gjørt í Danmark. Har er skipanin, at ein stovnur, meðan tænastumaður er í starvi, skal útreiðsluføra 15% av lønini sum eitt eftirlønargjald. Gjaldið verður "inntøkuført" á einari felags eftirlønarkontu, har eftirløn til allar fráfarnar tænastumenn verður bókað.

Vantandi útrokning/meting av samlaðu eftirlønarskylduni

Útreiðslurnar til tænastumannaeftirlønir o.t. í 2005 verða væntandi um 52 mió.kr., netto., sum er einar 30 mió.kr. hægri enn í 1997. Sambært landsroknskapinum eru tænastumannalønir o.t. í sama tíðarskeiði vaksnar úr um 194 til 254 mió.kr.

Einki samlað yvirlit finst yvir, hvussu nógvir tænastumenn o.t. hava vunnið sær eftirlønarrætt, hvussu nógvir teirra framvegis eru í tænastumannastarvi, eru farnir í annað starv, og hvussu nógvir fáa eftirløn. Vit hava roynt at leita fram upplýsingar og hava gjørt eitt ávegis yvirlit, sum skal verða tikið við fyrivarni:

- Tænastumenn í starvi: 658
- Tænastumenn, farnir í annað starv: 212
- Tænastumenn o.t., ið fáa eftirløn: 344

Samanlagt er talan um umleið 1200 tænastumannamál. Størstu økini eru:

- Fólkaskúlin: 588
- Sjúkrahúsverkið: 158
- Serforsorgin: 138
- Postverkið: 74
- Toll- og Skattstova Føroya: 39
- V&B/Fiskiveiðieftirlitið: 39
- Aðalráðini: 33

Umframt nevndu øki koma løgtings- og landsstýrismenn, ið eisini fáa eftirløn sum tænastumenn.

Í skrivi 27. september 2004 til landsstýrismannin í fíggjarmálum ger Gjaldstovan vart við, at eftirlønarskyldan kann gerast ein stórur búskaparligur trupulleiki fyri landskassan. Sambært Gjaldstovuni verður neyðugt at kravfesta eina KT-loysn fyri at fáa skrásett skyldurnar, og síðani at gera aktuarútrokningar fyri at finna samlaðu eftirlønarskylduna.

Eftirlønir, Postverk Føroya

2 mió.kr. eru settar av til eftirlønir til starvsfólk á Postverki Føroya á fíggjarlógini 2005.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið verður m.a. kunnað um, at tá Postverk Føroya varð yvirtikið í 1976, yvirtók postverkið 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn. Eftirlønarskyldan er ein lógarbundin skylda, ásett í § 1 í Ll.

nr. 45 frá 9. mai 1976 um viðurskiftini hjá starvsfólki á Postverkinum í sambandi við yvirtøku. Ásett er, at eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og Føroya Landsstýri í mun til eftirlønaraldur áðrenn yvirtøkuna og eftirlønaraldur eftir yvirtøkuna. Postverk Føroya fær endurgoldið "donsku eftirlønarútreiðslurnar" frá danska statinum, men fíggjar sjálvt av rakstrinum útreiðslurnar fyri starvstíðina eftir yvirtøkuna.

Í viðmerkingunum skrivar Landsstýrið eisini:

"Á Postverki Føroya fingu 27 starvsmenn við eftirlønarrætti eftirløn í 2003, og kostaði tað 2,3 mió. kr. Mett verður, at útreiðslurnar til endamálið verða umleið 2,7 mió. kr. í 2005. Hildið verður, at tað er óheppið, at Postverk Føroya ella rættari sagt brúkarin av posttænastunum skal fíggja hesa eftirlønarskyldu. Spurningurin er eisini tengdur at fyritreytunum hjá Postverkinum at kappast við onnur vinnurekandi. Harafturat er at siga, at landskassin annars ber slíkar eftirlønarskyldur við játtan á fíggjarlógini, t.d. til tænastumenn fólkaskúlans og tænastumenn innan heilsuverkið.

Peningur verður tí settur av á fíggjarlógini til endamálið í 2005. Tó soleiðis, at Postverkið sjálvt rindar yvir raksturin, tað sum annars svarar til eftirlønina fyri "vanligar" sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna). Tað merkir, at Postverkið sjálvt skal gjalda 700 t. kr., meðan 2,0 mió. kr. verða játtaðar til endamálið á fíggjarlógini fyri 2005. Útreiðslur landskassans til endamálið fara leysliga mett at vaksa til umleið 5 mió kr. næstu 5- 6 árini. Síðan fara útreiðslurnar at falla líðandi."

Okkum kunnugt skal hetta síðsta brotið í viðmerkingunum skiljast soleiðis, at landið yvir fíggjarlógina tekur á seg eftirlønarskyldurnar hjá yvirtiknu tænastumonnunum, ímóti at Postverk Føroya rindar eitt árligt gjald fyri teir, sum enn eru í starvi hjá Postverki Føroya. Hetta gjald svarar til ásetta eftirlønargjaldið hjá teimum sáttmálasettu í Postverkinum.

Í skrivi 23. september 2004 til landsstýrismannin í fíggjarmálum mælir Lønardeildin frá, at landskassin við einari "hovsaloysn" átekur sær eftirlønarskyldurnar hjá Postverkinum, skyldur fyri yvir 100 mió.kr., uttan at nøkur kvalifiserað kanning av konsekvensunum er gjørd. Lønardeildin mælir staðiliga til fyrst at gera eina forkanning av einari samlaðari loysn á eftirlønarøkinum, so politiski myndugleikin hevur eitt kvalifiserað avgerðargrundarlag.

Sambært skrivi 18. oktober 2004 til Fíggjarmálaráðið hevur Gjaldstovan, vísandi til skrivið hjá Lønardeildini, mælt Fíggjarmálaráðnum til at krevja, at í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið verður kunnað um kapitaliseraða virðið av eftirlønarskylduni hjá Postverkinum, ið verður flutt í landskassan. Sambært Gjaldstovuni kundi Fíggjarmálaráðið einki gera, tí dáturnar, ið áttu at verið í sambandi við flytingina, vóru ikki til.

Annars vísir Gjaldstovan á, at Postverkið hevur verið ein isolerað rakstrareind, sum hevur skula fíggjað m.a. tænastumannaeftirlønir av sínum inntøkum, t.d. gjøldum, sum eru javnað sambært heimild í lóg. Gjaldstovan setir spurnartekin við, um ein so týdningarmikil partur uttan víðari verður fluttur úr rakstrinum og vísir á, at ein partur av privatiseringini kundi verið, at eftirlønarskyldan, ella partur av henni, varð tikin við sum skuld í partafelagnum.

Gjaldstovan heldur tó ongan iva vera um, at eftirlønirnar so ella so høvdu endað í landskassanum, men at viðurskiftini áttu at verið nærri lýst, nú serlig játtan er stovnað á fíggjarlógini til endamálið. Gjaldstovan heldur, at tað, sum stendur í viðmerkingunum um *"at tað er óheppið, at Postverk Føroya ella rættari sagt brúkarin av posttænastunum skal fíggja hesa eftirlønarskyldu"*, leggur upp til, at tænastumannaeftirlønir er nakað heilt serligt. Gjaldstovan vísir á, at t.d. BLF-arar fáa eisini eftirløn. Substansurin er hin sami, hvørt eftirlønin verður flutt til LÍV, ella hon verður goldin av fíggjarlógini. Spurningurin er bara, nær gjaldið fer fram.

Landsgrannskoðanini kunnugt vóru upplýsingar tøkar um kapitaliseraða virðið av eftirlønarskyldum Postverksins, væl áðrenn fíggjarlógaruppskotið varð lagt fyri tingið. Eftir áheitan frá Postverki Føroya lat LÍV 31. mars 2004 úr hondum eitt yvirlit yvir kapitaliseraðu eftirlønarskyldurnar hjá yvirtiknu tænastumonnunum. Útrokningin er gjørd við støði í einari

rentu á 2,5 % p.a. og er býtt upp í 3 bólkar. Danski parturin av eftirlønarskylduni er drigin frá. Upphæddirnar svara til, hvat tað vildi kostað landinum at keypt seg frá eftirlønarskyldunum:

Bólkur 1: 17 persónar, ið fáa eftirløn (27,9 mió.kr.)

Bólkur 2: 36 persónar, ið framvegis eru í starvi (65,9 mió.kr.)

Bólkur 3: 3 persónar við eftirlønarrætti (1,8 mió.kr.)

Samlaði kostnaðurin fyri eftirlønarskyldurnar hjá øllum bólkunum eru mettar til 95,6 mió.kr.

LÍV ger vart við, at vegna væntandi upplýsingar er ikki roknað við møguligum hjúnafelaga í bólki 1. LÍV vísir eisini á, at 14 starvsfólk, ið eru farin úr starvi, og tí hava ein uppsettan eftirlønarrætt, eru ikki við í útrokningunum vegna vantandi upplýsingar. Postverkið hevur í februar 2005 boðað frá, at harumframt vanta 4 persónar í bólki 1.

Eftirlønir, Føroya Handilsskúli

14. apríl 2004 samtykti Løgtingið Ll. nr. 16 frá 20. apríl 2004 "um eftirløn hjá ávísum lærarum o.ø. á Føroya Handilsskúla". Sambært viðmerkingum er talan um 13 lærarar, sum høvdu tænastumannalíknandi setanir, tá málsøkið 1. januar 1988 varð yvirtikið, harav eru 4 ikki longur í starvi. Hildið verður, at landið hevur skyldu at átaka sær hesa eftirlønarskylduna, og sambært viðmerkingunum er ætlanin við lógini at fáa formligu viðurskiftini í rættlag. Í viðmerkingunum verður út frá ymiskum fortreytum mett, at samlaða eftirlønarskyldan er um 16,7 mió.kr., har meginparturin fellur til gjaldingar um nógv ár. Talan er ikki um eina kapitaliseraða aktuarútrokning, har t.d. møgulig hjúnafelagaeftirløn er tikin við.

Viðmerkingar/tilmæli

Vantandi roknskaparreglugerð/innaneftirlit

Umsitingin av eftirlønum á teimum stovnum og ráðum, vit hava vitjað, er í flestu førum ikki skrivliga lýst í roknskaparreglugerð e.l., og eftirlitsuppgávur eru ikki skrivliga greinaðar. Heldur ikki tær tvørgangandi umsitingar- og eftirlitsuppgávurnar eru lýstar. Vit mæla til at bøta um hesi viðurskifti.

Ásetingarnar í einari roknskaparreglugerð hava serliga til endamáls at skipa fyri einum innaneftirliti, ið skal tryggja, at roknskapurin er rættur og álítandi, t.v.s., at skrásetingarnar:

1. allar eru við í roknskapinum, fullfíggjað skráseting
2. hava gildi
3. eru rættar
4. eru rætt tíðaravmarkaðar

Harumframt skal ogn, skuld, skyldur o.t. verða 5) virðismett rætt, og 6) ársroknskapurin skal verða rætt settur upp í síni heild.

Eftir okkara tykki lýkur roknskapurin fyri eftirlønir ikki til fulnar øll hesi krøv.

Ymiskir bókingarhættir

Nakrar eftirlønir verða bókaðar undir fíggjarmál, aðrar undir teimum málsøkjum/virksemisøkjum, har hin eftirlønti áður hevur starvast.

Endurgjald frá danska statinum verður í einum føri tikið við undir inntøkum sum "Heildarveiting o.t.", í øðrum førum verður tað bókað á teimum kontum, har eftirlønin verður útreiðsluførd. Endurgjøld frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum eru ikki bókað.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera rætt, at talan er um so ymiskar bókingarhættir, og vit hava mælt til at finna ein hóskandi hátt at bóka eftirlønir.

Eftirlønarskyldur ikki við í landsroknskapinum

Sum er, eru eftirlønarskyldur landsins ikki tiknar við í landsroknskapinum. Í einum fíggjarári verður heldur einki sett av ella útreiðsluført sum "eftirlønargjald" á tí stovni, tænastumaðurin starvast, t.d. svarandi til tað eitt eftirlønarár mest sannlíkt kemur at kosta landinum í eftirløn "í síðsta enda". Sostatt gevur landsroknskapurin ikki eina sambærliga og rætta mynd av, hvat tað veruliga kostar at hava ein tænastumann e.t. í starvi, samanborið við onnur starvsfólk, har landið í einum fíggjarári aftrat lønini rindar eitt eftirlønargjald. Vit hava mælt til at endurskoða verandi játtanar- og roknskaparmeginreglur.

Vantandi uppgerð av samlaðu eftirlønarskylduni

Samlaðu eftirlønarskyldurnar hjá landinum eru ikki tiknar við í landsroknskapinum; eftirlønaraldur o.a. hjá tænastumonnum er ikki skrásett á ein skipaðan hátt; fullfíggjað yvirlit er ikki yvir allar tænastumenn, ið eru og hava verið í starvi; vissa er ikki fyri, at øll, ið hava eftirlønarrættindi, fáa eftirløn, herímillum hjúnafelagar og børn o.s.fr.

Eftir okkara tykki er tað eitt vandamál, at landið ikki hevur nóg gott yvirlit yvir verandi og komandi eftirlønarskyldur og eftirlønarútreiðslur. Tað finnast ongar metingar av vøkstrinum í landsins útreiðslum til tænastumannaeftirlønir o.t. komandi 5, 10, 20 árini. Metingar av samlaðu, kapitaliseraðu eftirlønarskylduni eru ikki gjørdar. Hetta ber til at rokna út, men sum víst á, er fyrst neyðugt at finna fram til, savna saman og á ein skipaðan hátt skráseta allar upplýsingar um hvønn einstøkan persón. Vit hava mælt til, at farið verður undir hetta arbeiðið.

Einki verður sett av til eftirlønarskyldur

Gjaldstovan hevur gjørt vart við, at eftirlønarskyldan kann gerast ein stórur búskaparligur trupulleiki fyri landskassan. Í fleiri londum, har tænastumannaeftirlønarskipanir o.t. verða nýttar, finnast skipanir, har tann, ið veitir tilsøgnina um eftirløn, tað veri seg felag, kommuna ella statur, á hvørjum ári "avdekkar" sínar eftirlønarskyldur hjá einum tryggingarfelag e.t. Sum dømi kunnu vit nevna, at flestu kommunur í Danmark árliga "avdekka" sínar eftirlønarskyldur hjá "Kommunernes Pensionsforsikring".

Vit hava mælt til, at Landsstýrið setir ein arbeiðsbólk, sum við sakkønari hjálp kann meta um fyrimunir og vansar við einari skipan, har landið "avdekkar" komandi eftirlønarskyldur frá einum ávísum degi. Í hesum sambandi kundi eisini verið vert at kannað, um landið skal fara undir at leggja upp fyri komandi útreiðslum til tær eftirlønarskyldur, sum landskassin longu hevur átikið sær.

2.6.4 Óhóskandi bygnaður

Landsgrannskoðanin hevur áður í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar mælt til at samskipa umsitingina av eftirlønum. Nógv ymisk ráð og stovnar umsita eftirlønir, og ymiskar KT-skipanir, tað veri journal-, skrásetingar-, eftirlits-, lønar-, útgjalds-, roknskaparskipanir o.a. verða nýttar í sambandi við umsiting av landsins eftirlønum.

Breið semja tykist verða í umsitingini um, at eftirlønarøkið eigur at verða betri skipað, og niðanfyri hava vit umrøtt nakrar av mongu vansunum við verandi bygnaði.

Vantandi samskipan og savnan av vitan

Í samskifti okkara um grannskoðan av tænastumannaeftirlønum hevur Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum í januar 2005 m.a. gjørt vart við tørvin á at samskipa fyrisitingina av eftirlønum:

> *"Upprunaliga var talan um lítla fyrisiting, og avmarkað tal av tænastumonnum – samlaða talið av tænastumonnum og eftirløntum tænastumonnum lá niðanfyri 100. Tí bar til at umsita økið uttan stórvegis ressourcir til dagliga umsiting. Tá øll umsitingin lá á einum stað, var heldur ikki neyðugt*

við nógvum øðrum reglum enn tænastumannaeftirlønarlógini.

Í sambandi við tær stóru yvirtøkurnar, sum eru framdar síðstu 30 árini, er talið av tænastumonnum og eftirløntum tænastumonnum tó nógv økt. Orsøkin er, at rættiliga stórur partur av starvsfólkunum, sum vóru yvirtikin, vóru tænastumenn.

Men hóast fyritreytirnar eru nógv broyttar, er ongantíð tikin nøkur avleiðing av, at talið av tænastumonnum er meiri enn 10 faldað (frá minni enn 100 persónar, sum annaðhvørt vóru í starvi sum tænastumenn ella fingu eftirløn sum tænastumenn, so er hetta tal í dag helst yvir 1.000 persónar).

Økið verður umsitið av fleiri landsstýrismonnum, sum hvør í sínum lagi umsita, sum um eingin broyting er hend síðstu 35 árini, tí tað er ongantíð tikin avgerð um at miðsavna og enn minni at játta neyðugu ressourcirnar til at umsita økið.

Úrslitið er, at vitanin er ikki samlað á einum stað, tí hon er spjadd runt á fleiri ymiskum stovnum, tað mangla skipanir til at umsita eftirlønir, og regluverkið er sera mangulfult á nógvum økjum.

Skal økið umsitast nøktandi, eiga allar eftirlønarútgjaldingar at verða fluttar til Gjaldstovuna, og Fíggjarmálaráðið má fáa tilført ressourcir til at dagføra regluverkið."

Starvsfólkadeildin í Almanna- og Heilsumálaráðnum hevur í einum uppriti til landsstýrismannin í Almanna- og Heilsumálum í oktober 2004 eisini mælt til, at sami stovnur skal umsita allar tænastumannaeftirlønir. Í hesum sambandi verður m.a. víst á, at:

"Umsiting og avgreiðsla av tænastumannaeftirlønum er ikki nakað einfalt mál. Tá hetta arbeiðið liggur úti á fleiri ymiskum ráðum og stovnum, er vandi fyri, at allir tænastumenn og avvarðandi teirra ikki verða viðgjørd eins í mun til lógina um tænastumannaeftirlønir.

Vitanin um tænastumannaøkið liggur í stóran mun inni í høvdinum á fólki, sum nú er komið so væl til árs, at tey skjótt fara úr starvi, ella liggur lokalt úti í ymiskum skipanum á stovnum.

Mett verður, at best hevði verið, um allar tænastumannaeftirlønir vórðu umsitnar av sama stovni. Á henda hátt hevði borið til at fingið eitt fullfíggjað yvirlit yvir allar skyldur, sum landið hevur mótvegis tænastumonnum, somuleiðis sum størri trygd var fyri eins viðgerð av málum um tænastumannaeftirlønir."

Eisini Lønarstovan í Mentamálaráðnum hevur víst á, at eftirlønarøkið sum heild er sera torskilt, og m.a. tí hevur tað stóran týdning, ikki minst fyri eftirtíðina, at savna eftirlønarumsitingarnar fyri at savna vitanina og menna umsitingina.

Gjaldstovan vísir eisini á, at fyri veruliga at bøta um og rationalisera umsitingina av tænastumannaeftirlønum og av lønum sum heild, skulu fremjast bygnaðarbroytingar, soleiðis at ein felags lønar-/og eftirlønarumsiting verður stovnað undir Fíggjarmálaráðnum, har roynd fólk frá ymiskum aðalráðum/stovnum við servitan innan sáttmálar, setanir, eftirlønarlóggávu, lønar- og forskipanir, verða savnað saman í eina eind. Gjaldstovan heldur tað vera neyðugt at seta fólk burturav at stýra hesum arbeiði, bæði fyri at fáa ment eina loysn og at fáa skrásett tað, sum skal verða skrásett. Ein háttur kundi verið at flutt ein part av játtanini hjá teimum stovnum, sum fyrisita eftirlønir í dag, til ein stovn, sum hevur hesa felags uppgávu.

Vantandi skráseting av eftirlønarrætti hjá tí einstaka

Sambært Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum er vantandi skipað skráseting av eftirlønarrættindum hjá tí einstaka eitt stórt vandamál í umsitingini av eftirlønum. Einki samlað yvirlit er yvir tænastumenn, ið hava rætt til eftirløn frá landinum, og nýggir tænastumenn, ið verða settir í starv, verða heldur ikki skrásettir á ein skipaðan hátt. Lønardeildin gerst ikki varug við eftirlønarrættin hjá tænastumonnum, fyrr enn ein stovnur boðar Lønardeildini frá, at tænastumaður fer frá við eftirløn.

Tað kemur eisini fyri, at hjúnafelagi boðar Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum frá, at viðkomandi hevur rætt til útsetta hjúnafelagaeftirløn. Lønardeildin heldur tað hava stóran týdning, at eftirlønarrættur hjá tænastumonnum verður skrásettur, og at tey, ið hava ein eftirlønarrætt, fáa eina árliga fráboðan um, hvat rætturin fevnir um.

Tey trý sjúkrahúsini rinda eftirlønir um egnar lønarskipanir, og mugu sjálvi steðga eftirlønini, tá tey frætta t.d. í útvarpinum, at tænastumaður ella eftirløntur tænastumaður er deyður. Tænastumenn innan Serforsorgina og Almanna- og Heilsumálaráðið fáa eftirløn um lønarskipanina á Gjaldstovuni. Gjaldstovan fær deyðsfráboðan frá Skiftirættinum og kunnar Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um, at eftirlønin er steðgað. Eingin skipað samskiftismannagongd er á hesum øki.

Mentamálaráðið, Almanna- og Heilsumálaráðið, serstovnaøkið og sjúkrahúsini hava heldur ikki skipaðar skrásetingar av t.d. avvarðandi hjá eftirløntum tænastumonnum. Tí er ikki vist, at avvarðandi fáa ta eftirløn, tey hava rætt til. Talan kann t.d. verða um einkjur ella børn, ið av órøttum ikki fáa eftirløn. Fyri at minka um møgulig mistøk hevur Mentamálaráðið sent øllum, ið fáa eftirløn, eitt oyðublað, har tey skulu skráseta og vátta persónligar upplýsingar og binda seg til at boða frá møguligum broytingum.

Í mars 2004 savnaðust starvsfólkini, ið dagliga umsita eftirlønir, at umrøða trupulleikarnar. Á fundinum var m.a. semja um, at umsitingin av eftirlønarøkinum hjá tænastumonnum var illa greinað, fyrisitingarliga ógreið, skipað skráseting av eftirlønarrætti manglar, og vandi er fyri, at fólk hava eftirlønarrættindi, sum hvørki tey sjálvi ella myndugleikar eru varug við.

Eitt brot í fundarnotatinum er orðað soleiðis: *"Verður einki gjørt, kann enda púra galið. Eitt er, at myndugleikin ikki veit, hvørjar skyldurnar eru. Eitt annað er, at vandi er fyri, at fólk detta burtur ímillum. Tey hava kanska rætt til eftirløn, men rættindini eru vunnin fyri so langari tíð síðani, at tey hava gloymt tað. Talan kann eisini vera um hjúnafelagaeftirløn hjá hjúnafelaga, sum ikki veit seg hava rættindini. Mælt verður til at fáa skil á økinum, áðrenn tað verður kravboð frá umboðsmanninum."*

Sambært fundarnotatinum er eftirlønarøkið ógvuliga viðbrekið, tí tað er so bundið at vitanini hjá einstøkum persónum. Í notatinum verður mælt til, at støða verður tikin til:

- at eftirlønarrættur hjá tænastumonnum skal verða skrásettur,
- hvør skal umsita økið at skráseta tænastumannaeftirlønarrætt,
- at upplýsingarnar verða skrásettar miðsavnað,
- at dátugrunnur verður gjørdur.

Tilmælið er stílað leiðaranum á Lønardeildini, sum síðani hevur kunnað aðalstjóran og landsstýrismannin og givið teimum avrit av tilmælinum. Síðani hava Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin og Føroya Gjaldstova havt tveir fundir um málið. Eitt umboð fyri Gjaldstovuna hevur eisini vitjað í Økonomistyrelsen í Danmark, fyri at kunna seg um, hvussu hesi viðurskifti verða umsitin har.

Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið halda, at skal ein skipan verða gjørd til endamálið, er tað mest natúrligt at skoyta eitt eyka modul uppí felags lønarskipanina, so til ber at skráseta øll tey, sum hava vunnið sær eftirlønarrættindi. Nógv starvsfólkamál skulu verða gjøgnumgingin á fleiri stovnum, fyri at finna fram til neyðugu upplýsingarnar um hesi starvsfólk, sum síðani skulu hava eitt bræv um síni rættindi, og um hvussu tænastumannaeftirlønin verður roknað út. Hetta er eitt sera stórt arbeiði, ið hevur skund, tí nógv neyðug vitan finst bert í høvdinum á nøkrum fáum starvsfólkum, ið eldast og fækkast. Hildið verður eisini, at felags lønarskipanin eigur at verða broytt, soleiðis at eftirlønarrætturin, sum ein tænastumaður vinnur, verður skrásettur so hvørt.

Lønardeildin og Gjaldstovan hildu í 2004, at ein tílík skipan við tilhoyrandi mannagongdum og reglugerðum o.a. kann verða ment í 2005, um neyðug starvsfólkaorka og peningalig játtan verður sett av til endamálið. Landsgrannskoðanini kunnugt verður ikki arbeitt við hesi verkætlan í 2005 vegna vantandi orku.

Viðmerkingar/tilmæli

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tað fyrisitingarliga kann forsvarast, at landsumsitingin ikki í øllum førum hevur fullfíggjað yvirlit yvir allar tær eftirlønarskyldur o.a., ið landskassin

sambært lóg hevur átikið sær mótvegis tænastumonnum og møguligum eftirsitandi hjúnafelaga og børnum. Vandi er fyri, at fleiri av óróttum verða gloymd burtur.

Samanumtikið er okkara fatan, at í umsitingini av eftirlønum starvast sera væl skikkað fólk við drúgvum royndum, men stórir veikleikar liggja í verandi bygnaði, ið ikki er hóskandi ella nóg væl samskipaður. Tað okkara vón, at frágreiðingin kann verða við til at skunda undir, at avvarðandi landsstýrismenn, ið hava ábyrgd av eftirlønarøkinum, finna eina hóskandi loysn á trupulleikunum.

Vit hava áður í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar m.a. víst á:

"Í dag eru nógvar og fløktar skipanir, sum ikki hanga nóg væl saman. Fleiri stovnar/grunnar umsita uppgávur, sum helst í størri mun kundu verið samskipaðar. T.d. er eitt ótal av stovnum, grunnum, deildum o.l., sum hvør sær umsita lønir. 4 fyrisitingarligar eindir umsita dagpening vegna sjúku og barnsburð: Lønjavningarstovan, Almannastovan, Vanlukkutryggingin og ALS. Almannastovan, ALS og Lønjavningarstovan umsita veitingar vegna vantandi arbeiðsinntøku. Almannastovan og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin umsita pensjónir, og harafturat umsita Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið, Almanna- og Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Postverkið tænastumannapensjónir. Hóast talan er um lutfalsliga smáar eindir, nýta almennir stovnar/grunnar nógvar ymiskar EDV-skipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, debitorar o.a. Tá ið uppgávurnar eru so spjaddar, er ofta torført at manna størv við fólki, sum hevur førleika og neyðugar royndir, "soðið verður ov tunt".

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tilgongdin seinnu árini hevur effektiviserað samlaðu almennu umsitingina, t.v.s. gjørt hana bíligari og betri. Tørvur er á at endurnýggja fleiri búskaparskipanir. Fer hetta arbeiði ikki fram sum liður í einari yvirskipaðari heildarætlan, har eisini bygnaðurin verður endurskoðaður, verður peningur og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt.

Higartil hevur Fíggjarmálaráðið ikki megnað ella havt neyðuga orku og stuðul til at átaka sær tann virkna, leiðandi og samskipandi leiklut, ið roknskaparlógin/-kunngerðin leggur upp til. Landsgrannskoðanin heldur, at er ætlanin, at umsitingin skal verða gjørd bíligari og betri, er tað ein fortreyt, at óskipaða gongdin verður steðgað.

Tað hevur tó eydnast at byggja upp nakrar væl virkandi búskaparskipanir á Gjaldstovuni, men trupulleikin er, at tær verða ikki gagnnýttar í tann mun, ætlanin var. Við einari skynsamari langtíðar ráðlegging ber helst til at umleggja ella niðurleggja fleiri av teimum smærru búskaparskipanunum, og í staðin fyri nýta búskaparskipanir landsins í størri mun. Tað krevur tó, at ein myndugleiki setir út í kortið."

Fíggjamálaráðið hevur í mars 2005 boðað frá, at semja er ímillum aðalráðini um, at fyrisitingin av lønum, íroknað eftirlønum, verður miðsavnað. Væntandi verður politisk støða tikin til eina tílíka verkætlan í 2005.

2.7 Hagstova Føroya (GL 2003/2 03 9-10)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Hagstovu Føroya eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á Hagstovuni er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

- *at* dagføra roknskaparreglugerðina og senda hana til Fíggjarmálaráðið at góðkenna,
- *at* lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi roknskapargóðkenning í roknskaparreglugerðini,
- *at* Hagstovan leitar sær ráð hjá Landsskjalasavninum, fyri at tryggja sær, at reglur ásettar sambært skjalasavnslógini/-kunngerðini, verða hildnar,
- *at* útreiðsluskjøl verða gjøllari greinað,
- *at* taka spurningin um langtíðarleigu upp við Fíggjarmálaráðið,
- *at* gera yvirlit yvir ognir og at lýsa mannagongdina í roknskaparreglugerðini,
- *at* taka spurningin um longdina av arbeiðsvikuni upp við Fíggjarmálaráðið,
- *at* lønarásetingar í sambandi við nýggjar setanir verða betur skjalprógvaðar,

at trygdarreglurnar, sum eru kravdar sambært K. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum", verða gjørdar og góðkendar,

at at mannagongdin fyri trygdaravrit verður skjalfest,

at skjalfestar mannagongdir verða gjørdar fyri, hvussu dátur og ritbúnaður kann endurskapast, eisini á øðrum teldum.

Í skrivi frá Hagstovu Føroya í januar 2005 hevur stjórin boðað frá, at viðmerkingar og tilmæli okkara verða tikin til eftirtektar.

3 LØGMANSFYRISITINGIN

3.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

2.11.1.21. Umbygging í Tinganesi (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.200 t.kr. Minninýtslan er 52 t.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga játtaðar 1.500 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin hækkað 700 t.kr.

Eykajáttanin varð umrødd í fyrispurningi til løgmann 17. september 2003 (Lm. nr. 100/5-2003) har løgmaður í einum fylgiskjali til svar sítt 15. oktober 2003 m.a. greiddi soleiðis frá málinum:

- 10. september 2003 vóru 1,4 mió.kr. nýttar av játtanini, sum var 1,5 mió.kr.
- Á fundi 11. september 2003 við Landsverk og ráðgevandi arkitektavirkið, kunnaði arkitektavirkið um, at tað fór at góðkenna rokningar, sum vóru á veg fyri arbeiði og tilfar, fyri fleiri hundrað túsund krónur.
- Á fundinum gav Løgmansskrivstovan Landsverk og arkitektavirkinum boð um, at alt keyp skuldi verða steðgað beinanvegin.
- 23 september 2003 vísti fyribilsuppgerð frá arkitektavirkinum, at meirnýtslan í mun til játtanina 2003 fór at verða umleið 550 t.kr., men løgmaður væntaði, at talið fór at verða nakað hægri. Harafturat varð neyðugt við 30-50 t.kr. fyri at kunna taka hølini í nýtslu. Tí varð biðið um eykajáttan 700 t.kr.
- Fyri at bøta um fíggjarstýringina er Løgmansskrivstovan farin undir at endurskoða samstarvsskipanina við Landsverk um ráðgevingartænastur veittar Løgmansskrivstovuni í byggimálum. Endamálið er at byrgja upp fyri, at meirnýtsla endurtekur seg.

3.2 Menningarhjálp (GL 2003/2 02 1-2)

Tað einasta, ið er ásett um endamálið við játtanini, er ein regla í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið um, at *"játtanin er ætlað til tiltøk, sum kunnu gagna menningarlondum, ella vera til hjálp í øðrum londum, um okkurt óvanligt er á vási"*.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at endamál, stuðulstreytir, málsviðgerð o.a. kundu verið væl betur lýst, og hevur mælt til at bøta um viðurskiftini.

Í apríl 2004 legði løgmaður frágreiðing um altjóða menningarpolitikk Føroya fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis. Løgmaður vónaði, at tað fór at skapa nýggjar karmar um, hvussu fyrisitingin í framtíðini kemur at leggja slíkt arbeiði best til rættis.

4. mars 2005 hevur løgmaður lagt fram uppskot til løgtingslóg um altjóða menningarhjálp (Lm. nr. 79/2004).

3.3 Nord Atlantisk Brygge (GL 2003/2 02 1-2)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit játtanar- og roknskaparviðurskiftini og kunnaðu um, at vit ætlaðu at gjøgnumganga viðurskiftini gjøllari, tá ið byggiroknskapurin hjá "Fonden Den Nordatlantiske Brygge" var liðugur. Byggiroknskapurin verður væntandi liðugur á vári 2005.

3.4 Samsýning o.a. til landsstýrismenn (GL 1998/2 02 9-2)

Sambært § 32, stk. 2, í stýrisskipanarlógini verða neyvari reglur um setanarviðurskifti løgmans og landsstýrismanna ásettar í løgtingslóg. Tað er gjørt í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." við seinni broytingum. Í lógini er neyvari ásett um løn, eftirløn umframt skattafrítt borðfæ og kostnaðarendurgjøld. Í 2000 mæltu vit løgmanni til at greiða fleiri ivaspurningar; m.a. um heimildina at veita onnur kostnaðarendurgjøld enn tey, sum eru ásett í lógini; hvussu nógv skal verða rindað/endurrindað fyri heimatelefon/fartelefon; hvat skal verða givið upp skattliga o.a.

Í mars 2001 tók løgmaður stig til at greiða heimildarspurningin um kostnaðarendurgjald fyri telefon o.a., tá ið hann legði fyri tingið uppskot um at broyta lógina "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." Broytingaruppskotið, sum annars snúði seg um at hækka eftirlønirnar, varð samtykt við gildi frá 1. januar 2002, men var sett úr gildi aftur í desember 2002. Eftirsíðan feldi Løgtingið eitt nýtt broytingaruppskot frá løgmanni, og sostatt er "gamla" lógin framvegis í gildi.

Í mai 2003 samtykti Løgtingið Ll. nr. 77/2003 "um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m." Sambært lógini velur løgmaður eina nevnd við trimum fólkum at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna o.a. Í nevndini, ið skal verða vald fyri hvørt valskeið, skal vera ein løgfrøðingur, ein kønur í lógarmálum og ein roknskaparkønur. Nevndin skal lata løgmanni tilmæli í seinasta lagi í aðru tingsetu í hvørjum valskeiði.

Í november 2004 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at løgmaður hevur valt nevndina, sum ætlandi skal lata løgmanni tilmæli fyri 20. januar 2005. Tilmælið er ikki latið løgmanni enn.

3.5 Alment um studningslóggávu og studningsumsiting (GL 1998/2 02 9-2)

Vit hava í fleiri frágreiðingum víst á, at tørvur er á at bøta um studningsgrundarlagið/-lóggávuna og studningsumsitingina, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði. Nógvar studningsjáttanir verða bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum, og í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding.

Viðvíkjandi studningsskipanum, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, hava vit eisini víst á, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur verða ásettar í serstakari lóg.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) samtykti Løgtingið 12. mars 2002 at mæla til, at Løgmansskrivstovan átók sær ein virknan og samskipandi leiklut í arbeiðinum at bøta um verandi studningslóggávu.

Í desember 2002 tók løgmaður stig til, at ein bólkur við starvsfólki úr miðfyrisitingini skuldi verða settur at arbeiða við málinum. Varð tað hildið at vera skilagott, skuldi bólkurin evna til eina almenna lóg um studning, sum skal áseta reglur fyri og krøv um roknskap, eftirlit, grannskoðan o.a. Harafturat skuldi bólkurin gera uppskot til eina skipan, sum skal tryggja, at verandi og nýggj studningslóggáva og viðmerkingar til studningsjáttanir á fíggjarlógini verða á fullgóðum støði.

Í januar 2003 heitti løgmaður á Fíggjarmálaráðið um at taka á seg ábyrgdina og leiðsluna av hesi verkætlan og at samskipa hana við arbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum at broyta játtanarskipanina.

Í november 2003 ásannaði løgmaður, at Fíggjarmálaráðið hevði ikki gjørt tað, ið løgmaður hevði biðið um í brævi sínum 21. januar 2003. Løgmaður vísti til skriv 28. oktober 2003, har landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði boðað frá, at Fíggjarmálaráðið hevði arbeitt við øðrum tíðarkrevjandi verkætlanum so sum at endurskoða játtanarskipanina og gera nýggja

budgetskipan. Í november 2004 kunnaði løgmaður um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt uppskot til rundskriv um játtanarreglur, har reglur fyri studningsumsiting vóru tiknar við, og har varð mælt til at gera serstakar studningslógir, tá ið tað snúði seg um munandi upphæddir ella varandi studningsskipanir til breiðan móttakaraskara. Umsiting Løgtingsins boðaði frá, at hon kundi ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í rundskrivinum, og hon var av tí áskoðan, at rættast var at gera eina játtanarlóg.

Í mars 2005 hevur Løgtingið samtykt uppskot til samtyktar frá Fíggjarnevndini (Lm. nr. 38/2004) har Løgtingið tekur undir við, at formansskapur Løgtingsins setir ein serkønan arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, ið skal áseta treytir og mannagongdir fyri játtanum.

3.6 Sendistovan í Keypmannahavn (GL 2000/2 02 2-4)

Í 2004 hava vit grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Sendistovuni í Keypmannahavn. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á Sendistovuni er gott. Vit hava tó mælt til:

- *at* roknskaparreglugerðin verður dagførd, og at uppgávubýtið viðvíkjandi roknskapareftirliti- og góðkenning verður greinað,
- *at* debitorskipanin hjá Gjaldstovuni verður brúkt í sambandi við fakturering av inntøkum,
- *at* kanna, um "mvg-uppgerðir" skulu verða gjørdar fyri "húsaleiguroknskapin" fyri 4. ársfjórðing 2003 og 1. og 2. ársfjórðing í 2004,
- *at* kanna, um stovnurin skal vera partur av "mvg-avlyftingarskipanini" og um "købsmoms" verður rætt bókaður,
- *at* fíggjarstøðan, herímillum millumrokningarkonta 0649, verður stemmað av,
- *at* ognaryvirlitið verður dagført.

Stovnsleiðarin hevur í november 2004 kunnað um, at farið verður undir at dagføra reglugerðina í næstum. Í framtíðini verða rokningar sendar Løgmansskrivstovuni at avgreiða, og fíggjarstøðan verður stemmað av og góðkend. MVG-uppgerðirnar eru kannaðar og sendar inn.

4 FISKIVINNA

4.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Vísandi til landsroknskapin 2003 er meirnýtsla á fleiri kontum. Niðanfyri verða nakrar teirra umrøddar:

t.kr.

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	*Frávik*
Fiskiveiðieftirlitið, V&B (rakstrarjáttan)	41.136	44.693	*3.557*
Magnus Heinason (rakstrarjáttan)	7.984	8.777	*793*
Fiskivinnumenning á landi	400	1.017	*617*
Bjargingarfeløg	800	1.000	*200*
Effektivar veðhaldsútreiðslur, inntøkur	3.000	8.260	*-5.260*
Effektivar veðhaldsútreiðslur, útreiðslur	1.000	629	*371*

5.34.2.01. Fiskiveiðieftirlit, Vaktar- og bjargingartænastan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 42,6 mió.kr. Meirnýtslan er 3,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin hækkað 716 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin lækkað 2.180 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna vantandi inntøkur, meirútreiðslur av skaðum og óvæntaðar útreiðslur av skipunum. Harafturat hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ikki vóru nóg nógvir útbúnir kavarar, og tí var peningur nýttur til at útbúgva 8 kavarar afturat.

Á eykajáttanarlógini desember 2003, sum varð samtykt 20. desember 2003, varð játtanin lækkað 2.180 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð tá hildið, at nýtslan fór at verða minni enn væntað. Metingin varð m.a. grundað á, at Fiskiveiðieftirlitið fekk 2,5 mió.kr. í inntøku frá tryggingarfeløgum vegna sleip, men henda upphædd varð ikki goldin í 2003.

5.34.3.04. Magnus Heinason (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8 mió.kr. Meirnýtslan er 800 t.kr. Farið er upp um ásetta lønarkarmin við 645 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2003, sum varð lagt fyri tingið 2. desember 2003, varð søkt um eykajáttan 900 t.kr. Sambært viðmerkingunum til uppskotið var Fiskimálaráðið komið eftir, at serliga inntøkurnar fóru at verða minni enn væntað, og at meirútreiðslur fóru at vera til lønir til avloysarar í sambandi við sjúkrafráveru. Uppskotið til eykajáttanarlóg november 2003 datt burtur, tá løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, og uppskotið varð ikki tikið við á eykajáttanarlógini desember 2003.

5.34.4.16. Fiskivinnumenning á landi

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,5 mió.kr. Meirnýtslan er 617 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin lækkað 2,1 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina væntaði Fiskimálaráðið, at nýtslan fór at verða minni enn mett frammanundan.

Sambært landsstýrismanninum tapti Fiskimálaráðið eitt sakarmál og varð dømt at rinda um 900 t.kr. í sakarmálskostnaði og endurgjaldi. Útreiðslurnar vórðu skrásettar og goldnar í november 2003.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2003, sum varð lagt fram 2. desember 2003, varð skotið upp at hækka játtanina 800 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið varð mett, at nýtslan fór at verða 1,2 mió.kr. Uppskotið til eykajáttanarlóg datt burtur, tá løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, og uppskotið varð ikki tikið við á eykajáttanarlógini desember 2003.

5.35.1.04. Bjargingarfeløg

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Meirnýtslan er 200 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin lækkað 200 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð játtanin lækkað av misgáum, eftir at øll játtanin var goldin út.

Minninýtsla

5.34.4.01. Inntøkutrygd (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 20 mió.kr. Minninýtslan er um 3,6 mió.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2003,ið datt burtur, tá ið løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, varð skotið upp at hækka játtanina, tí at Fiskimálaráðið var komið eftir, at neyðugt fór at vera við eykajáttan 8 mió.kr. Metingin bygdi á skeivu gongdina í fiskiskapinum seinna hálvár 2003.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg desember 2003, sum varð samtykt 20. desember 2003, varð skotið upp at hækka játtanina 8 mió.kr. Viðmerkingarnar í lógaruppskotinum vóru tær somu, sum í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2003.

Sambært landsstýrismanninum var neyðugt at søkja um eykajáttan, tí tá komið var út á árið versnaðu fiskiskapurin og fiskaprísirnir. Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um slíka játtan.

4.2 Sjóvinnufyrisitingin og Trygdarmiðstøðin (GL 2000/2 14 1-3)

Vit hava í 2004 verið ófráboðað á kassaeftirliti á Trygdarmiðstøðini og á Sjóvinnufyrisitingini. Harafturat kannaðu vit, um stovnarnir umsita inntøkurnar á tryggan hátt, og um innheintan av eftirstøðum virkar nøktandi.

4.2.1 Sjóvinnufyrisitingin

Avgreiðslukassin verður nýttur til inntøkur, sum eru gjøld fyri siglingarbøkur, skipsbløð, tjóðskaparbrøv o.a. Við ársbyrjan 2004 tók stovnurin í nýtslu nýggja EDV-kassaskipan, sum hevur ein avgreiðsluterminal og ein PBS-gjaldsterminal knýttan at sær.

Vit taldu kassapeningin, sum stemmaði við innanhýsis uppgerðarskjal, og vit samanbóru hann við landsbókhaldið. Eftirlitsdagin var ikki samsvar við salduna í landsbókhaldinum, m.a. tí at EDV-kassaskipanin hevði ikki latið sínar upplýsingar um inntøkur, kassatømingar o.a. til fíggjarstýringarskipan landsins. Viðurskiftini eru eftirsíðan komin í rættlag.

Sjóvinnufyrisitingin hevur 2 peningastovnskontur. Onnur kontan er skrásett í navninum hjá Sjóvinnufyrisitingini/Fiskimálaráðnum, og hon verður nýtt til inngjøld fyri tænasturnar hjá Sjóvinnufyrisitingini. Harafturat verður hon nýtt, tá ið gjaldsterminalurin, sum er knýttur at avgreiðslukassanum, verður tømdur. Hin kontan er skrásett í navninum hjá Trygdarmiðstøðini og Sjóvinnufyrisitingini, og hon er seinastu 2 árini bert nýtt til skeiðsinntøkurnar hjá Trygdarmiðstøðini.

Vit samanbóru kontuavrit frá peningastovninum við landsbókhaldið. Samsvar var ikki, tí rørslan hjá báðum kontum var bókað á somu kontu í landsbókhaldinum. Vit mæltu til at stemma kontuna av og gera neyðugu umbókingarnar. Viðurskiftini eru eftirsíðan komin í rættlag.

4.2.2 Trygdarmiðstøðin

Forskotskassi

Vit taldu kassapeningin og samanbóru hann við landsbókhaldið. Vit mæltu til at greina og bóka munirnar. Viðurskiftini eru eftirsíðan komin í rættlag.

Skuldarar

Vit vístu á, at um 115 t.kr. av eftirstøðunum stavaðu frá 2002 og eldri árum, og vit hava spurt, hvørjar reglur eru um at heinta inn krøv, og hvørji tiltøk stovnurin hevur sett í verk fyri ikki at missa peningin.

Í januar 2005 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at Fiskimálaráðið fylgir teimum mannagongdum, sum Gjaldstovan hevur ásett viðvíkjandi innheintan av krøvum. Við árslok 2004 hevur Fiskimálaráðið sett av 100 t.kr. til tap av skuldarum.

Inntøkur

Inntøkur stovnsins stava frá skeiðsvirksemi, í høvuðsheitum frá trygdarskeiðum (grundskeið og endurnýggjan), sum eru áløgd við Ll. nr. 63 frá 3. juli 1998 "um manning av skipum" og neyvari greinað í K. nr. 50 frá 12. mai 1999 "um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk", sum seinast broytt við K. nr. 102 frá 20. desember 2002. Samanumtikið halda vit, at skeiðsumsitingin virkar sera væl.

4.3 Fiskiveiðieftirlit/tyrlutænasta (GL 2003/2 14 2-3)

Í februar 2001 skrivaðu Fiskimálaráðið og Atlantsflog undir 10 ára sáttmála galdandi frá 1. januar 2001. Árliga samsýningin byggir á fyritreytirnar í einari rakstrarætlan, sum Atlantsflog hevði sett upp fyri nýútvegaðu tyrluna og tyrluna, sum landið eigur. Í fleiri frágreiðingum hava vit umrøtt hetta mál.

Vit hava m.a. víst á, at roknskapurin hjá "tyrlutænastuni" fyri 2001 var ov lítið greinaður, so tað var trupult at bera hann saman við rakstrarætlanina, og vit mæltu Fiskimálaráðnum til at útvega neyvari upplýsingar um ávís viðurskifti. Fiskimálaráðið hevur útvegað flestu upplýsingarnar, og roknskapurin 2002 var betur greinaður. Vit mæltu til at seta fíggjarstøðuna upp sambært ársroknskaparlógini.

Uppsetan av roknskapi 2003

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann, frá grannskoðaranum hjá Atlantsflogi, hevði útvegað váttan fyri, at býtislyklarnir vóru á rímiligum støði.

Atlantsflog hevur sett ein partsroknskap upp fyri 2003, sum eisini vísir fíggjarstøðuna hjá "tyrlutænastuni" í 2003 og samanberingartøl fyri 2002. Í brotinum "Nýttur roknskaparháttur" verður m.a. greitt frá býtislyklunum, sum verða brúktir í sambandi við útreiðslupostarnar. Notur eru til allar postar í rakstrarroknskapinum. Noturnar til aktiv og passiv eru settar upp sambært ásetingunum í § 6 í "Anordning om opstilling af årsregnskab m.m."

Í notuni til passivið "Veðlán" er greitt frá, at stórur partur av láninum 25 mió.kr. frá Íleggingargrunninum fyri Føroyar er goldið aftur í 2003 og í staðin fíggjað "innanhýsis" av Atlantsflogi. Í notuni til rakstrarpostin "Rentur" er greitt frá, at í 2003 var roknað renta av innanhýsis fíggingini 5%.

Roknskaparligt úrslit

Sambært § 7, stk. 3, í sáttmálanum hevur Fiskimálaráðið rætt til helvtina av staðfestum roknskaparligum vinningi yvir eina millión, eftir grannskoðaðum partsroknskapi. Atlantsflog hevur rætt til at fáa eitt staðfest roknskaparligt hall goldið av Fiskimálaráðnum, tó so, at Atlantsflog ber tær fyrstu 250 t.kr. av einum møguligum halli. Harafturat hevur Atlantsflog rætt til at fáa árligu samsýningina hækkaða, vísir partsroknskapurin hall, sum kemur av vøkstri í útreiðslum til starvsfólk, brennievni og viðlíkahald.

Sambært roknskapinum fyri 2003 vóru inntøkurnar um 900 t.kr. lægri enn í 2002, og útreiðslurnar um 2.169 t.kr. lægri enn í 2002. Úrslitið var eitt yvirskot um 542 t.kr.

Onnur viðurskifti

Vit hava fleiri ferðir vístá, at vit ivast í, um tað var rætt av Fiskimálaráðnum at endurrinda Atlantsflogi 1,3 mió.kr. fyri útreiðslur, hildnar áðrenn sáttmáli varð gjørdur millum partarnar. Vit hava fleiri ferðir biðið landsstýrismannin um viðmerkingar. Vit hava einki svar fingið.

4.4 Sjóbjargingarstøðin (GL 2004/2 14 2-4)

Vit hava í 2004 kannað, um roknskaparviðurskiftini á Sjóbjargingarstøðini (MRCC) eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á Sjóbjargingarstøðini (MRCC) er gott, men vit hava tó mælt til hesar ábøtur:

- *at* endurskoða roknskaparreglugerðina, herímillum at lýsa nýggju mannagongdina í sambandi við ljóslesing av fakturum,
- *at* endurskoða mannagongdina um roknskapargóðkenning,
- *at* avrit av lønargrundarkortum og skjalprógv/brævaskifti í sambandi við lønarframflytingar verða goymd í starvsfólkamálunum,
- *at* allar tímauppgerðir verða váttaðar av deildarleiðaranum á Sjóbjargingarstøðini,
- *at* mvg-viðurskiftini verða fingin í rættlag, í samráð við Gjaldstovuna.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at roknskaparreglugerð og góðkenningar- og eftirlitsmannagongdir verða endurskoðaðar fyri alt Fiskimálaráðið, herímillum eisini Sjóbjargingarstøðina. Harafturat kunnaði landsstýrismaðurin um, at flestu viðurskiftini, vit hava vístá, eru komin í rættlag.

4.5 Fiskirannsóknarstovan (GL 2004/2 14 3-9)

4.5.1 Roknskapartøl/samandráttur

Roknskapurin hjá Fiskirannsóknarstovuni er býttur sundur í 5 undirkontur. Niðanfyri hava vit sett upp eina talvu, ið vísir samlaðu útreiðslurnar og samlaðu inntøkurnar, sum eru skrásettar á undirkontunum. Vit hava eisini tikið "Magnus Heinason" við fyri at lýsa samlaða virksemið, ið Fiskirannsóknarstovan umsitur.

mió.kr.

Høvuðskonta 5.34.3.01 Fiskirannsóknarstovan	2003		2002		2001	
	Útreiðslur	Inntøkur	Útreiðslur	Inntøkur	Útreiðslur	Inntøkur
20. Vanligt virksemi	9,9	1,2	9,9	1,2	9,4	1,2
22. Ferðing og atburður hjá toski	0,7	-	0,6	-	0,6	-
23. Fuglakanningarstøð	0,5	-	0,5	-	0,5	-
40. Inntøkufíggjað virksemi	3,3	3,3	3,6	3,6	3,1	3,1
45. Verkætlanir	3,4	3,4	-	-	-	-
Tilsamans	**17,8**	**7,9**	**14,6**	**4,8**	**13,6**	**4,3**
Høvuðskonta 5.34.3.04. Magnus Heinason	11,9	3,2	15,3	4,8	14,6	5,1
Tilsamans	**29,7**	**11,1**	**29,9**	**9,6**	**28,2**	**9,4**

Á talvuni sæst, at í 2003 hevur Fiskirannsóknarstovan ábyrgdina av at umsita útreiðslur um 30 mió.kr., og inntøkurnar liggja um 11 mió.kr.

Sambært landsroknskapinum 2003 vórðu umleið 38% av samlaðu útreiðslunum hjá Fiskirannsóknarstovuni hildnar á "inntøkufíggjaða virkseminum". Samsvarandi tøl fyri 2001 og 2002 vóru umleið 25% og umleið 27%. Hækkingin stendst av, at útreiðslur til verkætlanir fíggjaðar av "Fiskivinnuroyndum" árini frammanundan vórðu umbókaðar til stovnsnummarið hjá "Fiskivinnuroyndum". Nú verða allar útreiðslur bókaðar á undirkontu 45 "verkætlanir". Harafturat verður rakstur hjá "granskingarkjarnum" (sum verða fíggjaðar av játtanini til "Granskingarætlanir") eisini bókaður á hesa undirkontu.

Í 2003 roknaði undirkonta 20 sær 1,1 mió.kr. í rakstrargjøldum. Í høvuðsheitum fyri at fyrisita verkætlanirnar, sum eru skrásettar á undirkontu 40 og 45. Harafturat hevur "undirkonta 20" roknað sær rakstrargjald fyri at umsita undirkontu 22. Einasta endamálið við rakstrargjaldinum tykist vera at "brúka játtanina fyri inniverandi ár". Vit hava mælt frá at gera tílíkar bókingar, ið eftir okkara tykki "grugga" roknskapin. Undirkontan hevur verið støðug í áravís, og eftir okkara tykki er spurningurin, um talan ikki er um vanligt virksemi, og um nøkur meining er í at vísa virksemið á einari serligari undirkontu.

Í 2003 var rakstur skrásettur á 15 verkætlanum á undirkontu 40 "inntøkufíggjað virksemi" og á 10 verkætlanum á undirkontu 45 "verkætlanir".

4.5.2 Alment um inntøkufíggjað virksemi

Vit hava mælt til, at Fiskirannsóknarstovan tekur spurningin um inntøkufíggjað virksemi upp við Fiskimálaráðið, tí í fleiri førum lúka verkætlanirnar ikki treytirnar, sum eru ásettar í játtanarskipanini.

Inntøkufíggjað virksemi er sum útgangsstøði ætlað til vinnuliga sølu av vørum og tænastum. Virksemið skal m.a. lúka tær treytir, at søluprísurin ikki er kappingaravlagandi mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og at langtíðar miðalkostnaðurin (beinleiðis útreiðslur og óbeinleiðis útreiðslur) skal verða fíggjaður.

Vit halda tað vera tilvildin/fíggingarhátturin, ið ger av, um virksemið verður skrásett sum inntøkufíggjað, og langtíðar miðalkostnaðurin verður ofta ikki fíggjaður. Samanumtikið kunnu verkætlanirnar á Fiskirannsóknarstovuni í flestu førum ikki metast sum "inntøkufíggjað virksemi". Talan er um granskingar- og menningarverkætlanir, sum stovnurin oftast sjálvur tekur stig til, í framhaldi av vanliga virkseminum.

4.5.3 Roknskaparviðurskifti annars

Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á Fiskirannsóknarstovuni er gott, men vit hava tó mælt til fleiri ábøtur:

- *at* endurskoða uppskotið til roknskaparreglugerð og at fáa reglugerðina góðkenda,
- *at* vegleiðingin "Arbeiðsgongd viðv. posti og journalisering á Fiskirannsóknarstovuni" verður dagført,
- *at* reglur verða ásettar fyri, hvørji skjøl skulu verða í starvsfólkamálunum, og at gjøgnumganga "gomlu" starvsfólkamálini og útvega øll neyðug skjalprógv, ið kunnu sanna, at lønarútgjaldingarnar eru rættar,
- *at* arbeiðstíðin verður skrásett, vísandi til § 7 í roknskaparkunngerðini,
- *at* greitt verður frá stóru nýtsluni av fartelefonini, sum er "til at taka", m.a. vísandi til rundskriv frá Løgmansskrivstovuni nr. 1/2002, og til rundskriv frá Toll- og Skattstovu Føroya nr. 2/2001 "um fartelefonir",
- *at* ognaryvirlitið verður dagført, og at yvirlitið fevnir um tær upplýsingar, sum eru minstukrøv sambært roknskaparrundskrivinum,
- *at* ferðaforskot verða gjørd upp og avroknað sambært galdandi reglum,
- *at* inntøkuføring av fremmandari fígging fylgir ásetingunum í vegleiðing frá Gjaldstovuni,
- *at* rørslur á kassa- og peningastovnskontum verða skrásettar regluliga, og at tær verða stemmaðar av.

Leiðslan á Fiskirannsóknarstovuni hevur greitt frá,

- *at* uppskotið til roknskaparreglugerð verður broytt, so tað verður tillagað broyttu mannagongdunum í.s.v. "Fiskivinnuroyndir",
- *at* kekklistar o.a. verða gjørdir, sum skulu tryggja, at øll viðkomandi skjøl eru í lønarmálunum, og at stovnurin hevur vissað sær, at setanarviðurskiftini hjá verandi starvsfólki eru rætt, og at løn o.a. svarar til útbúgving royndir o.a.,
- *at* leiðslan umhugsar at taka av fartelefonina "til at taka" og í staðin fyri lata starvsfólkunum talutíðarkort, ella at eitt danskt fartelefonhald verður stovnað, tí at fartelefonin "til at taka" m.a. verður nýtt í.s.v. uttanlandsferðing, einamest í Danmark,
- *at* fyrisitingin av ognaryvirlitinum verður nú endurskoðað.

Leiðslan á Fiskirannsóknarstovuni hevur kunnað um, at girokontan verður gjørd upp og strikað. Harafturat verður umhugsað at taka av forskotskassan og peningastovnskontuna.

<u>Roknskapargóðkenning</u>

Samanumtikið halda vit, at mánaðarliga eftirlitið við lønar- og øðrum rakstrarútreiðslum er gott, og at framskrivingar o.a. geva leiðsluni internt eina góða mynd av fíggjarligu støðuni.

Men vit halda ikki, at verkætlanarinntøkur, herímillum "fremmand fígging" og rørslur á fíggjarstøðukontum verða skrásettar nóg regluliga og so skjótt sum gjørligt, og vit halda heldur ikki mánaðarligu avstemmanina av fíggjarstøðuni vera nøktandi. Flestu viðurskiftini koma í rættlag við árslok, tá ið verkætlanirnar verða gjørdar upp, og fíggjarstøðan verður dagført.

Vísir eksterni mánaðarroknskapurin, herímillum fíggjarstøðan, ikki eina rætta mynd av ogn, skuld, inntøkum og nýtslu, halda vit tað vera ivasamt, um mánaðarroknskapurin er ein álítandi frásøgn til landsstýrismannin um "veruligu fíggjarstøðuna" hjá stovninum.

4.6 Magnus Heinason (GL 2004/2 14 3-10)

Seinastu 3 árini hava útreiðslurnar ligið um 12 mió.kr., men inntøkurnar hava verið støðugt minkandi, frá um 5 mió.kr. í 2001 til um 2,4 mió.kr. í 2004.

Magnus Heinason hevur felags umsiting við Fiskirannsóknarstovuna, og tí eru flestu viðmerkingarnar til umsitingina hjá Fiskirannsóknarstovuni, herímillum roknskaparreglugerð, roknskapargóðkenning, lønarumsiting, ognaryvirlit o.a., eisini galdandi fyri Magnus Heinason.

Vit hava mælt til, at ferðaforskot verða gjørd upp og avroknað sambært galdandi reglum, og at forskotskassin verður gjørdur upp og tikin av. Sambært landsstýrismanninum verður forskotskassin gjørdur upp í næstum.

4.7 Lønjavningarstovan (GL 2003/2 14 4-7)

Síðani 1999 hava vit víst á, at lógarkravda kunngerðin er ikki gjørd, og at tørvur er á roknskaparreglum og innaneftirliti.

Í dag eru reglur, sum eru felags fyri allar landsstovnar, ásettar í roknskaparkunngerðini, roknskaparrundskrivinum og kontuskipan landsins. Serligar reglur, sum eru fyri ávísar studningsskipanir, verða vanliga ásettar í studningslógunum. Tí er tað ein spurningur, um nøkur meining er í at hava eina lóg um Lønjavningarstovu.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Lønjavningarstovan, saman við fíggjardeildini í Fiskimálaráðnum, hevur lýst nakrar av mannagongdunum fyri útgjaldingum neyvari og hevur seinasta hálva árið, við stakroyndum, kanna útrokningarnar í sambandi við útgjøld.

Vit hava spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent í málinum, men vit hava einki svar fingið.

4.7.1 EDV-viðurskifti

Vit hava fleiri ferðir víst á, at trupulleikarnir í gomlu EDV-skipanunum eru ikki loystir. Fiskimálaráðið er farið undir at endurnýggja partar av EDV-skipanunum. Vit hava víst á, at vit halda tað vera óheppið, at Fiskimálaráðið ikki hevur gjørt nakrar kravfestingar, og vit hava mælt til, at uppgávan at dagføra EDV-skipanirnar hjá Lønjavningarstovuni fer fram sum liður í yvirskipaðari heildarætlan.

Í november 2004 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at serskildar EDV-skipanir eru til avreiðingar, mynstringar, forskot, flutningsstuðul, telefonstuðul og inntøkutrygd. Skipanin til flutningsstuðul er frá 2000, og hon verður neyvan endurnýggjað. Í 2002 varð ein nýggj avreiðingarskipan ment og tikin í nýtslu. Ætlanin er at endurnýggja skipanirnar til minstaløn/dagstudning, til minstaforvinning, til telefonstuðul og til mynstringarskipanina. Harafturat umhugsar Lønjavningarstovan at menna eina skipan til sjúkratrygdina. Fiskimálaráðið hevur í november 2004 kunnað um, at forskotsskipanin og mynstringarskipanin eru dagførdar, og at "plattformurin" er gjørdur til allar skipanirnar.

Landsstýrismaðurin hevur í mars 2005 kunnað um, at EDV-verkætlanin varð steðgað, tá ið játtanin varð skorin av fíggjarlógini í 2004.

4.7.2 Mánaðarligur minstaforvinningur

Vit hava síðani 1999 víst á, at tørvur var á greiðari reglum á fleiri økjum, og vit hava mælt til fleiri ábøtur. Nøkur viðurskifti eru rættað, men framvegis er talan um fleiri veikleikar við skipanini:

- Maður ikki við allar túrar: Vit hava mælt til, at neyvari reglur verða ásettar í kunngerð.
- Bert A-inntøka verður roknað sum onnur inntøka: Útróðrarmaður kann hava stórar B-inntøkur, uttan at tað minkar um minstaforvinningin.

- Inntøkutreytir: Í sambandi við grannskoðanina komu vit fram á fleiri dømi um bátar, sum ikki høvdu verið nakran túr í einum mánaði. Sostatt var manningarparturin 0 kr, men manningin fekk fullan minstaforvinning. Tað kundi lata seg gera, tí báturin 6 undanfarnu mánaðirnar hevði avreitt fyri so mikið, at hann leyk treytirnar í § 2, stk. 1, í lógini um minstaforvinning. Tikið varð fram sum dømi, at avreiddi einsamallur maður fyri 54 t.kr. í einum mánaði, leyk hann treytirnar fyri at fáa minstaforvinning komandi 5 mánaðirnar uttan at fara á flot. Teoretiskt nýttist honum sostatt bert at rógva út 6. hvønn mánað fyri at fáa minstaforvinning.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at endurskoða skipanina.

Í mars 2003 legði landsstýrismaðurin uppskot, sum Fiskimálaráðið hevði orðað, fyri tingið um at broyta løgtingslógina um minstaforvinning. Uppskotið fall.

Í desember 2003 legði landsstýrismaðurin enn eitt uppskot fyri tingið um at broyta løgtingslógina um minstaforvinning. Av tí at løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, fall uppskotið burtur.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at fleiri royndir hava verið gjørdar fyri at broyta lógina, men tað hevur ikki verið politiskur meiriluti til at fremja broytingar. Tað hevur verið frammi í ráðnum at endurskoða skipanina, men enn er eingin avgerð tikin.

4.7.3 Sjúkratrygd

Vit hava síðani 1999 m.a. vístá, at:

1. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis fáa dagpening frá Føroya Vanlukkutrygging.
2. Eingin umsóknarfreist er ásett í lógini.
3. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis hava aðra inntøku.
4. Frítíðarløn verður goldin út, hóast eingin heimild er í lógini.
5. Lógin er ikki samskipað við lógirnar um dagpening frá Almannastovuni og frá Vanlukkutryggingini.

Í mai 2004 varð endurskoðaða lógin um sjúkratrygd samtykt. Í lógini er m.a. ásett:

- At frítíðarløn verður goldin av sjúkratrygdini.
- Umsóknarfreist.
- At veitingin av sjúkratrygd heldur uppat, tekur fiskimaður upp annað arbeiði, áðrenn hann er "mettur arbeiðsførur" (sum fiskimaður).

4.7.4 Flutningsstudningur

<u>Lógargrundarlag o.a.</u>

Lógargrundarlagið undir flutningsstuðuli er Ll. nr. 14 frá 3. mars 1999 "um stuðul til flutning av fiski" broytt við Ll. nr. 175 frá 21. desember 2001. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 76 frá 6. desember 2004 "um stuðul til flutning av fiski". Í 2003 eru rindaðar um 2 mió.kr. í flutningsstudningi og í 2004 um 1,4 mió.kr.

<u>Endurskoðan av studningsskipanini</u>

Ein arbeiðsbólkur, sum landsstýrismaðurin setti í oktober 2002, mælti í februar 2003 til at taka av verandi studningsskipan til flutning av fiski, m.a. vísandi til at talan er um rakstrarstudning, sum ikki í longdini vil betra kappingarførið hjá fiskaframleiðarum.

Sambært landsstýrismanninum í mars 2005 eru ongar ætlanir í løtuni um at taka av skipanina.

4.7.5 Telefonstuðul

Lógargrundarlagið undir telefonstuðlinum er Ll. nr. 96 frá 6. juni 1997, broytt við Ll. nr. 70 frá 18. august 1998. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 6 frá 21. januar 1998.

Í seinastu frágreiðing vístu vit m.a. á, at eingin umsóknarfreist er ásett í lógini, og ásetingarnar í kunngerðini um talið á árligum útgjøldum er ikki í samsvari við lógina, og at lógin lýkur ikki fleiri grundleggjandi krøv til eina "góða" studningslóg.

Sambært landsstýrismanninum í mars 2005 er avgerð tikin um at endurskoða lógina.

4.8 Stuðul til gransking, menning og royndir (GL 2003/2 14 4-8)

Á síðu 62-66 í seinastu frágreiðing okkara umrøddu vit umsitingina av studningsjáttanunum til gransking, menning og royndir:

- Fiskivinnuroyndir
- Granskingarætlanir
- Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota
- Fiskivinnumenning á landi

Vit vístu m.a. á, at í fleiri førum er trupult at meta um, hvørt peningurin á studningsjáttanunum er rætt umsitin, og er nýttur til ætlaða endamálið. Í nøkrum førum er eingin neyvari endamálsáseting, og ítøkiligar ásetingar eru ikki, sum kunnu geva eina ábending um, hvørt endamálið er rokkið.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003) hildu løgtingsgrannskoðararnir samanumtikið, at studningsjáttanirnar vóru ikki nóg greiðar, og at umsitingin var ikki nøktandi. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu landsstýrismanninum til at bøta um viðurskiftini.

Vit hava spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent í málinum. Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann á landsstýrisfundi í juli 2004 fekk undirtøku fyri at arbeiða víðari við lóggávu, sum samskipaði allar studningsjáttanirnar hjá Fiskimálaráðnum, treytað av, at atlit varð tikið fyri, at landsstýrismaðurin í mentamálum arbeiddi við at samskipa gransking sum heild. Fiskimálaráðið hevur gjørt eitt lógaruppskot, sum ætlanin er at fáa fyri tingið í hesari tingsetu, men arbeiðið hevur drigið út, tí at landsstýrismaðurin í mentamálum arbeiðir við at samskipa játtanir til gransking undir Granskingarráðið, herímillum eisini studningsjáttanirnar hjá Fiskimálaráðnum.

5 VINNUMÁL

5.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Vísandi til landsroknskapin 2003 er meirnýtsla á fleiri kontum. Niðanfyri verða nakrar teirra umrøddar:

t.kr.

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	*Frávik*
Havbúnaðarroyndir	9.000	10.742	*1.742*
P/f Fiskaaling, útreiðslur	9.141	2.460	*-6.681*
P/f Fiskaaling, inntøkur	-6.000	-	*6.000*
Rúsdrekkasøla Landsins (landsfyritøka)	-13.550	-11.128	*2.422*
Suðuroyarskip (løgujáttan)	107.000	107.974	*974*
Barsilsskipanin (lógarheimild)	71.300	78.404	*7.104*

6.36.1.04. Havbúnaðarroyndir

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 9 mió.kr. Meirnýtslan er 1,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er talan um "eitt reint bókingartekniskt mál." Í 2003 hevur Vinnumálaráðið útreiðsluført 1.742 t.kr., sum var ov nógv inntøkuført í 2001 sum avlop frá verkætlanarroknskapinum hjá P/f Fiskaaling. Upphæddin er bókað sum inngjald á skuldina hjá P/f Fiskaaling til landskassan.

6.36.1.05. P/f Fiskaaling

Á fíggjarlógini var játtanin til útreiðslur, keyp av virðisbrøvum, 9.141 t.kr. Minninýtslan er 6,7 mió.kr. Játtanin til inntøkur, afturgjald av lánum, var 6,0 mió.kr. Minniinntøkan/meirnýtslan er 6,0 mió.kr.

Við Ll. nr. 69 frá 2. mai 2003 "um at hækka partapeningin í og veita stuðul til P/f Fiskaaling" gav Løgtingið landsstýrismanninum heimild at hækka partapeningin í felagnum og at skjóta tvær ognir hjá landinum, sum felagið hevði nýtslurætt til, í felagið.

Ognirnar, Lívfiskastøðin í Skopun og ein høll við Áir, vóru mettar til eitt søluvirði 6,0 mió.kr. Ætlanin var, at ognirnar skuldu verða skotnar inn í felagið (apportinnskot), við at Landsstýrið teknaði 1,0 mió.kr. í partapeningi, og at viðbót fyri meirkurs var 5,0 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu ognirnar ikki skotnar inn í felagið í 2003, tí Landsstýrið ikki formelt stendur sum eigari av ognunum. Tí er minninýtsla á útreiðslujáttanini og minniinntøka á inntøkujáttanini.

Sambært landsstýrismanninum eru viðurskiftini viðvíkjandi ognunum við Áir komin í rættlag í 2004. Viðvíkjandi grundøkinum hjá Lívfiskastøðini í Skopun verður arbeitt við einari loysn, har kommunan ognar sær lendið og fer at leiga til P/F Fiskaaling.

6.37.3.01. Rúsdrekkasøla Landsins (landsfyritøka)

Á fíggjarlógini var avlopið hjá Rúsdrekkasølu Landsins sett til 13,6 mió.kr. Minniinntøkan er 2,4 mió.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2003 varð skotið upp, at avlopið varð lækkað 1,4 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið helt Rúsdrekkasølan, at sølan í 2003 fór at verða um 5% lægri enn mett á fíggjarlógini, og at útreiðslurnar fóru at verða 3,7% lægri. Tá løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, fall uppskotið burtur. Uppskotið varð ikki tikið við á eykajáttanarlógini desember 2003.

Sambært landsstýrismanninum bygdi uppskotið um eykajáttan á fíggjarligu gongdina fyrstu 9 mánaðirnar í 2003, og á framrokningar hjá Rúsdrekkasøluni fyri restina av árinum 2003. Sølan gjørdist nakað lægri seinastu 3 mánaðirnar. Landsstýrismaðurin vísir á, at sølan til jóla og nýggjárs hevur stóra ávirkan á rakstrarúrslitið.

6.38.2.02. Suðuroyarskip (løgujáttan)

Á fíggjarlógini var játtanin til útreiðslur, løgur, 107,0 mió.kr. Meirnýtslan er 1.134 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdi Strandferðslan mánaðarskiftið juni/juli 2003 vart við, at tørvur helst fór at verða á einari eykajáttan, og avtalaði við Vinnumálaráðið, at málið skuldi verða tikið upp aftur í sambandi við seinastu eykajáttanarlóg 2003.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2003, sum varð lagt fyri Løgtingið 2. desember 2003, skeyt Vinnumálaráðið upp, at játtanin varð hækkað 1,2 mió.kr. Tá ið løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, fall uppskotið burtur. Uppskotið varð ikki tikið við á eykajáttanarlógini desember 2003.

6.39.4.01. Barsilsskipan (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 56,3 mió.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin hækkað 15 mió.kr. Meirnýtslan er 7,1 mió.kr.

Orsøkin til meirnýtsluna er avgerð, sum Løgtingsins Umboðsmaður tók í einari kæru frá Starvsmannafelagnum um rættin til frítíðarløn av "barsilsendurgjaldi". Umboðsmaðurin tulkaði § 5 í Ll. nr. 48/2001 um "barsilsskipan" soleiðis, at Barsilsskipanin skal rinda frítíðarløn eftir frítíðarlógini umframt barsilspening eftir barsilslógini. Umboðsmaðurin heldur, at barsilspeningur er at meta sum løn sambært frítíðarlógini, og at Barsilsskipanin er at meta sum arbeiðsgevari. Tá ið barsilspeningur verður goldin út, skulu sostatt 12% verða goldin í frítíðarløn. Eftir avgerð Umboðsmansins vórðu aðrar løgfrøðiligar metingar gjørdar av málinum.

Í samráð við Gjaldstovuna varð gjørt av, at útreiðslurnar til frítíðarløn fram til ultimo 2003 skuldu verða bókaðar í 2003. Fíggjarárini 2001, 2002 og 2003 vóru tilsamans 160,6 mió.kr. goldnar í barsilspeningi, og frítíðarlønin av hesi upphædd er 19,3 mió.kr. Umleið triðingurin av upphæddini var ikki endurgoldin, tí talan var um landsstovnar. Meirútreiðslan er tí 12,9 mió.kr.

5.2 Vantandi stjórnan av kunningartrygd (GL 2001/1 02 0-2)

Løgmaður ásannaði í oktober 2001, at enn var eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur ásettur, og at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur ábyrgdina av, at tað almenna hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk, ið skal taka støði í altjóða standardum innan stjórnan av KT-trygd.

Í januar 2004 handaði KT-forum landsstýrismanninum uppskot til "Felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini", sum byggir á ISO 17799 standardin, m.a. tí at hann er mest brúkti standardur í heiminum, og tí at K. nr. 28/2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum eisini byggir á henda standard.

Í seinastu frágreiðing vístu vit m.a. á, at tá ið ræður um KT-trygd, er verandi KT-bygnaður eitt tað størsta vandamálið. Landsumsitingin hevur eitt ótal av KT-skipanum, og skal hvør stovnur í sínum lag lúka øll trygdarkrøvini, er vandi fyri, at kunningartøkni gerst eitt haft um

beinið á landsumsitingini. Vit hildu tað vera neyðugt at endurskoða verandi bygnað og miðsavna fleiri uppgávur.

1. februar 2005 hevur Vinnumálaráðið sett í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 byggir á ISO 17799 og BS 7799-2 standardirnar, og at leiðslurnar hava sett í verk teir partar av ISO 17799 trygdarstandardinum, sum teir sambært ítøkiligari váðameting skulu lúka.

5.3 Rúsdrekkasøla Landsins (GL 2000/2 03 9-9)

Eins og undanfarin ár hava vit ófráboðað verið á kassa- og goymslueftirliti á øllum deildunum, og vørugoymslurnar eru eisini grannskoðaðar eftir árslok. Vísandi til roknskaparkunngerðina hava vit mælt stovnsleiðaranum til at gera ófráboðað kassaeftirlit.

Egnar búskaparskipanir

Roknskapurin hjá Rúsdrekkasøluni er við í landsroknskapinum. Harumframt ger leiðslan á hvørjum ári ein eksternan roknskap, sum er settur upp eftir vanligum rakstrarbúskaparligum grundreglum.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur egnar búskaparskipanir. Talan er um eina bókhaldsskipan við fleiri mótulum, tríggjar kassaskipanir, lønarskipan, heimabanka og excel-rokniørk, sum eru forritað til at skráseta lønartímar. Í januar 2005 hevur leiðslan kunnað um, at seinni í ár fara allar deildirnar at nýta somu kassaskipan, sum er partur av bókhaldsskipanini.

Hvønn mánað ger roknskaparleiðarin eitt yvirlit yvir samlaðu bókingarnar í bókhaldsskipanini hjá Rúsdrekkasøluni. Gjaldstovan skrásetir yvirlitini handliga í búskaparskipan landsins.

Millumrokning við landskassan/Yvirskotsgjaldføri

Vit hava í fleiri ár víst á, at stovnurin ofta hevur nógvan tøkan pening standandi á vanligum peningastovnskontum, ið lata 0,75% og minni í rentu. Tað kemst m.a. av tí, at Rúsdrekkasølan bert rindar Gjaldstovuni avlopið einaferð um árið. M.a. vísandi til rentumiss hava vit mælt til, at avlopið verður avroknað javnan. Landsstýrismaðurin hevur áður boðað frá, at hann er samdur við okkum og hevur skotið upp, at Rúsdrekkasølan avroknar hvønn mánað ella hvønn ársfjórðing.

Okkum kunnugt, avroknar Rúsdrekkasølan framvegis bert einaferð um árið við Gjaldstovuna. Fyri at økja um rentuinntøkurnar er ein partur av yvirskotsgjaldførinum settur á bundna kontu í peningastovni.

Gjaldstovan hevur eisini víst á, at tað er skeivt, at landsstovnar/-fyritøkur sum t.d. Rúsdrekkasøla Landsins hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum, og Gjaldstovan hevur sett spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

Egin/Felags lønarskipan

Í seinastu frágreiðing okkara í mars 2004 vístu vit á, at stovnurin hevur egna lønarskipan. Sambært skrivi 12. juni 2001 frá Fíggjarmálaráðnum skulu allar almennar lønir og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum løn, verða avgreiddar um nýggju lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Í ávísum førum kunnu egnar forskipanir verða nýttar. Í februar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann helt, at Rúsdrekkasølan átti at nýtt nýggju felags lønarskipanina.

Tættari tilknýti til búskaparskipanir landsins

Landsstýrismaðurin tekur undir við, at Rúsdrekkasøla Landsins, sum frálíður, verður partur av búskaparskipanum landsins og felags lønarskipanini. Í apríl 2004 gav Vinnumálaráðið Rús-

drekkasølu Landsins boð um at fremja hesa ætlan í samstarvi við Gjaldstovuna. Sambært Vinnumálaráðnum hevur samskifti verið millum partarnar, og Gjaldstovan hevur mælt til, at Rúsdrekkasøla Landsins framvegis hevur sítt egna roknskaparhald/fíggjarstýringarskipan, tó við ávísum broytingum:

- at útgjøld fara fram yvir búskaparskipanir landsins,
- at allar lønir verða rindaðar umvegis felags lønarskipanina,
- at Rúsdrekkasølan stovnar kontu í Landsbankanum, og at alt yvirskotsgjaldførið javnan verður flutt í Landsbankan.

KT-trygd o.a.

Vinnumálaráðið hevur 8. mai 2003 góðkent roknskaparreglugerðina hjá stovninum. Vit hava áður vístá, at Rúsdrekkasølan lýkur ikki fleiri grundleggjandi krøv til egnar EDV-skipanir, sum eru ásett í pkt. 10 í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Vit hava mælt til at endurskoða reglugerðina.

Í desember 2004 kunnaði stjórin um, at trygdarbólkur, við 3 umboðum frá stovninum og 1 frá EDV-veitara stovnsins, er farin undir at menna KT-trygdina á stovninum við støði í standardinum ISO-17799. Váðagreiningar og metingar av fyriskipanum eru lidnar, og komið verður væntandi á mál fyri árslok 2005.

Í 2002 mæltu vit til, at mannagongdirnar viðvíkjandi rokniørkum, ið verða nýtt til tímaskráseting, mánaðaruppgerð o.a., verða gjøgnumgingnar og skrivliga lýstar, við atliti at eftirlitsslóð og trygdaravriti. Í januar 2005 hevur leiðslan boðað frá, at tað verður gjørt í sambandi við arbeiðið at menna KT-trygdina.

5.4 Matrikulstovan (GL 2003/2 05 9-4)

Roknskaparviðurskifti

Vit hava í 2004 kannað, um roknskaparviðurskiftini á Matrikulstovuni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt skjalagrannskoðan og gjøgnumgingið umsitingina av inntøkum. Samanumtikið halda vit innaneftirlitið á Matrikulstovuni vera gott. Tó hava vit mælt til hesar ábøtur:

at endurskoða roknskaparreglugerðina, herímillum:
at greina neyvari ymiskar ásetingar í roknskaparreglugerðini,
at lýsa mannagongdirnar á fleiri økjum, m.a. roknskapargóðkenningina og at gera journalskipanarreglur,
at skipa fyri hóskandi tíðarskráseting,
at tryggja, at inntøkurnar verða bókaðar rætt tíðarskeið,
at skráseta/bóka kassafrágreiðingina oftari, og at varðveita fullfíggjaðar "finansjournalir" á einum stað,
at taka støðu til, um stovnurin hevur tørv á kekk-kontuni,
at dagføra yvirlitið yvir ognir.

Stovnsleiðarin hevur í desember 2004 boðað frá, at farið er undir at dagføra reglugerðina.

Inntøkur

Stovnurin hevur inntøkur av kortsølu, matrikulsakum, tekniskum sakum og útskifting. Umleið triðingurin av inntøkunum kemur frá kortgerð. Stjórin helt, at í framtíðini kemur Matrikulstovan at vera ein "dataleverandørur", heldur enn "kortleverandørur", og stovnurin kemur at selja dagføringar o.a.

Prísáseting

Matrikulstovan hevur ásett prísir fyri søluna av kortum og avritum. Matrikulsakir verða fakturaðar eftir gjøldum, sum eru ásett í K. nr. 148 frá 12. juli 1993. Tíðarskráseting og "faktiskar útreiðslur" verða ikki nýttar í sambandi við "uppgerð" av einari matrikulsak.

Útskiftingar verða inntøkuførdar einaferð um árið. Lønir og annar rakstrarkostnaður er "álíknaður" hvørjari útskifting sær. Samlað nýtsla um árið pr. útskifting verður gjørd upp, og 65% av nýtsluni verður inntøkuførd. "Landið" ber restina av kostnaðinum.

5.5 Arbeiðseftirlitið (GL 1997/2 09 2-1)

Í § 56 í Ll. nr. 70/2000 "um arbeiðsumhvørvi" er ásett, at Arbeiðseftirlitið krevur inn gjøld fyri tænastur sínar, og at gjøldini skulu verða góðkend av landsstýrismanninum. Í 2003 brúkti stovnurin framvegis príslistan, sum varð góðkendur av landsstýrismanninum 1. november 1998.

Ikki allar tænastur stovnsins eru lógarfestar. Arbeiðseftirlitið hevur tikið tær vørur og tænastur, sum ikki eru lógarfestar, burturúr príslistanum og gjørt tveir príslistar: ein, sum skal verða kunngjørdur í Kunngerðablaðnum (lógarásett eftirlit o.a.) og ein, sum skal verða góðkendur av landsstýrismanninum.

Prísáseting

Í roknskaparreglugerðini, sum í mai 2003 varð góðkend av Vinnumálaráðnum, er ásett, at gjøld fyri tænastur, skeið o.a. verða roknað til beinleiðis kostnað umframt part av umsiting, og at 50 % verða løgd omaná í vinningi fyri ikki at vera kappingaravlagandi.

Vit hava víst á, at í prísásetingini eru einans "beinleiðis útreiðslur", og at hon tí ikki lýkur yvirskipaðu ásetingarnar í játtanarskipanini um, at langtíðar miðalkostnaðurin skal verða fíggjaður. Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Vinnumálaráðið fór at heita á stovnin um av nýggjum at viðgera uppskot til kunngerð um gjøld fyri eftirlit o.t. og uppskot til príslista fyri aðrar tænastur, fyri at tryggja, at ásetingarnar í játtanarskipanini verða hildnar.

Yvirskipaðar reglur um prísáseting

Í sambandi við prísásetingina hava vit m.a. víst á, at um ein almennur stovnur tekur "ov lágan" prís, tí stovnurin er á fíggjarlógini, og ikki skal svara hvørjum sítt, kann tað vera kappingaravlagandi/-avmarkandi og í stríð við kappingarlógina og játtanarskipanina.

Er eitt gjald ikki ásett í lógini, má gjaldið ikki verða sett "ov høgt", tí so kann talan verða um ein skatt. Sambært stýrisskipanarlógini má eingin skattur verða álagdur uttan við løgtingslóg.

Vit hava mælt til at taka allan spurningin um prísáseting upp av nýggjum fyri at tryggja, at stovnurin heldur seg innanfyri galdandi lógir og reglur.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Vinnumálaráðið í oktober 2004 góðkendi eina dagførda útgávu av roknskaparreglugerð stovnsins. Í reglugerðini er ásett, at *"gjald fyri lógarkravt eftirlit verður ásett eftir kostnaðinum fyri eftirlitið, harímillum eisini óbeinleiðis útreiðslur, t.e. skrivstovuútreiðslur o.a. Prísáseting av skeiðum o.ø. tænastum skal ongantíð vera kappingaravlagandi. Av hesi orsøk verður 25% lagt omaná kostprísin, til vinning."*

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Vinnumálaráðið í januar 2005 hevur góðkent príslistan fyri tær tænastur, sum ikki eru lógarásettar, og at prísásetingin byggir á ásetingarnar í játtanarskipanini.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Arbeiðseftirlitið og Vinnumálaráðið høvdu orðað eitt uppskot til "kunngerð um gjøld fyri lógarásett eftirlit", sum í november 2004 varð sent

Lógardeildini á Innlendismálaráðnum. Innlendismálaráðið havnaði uppskotinum. Nýtt uppskot til kunngerð er orðað, og eftir ætlan fer kunngerðin at verða lýst á vári 2005.

5.6 Vinnumálaráðið (GL 2000/2 15 1-1)

5.6.1 Vinnumálaráðið

Vit hava í 2004 kannað, um roknskaparviðurskiftini í Vinnumálaráðnum eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit innaneftirlitið á Vinnumálaráðnum vera gott, men vit hava mælt til einstakar ábøtur:

- *at* endurskoða roknskaparreglugerðina, herímillum lýsa nýggju mannagongdina um ljóslesing av kreditorfakturum; og meira nágreiniliga at lýsa mannagongdirnar á journaløkinum, hvussu roknskapartilfar verður goymt, herímillum hvussu trygdaravrit verða tikin, goymd og kannað
- *at* Postverk Føroya sendir Vinnumálaráðnum eina roknskaparreglugerð at góðkenna, vísandi til galdandi roknskaparreglur
- *at* setanarviðurskiftini hjá tænastumanni verða fingin í rættlag
- *at* ognaryvirlitini verða dagførd í tráð við ásetingarnar í roknskaparrundskrivinum
- *at* endurskoða mannagongdirnar í.s.v. roknskapargóðkenningina, herímillum at t.d. ein kekklisti verður nýttur, soleiðis at tryggjað verður, at øll neyðug eftirlit verða framd

Í februar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at roknskaparreglugerðin er dagførd og góðkend í februar 2005. Vinnumálaráðið kunnaði um, at flestu tilmæli okkara vórðu fylgd í hesum sambandi. Vinnumálaráðið helt tað ikki vera neyðugt hjá Postverki Føroya at gera eina roknskaparreglugerð, tí stovnurin ætlandi í vár verður skipaður um til partafelag. Vinnumálaráðið boðaði frá, at setanarviðurskiftini hjá tænastumanninum komu ikki í rættlag, tí Løgmansskrivstovan vildi ikki góðkenna starvið sum tænastumannastarv. Tænastumaðurin er síðani farin í annað starv.

Viðvíkjandi skatting av fríari heimatelefon

Í skrivi 13. februar 2003 frá løgmanni til landsstýrismenninar "viðvíkjandi samsýning o.a. til landsstýrismenn" vísti løgmaður m.a. á, at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó so, at teir gjalda 1.000 kr. um árið; at frí heimatelefon er at rokna sum skattskyldugur fríur ágóði; og at skattgjaldari og arbeiðsgevari hava skyldu at boða frá um fríar ágóðar. Løgmaður heitti á landsstýrismenninar um at skipa so fyri, at galdandi reglur verða fylgdar.

Í skrivi 18. februar 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at Vinnumálaráðið fylgir teimum reglum, ið vórðu samtyktar av Fíggjarnevnd Løgtingsins í 1981 "um at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó so at teir gjalda 1.000 kr. um árið."

Landsstýrismaðurin vísti á, at hann hevði reist spurningin fyri Løgmansskrivstovuni um skattaviðurskifti í sambandi við teir hentleikar, ið verða útvegaðir landsstýrismonnum sum partur av starvi teirra. Harafturat hevur landsstýrismaðurin vent sær til landsstýrismannin í fíggjarmálum við áheitan um at fáa greið viðurskifti á økinum. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur heitt á løgmann um at strika gjaldið á 1.000 kr., og at landsstýrismenn verða skattaðir av teirri upphædd, sum Toll- og Skattstovan hevur sett á virðið av fríari telefon.

Nýtsla av fartelefonum

Í rundskrivi nr. 1 frá 7. februar 2002, frá Løgmansskrivstovuni, "um nýtslu av fartelefon" er ásett, at fartelefon, sum verður latin starvsfólki ókeypis at nýta sum arbeiðsamboð, skal sum

meginregla einans nýtast til samskifti, sum hevur beinleiðis við arbeiðsuppgávur stovnsins at gera.

Í rundskrivi nr. 2/2001, frá Toll- og Skattstovu Føroya, "um fartelefon" er ásett, at fartelefon, sum arbeiðsgevari letur starvsfólki sínum at nýta ókeypis, meginregluliga er at rokna sum frí telefon, sambært reglunum um fríar ágóðar. Tekur løntakarin telefonina við til hús, talar alt fyri, at hon eisini verður nýtt privat. Nýtir løntakarin einans fartelefonina í.s.v. arbeiðið, ella er fartelefonin neyðug, fyri at kunna útinna arbeiðið, t.d. í samband við tilkalluvaktir, skal løntakarin ikki skattast av fríari telefon.

Ásett er eisini, at minsta krav fyri, at løntakarin ikki skal verða skattaður av fríari telefon, er, at arbeiðsgevarin áleggur løntakaranum ikki at nýta telefonina til annað endamál enn tað, sum hevur samband við arbeiðið, ella tekur onnur stig til at forða fyri hesum, sum t.d. at fáa til vega útgreinaðar rokningar.

Í februar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at sambært roknskaparreglugerðini fyri Vinnumálaráðið skal fartelefon meginregluliga bert verða nýtt til samskifti, sum hevur við arbeiðsuppgávur ráðsins at gera. Ásetingin í reglugerðini er at meta sum boð frá stjóranum. Nýtslan av fartelefonum verður kannað hvønn mánað, og tann, ið hevur fartelefon, skal gera viðmerkingar til størri frávik í mánaðarligu nýtsluni. Landsstýrismaðurin heldur, at hetta eigur at tryggja, at ásetingarnar í nevndu rundskrivum verða hildnar.

5.6.2 Kassaeftirlit á Felagsskrásetingini

Vit hava í 2004 verið ófráboðað á kassaeftirliti á Skráseting Føroya (Felagsskrásetingin), sum er deild í Vinnumálaráðnum. Felagsskrásetingin hevur ein avgreiðslukassa og 3 peningastovnskontur til inntøkur. Inntøkurnar eru árligt skrásetingargjald frá smá- og partafeløgum, umframt gjøld fyri ymiskar útskriftir og avrit av roknskapum.

Vit taldu kassapeningin í avgreiðslukassanum og samanbóru hann við landsbókhaldið, og vit samanbóru kontuavrit frá peningastovnunum við landsbókhaldið.

Samanumtikið halda vit umsitingina av avgreiðslukassanum virka sera væl, men vit vístu á, at fíggjarstøðukontur vórðu ikki stemmaðar av, og at innheintan av eftirstøðum í "debitorskipan landsins" hevur ikki virkað nóg væl. Vit mæltu til, at fíggjarstøðukonturnar vórðu stemmaðar av, og at møguligir munir vórðu greinaðir og bókaðir. Viðurskiftini eru eftirsíðan komin í rættlag. Í februar 2005 hevur Vinnumálaráðið greitt frá, at eftirstøður í "debitorskipan landsins" um 45 t.kr., sum stava frá 2001, eru sendar sakførara at heinta inn.

Girostovan umsitur vegna Skráseting Føroya innkrevjingina av árliga skrásetingargjaldinum, sum smá- og partafeløg rinda. Girostovan avroknar við millumbilum inn á girokontuna hjá Skráseting Føroya. Skráseting Føroya kunnar Girostovuna um teir skuldarar, ið hava goldið á aðrar kontur, og Girostovan dagførir yvirlitið.

5.7 Ferðaráð Føroya (GL 2004/2 15 2-2)

Vit hava í 2004 grannskoðað umsitingina av studningi til økisferðavinnufeløg, studningi til FITUR og inntøkufíggjaðum virksemi.

Studningur til økisferðavinnufeløg

Vit hava gjøgnumgingið reglur og mannagongdir og kannað onkur mál/útgjaldingar í sambandi við umsiting av studningi til økisferðavinnufeløg. Samanumtikið halda vit umsitingina av studninginum vera væl skipaða, og at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar. Vit hava tó víst á:

at ongar samanskrivaðar reglur eru fyri málsviðgerðina av studninginum, og í roknskaparreglugerðini er einki ásett um umsiting av studningi, og

at fleiri viðurskifti, í sambandi við umsitingina av studninginum, eru ásett í "avtalu frá 1996" millum Ferðaráðið og økisferðavinnufeløgini og í óformligum fundarfrásagnum.

Vit hava eisini mælt landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða verandi lógargrundarlag.

Studningur til FITUR

Seinastu 5 árini eru á hvørjum ári 500 t.kr. fluttar FITUR, sum verður umsitin av íslendska ferðaráðnum. Sambært samstarvsavtaluni millum føroyska og íslendska ráðharran í ferðavinnumálum skulu forðanir á samferðsluøkinum verða loystar við samstarvi millum flutningsfeløg í báðum londum, og tað skal hava við sær fleiri fráferðir og lægri ferðaseðlakostnað. Peningurin frá FITUR skal fyrst og fremst verða nýttur til at økja um talið á fráferðum millum londini.

Endamálið við samstarvsavtaluni er at styrkja sambandið millum londini, betra flutningsmøguleikarnar, samstarva um frálæru á ferðavinnuøkinum og knýta bond millum áhugabólkar, sum t.d. felagsskapir, skúlar, mentanarlív og vinarbýir. Sambært játtanaryvirlitunum fyri 2003 er størsti parturin av studninginum farin til "at knýta bond millum áhugabólkar, sum t.d. felagsskapir, skúlar, mentanarlív og vinarbýir".

Umsóknarbløð til studning frá FITUR kunnu heintast á heimasíðuni hjá Ferðaráðnum, og tey verða send Ferðaráðnum. Nevndin fyri FITUR hevur 6 limir, harav 3 føroyskar. Nevndin hevur 3 fundir um árið, har umsóknirnar verða viðgjørdar.

Sambært punkt 6 í samstarvsavtaluni fær Ferðaráðið fyri 1. apríl á hvørjum ári grannskoðaðan roknskap, grannskoðanarfrágreiðing og yvirlit yvir, hvørji tiltøk hava fingið studning, og hvørji tiltøk FITUR ætlar at raðfesta komandi árið.

Vit hava gjøgnumgingið roknskap, játtanaryvirlit og fundarfrásagnir hjá nevndini fyri FITUR og grannskoðanarátekningina fyri 2003. Eftir okkara tykki eru roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftini væl skipað.

Inntøkufíggjað virksemi (verkætlanir)

Virksemið á verkætlanunum verður roknskaparliga skrásett á egnari undirkontu/stovnsnummari. Í høvuðsheitum verða verkætlanirnar fíggjaðar av Vinnuframagrunninum. Ferðaráðið sendir Vinnuframagrunninum tilmæli um heildarverkætlanir og vinnuframtøk, sum tað heldur, at grunnurin skal stuðla. Ferðaráðið umsitur og fremur verkætlanirnar. Í høvuðsheitum er talan um, at keyp av vørum og tænastum verður bókað á verkætlanirnar.

Vit halda ikki, at verkætlanirnar á Ferðaráði Føroya kunnu metast sum "inntøkufíggjað virksemi", soleiðis sum tað er allýst í játtanarskipanini, m.a. tí talan er ikki um vinnuliga sølu av vørum og tænastum í kapping við onnur, og verkætlanirnar fíggja ikki langtíðar miðalkostnaðin.

5.8 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar (GL 1998/2 15 3-2)

Í frágreiðing frá februar 2002 umrøddu vit í stuttum Endurgjaldsgrunn alivinnunnar. Har varð m.a. kunnað um, at í sambandi við, at ILA-sjúkan í 2000 rakti eitt alibrúk, varð eitt endurgjaldskrav reist ímóti grunninum. Tað hendi, áðrenn Ll. nr. 26/1987 "um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum" varð tikin av. Í 2001 vórðu um 2,9 mió.kr. goldnar út til felagið. Kravið var munandi størri, og málið fór í rættin.

Í mars 2005 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at partarnir hava gjørt semju, og partur av semjuni er, at grunnurin rindar sakarmálskostnaðin um 183 t.kr., og í desember 2004 hevur grunnurin rindað saksøkjaranum 8,9 mió.kr. í endurgjaldi. Ultimo 2004 er eginpeningurin hjá grunninum um 7,3 mió.kr.

Vinnumálaráðið bíðar eftir, um enn eitt endurgjaldskrav verður reist móti grunninum. Síðani verða lóg og grunnur tikin av.

5.9 Tyrlutænastan (GL 1998/2 15 3-2)

Landsstýrið/Vinnumálaráðið hevur síðani 1996 rindað Atlantic Airways (Atlantsflog) 5 mió.kr. á høvuðskontu 6.38.2.04. "Tyrlutænastan" fyri at flúgva millum oyggjarnar við Bell 212 tyrluni, sum Landsstýrið eigur.

Sambært § 1 í sáttmálanum tekur Atlantsflog á seg at reka tyrluna hjá Landsstýrinum, og Landsstýrið letur Atlantsflogi tyrluna at nýta, umframt eykalutir, vørugoymslu o.a. Í § 3 stendur, at Atlantsflog veitir Landsstýrinum tyrlutænastu sambært galdandi ferðaætlan, umframt SAR (Search and Rescue). Veitingin fevnir um operativa og tekniska raksturin/viðlíkahaldið. Í § 4 er ásett, at árliga samsýningin er 5 mió.kr. Sambært § 6 kann sáttmálin verða sagdur upp til ein 1. mars við 6 mánaða skrivligari freist. Sáttmálin kann verða sagdur upp uttan freist, misheldur annar parturin hann.

Í oktober 2002 kunnaði Vinnumálaráðið um, at Strandfaraskip Landsins, sum umsitur "tyrlusáttmálan" vegna landsstýrismannin, hevði boðað Atlantsflogi frá, at sáttmálin frá 1996 fór úr gildi 1. mars 2003. Endamálið við uppsøgnini var at dagføra sáttmálan, og Vinnumálaráðið gjørdi Strandfaraskipum Landsins greitt, at SAR-uppgávurnar ikki skuldu vera partur av endurskoðaða sáttmálanum, tí tað málsøkið var flutt til Fiskimálaráðið.

Í mars 2004 hevur Strandfaraskip Landsins boðað frá, at sáttmálin frá 1996 framvegis er í gildi.

Í 2004 er málið um tyrlutænastuna flutt til Innlendismálaráðið, sum í februar 2005 hevur greitt frá, at partarnir eru samdir um at dagføra sáttmálan, har nakrar tænastur verða betraðar, og at árliga samsýningin verður hækkað við 1,6 mió.kr. til 6,6 mió.kr. Innlendismálaráðið hevur latið Fíggjarmálaráðnum uppskot um eykajáttan 1,6 mió.kr. fyri 2005. Tá ið eykajáttanin er samtykt, verður nýggi sáttmálin skrivaður undir.

5.10 Endurgjald til skipasmíð (GL 2004/2 15 3-5)

Árini 1997 til 2003 hevur árliga útgjaldið av studningi ligið millum 1 mió.kr. og 5 mió.kr., burtursæð frá 2001 tá um 9,4 mió.kr. vórðu goldnar í studningi, tá ið Skála Skipasmiðja fekk um 5 mió.kr. í studningi í sambandi við nýbygningin M/F Teistin.

5.10.1 Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 73 frá 20. mai 1996 "um studning til skipasmiðjur" seinast broytt við Ll. nr. 49/2002. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var endamálið við lógarbroytingini m.a.:

at tað skuldi vera greitt, at skipasmiðjur ikki skulu skjalprógva útreiðslur til farma- og innflutningsgjald í sambandi við útgjald av studningi,

at allur studningur verður roknaður av sáttmálaprísinum,

at taka av Sáttmálastovnin.

Sambært § 3 í Ll. nr. 73/1996 verður studningur veittur eftir umsókn, og Landsstýrið ásetir í kunngerð reglur fyri, hvussu og nær studningurin verður veittur. Við heimild í §§ 2 og 3 í Ll. nr. 73/1996 við seinni broytingum eru neyvari reglur ásettar í K. nr. 61 frá 23. mai 2002 "um at umsita lóg um studning til skipasmiðjur".

Sambært § 1, stk. 1, verða 8 % av sáttmálaprísinum veitt føroyskum skipa- og bátasmiðjum í studningi til ný- og ella umbygging av flótandi eindum. Studningur til nýbygging verður veittur, um sáttmálaprísurin er 0,3 mió.kr. ella meira, og studningur til umbygging verður veittur, um sáttmálaprísurin er 3 mió.kr. ella meira.

Sambært § 3, stk. 3, í K. nr. 61/2002 kunnu umsóknir um studning til meirkostnað, í mesta lagi 5% av sáttmálaprísinum, verða sendar Vinnuframagrunninum saman við umbønini um at gjalda út studningin.

Gjøgnumgongd av lógargrundarlag

Vit hava á ein skipaðan hátt roynt at kanna, í hvønn mun tær lógarásetingar, sum mælt er til í áliti frá danska fíggjarmálaráðnum "Forvaltning af tilskud", eru tiknar við í lógini ella kunngerðini um at veita studning til skipasmiðjur. Fleiri ásetingar eru við í verandi lógargrundarlagi, aðrar týðandi ásetingar eru ikki við, og vit mæla landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða verandi lógargrundarlag m.a. soleiðis, at í lógini verður:

- endamálið við at veita studning ásett so neyvt sum til ber, og í viðmerkingunum ítøkiligar ásetanir fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
- ásett, at ein tilsøgn um studning fellur burtur, ella at studningurin skal verða rindaður aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar hann ikki at fullføra eina ætlan innan ásettu tíðina.
- heimild at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
- ásett, at studningsmóttakari hevur skyldu at boða frá, hvørt treytirnar eru loknar, og at studningsveitarin hevur rætt til á staðnum at kanna, um viðurskiftini eru í lagi.

Í desember 2004 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at dagføring av lógargrundarlagnum verður tikin upp í sambandi við aðrar broytingar av lógini, t.d. broyting av studningssatsi, ella í sambandi við at broytingar verða gjørdar í fyrisitingini á vinnuframaøkinum.

5.10.2 Grannskoðan av einstøkum málum/viðmerkingar

Vit hava gjøgnumgingið reglur og mannagongdir í sambandi við umsiting av skipasmiðjustudningi. Vit hava tilvildarliga valt út og kannað tvær útgjaldingar. Talan er um studning til 2 feløg, ávikavist til bygging og umbygging. Samanumtikið halda vit umsitingina av skipasmiðjustudningi vera væl skipaða, roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar, og einstøku útgjaldingarnar eru hóskandi skjalprógvaðar.

5.10.3 Umsitingarútreiðslur

Sambært § 2, stk. 1, í lógini verða neyðugar útreiðslur til at umsita lógina, herímillum útreiðslur til serkøna hjálp, hildnar á serstakari játtan á løgtingsfíggjarlógini. Árini 1997 til 2003 hava útreiðslurnar til sáttmálaeftirlit ligið millum 46 t.kr. og 300 t.kr. um árið.

Gjald til Vinnuframagrunnin

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er rakstrarjáttanin til "Sáttmálaeftirlit" ætlað Vinnuframagrunninum *"til tess at viðgera og umsita umsóknir um studning til skipasmiðjur"*.

Allar útreiðslur, sum eru bókaðar á høvuðskontuni, eru til eksterna hjálp/ráðgevarar. Sambært stjóranum tekur Vinnuframagrunnurin sær einki gjald fyri at umsita studningin til skipasmíð.

Í desember 2004 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Vinnuframagrunnurin og Vinnumálaráðið eru samd um, at samlaður lønarkostnaður til stjóran og nevndarlimirnar í Vinnuframagrunninum, fyri at fyrisita skipasmiðjustudningin, er um 38 t.kr. um árið. Harafturat verður rakstrargjald á 25% av lønarútreiðslunum lagt omaná fyri aðrar umsitingarútreiðslur. Tilsamans fær Vinnuframagrunnurin 48 t.kr. um árið fyri at umsita skipasmiðjustudningin.

5.11 Landsverk (GL 2002/2 16 1-2)

Í 2003 og 2004 hava vit kannað EDV-nýtslu, virksemi/inntøkur og innanhýsis skrásetingar hjá Landsverki. Í 2004 hevur Landsverk, m.a. við serkønari hjálp, broytt og bøtt um fleiri av teimum mannagongdum og veikleikum, ið vit hava umrøtt, og í 2005 er harafturat ætlanin at menna skipanir og mannagongdir at lúka krøvini til KT-trygd í ISO 17799.

5.11.1 Edv-nýtsla

Vit hava kannað, um roknskaparreglugerð stovnsins, sum er góðkend 19. juli 2000, lýkur ásetingarnar í roknskaparrundskrivinum fyri egnar EDV-skipanir, og um innaneftirlitið í sambandi við EDV-nýtsluna er hóskandi og virkið.

Egnar EDV-skipanir

Landsverk hevur egnar EDV-skipanir, sum verkfrøðingar á stovninum hava ment. Í roknskaparligum høpi eru tær týdningarmiklastu "skipanirnar":

- Vektarskipanin: sum verður brúkt til at skráseta uttanhýsis sølu og innanhýsis nýtslu frá skerv- og asfaltsverkunum kring landið.
- Lønarskipanin: sum verður brúkt til at skráseta vikulønir, koyripengar umframt samsýningar í sambandi við tyrluavgreiðslur. Harafturat liggja ávísar fastar lønir í skipanini.
- Interna bókhaldsskipanin (INTB): er ætlað til at býta nýtsluna av egnari framleiðslu (*skerv, asfalt, maskintímar)* út á einstøku arbeiðsplássini *(vegastrekki o.a.)*.

Harafturat hevur stovnurin sjálvur ment eina eykaluta-goymslustýringarskipan, maskinviðlíkahaldsskipan, prísindexskipan, journalskipan, vegdátugrunn, lendisskipan og eina skipan, har ferðsluóhapp verða skrásett. Stovnurin hevur eisini sjálvur ment eina intranet-skipan.

Stovnurin bókar sjálvur í búskaparskipanum landsins og nýtir høvuðsbók-, debitor-, kreditor- og budgettskipanina.

Ásetingar um KT og KT-trygd

Fram til 2001 vóru ongar serstakar reglur ásettar um KT í landsumsitingini. Reglur eru síðani ásettar í roknskaparrundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum í februar 2001, serliga í pkt. 8 og 10. 21. desember 2004 sendi Vinnumálaráðið út rundskriv um, at stovnsleiðslurnar hava ábyrgdina av, at KT nýtslan á teirra øki, í seinasta lagi 1. februar 2006, skal byggja á ISO 17799 og BS 7799-2.

Ásetingar í roknskaparrundskrivinum

Í pkt. 10 í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir eru ávís krøv til skrivligar lýsingar av egnum EDV-skipanum.

Viðmerkingar

Vit hava m.a. víst á, at roknskaparreglugerðin lýkur ikki minstukrøvini í roknskaparrundskrivinum "um egnar EDV-skipanir", leiðslan hevur ikki skjalfest nakra váðameting í sambandi við EDV-nýtsluna, og stovnurin hevur ongan yvirskipaðan EDV-politikk/trygdarpolitikk. Stovnurin hevur ikki formliga fingið loyvi frá Fíggjarmálaráðnum sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini til at nýta egna búskaparskipan, og eingin skrivlig rakstraravtala er gjørd við Føroya Gjaldstovu. Stovnurin er bundin at eksternari hjálp, og vit hava mælt til, at ein formlig samstarvsavtala verður gjørd.

Landsverk hevur m.a. kunnað okkum um:

at stovnurin arbeiðir við at greina trygdarviðurskiftini í sambandi við búskaparskipanir landsins, og at leiðslan samstarvar við Gjaldstovuna um eina rakstraravtalu,

at arbeitt verður við at dagføra roknskaparreglugerðina, og tað arbeiðið verður væntandi liðugt í apríl 2005,

at í november 2004 fór LV, saman við eksternum ráðgeva, undir at orða ein KT-politikk fyri stovnin og at gera ein KT-trygdarpolitikk, sambært ISO 17799 og BS 7799-2. Væntandi verður tað arbeiðið liðugt seint á sumri 2005,

at í november 2004 varð heitt á KT-fyritøku um at skjalprógva KT-umhvørvið á plattforminum, har m.a. "egnar EDV-skipanir" (roknskaparskipanirnar) liggja, og at kanna, um "egnar EDV-skipanir" skulu mennast ella um aðrar skipanir skulu verða keyptar. Ætlanin er, at tað arbeiðið skal verða liðugt í 2005.

5.11.2 Virksemi/inntøkur

Vit hava gjøgnumgingið innaneftirlitið í sambandi við umsitingina av inntøkum. Vit hava serliga hugt eftir, um roknskaparreglugerð stovnsins lýkur minstukrøvini í sambandi við prísáseting, góðkenning og roknskaparliga skráseting.

Undirkonta 6.38.1.02.30 "Hald av landsvegum"

Sambært Ll. nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir "ger og heldur landið landsvegirnar". Høvuðsendamálið við játtanini er vanligt hald og vetrarhald av landsvegum, umframt at reka skerv- og asfaltsverk, smiðjur o.a.

Raksturin av skerv-/asfaltsverkum, amboðum og smiðjum ("útgerðarvirksemið") fevnir um rakstur og viðlíkahald av skerv-/asfaltsverkunum, útreiðslur til keyp og framleiðslu av asfalti, rakstur og viðlíkahald av amboðum, sum Landsverk hevur um hendi, umframt keyp av nýggjum amboðum. Inntøkur av "reinari" vørusølu av skervi og asfalti vórðu í 2003 skrásettar á undirkontu 30.

Landsverk hevur greitt frá, at sambært avtalu við Vinnumálaráðið skuldu lønarútreiðslur í sambandi við eksterna framleiðslu (t.e. "rein vørusøla" og søla til undirkontu 40) ikki tyngja lønarkarmin á undirkontu 30, einans lønarútreiðslurnar til "egna framleiðslu". Lønarumbókingin tók støði í lutfallinum millum samlaðu uttanhýsis søluna og samlaðu søluna hjá skerv- og asfaltverkunum.

Vit hava víst á, at tey formligu viðurskiftini í.s.v. umbókingina av lønarútreiðslum frá undirkontu 30 til undirkontu 40 vóru ógreið og gjørdu roknskapin hjá stovninum minni gjøgnumskygnan. Síðani 1. januar 2004 er øll ekstern vørusøla skrásett á undirkontu 40, inntøkufíggjað virksemi, og lønarútreiðslur verða ikki longur umbókaðar millum undirkonturnar í mun til lutfallið millum samlaða eksterna vørusølu og samlaða sølu.

Undirkonta 6.38.1.02.40 "Hald av landsvegum, inntøkufíggjað virksemi" ("ITV")

Á kontuna verða skrásettar útreiðslur og inntøkur hjá Landsverki í sambandi við sølu av tænastuveitingum ("rokningararbeiði") til privat og kommunur, tvs. virksemi, har stovnurin, umframt tilfar, eisini letur arbeiðsmegi.

Sambært Landsverki hevur Vinnumálaráðið gjørt av, at skrásettu útreiðslurnar til lønir, vørukeyp og nýtslu av egnari framleiðslu á "ITV-verkætlanunum" skulu verða faktureraðar uttan annan vinning enn eitt 10% umsitingargjald, sum verður góðskrivað Landsverksskrivstovuni, undirkonta 20.

Minstukrøv til roknskaparreglugerðina o.a. viðvíkjandi inntøkum

"Inntøkufíggjað virksemi" er sum útgangsstøði ætlað til vinnuliga sølu av vørum og tænastum. Virksemið skal m.a. lúka tær treytir, at søluprísurin ikki er kappingaravlagandi mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og at langtíðar miðalkostnaðurin (beinleiðis útreiðslur og óbeinleiðis útreiðslur) skal verða fíggjaður.

Harafturat er serliga viðvíkjandi inntøkum ásett, at stovnur í roknskaparreglugerðini skal greiða frá um heimildir, prísáseting, avsláttur og kredittir. Eisini skal verða greitt frá, hvussu skrásetingin er løgd til rættis, og hvussu prísásetingin verður gjørd, so til ber at kanna, um samsvar er ímillum vørukeyp, vørunýtslu og sølu.

Viðmerkingar

Vit hava m.a. víst á, at roknskaparreglugerðin lýkur ikki minstukrøvini í rundskrivinum um prísáseting/príspolitikk, og at ongar formligar reglur eru um at góðkenna prísásetan/-broytingar. Harafturat ivaðust vit í, um reglurnar í játtanarskipanini um inntøkufíggjað virksemi og prísáseting vórðu hildnar.

Landsverk hevur m.a. kunnað um, at arbeitt verður við at dagføra roknskaparreglugerðina; og við serkønari hjálp verður arbeitt við at orða ein príspolitikk.

Landsverk hevur eisini víst á, at í sambandi við prísáseting av asfalti eru greiðar mannagongdir, sum skulu tryggja, at bæði beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur (herímillum íløgukostnaður) eru íroknaðar prísin. Viðvíkjandi prísáseting av skervi er tað bert beinleiðis kostnaður, ið er fíggjaður, tí hildið verður, at skervverkini eru ein partur av íløguni til sjálva vegagerðina (egin framleiðsla). Leiðarin á framleiðsludeildini kannar regluliga, um søluprísir skulu verða dagførdir, t.d. í sambandi við broytingar í rávøruprísunum. Eisini hevur Landsverk samskifti við Landssjúkrahúsið, sum hevur royndir við inntøkufíggjaðum virksemi á "vaskarínum", fyri at tryggja sær, at inntøkufíggjaða virksemið hjá Landsverki ikki skal vera kappingaravlagandi.

5.11.3 Innanhýsis skrásetingar/-roknskapur

Eitt av høvuðsendamálunum við at menna internu bókhaldsskipanina var at "býta tær samlaðu útreiðslurnar hjá stovninum út á tær einstøku verkætlanirnar", m.a. tá ið "maskinur arbeiða fyri sjálvan stovnin (Landsverk)", og tá ið asfaltverkini lata asfalt til "egnar verkætlanir"."

Høvuðsskrásetingareindin í INTB er "stað/rakstrarstað". Talan kann vera um vegastrekki, asfaltverk, umsiting ella maskinútbúnað. Skrásett verður sambært meginregluni um "dupult bókhald". Tá ið ein prísásett nýtsla verður útreiðsluførd á einum "staði", verður hon inntøkuførd eitt annað "stað". "Staðar-eindin" kann vera eitt vegastrekki, ein havn, eitt skervverk ella ein maskinútbúnaður.

Prísir

Meginregluliga verða somu prísir brúktir í INTB sum í uttanhýsis roknskapinum. Í sambandi við maskinnýtslu hava vit víst á, at sama slag maskina kann verða leigað fyri ymiskan prís, tí leigan verður sjálvvirkandi roknað í INTB við støði í keypsprísinum fyri hvørja maskinu sær.

Í sambandi við innanhýsis nýtslu av skervi, asfalti o.ø. hava vit víst á, at til og við 2003 hevur mvg verið lagt oman á innanhýsis nýtslu, hóast keypsmvg hevur verið "endurgoldið" í landsbókhaldinum síðani 1999. Landsverk hevur boðað frá, at tað nú er broytt, soleiðis at mvg ikki longur verður roknað innanhýsis.

Mongdir

Alt verður tøppað inn í INTB við hond. Nýtslan av maskintímum verður tøppað inn út frá ávikavist viku-/mánaðaruppgerðum/arbeiðsseðlum frá arbeiðsformonnunum – mánaðarupp-

gerðir verða tøppaðar inn á maskinmiðstøðini, og vikuuppgerðir/arbeiðsseðlar í LV-bókhaldinum. Nýtslan av skervi og asfalti verður tøppað inn í LV-bókhaldinum.

Viðmerkingar

Landsverk hevur boðað frá, at tær mest nýttu útskriftirnar frá INTB eru uppgerðir, har "uttanhýsis" og "innanhýsis" útreiðslur eru gjørdar upp fyri eitt rakstrarstað. Tílíkar uppsetingar verða fyri tað mesta nýttar í sambandi við fyrispurningar frá Vinnumálaráðnum/Løgtinginum um samlaða kostnaðin av einari verkætlan (t.d. eitt vegastrekki).

Vit hava víst á, at uppsetingarnar kunnu ikki sammetast við játtanina, og at tílíkar uppsetingar kunnu geva eina skeiva mynd, verður ikki neyvari greinað, hvat "innanhýsis" útreiðslur fevna um, og hvat "samlaðar" útreiðslur fevna um.

Vit hava mælt til, at leiðslan gjøgnumgongur skrásetingarnar í INTB sum heild, m.a. fyri at lýsa endamálið við skrásetingunum og at tryggja, at kontuskipanin og prísir eru hóskandi í mun til virksemið hjá stovninum. Vit hava eisini mælt til at kanna, um mannagongdir kring skipanina kunnu "rationaliserast".

Landsverk hevur kunnað um, at kontuskipanin varð broytt 1. januar 2004, og at farið er undir at gera eina nýggja skipan í staðin fyri INTB.

6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING

6.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Vísandi til landsroknskapin fyri fíggjarárið 2003 er meirnýtsla á summum kontum. Niðanfyri verða nakrar teirra umrøddar:

t.kr.

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	*Meirnýtsla*
Mentamálaráðið (rakstrarjáttan)	16.008	16.138	*130*
Stuðul til fólkaskúlar (onnur játtan)	3.644	3.940	*296*
Studningur til læruplass (lógarbundin játtan)	11.600	13.633	*2.033*
Klaksvíkar Sjómansskúli (rakstrarjáttan)	2.710	2.889	*179*
Almanna- og heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan)	16.192	16.301	*109*
Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan)	14.664	14.801	*137*
Listasøvn (rakstrarjáttan)	1.939	2.037	*98*

7.11.1.09. Mentamálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 16 mió.kr. Meirnýtslan er 130 t.kr. Sambært landsstýrismanninum komu boðini frá Fíggjarmálaráðnum, um at lønarhækkingarnar á heysti 2003 ikki skuldu játtast rakstrarstaðnum, so mikið seint á árinum, at møguleiki ikki var at spara meirkostnaðin inn aftur. Sambært landsstýrismanninum var greitt mánaðarskiftið november/desember 2003, at eingin eykajáttan varð latin fyri sáttmálalønarhækkingar. Hann vísir eisini á, at politiskt varð støða tikin um, at tað fóru ikki at verða fleiri umbønir um eykajáttanir í 2003.

7.23.2.03. Stuðul til fólkaskúlar

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.644 t.kr. Meirnýtslan er 296 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru útreiðslur í sambandi við skúlabarnaflutning øktar, m.a. tí at fleiri næmingar skulu flytast.

Sambært uppskoti til eykajáttanarlóg november 2003, sum varð lagt fyri Løgtingið 2. desember 2003, varð søkt um 300 t.kr. í eykajáttan, tí at í fíggjarlógararbeiðinum fyri 2003 varð ikki lagt upp fyri, at Strandferðslan hevði broytt avsláttarskipanina til skúlanæmingar.

Uppskotið til eykajáttanarlóg fall burtur, tí at val varð skrivað út 5. desember 2003. Vit hava spurt, hví upphæddin ikki varð tikin við í eykajáttanarlógini desember 2003, sum gjørt varð á øðrum játtanum. Sambært landsstýrismanninum varð umsókn um eykajáttan send Fíggjarmálaráðnum, men umbønin vann ikki politiskan frama.

7.23.3.14. Studningur til læruplass (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 11,6 mió.kr. Meirnýtslan er 2.033 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð ikki lagt upp fyri umsóknum frá undanfarna ári og óvissuni um tilgongdina av lærlingum.

Á talvuni niðanfyri hava vit lýst játtan í mun til nýtslu árini 1998-2003:

mió.kr.

F-ár	F-lóg	Eyka F-lóg	Játtan	Rsk.	Meir-nýtsla	Viðmerkingar/orsøk til meirnýtslu sambært landsstýrismanninum:
1998	4,6		4,6	5,9	1,3	
1999	6		6	7,5	1,5	”játtanin til lógarbundnar útreiðslur ikki varð dagførd”
2000	6,4	2,6	9	9,2	0,2	(Hóast 2 eykajáttanir var talan um meirnýtslu)
2001	9,9	1,6	11,5	12,8	1,4	“trupult er at ætla um tilgongdina av lærlingum og gera heilt neyvar útrokningar av útreiðslunum”
2002	14,4		14,4	14,6	0,2	”umsóknir komu inn, sum stavaðu frá árum undan 2002”
2003	11,6		11,6	13,6	2	“lagt varð ikki upp fyri, at umsóknir fóru at koma inn frá undanfarna ári, og tí óvissu sum er, tá ið mett verður um tilgongdina av lærlingum”
2004	15,5					

Í § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini er ásett, at eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður. Vísandi til talvuna tykist játtanin á fíggjarlógini seinastu árini at hava verið undirmett, og spurningurin er, um ikki landsstýrismaðurin í 2003 átti at verið varugur við, at játtanin á fíggjarlógini var ov lítil. Sambært landsstýrismanninum verður arbeitt við at gera eina nýggja útgjaldsskipan, sum vónandi fer at bøta um hesi viðurskifti.

Í sambandi við mánaðarligu góðkenningina av játtanarroknskapunum (góðkenningarskjal EK 76.0) váttar stovnsleiðarin m.a., at *“neyðug tiltøk eru sett í verk, um fyritreytirnar fyri játtanini eru broyttar, so at játtanin t.d. ikki fer at halda”*. Sambært landsstýrismanninum gjørdi stovnsleiðarin ikki vart við, at játtanin á fíggjarlógini 2003 fór at verða ov lítil. Krøvini frá læruplássunum koma seint í fíggjarárinum, og tí hevur tað verið torført í nóg góðari tíð at gjørt vart við eina neyðuga meirjáttan.

7.23.6.04. Klaksvíkar Sjómansskúli (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.710 t.kr. Meirnýtslan er 179 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru orsøkirnar til meirnýtsluna m.a. øktar lønarútreiðslur, og at fíggjarætlanin hjá skúlanum hevur ikki verið nóg neyv.

7.23.6.11. Almanna- og Heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 16,2 mió.kr. Meirnýtslan er 109 t.kr. Sambært landsstýrismanninum komu boðini frá Fíggjarmálaráðnum, um at lønarhækkingarnar á heysti 2003 ikki skuldu játtast rakstrarstaðnum, so mikið seint á árinum, at møguleiki ikki var at spara meirkostnaðin inn aftur.

Upprunaliga játtanin var 16,4 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2003, sum varð samtykt 7. november 2003, varð játtanin lækkað 220 t.kr., tí hildið varð, at *“raksturin verður minni, enn upprunaliga mett”*.

Vit spurdu, hvussu komið varð fram til júst hesa upphædd, havandi í huga meirnýtsluna við árslok. Sambært landsstýrismanninum varð hildið, at skúlin fór at hava eitt avlop millum 200 og 300 t.kr. út frá teimum fortreytum, ið vóru kendar á sumri 2003.

7.23.6.13. Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14.664 t.kr. Meirnýtslan er 137 t.kr. Sambært landsstýrismanninum komu boðini frá Fíggjarmálaráðnum, um at lønarhækkingarnar á heysti 2003 ikki skuldu

játtast rakstrarstaðnum, so mikið seint á árinum, at møguleiki ikki var at spara meirkostnaðin inn aftur.

7.24.3.22. Listasøvn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.939 t.kr. Meirnýtslan er 98 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna truplu viðurskiftini á Listasavninum í 2003.

Minninýtsla

7.23.1.34. Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.749 t.kr. Minninýtslan er 128 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kundu nakrir lærarar, sum Mentamálaráðið hevði ætlað at senda í verkligan part av námsfrøðiligu útbúgvingini, ikki fara. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað vinnu- og miðnámsskúlum.

7.23.2.01. Fólkaskúlin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 206.586 t.kr. Minninýtslan er 3.226 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var eingin eftirútbúgving seinna hálvár 2003. Eisini varð hildið aftur í tímanýtslu, av tí at trupult var at meta um, hvørja ávirkan nýggja skipanin, ið var sett í verk í seinnu hálvu 2003, fór at hava.

Játtanin til at eftirútbúgva lærarar í fólkaskúlanum er á somu høvuðskontu sum játtanin til fólkaskúlan. Sum víst á, varð eftirútbúgvingin strikað í seinnu helvt av 2003 - ikki tí at tørvurin var nøktaður, men vísandi til, at trupult var at meta um lønarútreiðslurnar í fólkaskúlanum. Játtanin at eftirútbúgva lærarar á vinnu- og miðnámsskúlunum er á høvuðskontu fyri seg (7.23.1.34.)

Vit hava spurt, hví játtanarmannagongdin at eftirútbúgva lærarar er so ymisk, og um tað er tilætlað. Sambært landsstýrismanninum verður vanliga eftirútbúgvingin umsitin av skúlunum. Í sambandi við nýggju arbeiðstíðina eru vikartímar í sambandi við eftirútbúgving av fólkaskúlalærarum lagdir til skúlarnar at umsita. Lønir til skeiðshaldarar, uppihald, skeiðsgjøld og ferðaendurgjøld hjá luttakarum eru á somu høvuðskontu sum játtanin til fólkaskúlan.

7.23.2.05. Eftirskúli (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.500 t.kr. Minninýtslan er 581 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð umbyggingin steðgað, tá ið val varð skrivað út 5. desember 2003. Landsstýrismaðurin helt ikki, at umbyggingin kundi halda fram og vísir á, at í bráðfeingis játtanarlóg fyri 2004 stendur: *"fyri játtanir av játtanarslagnum Løgujáttan skal vegleiðandi bert íløguvirksemi halda fram, sum er sáttmálabundið, ella sum á annan hátt er átikin skylda. Eingi nýggj tiltøk mugu setast í verk"*.

7.23.3.06. Miðnámsskúlin í Suðuroynni (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.600 t.kr. Minninýtslan er 788 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fór útgrevsturin í gongd seinni enn ætlað.

7.24.3.02. Bókasøvn (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2003.

Upprunaliga játtanin var 2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2003 varð játtanin lækkað 500 t.kr. *"Av tí at tað dregur út við byggingini av nýggjum miðnámsskúla í Suðuroy verður ikki øll avsetta játtanin nýtt .."* Á eykajáttanarlógini september 2003, sum varð samtykt 7. november 2003, varð játtanin lækkað 1 mió.kr., tí *"arbeiðið er ikki komið so langt, sum upprunaliga ætlað"*.

Sambært landsstýrismanninum varð eingin stuðul goldin út til at byggja fólkabókasøvn, tí at eftir at val varð skrivað út 5. desember 2003, var eingin myndugleiki at góðkenna eitt liðugt bygt fólkabókasavn, soleiðis sum ásett er í lógini, at landsstýrismaðurin skal gera.

7.23.3.07. Norðoya Skúladepil (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 200 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð játtanin, sum var sett av til prosjektering og byggifyrireiking, nýtt til at gera byggiskrá, sum bygginevndin læt Mentamálaráðnum at taka støðu til.

7.23.3.08. Fiskivinnu- og havbúnaðargranskingarmiðstøð (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2003. Sambært landsstýrismanninum var fyrireikandi arbeiðið ikki komið í gongd við árslok.

Upprunaliga játtanin var 1,2 mió.kr., men hon varð lækkað við 1 mió.kr. við eykajáttanarlóg september 2003, *"tí væntaða virksemið á hesi játtan væntast ikki at verða meira enn 200 t.kr. í ár."*

7.23.6.12. Lista- og tónleikaskúli (løgujáttan)

Upprunaliga játtanin á fíggjarlógini var 500 t.kr. Játtanin varð lækkað við 500 t.kr. við eykajáttanarlóg september 2003, tí *"gongd er ikki komið á verkætlanina"*. Eingin peningur er nýttur í 2003.

Á fíggjarlógini 2001 var 1 mió.kr. játtað til Lista- og tónleikaháskúla Føroya, men eingin peningur varð nýttur. Á fíggjarlógini 2002 var upprunaliga játtað 2 mió.kr. Játtanin varð lækkað 1,5 mió.kr. við eykajáttanarlóg desember 2002; men ongin peningur varð nýttur. Landsgrannskoðanin kann leggja afturat, at játtanin fíggjarárið 2004 er 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur.

Spurdur, hví peningur ár um ár verður játtaður, uttan at játtanin verður brúkt, hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ætlanirnar um listaskúla higartil hava verið lítið ítøkiligar. Hann ætlar at gera ymiskar útgreiningar, og at bøta um grundarlagið fyri at taka støðu til ein Listaskúla í Føroyum. M.a. tí er prosjekteringin ikki sett í gongd.

7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 19.385 t.kr. Minninýtslan er 1.468 t.kr. Sambært landsstýrismanninum:

- vórðu studentar ikki tiknir upp til lívfrøði, sum ætlað,
- vórðu felagsskeið hildin á søgu- og samfelagsdeildini,
- gjørdist útreiðslur til læraraløn minni, tí Setrið brúkti fleiri norðurlendskar lærarar,
- varð talið av studentum, ið fóru til próvtøku, minni enn upprunaliga mett, og
- varð nýtt virksemi avmarkað, tí á sumri 2003 var ivasamt, um Setrið fekk nóg stóra játtan aftur í 2004 at halda fram við nýggjum virksemi.

Upprunaliga játtanin var 19.573 t.kr., men játtanin varð lækkað 188 t.kr. í eykajáttanarlóg september 2003, sum varð samtykt 7. november 2003. Sambært landsstýrismanninum varð hildið, at Fróðskaparsetrið fór at hava avlop í 2003. Fyri at gera eina umbøn um eykajáttan á sumri 2003 útreiðsluneutrala, var gjørt av at lækka játtanina 188 t.kr. Á sumri 2003 var Mentamálaráðnum ikki kunnugt, at Fróðskaparsetrið fór at hava so stórt avlop við árslok.

7.24.4.10. Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari (onnur játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 700 t.kr. Eingin peningur er nýttur. Sambært landsstýrismanninum skuldi játtanin verið niðurløgd í 2003, og upphæddin flutt Mentanargrunninum.

6.2 Fólkaskúlin (GL 1996/2 10 2-1)

Í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar hava vit fleiri ferðir vístá, at lønarskipanin til læraraløn er gomul og ótíðarhóskandi. Skipanin er ikki nøktandi skjalprógvað, og eingin vegleiðing e.a. finst. Lønarstovan hevur innanhýsis eftirlit á teimum mest týðandi økjunum. Tó halda vit tað vera ein veikleika, at ongar samanskrivaðar reglur lýsa, hvørji innanhýsis eftirlit skulu verða gjørd, hvussu stemmað skal verða av, hvussu arbeiðið skal verða skjalprógvað, og hvørja ábyrgd og heimild hvør einstakur hevur. Vit hava mælt til at bøta um viðurskiftini. Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið hevði valt at bíða, til nýggj lønarskipan fór at verða tikin í nýtslu.

Á vári 2000 fór Mentamálaráðið undir at menna eina forskipan til nýggju felags lønarskipanina á Gjaldstovuni. Bæði arbeiðið við lønarskipanini á Gjaldstovuni og við forskipanini til læraraløn varð nógv seinkað.

Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at skipanin væntandi fór at verða tikin í nýtslu komandi skúlaár.

Í januar 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at eftir summarfrítíðina varð ein innanhýsis royndarskipan byrjað. Hetta arbeiðið hevur gingið væl. Í januar/februar 2005 eru allir tænastumanna- og sáttmálasettu lærararnir stovnaðir í lønarskipanini á Gjaldstovuni, soleiðis at klárt verður at gera ráðleggingina í fólkaskúlanum við lønarforskipanini, herímillum eisini at leggja øll næmingayvirlit inn. Miðað verður ímóti, at skipanin fult og heilt verður tikin í nýtslu í august 2005.

6.3 Musikkskúlaskipanin (GL 2001/2 10 9-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 69/1984 "um stuðul til musikkskúlar", broytt við Ll. nr. 67/1996. Í februar 2003 vístu vit á, at ósamsvar var ímillum § 1 í lógini, har ásett er, at landskassin letur studning, og § 5, har ásett er, at landsstýrismaðurin setir lærararnar. Heldur ikki verður lógin umsitin, sum var talan um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% av lønarútreiðslunum til lærararnar í mun til, hvussu nógvar tímar musikkskúlarnir í kommununum hava fingið tillutað.

Vit hava áður vístá, at musikkskúlaskipanin er væl umsitin, og umsitingin verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Tí mæltu vit landsstýrismanninum til at broyta lógina, soleiðis at samsvar verður ímillum praksis og allar ásetingar í lógini.

Í februar 2003 vísti landsstýrismaðurin á, at hann hevði sett ein arbeiðsbólk, ið fyri 1. apríl 2003 skuldi koma við einum tilmæli um, hvørjar tillagingar/broytingar skulu verða gjørdar í lógargrundarlagnum fyri musikkskúlaskipanina, soleiðis at samsvar verður millum lógina og fyrisitingina av lógini.

Í januar 2004 kunnaði Mentamálaráðið um, at nevndin, sum skuldi endurskoða lógina um musikkskúlar, hevði gjørt eitt fyribils uppskot um "Løgtingslóg um musikkskúlaundirvísing".

Í desember 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at nevndin, ið varð sett at endurskoða musikkskúlaskipanina, er ikki komin við nøkrum tilmæli enn. Arbeiðið at endurskoða lógina hevur tikið longri tíð, m.a. tí at kommunurnar og musikklærarafelagið hava biðið um at sleppa við í endurskoðanararbeiðið, men roknað verður við, at nevndin kemur við einum tilmæli til vár (2005). Landsstýrismaðurin ætlar at taka støðu til, hvat skal verða gjørt við málið, tá ið hann hevur fingið tilmælið frá nevndini.

6.4 Frítíðarundirvísing (GL 2001/2 10 9-7)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing", broytt við Ll. nr. 124/2003 og K. nr. 6/1988 "um frítíðarvirksemi". Harafturat eru nógvar ásetingar gjørdar í rundskrivum. Í seinastu frágreiðing okkara í februar 2003 vístu vit m.a. á:

at nógvar ásetingar viðvíkjandi frítíðarundirvísingini eru gjørdar í rundskrivi. Í oktober 2002 tók Mentamálaráðið undir við, at fleiri av rundskrivunum eiga at verða gjørd til kunngerðir.

at hóast lógin ásetir, at landskassin veitir kommunum studning, er játtanin til frítíðarundirvísing ein rakstrarjáttan. Landskassin rindar lønirnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum fyri lønarútreiðslur til lærarar. Mannagongdin er sostatt ikki í samsvari við Ll. nr. 70/1983, har ásett er, at landskassin letur kommununum studning.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði tikið stig til, at fult samsvar fór at verða ímillum fyrisitingarligu mannagongdirnar og lógina um frítíðarundirvísing. Frá 1. august 2003 skuldi Mentamálaráðið ikki sum higartil gjalda út lønir til teirra, sum undirvísa í frítíðarundirvísingini, men bert veita kommununum studning. Kommunurnar skuldu so sjálvar gjalda undirvísarum løn o.a. samsýning sambært galdandi sáttmála.

Í frágreiðing okkara í februar 2003 vístu vit á, at sæð út frá einum almennum sjónarmiði, ivaðust vit í, um tað var nøkur góð loysn. Umsitingin av lønum í sambandi við frítíðarundirvísing verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Vit mæltu landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða lógina, soleiðis at lógin kom at samsvara við praksis.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein arbeiðsbólkur við umboðum úr Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Kommunudeildini í Landsstýrinum og Mentamálaráðnum hevði arbeitt við at útgreina, hvussu uppgávubýtið millum land og kommunur skuldi verða eftir 1. august 2003. Niðurstøðan av hesum arbeiði var, at kommunufeløgini hildu ikki, at kommunurnar fóru at verða førar fyri at umsita økið, fyrr enn ein felags lønarskipan var fingin at virka, og fyrr enn greiða var fingin á einari millumrokningarskipan millum kommunur.

Í november 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann hevur gjørt av, at lóggávan skal verða fylgd, og frá 1. august 2005 skulu fyrisitingarligu mannagongdirnar verða soleiðis, at fyrisitið verður samsvarandi galdandi lóg.

Eftir hesum at døma er framvegis ætlanin, at kommunurnar sjálvar skulu gjalda undirvísarum løn o.a. samsýningar, og at Mentamálaráðið bert skal veita kommununum studning.

6.5 Føroya Skúlabókagrunnur (GL 2000/2 10 6-5)

6.5.1 Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 36/1959, sum seinast broytt við Ll. nr. 84/1978, og reglugerð nr. 64/1985 um útgávu av skúlabókum og øðrum undirvísingartilfari. Í áravís hava vit gjørt vart við, at lógargrundarlagið er ófullfíggjað og ikki dagført.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin lagt fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um útgávu av undirvísingarmiðlum (Lm. nr. 61/2004). Sambært uppskotinum skal lógin koma í gildi 1. august 2005. Samstundis fara úr gildi verandi lóg og kunngerð viðvíkjandi Skúlabókagrunninum.

6.5.2 Roknskaparviðurskifti

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Skúlabókagrunni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á stovninum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at dagføra og broyta roknskaparreglugerðina, og lýsa betur mannagongdir og reglur viðvíkjandi lønarumsiting, keyp av vørum og tænastum, prísáseting og ábyrgdum,

at Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,

at finna eina hóskandi skipan at skráseta arbeiðstíð, fráveru o.a.,
at taka spurningin um langtíðarleigu upp við Mentamálaráðið,
at dagføra tryggingarnar samsvarandi rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum,
at taka støðu til, um tað er neyðugt at hava ein kassakredit,
at taka upp spurningin, hvørt tað er rætt, at Skúlabókagrunnurin er MVG-skrásettur, vísandi til at útgávuvirksemi gevur hall, og at talan ikki er um vinnuligt virksemi.

Leiðslan í Skúlabókagrunninum hevur tikið viðmerkingar og tilmæli okkara til eftirtektar. Flestu broytingar eru longu framdar, í sambandi við at roknskaparreglugerðin er endurskoðað, dagført og send Mentamálaráðnum at góðkenna.

Uppbýtið í vanligt virksemi og útgávuvirksemi

Roknskapurin hjá Føroya Skúlabókagrunni er býttur í 2 undirkontur, "vanligt virksemi" og útgávuvirksemi". Bæði vanliga virksemið og útgávuvirksemið geva hall, samlaða netto-útreiðslan hevur ligið um 5 mió.kr. seinnu árini. Á "vanliga virkseminum" verða lønir til starvsfólk og útreiðslur til skrivstovuhaldið skrásett. Á "útgávuvirksemið" verða framleiðslu-útreiðslur skrásettar. Høvuðsuppgávan hjá Skúlabókagrunninum er at geva bøkur út, og vit hava tí ilt við at skilja uppbýtið ímillum vanliga virksemið og útgávuvirksemið, og hvat endamálið er við hesum uppbýti. Vit hava mælt landsstýrismanninum til at viðgera henda spurning.

Leiðslan í Skúlabókagrunninum hevur í hesum sambandi víst á, at tað er umráðandi, at grunnurin verður skipaður á ein hátt, sum fremur útgávuvirksemi. Skúlabókanevndin og leiðsla grunsins halda tað vera rætt at skipa vanliga virksemi grunsins sum rakstrarjáttan og útgávuvirksemið sum inntøkufíggjað virksemi. Tað hevur virkað væl og hevur tryggjað gjøgnumskygni.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at útgávuvirksemið lýkur treytirnar um "inntøkufíggjað virksemi", og vit hava mælt til at taka upp spurningin við Mentamálaráðið.

Skráseting av inntøkum

Roknskapurin hjá Skúlabókagrunninum gevur ikki eina greiða mynd av ognarum og inntøkum. Skuldin hjá Bókamiðsøluni er ikki skrásett í roknskapinum hjá Skúlabókagrunninum, og inntøkurnar frá seldu bókunum verða ikki skrásettar í tí tíðarskeiði, bøkurnar eru seldar. Inntøkurnar verða skrásettar, so hvørt Bókamiðsølan flytir Skúlabókagrunninum pening fyri seldu bøkurnar. Bókamiðsølan rindar Skúlabókagrunninum, so hvørt Bókamiðsølan hevur gjaldføri til tess. Leiðslan á Skúlabókagrunninum hevur kunnað um, at allir hesir spurningar verða endurskoðaðir í 2005, í sambandi við at nýggj roknskapar- og goymsluskipan á Bókamiðsøluni verður fyrireikað.

Vørugoymsla

Goymslan hjá Føroya Skúlabókagrunni verður umsitin av Bókamiðsøluni. Vit valdu nakrar bøkur burturúr goymslulistanum til eftirlit við árslok 2003. Úrslitið av okkara stakroyndum bendir á, at goymsluskipanin ikki er nøktandi, og tí hava vit mælt til, at Skúlabókagrunnurin viðger hesar trupulleikar saman við Bókamiðsøluni og tryggjar sær, at skrásetta goymslan verður tald upp regluliga. Leiðslan á Skúlabókagrunninum vísir á, at hesir trupulleikar fara at verða loystir í sambandi við, at nýggj roknskapar- og goymsluskipan væntandi verður tikin í nýtslu í januar/februar 2006, tá Bókamiðsølan ætlandi flytir í nýggj høli.

6.6 Bókamiðsølan (GL 2000/2 10 6-5)

Tilknýti til fíggjarlóg

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti". Bókamiðsølan varð ikki umrødd í álitinum, men Fíggjarmálaráðið hevur eftirsíðan viðgjørt stovnin.

Niðurstøðan er, at Bókamiðsølan er ein landsstovnur. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið hjá Bókamiðsøluni kann verða hildið uttan fyri fíggjarlógina. Somuleiðis eigur virksemið antin at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið kann verða hildið atskilt frá landsroknskapinum.

Í november 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat er hent í málinum, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur. Landsstýrismaðurin svaraði 30. november 2004, at hann "hevur sett sær fyri at fáa viðurskiftini skipað á Bókamiðsøluni og arbeiðir við at fáa gjørt formligu reglurnar fyri hesum".

Onnur viðurskifti

Í roknskapinum hjá Bókamiðsøluni 2003 er frámerktur ein "Byggigrunnur" 623 t.kr. Talan er ikki um nakran byggigrunn. Bókamiðsølan er søgd upp í hølunum, har hon heldur til. Tí hevur hon gjørt ein 20 ára sáttmála við Føroya Lærarafelag um at leiga hølir í bygningi, sum Føroya Lærarafelag ætlar at byggja.

Í grein 12 í sáttmálanum stendur: *"Leigarin rindar eitt depositum, í minsta lagi kr. 600.000, ið leigarin ræður yvir í samband við flyting, innrætting, telduskipan o.a. Flytir leigarin av einari ella aðrari orsøk ikki inn, tá ið hølini eru klár at taka í nýtslu, fellur depositumið til eigaran."* Tað er hetta depositum, sum er frámerkt í roknskapinum hjá Bókamiðsøluni sum "Byggigrunnur". Vit hava mælt til, at 20-ára sáttmálin, sum Bókamiðsølan hevur gjørt við Føroya Lærarafelag, verður tikin upp til viðgerðar við Mentamálaráðið.

6.7 Eftirútbúgving av yrkislærdum (GL 2000/2 10 1-2)

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina verður studningur játtaður til skeiðsluttøku hjá yrkislærdum, t.e. handverkarum, handils- og skrivstovufólki, so at tey fakliga kunnu fylgja við og varðveita yrkisførleika og kappingarføri. Játtanin hevur í fleiri ár verið um 350 t.kr.

Í frágreiðing í februar 2002 vístu vit m.a. á:

at játtanin ikki hevur tey eyðkenni, sum ein "rakstrarjáttan" skal hava sambært játtanarskipanini,

at útreiðslurnar verða bókaðar sum "stuðul til vinnu", standardkontu 53, hóast talan er um studning til einstaklingar,

at nógvir ivaspurningar eru viðvíkjandi játtan og endamáli við játtanini,

at tað er óheppið at hava játtanir, sum eru so breitt og so leyst orðaðar, í 3 reglum í viðmerkingum til eina fíggjarlóg.

Í fleiri ár hevur bert umleið helvtin av játtanini verið nýtt. Tað er helst tí, at so fá vita um játtanina. Er ætlanin at veita studning í mun til tørvin á hesum øki, so skal játtanin vera munandi hægri. Eftir okkara tykki er ivasamt, hvat endamálið er við játtanini.

Í juli 2002 boðaði Mentamálaráðið frá, at tey hildu tað vera rættast at bíða við at viðgera og møguliga broyta játtanina, til arbeiðsbólkurin, sum Yrkisútbúgvingarráðið hevði sett, hevði latið úr hondum álit og uppskot til lóg um yrkisskeið (arbeiðsmarknaðarútbúgvingar).

Í mai 2004 var løgtingslóg um yrkisskeið lýst. Yrkisskeiðini hava til endamáls, at:

1. hjálpa einstaklingum at nøkta grundleggjandi krøv til førleika í vinnuni,

2. viðlíkahalda og menna verandi vinnuførleika,
3. menna og viðlíkahalda ástøðiligan førleika.

Eftirútbúgving av yrkislærdum er fevnd av endamálsorðingini um yrkisskeið, og í fíggjarlógaruppskotinum 2005 er kontan "Eftirútbúgving av yrkislærdum" tikin av.

6.8 Studningur til læruplass (GL 2003/2 10 1-3)

Í sambandi við grannskoðan okkara í 2003 av játtanini "Studningur til læruplass" vístu vit á, at í einum máli hevði læruplássið søkt um kr. 28.113 í staðin fyri kr. 35.251, sum var lønin, lærlingurin hevði rætt til sambært sáttmálanum. Yrkisdepilin kannaði málið og kom fram til, at arbeiðsgevarin hevði søkt um ta upphædd, sum hann hevði goldið lærlinginum í løn. Arbeiðsgevarin hevði ikki í hyggju at rinda lærlinginum hægru lønina.

Í § 33, stk. 2, í lógini stendur, at lønin hjá lærlingum í minsta lagi skal verða tann løn, ið er ásett í sáttmálanum. Vit spurdu um mannagongdina, tá ið Yrkisdepilin veit um, at ein lærlingur ikki fær ta løn, ið er ásett í lógini. Yrkisdepilin hevur vístá, at stovnurin hevur onga eftirlitsskyldu í so máta.

Í mars 2004 spurdu vit, hvørji sjónarmið landsstýrismaðurin hevði í hesum máli. Landsstýrismaðurin hevur ikki gjørt viðmerkingar til tilskilaða málið, men í oktober 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ábøtur eru gjørdar á útgjaldsskipanina. Útgjaldsskipanin er umløgd, soleiðis at læruplássið á umsóknarblaðnum skrivliga váttar, at lærlingurin í minsta lagi hevur fingið lønina, sum er ásett sambært sáttmála. Tá ið læruplássið hevur váttað lønina, roknar Yrkisdepilin lønarendurgjaldið.

6.9 Yrkisskúlar og aðrir skúlar (GL 2000/2 10 3-4)

Í februar 2001 vístu vit á, at hóast Ll. nr. 106/1998 "um yrkisskúlar" kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett reglur, sum álagt í § 14 í lógini. Mentamálaráðið svaraði, at ein innanhýsis arbeiðsbólkur fór at verða settur at arbeiða við málinum.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000) heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í desember 2001 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt, men at Vinnu- og Miðnámsskúladeildin hevði gjørt fastar mannagongdir fyri, hvussu fíggjarlógararbeiðið, herímillum játtan til góðkent undirvísingarvirksemi, skuldi fara fram.

Eftir var at gera almennar reglur fyri fleiri viðurskifti, so sum:

- Greiðan skilnað millum inntøkufíggjað virksemi og alment góðkent undirvísingarvirksemi, herímillum at endurskoða rundskriv um yvirskot frá eginrakstri.
- Hvussu avdráttir av lánum hjá sjálvsognarstovnum, sum landið rindar, skulu verða bókaðir.
- Hvat skal verða bókað í landsroknskapinum, og hvat skal verða hildið uttanfyri.
- Krøv, tá bókað verður á egnum teldukervi.

Landsstýrismaðurin boðaði frá, at nøkur av viðurskiftunum fóru at verða tikin upp í sambandi við, at uppskotini um roknskaparreglugerð, sum skúlarnir høvdu sent inn, fóru at verða viðgjørd í Mentamálaráðnum fyrst í 2002.

Lógin um yrkisskúlar hevur verið í gildi í 6 ár. Vit skrivaðu í frágreiðing okkara í februar 2003, at vit hildu ein vanda liggja í, at skiftandi landsstýrismenn ár um ár skákaðu sær undan at gera lógarásettar kunngerðir.

Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt hevur verið við málinum, og:

at uppskot til nýggja reglugerð fyri brúkaragoldið skeiðsvirksemi er gjørt, og verður sent Gjaldstovuni til viðmerkingar,

at Fíggjarmálaráðið arbeiðir við einari nýggjari játtanarskipan, ið neyvt sigur, hvussu avdráttir skulu verða bókaðir,

at í 2002 søktu Tekniski skúli í Tórshavn og Føroya Handilsskúli um loyvi at bóka sjálvi á egnum teldukervi, men fingu noktandi svar. Teir hava biðið um nýggja viðgerð av umsóknini, og saman við Føroya Gjaldstovu verður útgreinað, hvør tørvurin er, og um og hvussu stovnarnir endaliga skulu verða tiknir við í búskaparskipanir landsins.

6.10 Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni (GL 2003/2 10 3-8)

Í 2003 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Studentaskúlanum í Eysturoynni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at endurskoða reglugerðina og lýsa mannagongdirnar gjøllari viðvíkjandi roknskapargóðkenning og lønarumsiting,

at Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,

at skúlin tryggjar sær, at journal- og skjalasavnsætlanir lúka galdandi reglur,

at goyma næmingaprotokollir sum annað roknskapartilfar,

at taka spurningin um langtíðarleigu upp við Mentamálaráðið,

at kanna og rætta munir á peningastovnskontu,

at dagføra yvirlitið yvir ognir og útbúnað.

Í mai 2004 boðaði rektarin frá, at hann tók undir við tilmælum okkara, og í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at ábøturnar eru framdar.

6.11 Studentaskúlin og HF-skeiðið í Hoydølum (GL 2003/2 10 3-9)

Í 2003 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at endurskoða reglugerðina og lýsa mannagongdirnar á fleiri økjum,

at Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,

at áseta skrivligar reglur um journalisering,

at taka spurningin um langtíðarleigu upp við Mentamálaráðið,

at greiða gjøllari frá umsiting av inntøkum,

at dagføra yvirlitið yvir ognir,

at viðurskiftini á Miðnámsskúlanum í Suðuroy, viðvíkjandi ábyrgdar- og heimildarbýti, verða formaliserað.

Í mars 2004 boðaði rektarin frá, at hann ætlaði at fremja tær ábøtur, vit høvdu mælt til. Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at ikki allar ábøtur eru framdar, og at Mentamálaráðið fleiri ferðir hevur skundað undir skúlan at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Sambært landsstýrismanninum eru viðurskiftini millum Studentaskúlan og Miðnámsskúlan í Suðuroy formaliserað 16. juni 2004 í reglugerð fyri leiðslu- og umsitingarbýti millum skúlarnar.

6.12 Klaksvíkar Sjómansskúli (GL 2004/2 10 4-11)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Klaksvíkar Sjómansskúla eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

- *at* gera eina roknskaparreglugerð samsvarandi rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum,
- *at* Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,
- *at* skúlin leitar sær ráð hjá Landsskjalasavninum fyri at tryggja sær, at reglur, ásettar sambært skjalasavnslógini/-kunngerðini, verða hildnar,
- *at* næmingarnir gjalda, tá ið bøkurnar verða latnar teimum,
- *at* kassapeningurin verður skrásettur í landsbókhaldinum í samráð við Gjaldstovuna,
- *at* taka spurningin um langtíðarleigu upp við Mentamálaráðið,
- *at* kanna um tryggingarviðurskiftini eru í samsvar við reglurnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum.

Í september 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið hevur heitt á Klaksvíkar Sjómansskúla um at gera tær ábøtur, sum Landsgrannskoðanin hevur mælt til.

6.13 Føroya Sjómansskúli (GL 2003/2 10 4-9)

Í 2003 og 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Sjómansskúla eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er hampiligt, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

- *at* endurskoða roknskaparreglugerðina og lýsa mannagongdirnar á fleiri økjum,
- *at* Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,
- *at* skúlin leitar sær ráð hjá Landsskjalasavninum fyri at tryggja sær, at reglur, ásettar sambært skjalasavnslógini/-kunngerðini, verða hildnar,
- *at* taka upp spurningin, um tað er rætt, at lærarar fáa yvirtíð fyri eina viku, hóast somu lærarar í vikuni frammanundan ella aftaná, ikki hava undirvíst 22,1 tímar,
- *at* taka spurningin um nógvu yvirtíðina upp við Mentamálaráðið,
- *at* greiða viðurskiftini í sambandi við, at stjórin í áravís hevur gjørt vart við, at ásetta skylduga tímatalið hjá skúlastjóranum er ov høgt,
- *at* ásettar verða skrivligar reglur fyri, hvussu løn og tímaniðurskurðir skulu roknast í sambandi við simulatorarbeiðið og siglingarskeið,
- *at* kontera, ávísa og góðkenna skjølini, áðrenn tey verða skrásett,
- *at* útreiðsluskjøl, m.a. í sambandi við umboðan, verða greinað nærri, og at skrivað verður á skjølini, í hvørjum sambandi útreiðslan er hildin, og hvør hevur verið við,
- *at* útgerð til vanliga raksturin av skúlanum ikki verður skrásett á "inntøkufíggjað virksemið",
- *at* innanhýsis skjøl so sum eftirbókingarskjøl verða greinað neyvari, og at t.d. skjøl verða løgd við, sum prógva, hví flytingin er gjørd,
- *at* Mentamálaráðið tekur til viðgerðar umrøddu ivaspurningar, í sambandi við at stuðul til bókaútgávu er latin av "inntøkufíggjað virksemi",
- *at* avrit av fylgiseðlunum, sum verða latnir Gjaldstovuni at skráseta, verða goymd saman við avritunum av fakturunum,

at skúlin tekur støðu til, um tað er neyðugt at hava kekkkontu,

at ferðauppgerðirnar verða skrásettar í lønarskipanini á Gjaldstovuni,

at dagføra yvirlitið yvir ognir.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá,

at roknskaparreglugerðin fyri skúlan er endurskoðað og góðkend,

at av tí at lærararnir og Mentamálaráðið ikki eru samd um, hvussu ásetingarnar í § 22 í sáttmálanum um yvirtíð skulu tulkast, hevur Mentamálaráðið biðið Fíggjarmálaráðið tulkað sáttmálan,

at nýggi skúlastjórin, í samráð við Mentamálaráðið, hevur tikið stig til at útgreina viðurskiftini viðvíkjandi yvirtíð. Endamálið er at minka um nógvu yvirtíðina,

at Mentamálaráðið, saman við leiðslu skúlans og avvarðandi lærarum, skal áseta skrivligar reglur fyri, hvussu løn og tímaniðurskurður skulu roknast í sambandi við simulatorarbeiði og siglingarskeið,

at onnur viðurskifti, ið víst verður á, eru tikin upp við skúlan.

6.14 Samskipan av virkseminum hjá sjómansskúlunum (GL 2000/2 10 4-5)

Sjómansskúlarnir undirvísa við støði í Ll. nr. 65/1984 "um sjómansútbúgving" við seinni broytingum. Í oktober 2001 spurdu vit landsstýrismannin, um hann hevði ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Tórshavn og í Klaksvík, nú samlaða næmingatalið var minkandi.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at 24. juli 2001 varð nýggj Ll. nr. 55 "um útbúgving av manning á skipum o.ø." samtykt. Arbeitt varð við at laga útbúgvingarnar til nýggju krøvini, ið IMO og vinnulívið seta. Í hesum arbeiði liggur eisini ætlan um møguliga at samskipa virksemið hjá sjómansskúlunum í Tórshavn og Klaksvík.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var, at høvuðskunngerðin fyri hesar útbúgvingar skuldi verða liðug á sumri 2003, og síðani fór spurningurin um samskipan at verða tikin upp.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kunngerðirnar fóru at verða sendar til góðkenningar í apríl mánaði 2004. Spurningurin um at samskipa virksemið var tikin upp, og arbeiðið hesum viðvíkjandi fór væntandi at verða liðugt til komandi skúlaárið.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at høvuðskunngerðin fyri útbúgvingarnar á sjómansskúlunum er liðug og er send at góðkenna. Tá ið kunngerðin er komin í gildi, er ætlanin at fara undir arbeiðið við at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Klaksvík og Tórshavn.

6.15 Undirvísingarskylda hjá skúlastjórum (GL 2000/2 10 4-5)

Síðani í 2000 hava vit í frágreiðingum umrøtt undirvísingarskylduna hjá skúlastjórunum á Maskinmeistaraskúlanum, Føroya Sjómansskúla og Klaksvíkar Sjómansskúla. Vit vístu á, at stjórarnir á Maskinmeistaraskúlanum og Føroya Sjómansskúla ikki undirvístu skylduga tímatalið. Setanarviðurskiftini hjá stjóranum á Maskinmeistaraskúlanum vóru ógreið og óformlig, og bæði hann og stjórin á Føroya Sjómansskúla høvdu gjørt vart við, at skylduga tímatalið var ov høgt. Í januar 2001 boðaði Mentamálaráðið frá, at arbeitt varð við málinum saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum.

Í september 2001 boðaði Mentamálaráðið frá, at málið var tengt at sáttmálasamráðingunum við avvarðandi yrkisfeløg. Mentamálaráðið fór saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum at viðgera spurningin, soleiðis at eitt lægri skyldugt undirvísingartímatal kundi verða sett í gildi frá skúlaárinum 2002/03.

Tíðarætlanin helt ikki. Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið væntandi fór at verða loyst innan fyri stutta tíð.

Í januar 2004 kunnaði Mentamálaráðið um, at rundskriv um undirvísingarskyldu hjá stjórum/rektarum á vinnu- og miðnámsskúlunum var gjørt. Uppskot til rundskrivið skuldi verða kannað innanhýsis av løgfrøðingi og fíggjarfrøðingi, og síðani verða sent Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum til ummælis. Kunning um rundskrivið fór at verða send skúlunum, so skjótt viðgerðin var liðug. Ætlanin var, at rundskrivið skuldi verða sett í gildi 1. august 2004.

Í januar 2005 vísti landsstýrismaðurin á, at hann á vári 2004 hevði gjørt av at leggja Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlan saman í ein stovn. Nýggjur stjóri er settur fyri báðar skúlarnar. Í setanarskrivinum hjá nýggja stjóranum er einki ásett um undirvísingarskyldu. Spurningurin er framvegis ikki loystur.

6.16 Føroya Læraraskúli

Roknskaparviðurskifti (GL 2004/2 10 4-12)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Læraraskúla eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at lýsa og greina mannagongdir í roknskaparreglugerðini viðvíkjandi
- roknskapargóðkenning
- postgongd
- umsiting av inntøkum og prísáseting
- inntøkufíggjaðum virksemi
- umsiting av gjaldingum, kassa og peningastovnskontu
- fyrisiting av vørugoymslu og øðrum ognum
- umsiting av læraralønum

at skúlin leitar sær ráð hjá Landsskjalasavninum fyri at tryggja sær, at reglur, ásettar sambært skjalasavnslógini/-kunngerðini, verða hildnar,

at taka spurningin um "inntøkufíggjað virksemi" upp við Mentamálaráðið, tí virksemið lýkur ikki ásettu treytirnar í játtanarskipanini,

at greina og rætta munin á einari peningastovnskontu,

at gera ognaryvirlit.

Í februar 2005 hevur Læraraskúlin boðað frá, at viðmerkingar og tilmæli okkara verða tikin til eftirtektar.

Vantandi reglur fyri tímaútrokning og lønaráseting (GL 2000/2 10 4-5)

Í oktober 2001 vístu vit á, at lønarumsitingin ikki í øllum førum byggir á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað, og vit mæltu til at bøta um viðurskiftini.

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið fór at verða tikið upp við Fíggjarmálaráðið, so skjótt fyrireikandi arbeiðið var gjørt, eftir ætlan á heysti 2002. Hann vísti eisini á, at í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum skúlamál fór spurningurin um donsku tænastumenninar á Læraraskúlanum eisini at verða tikin upp við danska Fíggjarmálaráðið. Arbeiðið fór at verða gjørt saman við Fíggjarmálaráðnum.

Í mars 2004 vísti landsstýrismaðurin á, at í sambandi við protokollat til sáttmálan frá september 2001 við Magistarafelagið var arbeiðsbólkur settur umboðandi Fíggjarmálaráðið-

/Lønardeildina, Mentamálaráðið, Magistarafelagið og Læraraskúlan at viðgera og endurskoða arbeiðstíð, arbeiðsviðurskifti og annað á Føroya Læraraskúla.

Okkum kunnugt eru viðurskiftini á Læraraskúlanum óbroytt. Niðurstøðan av grannskoðanini í 2004 er, at verður støði tikið í sáttmálanum við Magistarafelagið og "óskrivaðu reglunum", sum Læraraskúlin hevur fyri tímaútrokningum og lønarásetingum, eru útgoldnu lønirnar rættar, men sum vit hava gjørt vart við í fleiri ár, byggir lønarumsitingin ikki í øllum førum á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað.

Vit hava tí enn einaferð heitt á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í februar 2005 hevur landsstýrismaðurin víst á, at viðurskiftini viðvíkjandi tímaniðurskurði eru partur av málinum um at endurskoða arbeiðstíð, arbeiðsviðurskifti o.a. á Føroya Læraraskúla, sum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelagið 11. september 2001 gjørdu protokollat um. Í nýggjari semju millum partarnar 1. juli 2004 varð aftur víst til protokollatið frá 2001, og samstundis varð avtalað, at Fíggjarmálaráðið í næstum fór at taka stig til at fáa sáttmálaviðurskiftini í rættlag. Mentamálaráðið hevur tó einki frætt aftur í hesum máli.

6.17 Fróðskaparsetur Føroya (GL 2003/2 10 4-10)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Fróðskaparsetur Føroya eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á Fróðskaparsetrinum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

- *at* peningastovnskonturnar verða skrásettar í landsbókhaldinum,
- *at* stuðulin, kr. 50.000, sum er latin Føroyamálsdeildini til liðugtgerð av tøkniorðabók, verður skrásettur í landsroknskapinum, fluttur Mentamálaráðnum aftur ella nýttur til ætlaða endamálið,
- *at* dagføra yvirlitið yvir ognir og útbúnað,
- *at* fylgja mannagongdunum um fyrisiting av vørugoymslu og øðrum ognum,
- *at* taka spurningin um "inntøkufíggjað virksemi" upp við Mentamálaráðið.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tey viðurskifti, ið víst verður á, verða loyst í næstum.

6.18 Altjóða Skrivstovan (GL 2004/2 10 9-8)

Í 2004 hava vit grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Altjóða Skrivstovuni. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan.

Fróðskaparsetrið tekur sær av flestu umsitingaruppgávunum, og í roknskaparreglugerðini er ábyrgdar- og heimildarbýtið millum stovnarnar gjølla greinað. Samanumtikið halda vit, at roknskaparviðurskiftini eru sera væl skipað. Vit hava mælt til, at arbeiðstíð, innbúgv o.t. verður skrásett. Hesi viðurskifti eru greinað í roknskaparreglugerðini, sum Mentamálaráðið góðkendi 10. desember 2004. Vit hava eisini mælt til at taka spurningin upp við Mentamálaráðið um samsýning og koyripening hjá limunum í ráðgevandi nevndini.

Í februar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tað verður gjørt.

6.19 Útbúgvingarstuðul og -lán (GL 2000/2 10 9-6)

Stuðulsstovnurin umsitur studning og lán til fólk í útbúgving og krevur lánini innaftur. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 45/1999 "um útbúgvingarstuðulsskipan". Við heimild í lógini eru 4 kunngerðir lýstar, sum áseta neyvari reglur á økinum.

Roknskaparreglur/innanhýsiseftirlit

Í november 2000 vístu vit á, at eingin roknskaparreglugerð var á Stuðulsstovninum, og at ongar samanskrivaðar reglur ella starvslýsingar lýstu, hvørji innanhýsiseftirlit skuldu verða gjørd. Eftirsíðan hevur Stuðulsstovnurin gjørt eina roknskaparreglugerð, sum Mentamálaráðið góðkendi í juni 2003.

Í november 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at reglurnar fyri stovnsraksturin, fyri innanhýsis mannagongdir og eftirlit, vóru lidnar í apríl 2004. Reglurnar fyri stuðul/lán eru ikki lidnar.

Journalskipanin: Í november 2000 vístu vit m.a. á tørvin á einari journalskipan til mál, ið ikki eru persónsmál. Ein journalskipan varð tikin í nýtslu í juli 2003. Sambært landsstýrismanninum er journalvegleiðingin ikki liðug.

Edv-skipanin: Umsitingin av stuðli og lánum er knýtt at EDV-skipanini á stovninum. EDV-skipanin á Stuðulsstovninum varð tikin í nýtslu í august 1993, men hon lýkur ikki øll krøv, sum eru sett til dokumentatión, brúkaravegleiðingar, brúkararættindi o.a. Váðameting er ikki gjørd, eingin neyðætlan finst, og ongar reglur eru um logg. Back-up verður tó tikið hvønn dag, og veitarin hevur eitt avrit av telduforritinum. Eingin skrivlig avtala er gjørd við veitaran um menning og viðlíkahald av skipanini, og stovnurin er bundin at einum fólki hjá EDV-veitaranum. Stuðulsstovnurin er greiður yvir veikleikarnar.

Í 2002 kravfesti stovnurin eina nýggja telduskipan, og sáttmáli varð undirskrivaður við teldufyritøku um at menna hesa telduskipan. Ábøtur á verandi skipan vórðu tí ikki raðfestar høgt.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at á sumri 2004 varð fyrri partur (studningsparturin) tikin í nýtslu, og tí verður hesin parturin í gomlu skipanini ikki nýttur. Seinni partur av skipanini (lánsparturin) verður tikin í nýtslu við árslok 2005. Samstundis sum skipanirnar eru mentar, verður arbeitt við at gera skjalfesting, vegleiðingar o.a.

Innheintan av eftirstøðum: Í seinastu frágreiðing í mars 2004 umrøddu vit, at lánsskuldin var góðar 62 mió.kr. "Vanligu" eftirstøðurnar vóru um 7 mió.kr. Umleið 600 lán vóru fallin til gjaldingar í síni heild, svarandi til um 12 mió.kr.

Sambært § 8 í lógini um útbúgvingarstuðul er síðani 1999 heimilað Toll- og Skattstovu Føroya at krevja inn skuld, ið stavar frá Stuðulsstovninum. Í august 2003 varð avtala undirskrivað ímillum Stuðulsstovnin og Toll- og Skattstovu Føroya um at heinta inn eftirstøður.

Í november 2004 hevur landsstýrismaðurin greitt frá,

at higartil eru 5,2 mió. kr. sendar Toll- og Skattstovu Føroya at heinta inn. Inngoldnar eru 1,7 mió. kr. Umleið 2/3 av krøvunum hjá teimum, sum búgva í Føroyum, eru flutt Toll- og Skattstovuni at heinta inn, og roknað verður við, at á sumri 2005 eru øll krøvini send Toll- og Skattstovuni,

at Mentamálaráðið hevur havt fund við Toll- og Skattstovuna um at heinta inn lestrarskuld hjá teimum, sum búgva uttanlands. Ein nøktandi loysn er ikki funnin enn.

6.20 Føroya Fornminnissavn (GL 2002/2 11 2-9)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Fornminnissavni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at áseta reglur og lýsa mannagongdina um prísáseting,

at taka støðu til, um tað er neyðugt at hava bankakontu, tá ið útgjaldingarnar kunnu fara um Føroya Gjaldstovu,

at fylgja ásetingunum í roknskaparrundskrivinum punkt 6.1 um ávísing,

at taka spurningin um langtíðarleigu upp við Mentamálaráðið,

at dagføra tryggingarnar í samráð við Mentamálaráðið, samsvarandi rundskrivinum 21. november 2003 um "tryggingarviðurskifti landsins",

at kunna starvsfólkini um rundskrivini frá Løgmansskrivstovuni og Toll- og Skattstovuni um telefon, sum arbeiðsgevarin letur starvsfólkum at brúka,

at finna ein hóskandi hátt at skráseta arbeiðstíð, so tað sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til, vísandi til § 7 í roknskaparkunngerðini.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tey viðurskifti, ið víst verður á, verða loyst í næstum.

6.21 Føroya Landsskjalasavn (GL 2003/2 11 2-10)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Landsskjalasavni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at endurskoða roknskaparreglugerðina, herímillum at greina mannagongdirnar gjøllari í sambandi við umsiting av inntøkum og umsiting av inntøkufíggjaðum virksemi,

at gera reglugerð um granskingarverkætlanir,

at greina nýggju arbeiðsgongdina við elektroniskari góðkenning av rokningum,

at stemma av kassarnar og fíggjarstøðuna einaferð um mánaðin,

at dagføra tryggingarnar sambært rundskrivinum 21. november 2003 frá Fíggjarmálaráðnum,

at finna ein hóskandi hátt at skráseta arbeiðstíð, so tað sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til, vísandi til § 7 í roknskaparkunngerðini.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tey viðurskifti, sum víst verður á, verða loyst í næstum.

6.22 Føroya Náttúrugripasavn (GL 2003/2 11 2-11)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Náttúrugripasavni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at endurskoða roknskaparreglugerðina, herímillum greina:

- reglurnar um nýtslu av fartelefon,
- mannagongdirnar viðv. umsiting av inntøkum og inntøkufíggjaðum virksemi,
- mannagongdirnar viðv. umsiting av kassa og bankakontu,

at finna ein hóskandi hátt at skráseta arbeiðstíð, so tað sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til, vísandi til § 7 í roknskaparkunngerðini,

at skráseta lønina til leiðaran á Biofar á stovnsnummarið hjá Biofar, soleiðis at roknskapirnir hjá Náttúrugripasavninum og Biofar betur lýsa virksemið hjá stovnunum,

- *at* dagføra tryggingarnar samsvarandi rundskrivinum frá 21. november 2003 frá Fíggjarmálaráðnum,
- *at* verkætlanirnar verða lýstar og skjalprógvaðar betur, við m.ø. umsóknum, játtanarskrivum, treytum fyri játtan og fíggjarætlanum,
- *at* gera upp Norlake verkætlanina,
- *at* Náttúrugripasavnið tekur spurningin um "inntøkufíggjað virksemi" upp við Mentamálaráðið, tí verkætlanirnar lúka ikki ásettu treytunum í játtanarskipanini,
- *at* seta mark fyri, hvussu nógvan reiðan pening "kioskin" kann liggja inni við, og hvussu ofta kassin skal verða tømdur,
- *at* talmerkt kvittan ella kassatól verður brúkt í sambandi við søluna í framsýningarhøllini,
- *at* bankakontan verður skrásett í landsbókhaldinum í samráð við Gjaldstovuna.

Í september 2004 boðaði savnsstjórin frá, at fleiri broytingar longu eru framdar. Í november 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið fer at taka hesar spurningar upp við leiðsluna á Náttúrugripasavninum.

6.23 Havlívfrøðiliga royndarstøðin Biofar (GL 1999/2 11 2-5)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Havlívfrøðiligu royndarstøðini Biofar eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

- *at* taka spurningin um "inntøkufíggjað virksemi" upp við Mentamálaráðið, tí verkætlanirnar lúka ikki ásettu treytunum í játtanarskipanini,
- *at* mannagongdin við trygdaravritum verður tikin við í roknskaparreglugerðina,
- *at* rættleikin í EDV-skrásettu upplýsingunum verður betur vardur mótvegis alnótini,
- *at* fáa tryggingarviðurskiftini í fasta legu í samráð við Mentamálaráðið,
- *at* lønin til leiðaran á Biofar verður skrásett á stovnsnummarið hjá Biofar, soleiðis at roknskapirnir hjá Náttúrugripasavninum og Biofar betur lýsa virksemið hjá stovnunum.

Í november 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at ætlanin er at endurskoða møguleikan at hava inntøkufíggjað virksemi, nú nýggjar játtanarreglur væntandi verða settar í verk í næstum. Mentamálaráðið fer eisini at taka stig til at fáa viðurskiftini, sum víst verður á, í rættlag.

6.24 Listasavn Føroya (GL 2002/2 11 2-8)

Í seinastu frágreiðing í mars 2004 umrøddu vit játtanar-, roknskapar- og ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya.

Í januar 2005 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at viðurskiftini millum sjálvsognarstovnin og stovnsraksturin enn ikki eru greidd, og arbeitt verður við at endurskoða viðtøkurnar hjá Listasavninum. Tá ið arbeiðið er liðugt, verður eisini avklárað, hvussu roknskapurin skal førast í framtíðini, ásannandi at verandi framferðarháttur, har eitt møguligt rakstraravlop tilvildarliga verður býtt millum eginrakstur og stovnsrakstur, ikki kann halda fram. Mentamálaráðið væntar, at arbeiðið verður liðugt á vári 2005.

6.25 Stuðul til mentan og ítrótt (GL 2000/2 11 9-1)

Í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vístu vit á, at umsitingin av studningi til mentanarendamál sum heild tyktist at vera fløkt og óskipað. Í ávísan mun er talan um fleirfaldað málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Eftir okkara tykki er tørvur á einari sanering/upprudding viðvíkjandi studningsgrundarlagi/-lóggávu og studningsumsiting, so endamál, treytir o.a. verða greiðari, og tað slepst undan dupultarbeiði o.s.fr.

Í frágreiðingini í februar 2003 umrøddu vit umsitingina av fleiri studningsjáttanum, sum Mentamálaráðið fyrisitur, og har studningur serliga verður veittur feløgum. Vit vístu m.a. á, at fleiri feløg/stovnar kunnu fáa studning frá fleiri studningsjáttanum til somu endamál. Í nógvum førum letur Mentamálaráðið øðrum upp í hendi at umsita studning, sum er játtaður á fíggjarlógini, t.d. Leikpalli Føroya, ÍSF, Føroya Skótaráð, Norrøna felagnum o.ø. Mentamálaráðið hevur ikki ásett leiðreglur ella treytir fyri, hvussu hesi feløg skulu umsita studningin, t.d. reglur um fíggjarætlan, eftirlit, roknskaparhald og grannskoðan.

Í november 2004 legði landsstýrismaðurin "Frágreiðing um stuðulsveitingar á mentanarøkinum" fram til aðalorðaskiftis. Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin lagt fyri tingið "Uppskot til løgtingslóg um stuðul til mentan og list v.m." (Lm. nr. 67/2004).

7 OLJUMÁL

7.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Á ongari játtan er talan um meirnýtslu. Allir stovnar/høvuðskontur hava eina minninýtslu. Niðanfyri verður greitt frá einari kontu, har talan er munandi frávik.

9.30.3.01. Lánsafturgjald

Á fíggjarlógini var eingin játtan. Sambært landsroknskapinum 2003 eru útreiðslurnar 3.016 t.kr. og inntøkurnar 5.490 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um rentutilskriving og inngjøld frá IRF viðvíkjandi veðhaldsláni frá landskassanum til IRF. Játtanin varð sett til 0, men sambært landsstýrismanninum átti nettoupphæddin at verið sett á fíggjarlógina, t.e. munurin millum rentutilskriving og inngjald sambært skuldarbrævi.

8 ALMANNAMÁL

8.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður vístá stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Vísandi til landsroknskapin 2003 er meirnýtsla á fleiri kontum. Niðanfyri verða nakrar teirra umrøddar:

t.kr.

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	Meirnýtsla
Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)	7.800	7.866	66
Dagpeningaskipanin	49.022	50.954	1.932
Fólkapensjón (lógarbundin játtan)	355.300	359.422	4.122
Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)	188.000	190.520	2.520
Einkjubarnastyrkur (lógarbundin játtan)	1.951	2.099	148

12.21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7,8 mió.kr. Meirnýtslan er 66 t.kr.

Í fíggjarlógaruppskotinum vóru upprunaliga settar av 6 mió.kr. Meirilutin í Fíggjarnevndini skeyt upp, at *"skipanin verður tikin av. Lógaruppskot verður lagt fyri Tingið samsvarandi"*. Uppskotið varð samtykt, og eingin peningur varð játtaður.

4. mars 2003 legði landsstýrismaðurin fram uppskot um at seta úr gildi løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening (Lm. 106/2002). Undir 2. viðgerð av uppskotinum 2. mai 2003 vísti tað seg, at trupult var at fáa undirtøku í samgonguni. Landsstýrismaðurin tók uppskotið aftur.

Við fíggjarnevndarskjali 13. juni 2003 søkti landsstýrismaðurin um 7,8 mió.kr. Fíggjarnevndin gjørdi 24. juni 2003 av at ganga umsóknini á møti.

12.21.4.01. Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 52,2 mió kr. til útreiðslur og 3,2 mió.kr. til inntøkur. Meirnýtslan er 1.932 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fekk Almannastovan óvanliga nógvar umsóknir um sjúkradagpening í 2003, m.a. tí føroyingar vóru serliga illa raktir av beinkrími á heysti 2003.

12.21.8.01. Fólkapensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 355,3 mió.kr. Meirnýtslan er 4,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu á heysti 2003 gjørdar framrokningar av útreiðslunum til fólkapensjónina. Ivasamt var, um væntast kundi ein lítil minninýtsla ella ein lítil meirnýtsla. Tí valdi Almannamálaráðið ikki at søkja um eykajáttan. Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at lutfalsliga lítil prosentbroyting í talinum av pensjónistum hevur stóran týdning fyri útreiðslurnar, tí pensjónistarnir eru so nógvir í tali.

12.21.8.05. Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 188 mió.kr. Meirnýtslan er 2,5 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 192,9 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin lækkað 4,9 mió.kr., vísandi til framskriving av útreiðslunum.

Sambært landsstýrismanninum hevur lutfalsliga lítil prosentbroyting í talinum av pensjónistum stóran týdning fyri útreiðslurnar, tí pensjónistarnir eru so nógvir í tali.

12.21.8.10. Einkjubarnastyrkur (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.951 t.kr. Meirnýtslan er 148 t.kr. Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 2.100 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin lækkað 149 t.kr. eftir tilmæli frá Almannastovuni. Sambært landsstýrismanninum vísti framrokningin hjá Almannastovuni seg ikki at halda.

Minninýtsla

12.21.6.04. Eldrarøkt (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 223,9 mió.kr. Minninýtslan er 1,6 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 221 mió.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin hækkað 2,9 mió.kr., og sambært viðmerkingunum varð sáttmálabundna lønin og Als-gjaldið hækkað við 3,1 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur. Niðanfyri verður vístá tær kontur, har talan er um ávikavist meir- og minniútreiðslur.

Meirútreiðslur:

- Heilsusystrar 243 t.kr.

Minniútreiðslur:

- Røktarheim 260 t.kr.
- Eldrarøkt í Sandoynni 269 t.kr.
- Heimarøktin 1.345 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at *"sambært rakstrarfrágreiðing í september vísti Heimarøktin á eitt hall upp á 1,6 mió.kr. í 2003, um ikki tiltøk vórðu sett í verk fyri at tálma útreiðslunum. Útlitini vóru vánalig, og Heimarøktin og Serforsorgin vistu ikki, um eykajáttan fór at verða játtað, ella hvussu stór upphædd fór at verða játtað, so neyðugt gjørdist við tiltøkum fyri at tálma útreiðslunum. Økisleiðarar og røktarheimsleiðarar fingu boð um hetta, og avleiðingarnar vóru, at Heimarøktin fekk bíðilistar, og onnur tænasta varð skorin niður.*

Eykajáttanin varð ikki liðug viðgjørd og viðtikin fyrr enn í desember mánaði 2003, og eldraøkið, serliga Heimarøktin, varð tískil í umleið 4 mánaðir rikið við serliga hørðum niðurskurði í tænastum. Tá árið var um at verða liðugt, var ikki møguligt at seta nýtt virksemi í gongd."

12.21.7.01. Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 137,3 mió.kr. Minninýtslan er 6,4 mió.kr. netto.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 104,3 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2003 varð játtanin hækkað 13,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003, sum varð samtykt 20. desember 2003, varð útreiðslujáttanin hækkað 19,5 mió.kr. og inntøkujáttanin varð hækkað 6,1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum øktust útreiðslurnar til hjálparamboð o.a. í 2002 við um 30%, og framrokningar vístu, at vøksturin fór at verða tann sami í 2003 sum í 2002. Søkt varð um eykajáttan á heysti 2003, men endaliga úrslitið vísti, at vøksturin flánaði út teir síðstu 3 mánaðirnar í 2003.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

mió.kr.

Undirkonta	F-lóg	EYJ-lóg sept. 2003	EYJ-lóg des. 2003	Játtan	Roknskapur	Frávik
01. Fyribils hjálp § 9	12,2	-0,5	-2,3	9,4	10,8	+1,4
02. Varandi veiting § 13	2,4	-	-	2,4	2,0	-0,4
03. Stakútreiðslur § 15	2,3	1,3	-	3,6	3,1	-0,5
04. Meirútreiðslur brekað barn § 17	30,5	5,6	1,0	37,1	36,5	-0,6
05. Endurbúgving § 18	16,4	-1,2	1,0	16,2	15,4	-0,8
06. Hjálparamboð o.a. § 18	28,5	12,3	13,7	54,5	48,4	-6,1
07. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2	12,0	-4,0	-	8,0	8,6	+0,6
Tilsamans	**104,3**	**13,5**	**13,4**	**131,2**	**124,8**	**-6,4**

Á talvuni sæst, at høvuðsorsøkin til stóru eykajáttanirnar er, at útreiðslurnar á undirkontu 06. Hjálparamboð o.a. vórðu 20 mió.kr. hægri enn upprunaliga mett (28,5 mió.kr.)

Landsgrannskoðanin hevur spurt landsstýrismannin, hví útreiðslurnar á fíggjarlógini 2003 bara vórðu mettar til 28,5 mió.kr., ið er 2,6 mió.kr. minni enn játtanin í 2002, og 9 mió.kr. minni enn roknskapartølini fyri 2002. Á fíggjarlógini fyri 2002 var játtanin til hjálparamboð § 18 o.a. 31,1 mió.kr., og sambært landsroknskapinum 2002 var nýtslan 37,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin kunnaði í november 2004 um, at tá ið uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003 varð gjørt, varð metingin av útreiðslunum gjørd við grundarlagi í roknskapartølunum 2001 við einari framskriving 3,5%. Tá ið útreiðslurnar hækkaðu seinastu mánaðirnar í 2002, heitti landsstýrismaðurin á Fíggjarnevndina um at hækka uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 2003 við 4,6 mió.kr. til 33,1 mió.kr. Áheitanin var ikki gingin á møti, og Løgtingið játtaði 28,5 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina september 2003 stendur m.a.:

> *"Serliga á undirkontu 06, hjálparamboð v.m. § 18, eru munandi hægri útreiðslur enn tað, sum varð játtað fyri 2003. Hjálpartólamiðstøðin hevur lagt eyka orku í at fáa avgreitt mál skjótari, og ger hetta, at nógv fleiri hjálpartól verða veitt. Eisini sæst stórur vøkstur í útreiðslunum av hoyritólum og heilivági.*
>
> *Ábendingar eru um, at útreiðslurnar við núverandi gongd verða uppaftur størri, men landsstýrismaðurin ætlar sær at gera broytingar í praksis, reglugerðum, kunngerðum v.m. fyri at tálma vøkstrinum. Almannastovan og Almannamálaráðið arbeiða í løtuni við at seta í verk broytingar."*

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina desember 2003 stendur m.a.:

> *"Sum greitt frá áður, er tað serliga útreiðslur til heilivág og hoyritól, sum vaksa nógv, men eisini útreiðslur til avlamisakfør, koyristólar og onnur hjálpartól vaksa. Grundin er partvís prísvøkstur og vøkstur í talinum av viðskiftafólkum – alt eftir hvørji hjálpartól, talan er um. Partvíst er vøksturin eisini grundaður á, at Hjálpartólamiðstøðin hevur sett sær fyri, at avgreiðslutíðin skal minka. Hetta hevur havt við sær, at goymslan av hjálpartólum er vaksin.*
>
> *Almannamálaráðið arbeiðir í løtuni við at gera kunngerðir á økinum, men roknað verður ikki við, at kunngerðirnar náa at fáa ávirkan á útreiðslurnar í ár."*

Í september 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar kunngerðir talan er um.

Í november 2004 boðaði Landsstýrismaðurin frá, at talan var um kunngerðir um stuðul til

- heilivág,
- avlamisbilar, og
- hoyri- og sjóntól.

Landsstýrismaðurin væntar, at kunngerðirnar verða lidnar í 2005.

8.2 Almannastovan (GL 2004/2 07 1-5)

Í 2004 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Samanumtikið halda vit, at roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni eru væl skipað, men vit hava mælt til ábøtur á summum økjum:

- nøkur ferðaforskot vórðu ikki afturgoldin rættstundis,
- skuldarar, um 2,6 mió.kr. vegna ov nógv goldið út ella goldið út av órøttum, vóru ikki minkaðir,
- langtíðarleiga var ikki í tráð við ásetingarnar í játtanarskipanini,
- ognaryvirlitið var ikki dagført.

Roknskapardeildin á Almannastovuni umsitur lønarútgjaldingarnar til tey um 100 starvsfólkini á Almannastovuni og á Hjálpartólamiðstøðini. Harafturat umsitur roknskapardeildin eisini lønarútgjaldingarnar til um 130 stuðlar, ið brektoymið og barnaforsorgartoymið hava játtað. Vit mæltu til at lýsa í roknskaparreglugerðini, hvør kann:

- seta fólk í starv/loysa fólk úr starvi, áseta lønarflokk, flyta í hægri lønarflokk, geva lønarískoyti o.t.,
- áleggja yvirtíðararbeiði/meirarbeiði og tænastuferðir,
- góðkenna lønarútgjaldingarnar, arbeiðstíð, frítíð, sjúku, avspáking og møguligar lønarfrádráttir,

Í juli 2004 boðaði Almannastovan frá, at tey ætla at fremja tær ábøtur, vit hava mælt til.

8.3 EDV-viðurskifti á Almannastovuni (GL 2004/2 07 1-5)

1. januar 2000 varð VFS-skipanin á Almannastovuni tikin í nýtslu. Skipanin er ein journal-, málsviðgerðar-, útrokningar- og útgjaldsskipan, ið verður nýtt til at gjalda út fólkapensjón, fyritíðarpensjón, forsorgarveitingar, barnaforsorgarveitingar o.a. tilsamans umleið 750 mió.kr. um árið.

Í juli 2000 gjøgnumgingu vit skipanina við støði í FSR-grannskoðanarvegleiðing nr. 14, "Vejledning om revision i virksomheder, som anvender edb" og sendu landsstýrismanninum eina frágreiðing, ið vísti á, at EDV-viðurskiftini á Almannastovuni vóru ikki nóg trygg, og vit mæltu til, at ábøtur vórðu gjørdar.

Í september 2000 vísti landsstýrismaðurin til eina verkætlan, har lýst varð, hvussu ætlanin var at bøta um viðurskiftini. Vit hava síðani havt skrivligt samskifti við landsstýrismannin um, hvørji tiltøk eru sett í verk, og hvussu gongst við arbeiðinum.

Síðani 2000 eru reglur ásettar um KT-trygd í landsumsitingini, t.d. í :

- Roknskaparrundskrivinum, serliga í pkt. 8 og 10,
- Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum", serliga í § 31, stk. 3,
- K. nr. 28 frá 27. februar 2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum", ið neyvari greinar ítøkilig krøv til trygdartiltøk eftir § 31, stk. 3, í persónsupplýsingarlógini,
- EDV-trygdarpolitikki hjá Føroya Gjaldstovu, ið ásetir krøv til stovnar, ið samskifta við búskaparskipanir landsins,
- Rundskrivi um KT-trygd frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004, ið ásetir, at leiðslurnar innan 1. februar 2006 skulu lúka krøvini í trygdarstandardunum ISO 17799 og BS 7799-2.

Í januar/februar 2003 høvdu vit fundir við leiðsluna á Almannastovuni, og í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um støðuna í mun til tilmæli okkara í frágreiðingini frá juli 2000.

Í februar 2004 høvdu vit aftur fundir við leiðaran á EDV-deildini á Almannastovuni fyri at kunna okkum um støðuna.

Við skrivi 20. oktober 2004 heittu vit á landsstýrismannin um greiða okkum frá, hvat síðani er hent í málinum, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur. Í skrivi 3. desember 2004 greiddi landsstýrismaðurin frá, hvat er hent í teimum einstøku málunum.

Niðanfyri hava vit í stuttum greitt frá, hvussu støðan er í dag:

Funktiónsskilnaður á EDV-deildini

Í juli 2000 mæltu vit til at gera greiðar reglur fyri ábyrgd og heimild hjá starvsfólkunum á EDV-deildini.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 26. mars 2004 greiddu vit frá, at framvegis var eingin skrivlig lýsing gjørd av, hvørjar uppgávur á EDV-deildini ikki kunnu verða røktar av sama fólki.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, *"at í 2004 hevur stórt sæð bert eitt starvsfólk verið í EDV-deildini á Almannastovuni, og tí hevur talan ikki verið um funktiónsskilnað í mun til tað, ið áður var. Almannastovan søkir tó eftir einum starvsfólki afturat at byrja skjótast gjørligt.*

Almannastovan er í gongd við at "outsourca" umsitingina av skipanini til ein veitara uttan fyri Almannastovuna."

Vit vilja vísa á, at skrivlig lýsing av, hvørjar uppgávur á EDV-deildini ikki kunnu verða røktar av sama fólki, er framvegis ikki gjørd.

Førleiki á EDV-deildini

Í juli 2000 mæltu vit til, at hóskandi útbúgving varð bjóðað starvsfólkunum á EDV-deildini, serliga til at umsita brúkarar og at logga. Eingin skrivlig lýsing sigur, hvønn førleika EDV-starvsfólk á Almannastovuni skulu hava.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan er í ferð við at lata einum veitara skipanina at umsita, og harvið keypir Almannastovan tekniska vitan frá veitaranum. Starvsfólk á Almannastovuni taka skeið í KT-trygd og persónsdátalóg, umframt at arbeitt verður við serligari útbúgvingarætlan fyri KT-økið.

Eftirlit og reglur fyri at logga

Í juli 2000 mæltu vit til at bøta um eftirlitið við feilum og misnýtslu, herímillum at lýsa loggmøguleikar og áseta reglur fyri at logga.

Í januar 2003 greiddi almannastjórin frá, at ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvat skal verða loggað, hvør skal gjøgnumganga loggin, og hvussu loggurin skal verða viðgjørdur o.t.

Sambært § 14, stk. 2, í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" skal verða skrásett, roynir onkur óheimilað at nýta upplýsingarkervið.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan arbeiðir við at betra um nýtsluna av loggunum til VFS-skipanina. Tó verður loggurin fyrst og fremst nýttur, um illgruni er um brot á mannagongdir. Dagslistarnir eru broyttir, so teir fevna um broytingar í kontunummrum o.a.

Almannastovan arbeiðir við at menna eina ISMS-skipan (Information Security Management System) til at savna upplýsingar um eftirlitsfunktiónir.

Nýtt starvsfólk er sett á EDV-deildini at arbeiða við EDV-trygd fyri at kunna skjalprógva og seta í verk mannagongdir og betra um nýtsluna av loggum.

Framvegis eru skrivligar reglur ikki gjørdar um, hvussu loggar skulu verða nýttir.

Sáttmálaviðurskifti

Í juli 2000 mæltu vit til at allýsa tørvin á veitingum frá høvuðsveitaranum av EDV-tænastum, og síðani fáa sáttmálaviðurskiftini í rættlag. Almannastovan er heft at hesum veitara, bæði til at reka, menna og broyta skipanina.

Sáttmáli millum høvuðsveitaran og Almannastovuna varð skrivaður undir 13. mai 2003. Í høvuðsheitum er talan um sáttmála, ið veitarin hevur orðað.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sáttmálin í síni tíð varð sendur advokati til viðmerkingar, áðrenn hann varð skrivaður undir av almannastjóranum.

Broytingarmannagongd

Í juli 2000 mæltu vit til at gera reglur fyri, hvussu farast skal fram, verða broytingar gjørdar í skipanini. Reglurnar skulu tryggja, at broytingar fara fram undir skipaðum viðurskiftum, at skjalfesting verður útvegað, og at krøv verða sett til skjalfestingina.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, *"at Almannastovan 5. juli 2004 setti í gildi mannagongdir viðvíkjandi broytingum í VFS/Scanjour. Arbeitt verður við at fáa sett mannagongdirnar endaliga í verk í arbeiðsgongdunum á Almannastovuni."*

Javnan skifta atlát

Í juli 2000 mæltu vit til, at VFS-skipanin varð broytt, so hvør brúkari javnan skuldi skifta atlát. Høvuðsveitarin kunnaði um, at verandi skipan ikki kundi noyða fólk at skifta atlát.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, *"at 15. november 2004 varð VFS-skipanin broytt, soleiðis at brúkararnir javnan skulu skifta atlát í skipanini."*

Brúkararættindi/Funktiónsskilnaður

Í juli 2000 mæltu vit til at gera greiðar reglur fyri, hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin. Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 26. mars 2004 vístu vit m.a. á:

- *at* rættindini hjá starvsfólkunum í skipanini eru ikki lýst,
- *at* starvsfólk á økisdeildunum kunnu broyta útgjaldsupphæddir, ið aðrar deildir hava ábyrgdina av,
- *at* starvsfólk kunnu gjalda út pensjónir og aðrar veitingar, uttan at skipanin krevur, at annar persónur skal leysgeva gjaldið,
- *at* starvsfólk á økisdeildunum kunnu broyta inntøkuskrásetingarnar hjá pensjónistum, og soleiðis hækka ella lækka pensjónsveitingar,
- *at* starvsfólk á økisdeildunum kunnu broyta kontunummarið hjá øllum viðskiftafólkum.

M.a. vísandi til § 16, stk. 2, í roknskaparkunngerðini, um skilnað millum skrásetingina og gjaldingina, og til neyvari ásetingar í roknskaparrundskrivi, er eftir okkara tykki talan um sera grundleggjandi veikleikar í trygdini í VFS-skipanini og innanhýsis eftirlitinum á Almannastovuni.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at VFS-skipanin hevur fingið eitt nýtt trygdarmótul til at stýra atgongdum til skermmyndir/upplýsingar. Leiðreglur fyri brúkararættindi í VFS-skipanini eru gjørdar, og Almannastovan arbeiðir eisini við at gera eitt yvirlit yvir brúkararættindini í teimum skipanum, ið Almannastovan hevur atgongd til. Landsstýrismaðurin vísir á, *"at funktiónsskilnaður er millum inntøpping og leysgeving, tí deildarleiðari kannar og leysgevur tað, sum onnur hava tøppað inn."*

Vit vilja vísa á, at skipanin ikki tryggjar, at sami persónur ikki bæði kann skráseta og leysgeva gjaldingar. Skipanin krevur heldur ikki funktiónsskilnað í sambandi við broytingar í inntøkuskrásetingum og kontunummari. Reglur eru framvegis ikki gjørdar um, hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin, og bøtt er ikki um frammanfyri nevndu veikleikar.

Uttanhýsis samskiftislinjur

Eingin skrivlig lýsing er av uttanhýsis samskiftislinjunum. Í 2000 mæltu vit til at gjøgnumganga tær, fyri at tryggja Almannastovuna ímóti óynsktari atgongd.

Í januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at Almannastovan hevði ein Firewall, men eingi skrivlig krøv vóru til, hvussu brandmúrurin skuldi verða umsitin, og einki eftirlit var við samskiftinum.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at uttanhýsis samskiftið eisini fer um ein brandmúr hjá Landsapotekaranum, og at Almannastovan fær eina frágreiðing um samskiftið hvørja viku.

Almannastovan er í ferð við at skriva mannagongdir um regluligt eftirlit við teirra egna brandmúri. Ætlanin er, at eftirlitið skal vera ein liður í nýggju ISMS-skipanini, ið Almannastovan er farin at menna (Information Security Management System).

Fysisk trygd/Neyðætlan

Í juli 2000 mæltu vit til at hugsa um tørvin á fyribyrgjandi tiltøkum í maskinrúminum, og at meta um tørvin á einari neyðætlan.

Í januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at neyðætlan er gjørd. Vit fingu avrit av einum skjali, ið ber heitið "neyðætlan". Eftir okkara tykki, er talan um eitt sera leyst orðað upprit um, hvat kann verða gjørt, um teldurnar ikki virka. Vit halda ikki, at skjalið kann verða kallað neyðætlan. Arbeiðið at menna eina veruliga neyðætlan er ikki farið í gongd, og eingin skrivlig mannagongd er fyri, hvussu dátur skulu verða endurskaptar.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevur biðið fleiri veitarar um tilboð at hýsa høvuðsteldunum, og at fysiska EDV-trygdin verður betrað í hesum sambandi. Neyðætlanina umrøddi landsstýrismaðurin ikki.

Í mars 2005 hevur Almannastovan kunnað um, at ein rakstrarsáttmáli er gjørdur við P/F Elektron um at hýsa servarunum hjá Almannastovuni og um rakstraruppgávur í hesum sambandi.

Skjalfesta skipan og mannagongdir

Í juli 2000 mæltu vit til sum skjótast at greina krøvini til at skjalfesta skipan og mannagongdir, at savna og skipa skjalfestingina á Almannastovuni, og at gera reglur fyri at varðveita og dagføra hana.

Í januar 2003 greiddi almannastjórin frá, at ávíst tilfar er savnað á Almannastovuni, men einki yvirlit er yvir hesa skjalfesting, og ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvussu skjalfestingin skal verða skipað, varðveitt og dagført.

Í dag eru alsamt fleiri krøv til skipaðar skjalfestingar, vísandi til

- Pkt. 10 í roknskaparrundskrivinum,
- § 31, stk. 3, í Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum",
- § 16 í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum".
- Rundskriv um KT-trygd frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004, ið setir trygdarstandardirnir ISO 17799 og BS 7799-2 í gildi 1. februar 2005.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at 5. juli 2004 vórðu reglur ásettar um broytingar í VFS-skipanini, herímillum hvussu broytingarnar skulu verða skjalfestar. Harafturat arbeiðir Almannastovan við at skjalfesta verandi skipan.

Trygdaravrit

Í juli 2000 mæltu vit til at gera skrivligar reglur fyri mannagongdum í sambandi við trygdaravrit.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan í dag nýtir tríggjar skipanir, har back-up er neyðugt. Almannastovan hevur gjørt nýggjar leiðreglur fyri back-up mannagongdini. Mannagongdin er ikki sett í verk, men back-up bondini verða skift dagliga, og verður tað skjalfest.

EDV-politikkur/stevnumið

Í juli 2000 mæltu vit til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna orðaði ein EDV-politikk viðvíkjandi menning av lokalskipanum á stovnum undir ráðnum, herímillum eisini á Almannastovuni.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almanna- og Heilsumálaráðið ætlar at seta ein KT-leiðara, og ein av uppgávunum verður at orða ein yvirskipaðan KT-politikk fyri alt almanna- og heilsuøkið. Almannastovan hevur gjørt eina langtíðarætlan fyri menning av VFS-skipanini og ætlar at samstarva við Føroya Gjaldstova í tí sambandinum.

Sum í juli 2000 mæla vit til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Fíggjarmálaráðið-/Gjaldstovuna orðar ein EDV-politikk viðvíkjandi menning av lokalskipanum á stovnum undir ráðnum, herímillum eisini á Almannastovuni, áðrenn støða verður tikin til, um VFS-skipanin skal verða ment víðari.

Loyvi til egnar búskaparskipanir

VFS-skipanin varð ment í 1997-1999 og tikin í nýtslu 1. januar 2000, uttan at Almanna- og Heilsumálaráðið og Almannastovan fyrst søktu Fíggjarmálaráðið um loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini.

Í skrivi 20. juni 2003 vísir Gjaldstovan m.a. á, *"at tað er høpisleyst so nógv ár eftir at góðkenna nakað, tí úrslitið vildi verið eitt annað, um formliga varð rætt atborið.", "at trupulleikin í málinum er, at Almannastovan fyri fleiri árum síðani hevur gjørt og sett í verk eina skipan uttan at hava tikið Gjaldstovuna/Fíggjarmálaráðið við í málið", "at byrjað var á skeivum grundarlagi, og tí varð loysnin uttan iva ein onnur, um Almannastovan hevði fylgt ásetingunum í § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini".*

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fegnast um, at Almannastovan hevur tikið stig til samstarv við Gjaldstovuna um at menna VFS-skipanina, og hann hevur gjørt Almannastovuna varuga við, at menningin skal sampakka við skipanirnar á Gjaldstovuni.

Niðurstøða

Eftir at vit í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar síðani mars 2001 hava skrivað um EDV-viðurskifti á Almannastovuni og VFS-skipanina, halda vit samanumtikið, at bøtt er um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum eru framvegis ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælum okkara frá juli 2000.

Sum áður vilja vit vísa á, at tað er lítið sannlíkt, at Almannastovan lýkur øll krøvini í § 31, stk. 3, í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerðini um trygdartiltøk.

1. februar 2005 hevur Vinnumálaráðið sett í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 byggir á ISO 17799 og BS 7799-2 standardirnar, og at leiðslurnar hava sett í verk teir partar av ISO 17799 trygdarstandardinum, sum teir sambært ítøkiligari váðameting skulu lúka. Tí er neyðugt, at Almannastovan straks fer undir eina skipaða tilgongd.

Í desember 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fegnast um, at Almannastovan hevur bøtt um fleiri viðurskifti, og *"viðvíkjandi reglunum um viðgerð av persónsupplýsingum, skal*

vísast á, at avgjørt er at miðsavna uppgávurnar undir KT-fyrisitingini í Vinnumálaráðnum, og peningur er settur av til endamálið".

Landsstýrismaðurin má hava misskilt uppgávurnar hjá KT-fyrisitingini í Vinnumálaráðnum, sum eru at áseta politikk, mannagongdir og reglur, umframt at ráðgeva stovnum um nýtsluna av KT, og ikki at fremja trygdartiltøk á hvørjum stovni, samsvarandi lógini um persónsupplýsingar. Hvør stovnsleiðari hevur framvegis ábyrgdina av kunningartøknini og persónsupplýsingunum á sínum stovni, og landsstýrismaðurin hevur framvegis ábyrgdina av sínum málsøki mótvegis Løgtinginum.

8.4 Barnapeningur veittur í forskoti (GL 2000/2 07 2-5)

Vit hava síðani februar 2002 í frágreiðingum greitt frá, at tørvur var á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Vit hava m.a. vístá:

- *at* brævaskiftið verður ikki journaliserað,
- *at* journaluppritabløð, har greitt verður frá gongdini í málinum, ikki verða nýtt,
- *at* málsviðgerin kannar útrokningina og rættar, er okkurt skeivt, men viðgerðin verður ikki váttað við átekning á útskriftina, sum í flestu førum heldur ikki verður goymd,
- *at* tað er sama fólkið, sum ger alt arbeiðið,
- *at* mannagongdin krevur nógva arbeiðsorku og kundi verið gjørd einfaldari,
- *at* broytingarnar í eftirstøðunum ikki samsvaraðu við munin ímillum afturrindan og forskotsrindan,
- *at* barnapeningur verður ikki heintaður inn uttanfyri Norðurlond, hóast tað sambært konventiónum kann lata seg gera,
- *at* barnapeningur ongantíð er eftirgivin,
- *at* fylgt verður ikki við, um krøv fyrnast,
- *at* ein frágreiðing frá 1996 frá "Kommunedata" um mannagongdirnar á Almannastovuni og á Føroya Gjaldstovu mælti til, at útgjalding og innheintan av barnapeningi varð samlað á einum stað, og mælti eisini til at samskipa dátumannagongdirnar í EDV-skipanunum, fyri at forða fyri dupultarbeiði,
- *at* landsstýrismaðurin í mars 2004 boðaði frá, at hann umhugsar at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið um møguliga at broyta lóggávuna "um útgjald og innheintan av barnapeningi" og skipanina viðvíkjandi stuðli til uppihaldspening við tí fyri eyga at lætta um umsitingina av tí parti av fyrisitingini, sum føroyskir myndugleikar varða av,
- *at* landsstýrismaðurin í mars 2004 boðaði frá, at umsitingin av hesum øki á Almannastovuni var ikki nøktandi, og at hann fór at taka málið upp við Almannastovuna í næstum.

Í oktober 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat eftirsíðan var hent í málinum, men vit fingu einki svar.

8.5 Stuðul til umsorganararbeiði fyri pensjónistar (GL 2002/2 07 2-7)

Vit hava í 2004 grannskoðað stuðul, sum í 2003 er veittur til umsorganararbeiði fyri pensjónistar.

Ógreitt lógargrundarlag

Stuðul til umsorganararbeiði verður veittur við heimild í Ll. nr. 48/1999 "um almannapensjónir o.a." við seinni broytingum § 12, stk. 1-4, fevnir um persónliga viðbót til pensjónistar, sum hava serliga trupul kor. Í stk. 5 er ásett: *"Stuðul kann harumframt veitast til umsorganararbeiði fyri pensjónistar."*

Í viðmerkingunum til almannapensjónslógina er einki nevnt um, hvat "umsorganararbeiði" fevnir um, til hvønn og til hvat stuðul kann verða veittur, og hvussu nógvur stuðul kann verða latin. Sambært § 12, stk. 6, ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur fyri stuðli til umsorganararbeiði eftir stk. 5. Hóast lógin áleggur landsstýrismanninum at gera reglur, eru ongar ásettar.

Stuðulin er í 2003 játtaður á løgtingsfíggjarlógini á egnari høvuðskontu, sum lógarbundin játtan. Viðmerkingarnar til kontuna eru í stóran mun ein samandráttur av K. nr. 49/1994 "um umsorganararbeiði fyri pensjónistar", sum varð ásett við heimild í gomlu pensjónslógini, ið fór úr gildi 1. januar 2000.

Í september 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at gera eitt uppskot um stuðulslóg til umsorganararbeiði. Hann fór tí ikki undir at gera neyvari reglur sambært § 12, stk. 5, í almannapensjónslógini.

A løgtingsfíggjarlógini 2005 er játtanarslagið broytt til "onnur játtan".

Krøv til roknskap, grannskoðan o.a.

Í oktober 2002 spurdu vit Almannastovuna, hvørji krøv verða sett stovnum og felagsskapum, ið skulu lata Almannastovuni roknskap, t.d. krøv um bókhald, fíggjarætlan, roknskaparuppseting, hagtøl/virksemisyvirlit, grannskoðan, o.a. Almannastovan vísti tá á umfarsskriv sítt frá 1. november 1994. Vit gjørdu vart við, at skrivið fevnir ikki um umsorganararbeiði, men um grannskoðan av dagrøktarskipanum og dag- og samdøgursstovnum fyri børn og ung, umframt grannskoðan av ellis-, vistar-, frítíðar- og umlættingarheimum.

Vanliga er eitt rundskriv frá hægri myndugleika til lægri. Er ætlanin at áseta neyvari ella avmarkandi reglur mótvegis triðjamanni, krevst vanliga lógarheimild, og verða neyvari reglur tá at áseta í kunngerð.

Í september 2003 ásannaði landsstýrismaðurin, at tørvur er á reglum mótvegis triðjamanni, og hann helt, at reglur fyri stuðulsumsitingina skulu verða ásettar í serligari stuðulslóg.

Stuðulsmóttakarar

Niðanfyri hava vit sett upp, hvørji endamál stuðul varð latin til í 2003:

	kr.
Dagtilhald, frítíðarklubbar o.t.	3.474.868
Mattænastu	682.051
Koyritænastu	203.279
Føroya Deyvafelag	285.000
Ljóðbókanevndin M.B.F	150.000
Føroya Blindastovnur (afturgoldið stuðul)	÷ 219.000
Tilsamans	**4.576.198**

Viðmerkingar

Vit hava kannað útgjaldingarnar í 2003 og staðfestu, at stuðulin er latin til endamál samsvarandi viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina. Samanumtikið halda vit, at mannagongd og málsviðgerð er hóskandi og góð eftir umstøðunum.

Tó halda vit, at lógargrundarlagið er ikki nóg greitt, og tørvur er á at bøta um stuðulsgrundarlag/-lóggávu, so endamál, treytir, heimildir o.a. verða greiðari.

24. februar 2005 legði landsstýrismaðurin fram uppskot til løgtingslóg um stuðul til umsorganararbeiði.

8.6 Viðbót til ávísar pensjónistar (GL 2003/2 07 2-8)

Vit hava í november 2004 grannskoðað umsitingina av "viðbót til ávísar pensjónistar" á Almannastovuni.

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 35 frá 16. apríl 1997 við seinni broytingum "um viðbót til ávísar pensjónistar".

Sambært K. nr. 127 frá 15. desember 2003 "um áseting og javning av almannaveitingum" er árliga viðbótin til ávísar pensjónistar kr. 4.944 í 2004

Umsiting/innaneftirlit

Vit kannaðu mannagongdina og mæltu til fleiri ábøtur:

- *at* mannagongdin, tá viðbótin verður goldin út, verður lýst skrivliga,
- *at* áseta reglur um eftirlit, sum skulu tryggja, at allir nýggir pensjónistar verða skrásettir, og at allar fráboðanir um broyttar inntøkuupplýsingar verða skrásettar, og hvussu úrslitið skal verða skjalprógvað,
- *at* gera skrivligar reglur um, hvussu dagslistarnir skulu verða kannaðir, og hvussu úrslitið skal verða skjalprógvað,
- *at* við stakroyndum kanna rættleikan av útgjaldingum,
- *at* gera skrivligar reglur um, hvussu ein slík kanning skal fara fram, og hvussu úrslitið skal verða skjalprógvað.

Í mars 2005 hevur Almannastovan boðað frá, at tey ætla at fremja tær ábøtur, sum vit hava mælt til.

Einstakar veitingar

Sambært § 2 verður viðbótin goldin út ávikavist 1. apríl, 1. juli og 1. desember. Sambært § 3 *"er treytin fyri at fáa viðbótina, at stakur pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn kr. 60.000,-, og at giftur pensjónistur, saman við hjúnafelaga, ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn kr. 80.000,-. Til grund fyri veitan av viðbótini verður løgd inntøkan, sum liggur til grund fyri pensjónsútrokningini útgjaldingardagin."*

Vit kannaðu 5 útgjaldingar í desember 2004, og tær vóru sambært ásetingunum í Ll. nr. 35/1997.

Eftirrokning, eftir-/afturgjald

Í Ll. nr. 35/1997 eru ongar ásetingar um eftirrokning, og eftir/-afturgjald. Almannastovan hevur í november 2004 kunnað um, at í sambandi við árligu eftirrokningina av almanna-pensjónum verður kannað, um inntøkugrundarlagið hevur verið rætt, tá viðbótin varð goldin út. Síðani verður roknað eftir, um pensjónistur hevur fingið ov lítið ella ov nógv goldið í "viðbót til ávísar pensjónistar", og pensjónisturin fær boð um aftur- ella eftirgjald.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivasamt, um heimild er at krevja pening aftur, tá eingin lógaráseting er. Í januar 2005 mæltu vit landsstýrismanninum til at gera greiðar lógar-ásetingar, um so er, at afturgjald skal fara fram.

Í februar 2005 ásannaði landsstýrismaðurin, at rætturin at krevja pening aftur kann verða ivasamur, tá talan er um ikki lógarásettar reglur. Høvuðsreglan er tá, at móttakarin skal hava verið illvarin um rætt sína til veitingina.

8.7 Avlamisveiting (GL 2003/2 07 2-8)

Vit hava í 2004 grannskoðað umsitingina av avlamisveitingum á Almannastovuni.

Sambært K. nr. 127 frá 15. desember 2003 "um áseting og javning av almannaveitingum" er avlamisveitingin 26.256 kr. í 2004. Um 90 fólk fáa avlamisveiting.

Sambært § 8 a í Ll. nr. 48 frá 10 mai 1999 "um almannapensjónir o.a." við seinni broytingum kann Vanlukkutryggingarráðið tilluta persónum millum 18 og 67 ár avlamisveiting, um teir lúka læknaligu krøvini til hægstu ella miðal fyritíðarpensjón, men ikki fáa pensjón tí teir hava ov stóra inntøku.

Harumframt kunnu fólk, sum vegna álvarsamar hoyriskaðar hava stórar samskiftistrupulleikar, fáa avlamisveiting.

Vit valdu tilvildarliga 10 mál og kannaðu, um:

- mannagongd og málsviðgerð var hóskandi og trygg,
- eitt fullfíggjað journaluppritsblað fanst, har greitt varð frá gongdini í málinum o.a.,
- dokumentatiónin var í lagi, t.v.s. at rætt fylt út umsóknarblað fanst,
- og játtan frá Vanlukkutryggingarráðnum fanst.

Vit høvdu einki at viðmerkja um hesi viðurskifti.

8.8 Almannapensjónir (GL 2004/2 07 2 -8)

Ógreitt lógargrundarlag

Longu í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í juli 2000 gjørdu vit vart við, at í fleiri førum er ógreitt, hvussu ásetingarnar í §§ 21-23 í almannapensjónslógini (Ll. nr. 48/1999) skulu verða tulkaðar, og er tað serliga § 21, ið hevur sera stóran umsitingarligan og fíggjarligan týdning fyri pensjónistin.

Í juli 2000 heittu vit á landsstýrismannin um at taka neyðug stig til at greiða viðurskiftini, og eisini umhugsa at endurskoða lóggávuna, so tað greitt gekk fram av lóg og viðmerkingum, hvat tað var, Løgtingið hevði samtykt.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 1999 (Lm. nr. 62-8/2000) heittu løgtingsgrannskoðararnir í mars 2001 á landsstýrismannin um at greiða ivaspurningarnar um at inntøkujavna og umrokna almannapensjónir.

Í juli 2002 vísti Kærustovnurin í skrivi til Almannamálaráðið á, at økið er í so ógreitt lógarregulerað. Kærustovnurin helt tað vera so mong ivamál, at antin eigur lógarásetingin at verða endurskoðað, ella eigur kunngerð/vegleiðing at verða gjørd um, hvussu ein eftirrokning skal fara fram, úr enda í annan.

Í august 2002 komu vit fram á, at Almannastovan helt seg hava so stórar trupulleikar av at umsita § 21 í pensjónslógini, at partar av hesum arbeiði varð ikki gjørt í 2002, hóast tað í § 21, stk. 6, er ásett, at pensjónin skal verða eftirroknað, tá ið inntøkan er álíknað.

Í september 2002 mæltu vit landsstýrismanninum til at kunna seg neyvari um málið og at boða frá, hvørji stig hann fór at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Almannastovuni vóru 154 mál um eftirrokning og afturgjald viðvíkjandi 2001. Almannastovan var í januar 2003 farin í holt við at senda skriv um eftirrokningarnar sambært § 21, stk. 6.

Í februar 2004 greiddi Almannastovan landsstýrismanninum frá, at Almannastovan als ikki var samd í seinastu avgerðunum hjá Kærunevndini viðvíkjandi eftirrokning av pensjónum.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið og Almannastovan høvdu havt fund um málið. Niðurstøðan var, at Almannastovan altíð skal fylgja avgerðum hjá Kærustovninum. Almanna- og Heilsumálaráðið fór at taka stig til broyta § 21, og fór helst at mæla til at strika eftirrokningina sambært § 21, stk. 5 og 6.

Í mars 2004 sigur Føroya Kærustovnur í skrivi til landsstýrismannin m.a. *"at tað vísir seg, at so hvørt sum eitt nýtt mál av hesum slagi kemur fyri í nevndini, koma nýggir trupulleikar til sjóndar, sum ikki kunnu svarast beinleiðis út frá lóg ella viðmerkingunum. Hesin mangulin uppá reglur ger, at Kærunevndin ofta má út í nýggjar truplar tulkingar á økinum, har tað kanska hevði verið betri hóskandi við eini politiskari støðutakan, sum var givin antin við lóg, kunngerð ella vegleiðing."*

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003) heittu løgtingsgrannskoðararnir í apríl 2004 aftur á landsstýrismannin um at tryggja, at nógvu ivaspurningarnir í hesum máli verða greiddir sum skjótast.

Í februar 2005 heitti Almannastovan á Almanna- og Heilsumálaráðið um at broyta almannapensjónslógina, soleiðis at reglurnar viðvíkjandi um- og eftirrokning verða eintýðugar.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann meginpartin av 2004 hevur arbeitt við einari lógarbroyting av §§ 21-23 í almannapensjónslógini. Av tí at neyðugt verður at kanna nøkur viðurskifti nærri, eru broytingarnar ikki tiknar við í uppskotinum til broyting til løgtingslóg um almannapensjónir, ið landsstýrismaðurin hevur lagt fyri tingið 23. februar 2005. Arbeiðið við at betra um §§ 21-23 er ikki slept. Landsstýrismaðurin arbeiðir víðari við málinum.

Eftirrokning av pensjónum

Í februar 2005 hava vit á fundi við Almannastovuna m.a. kunnað okkum um, hvussu støðan er í dag. Sambært Almannastovuni eru framvegis mong ivamál viðv. umrokning, eftirrokning og uppgerð av krøvum um ov nógv útgoldna pensjón. Sambært Almannastovuni eru tað áhaldandi broytingarnar í uppgerðarháttinum hjá Kærunevndini, sum hava ørkymlað.

Eitt av ivamálunum er framvegis, nær pensjónin skal lækka vegna ov stóra inntøku. Í 2002 kundi t.d. ein giftur pensjónistur, ið fekk miðal fyritíðarpensjón, hava upp til kr. 66.800 í inntøku, áðrenn viðbót og grundupphædd lækkaðu. Er inntøkan hægri, minka viðbót og grundupphædd, og tá inntøkan er 160 t.kr. verður als eingin pensjón útgoldin.

Í einum máli hevði pensjónistur í 2002 fingið útgoldið uml. 25 t.kr. í pensjón, tí hann í árinum hevði staðið skrásettur í pensjónsskipanini á Almannastovuni við einari væntaðari ársinntøku 100 t.kr. Ársinntøkan var ov lágt sett. Veruliga ársinntøkan var 174 t.kr. Eftirsum veruliga ársinntøkan var hægri enn árliga inntøkumarkið 160 t.kr., átti pensjónisturin als ikki at hava fingið pensjón.

Í § 21, stk. 5, er ásett, at pensjónin *"verður eftirroknað eftir inntøkuni viðkomandi ár, tá inntøkan er álíknað."* Varð inntøkan eftirroknað fyri alt árið undir einum, skuldi Almannastovan sett fram krav um, at pensjónisturin skuldi rinda 25 t.kr. aftur. Almannastovan hevði sent pensjónistinum krav í juni 2004 um at gjalda 14 t.kr. aftur. Almannastovan hevði einans eftirroknað pensjónina frá juni 2002, tá inntøkan fór upp um kr. 66.800. Almannastovan helt, at hesin útrokningarháttur var í tráð við áður tiknar avgerðir frá 2003 hjá Kærunevndini.

Í november 2004 vísti Kærunevndin á, at skrásetta væntaða inntøkan í 2002 var 100 t.kr., og at pensjónisturin ikki fór uppum hetta markið fyrr enn í september 2002, tá pensjónisturin boðaði frá, at inntøkan væntandi fór at verða 160 t.kr. Sambært Kærunevndini er pensjónin røtt, so leingi inntøkan er undir skrásettu inntøkuni hjá Almannastovuni, og tí er tað einans pensjónin fyri september – desember 2002, uml. 6.000 kr., ið skal gjaldast aftur.

Í februar 2005 kunnaði Almannastovan okkum um, at tey bert viðgjørdu mál, ið vóru kærd, eftir nýggja eftirrokningarháttinum, tí tey hava ikki orku til at eftirrokna pensjónirnar einaferð aftrat.

Vanliga føra avgerðir um at broyta siðvenju við sær, at myndugleikin hevur skyldu til at endurskoða øll samsvarandi mál. Vit vilja vísa á, at um hetta ikki verður gjørt, er vandi fyri, at allir pensjónistar ikki verða viðgjørdar eins, og rættartrygdin er harvið í vanda.

Afturgjald vegna ikki hildna upplýsingarskyldu (§ 23)

Sambært § 22 hava pensjónistar skyldu at boða Almannastovuni frá broytingum, sum kunnu hava við sær, at veiting skal verða lækkað ella fella burtur. Verður upplýsingarskyldan ikki hildin, ella hevur pensjónisturin móti betri vitan av órøttum fingið veiting, skal hann ella deyðsbúgv hansara sambært § 23 gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at tað tykist, sum at Kærunevndin hevur broytt siðvenju í mun til avgerðir sambært gomlu pensjónslógini. Nú tykist tað ikki vera nóg mikið, at pensjónisturin ikki hevur hildið upplýsingarskylduna sambært § 22. Almannastovan hevur sambært Kærunevndini *"prógvbyrðuna fyri, at pensjónistur hevur verið illvarin um rætt sín til útgoldna pensjón."*

Sambært § 20 verður pensjónin roknað eftir inntøkuni seinasta álíknaða inntøkuár. Eftir áheitan fær Almannastovan upplýsingar frá Elektron/Toll- og Skattstovu Føroya um álíknaðar inntøkur undanfarna ár. Í februar 2005 kunnaði Almannastovan um, at tey ætla ikki longur at skriva út munarlistan, ið vísir munin millum inntøkuupplýsingarnar, pensjónin varð roknað eftir, og tær veruligu endaligu inntøkurnar sambært Toll- og Skattstovu Føroya. Almannastovan ætlar ikki longur at kanna, um pensjónistar hava fingið ov nógva pensjón útgoldna, tí teir ikki hava boðað frá inntøkuhækkingum í árinum, og harvið ikki hildið upplýsingarskylduna sambært § 22.

Biður pensjónistur í framtíðini um at fáa hægri pensjón, tí inntøkan er minkað í mun til seinast álíknaðu inntøkuna, og tað í tí sambandinum vísur seg, at hann ikki hevur boðað frá einari hægri inntøku undanfarna ár, ætlar Almannastovan at seta fram krav um afturgjald fyri undanfarna ár sambært §§ 22 – 23.

Avrundan av inntøkugrundarlagi (§ 20, stk. 6)

Sambært § 20, stk. 6, verður inntøka rundað av niðureftir til næstu upphædd, ið kann verða býtt við 100. Í seinastu frágreiðing okkara vístu vit á, at inntøkan verður ikki rundað av, tá ið pensjónir verða roknaðar út. Talan er ikki um stórar upphæddir hjá pensjónistinum, men tað verður ikki umsitið sambært lógini.

Í februar 2005 kunnaði Almannastovan um, at einki er hent á hesum økinum.

Árliga pensjónsásetanin (§ 21, stk. 1)

Eftir áheitan fær Almannastovan upplýsingar frá Toll- og Skattstovu Føroya um álíknaðar inntøkur undanfarna ár. Vanliga verða upplýsingar lisnar inn uml. 1. apríl og síðani tríggjar ferðir afturat seinni á árinum, fyri at fáa inntøkur við, sum verða álíknaðar seinni, t.d. B-inntøkur. Út frá hesum upplýsingum um inntøkugrundarlagið, sum er skattskylduga inntøkan við ávísum frávikum eftir § 20, verður pensjónin ásett frá komandi mánaði.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Almannastovan framvegis ikki hevur nakra skrivliga lýsing av inntøkuupplýsingunum frá Toll- og Skattstovu Føroya. Ongar skrivligar reglur eru fyri mannagongdini í sambandi við innlesing av inntøkum, nær og hvussu ofta lisið verður inn, og hvussu arbeiðið skal verða skjalprógvað.

Í februar 2005 kunnaði Almannastovan um, at enn er eingin skrivliga mannagongd, men arbeitt verður við málinum. Almannastovan kunnaði eisini um, at inntøkuinnlesingarnar í 2004 vóru ikki skjalprógvaðar, men ætlanin er at gera hetta í framtíðini.

Serlig persónlig viðbót

Ein serlig persónlig viðbót ("skiftisupphæddin") er ásett sambært § 7, stk. 2, í Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum".

Vit hava víst á, at eftir okkara tykki átti "skiftisupphæddin" til fyritíðarpensjónistar 1. januar 2002 at verið 732 kr. ístaðin fyri 856 kr., og í 2003 kr. 585 ístaðin fyri kr. 856.

Í februar 2004 boðaði Almannastovan frá, at hon er samd við okkum, og broytti upphæddina frá 1. juni 2004. Onkur pensjónistur hevði kært avgerðina til Kærunevndina í almannamálum, sum í januar 2005 staðfesti avgerðina hjá Almannastovuni.

Innanhýsis leiðbeiningar

Vit hava áður vístá, at Almannastovan hevði ongar innanhýsis leiðbeiningar um:

- inntøkugrundarlag fyri almannapensjónir
- fyrstu pensjónsútrokningina
- árliga ásetan av almannapensjónum
- inntøkubroytingar í árinum – umrokning av almannapensjónum
- eftirrokning av broyttum og nýggjum almannapensjónum
- fráboðanarskyldu – inntøkuhækking

Í juni 2004 fingu vit frá leiðsluskrivstovuni á Almannastovuni avrit av leiðbeiningunum um hesi viðurskifti.

Dagslistar

Vit hava áður vístá, at ongar skrivligar reglur vóru formliga settar í gildi um, hvussu dagslistarnir skulu verða kannaðir og varðveittir. Dagslistarnir fevndu ikki um broytingar í kontunummari og inntøkum hjá pensjónistum, og tískil var einki eftirlit við hesum viðurskiftum.

Í februar 2005 kunnaði Almannastovan um:

at eitt uppskot til reglugerð er gjørt um, hvussu dagslistar generelt skulu verða nýttir á Almannastovuni,

at dagslistarnir eru broyttir, so teir eisini fevna um kontunummar og inntøkuskrásetingar,

at fulltrúin á Veitingardeildini hevur eftirlit við dagslistunum,

at deildarleiðarin á Veitingardeildini hevur listarnar í varðveitslu

8.9 Persónlig viðbót til pensjónistar (GL 2004/2 07 2 -8)

Lógargrundarlag o.a.

Sambært § 12 í almannapensjónslógini kann persónlig viðbót verða veitt pensjónistum, ið hava serliga trupul kor.

Í K. nr. 8 frá 11. februar 2000 "um persónliga viðbót sambært almannapensjónslógini" ásetti landsstýrismaðurin neyvari reglur. Kunngerðin fór úr gildi 14. mai 2004, tá K. nr. 19 frá 14. mai 2004 "um persónliga viðbót sambært almannapensjónslógini" varð sett í gildi.

Ognar- og inntøkumark

Í K. nr. 8/2000 var ásett, at persónlig viðbót kundi bert verða veitt pensjónistum, um so var, at pensjónisturin ikki átti størri peningaupphæddir enn 10.000 kr. fyri støk ella 15.000 kr. tilsamans fyri hjún.

Harumframt var ásett, at treytin fyri, at fólkapensjónistar kundu fáa fulla persónliga viðbót, var, at ársinntøkan ikki fór upp um 90.356 kr. fyri støk og 127.784 kr. tilsamans fyri hjún. Treytin fyri, at fyritíðarpensjónistar kundu fáa persónliga viðbót, var, at ársinntøkan ikki fór upp um 159.568 kr. fyri støk og 227.032 kr. tilsamans fyri hjún.

Eftir okkara tykki var ikki heimild at áseta hesi ognar- og inntøkumørk í K. nr. 8/2000, tí talan verður tá um "skøn under regel".

Í K. nr. 19/2004 eru ognar- og inntøkumørkini tikin burtur. Nú er ásett, at persónlig viðbót kann verða veitt í tann mun, at ein ítøkilig tørvsmeting vísir, at pensjónisturin ikki er førur fyri at bera útreiðsluna.

Í fleiri førum hevur Almannastovan sýtt umsøkjarum persónliga viðbót vísandi til ognar- og inntøkumørkini í K. nr. 8/2000.

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin, í hvønn mun sýttar umsóknir eiga at verða tiknar upp til nýggja viðgerð eftir ásetingunum í K. nr. 19/2004.

Innanhýsis leiðbeiningarnar

Almannastovan nýtir í síni málsviðgerð innanhýsis leiðbeiningar frá 2002. Í einari leiðbeining er t.d. ásett, at stuðul til brillustell kann í mesta lagi verða kr. 800. Hevur Almannastovan ítøkiliga mett, at ein pensjónistur hevur serliga trupul fíggjarlig kor, og hevur rætt til fullan stuðul til brillur, verður nevnda upphædd veitt, uttan mun til hvat eitt brillustell kostar.

Í kærunevndaravgerð í juni 2003 heldur Kærunevndin, at *"tá talan er um persónliga viðbót, og um kostnaðurin fyri brillustellið annars er rímiligur, eigur allur kostnaðurin at verða játtaður, og ikki ein standardupphædd."* Sambært Kærunevndini eigur Almannastovan ikki at avmarka stuðulin uttan frammanundan at hava kannað hjá optikaranum, um tað eru nakrar serligar orsøkir til, at viðkomandi hevur fingið tað valda brillustellið, ella um eitt annað bíligari brillustell eins væl kann nýtast.

Undir grannskoðan okkara hava vit staðfest, at Almannastovan framhaldandi bert veitir kr. 800 fyri brillustell, hóast kostnaðurin er hægri.

Í innanhýsis leiðbeiningunum eru eisini ásettar hámarksupphæddir fyri t.d. komfýr, vaskimaskinu, kuldaskáp og ketil. Almannastovan er samd við okkum í, at við standarduppphæddum er talan um *"skøn under regel"*. Almannastovan boðaði í oktober 2004 frá, at leiðsluskrivstovan er í ferð við at orða nýggjar leiðbeiningar. Standarduppphæddirnar skulu nýtast vegleiðandi, men ikki sum ein standard hámarks upphædd.

Útreiðslur til uppihald

Sambært § 4, stk. 2, í K. nr. 19/2004 *"verður sum nøktandi upphædd til útreiðslur til mat, klæði og tílíkt nýtt ein grundupphædd, ið svarar til grundupphæddina til fólkapensjón."*

Grundupphæddin til fólkapensjón verður ikki javnað, sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" við seinni broytingum. Upphæddin til uppihaldsútreiðslur er tí ikki hækkað í sambandi við prísvøkstur o.a. síðani 1. februar 1999

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin um, henda avleiðing er tilætlað.

8.10 Samdøgursstovnurin Rókin (GL 2000/2 07 3-5)

Lógargrundarlag

Rókin er settur á stovn sambært § 32, stk. 1, í barnaforsorgarlógini. Sambært § 32, stk. 2, *"ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um virksemið á slíkum stovnum v.m."* Hesar reglur eru ásettar í §§ 13-17 í K. nr. 62 frá 1. apríl 1993 "um dagstovnar, dagrøkt og samdøgursstovnar fyri børn og ung."

Sambært kunngerðini er Almannastovan eftirlitsmyndugleiki. Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar í almannaverkinum tók Almannamálaráðið 1. juli 1998 yvir eftirlitið. Kunngerðin er ikki broytt, og hon er sostatt at kalla meira villleiðandi enn vegleiðandi.

Í september 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið í rúma tíð hevði arbeitt við at gera eina nýggja barnaverndarlóg, sum eftir ætlanin skuldi fáa gildi 1. januar 2004. Í tí sambandinum skulu neyvari reglur verða ásettar í kunngerð, millum annað reglur um virksemið hjá samdøgursstovnum. Almannamálaráðið helt, at kunngerðir við heimild í

galdandi barnaforsorgarlóg ikki skuldu broytast, fyrr enn støða var tikin til nýggja barnaverndarlóg. Landsstýrismaðurin legði afturat, at varð uppskotið til nýggja barnaverndarlóg ikki samtykt, var neyðugt at K. nr. 62/1993 varð broytt og dagførd.

Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at uppskot til nýggja barnaverndarlóg varð lagt fyri tingið á heysti 2004. Landsstýrismaðurin hevur ta áskoðan, at reglurnar fyri samdøgursstovnin "Rókin" skulu javnførast sambært nýggjari lóggávu, og hann hevur tí bíðað eftir nýggju barnaverndarlógini.

Løgtingið hevur 4. mars 2005 samtykt uppskot til løgtingslóg um barnavernd.

Lummapeningur

Sambært leiðaranum rindar stovnurin børnunum lummapening. Vit hava fingið avrit av teimum satsum, goldið verður út eftir. Talan er helst um danskar satsir frá mitt í 90-árunum. Eingin heimild er í barnaforsorgarlógini at áseta gjald ella at rinda børnum á samdøgursstovnum lummapening.

Í juni 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at áseta neyvari reglur um lummapening í kunngerð, tá ið lógaruppskotið um barnavernd væntandi fór at koma í gildi 1. januar 2004.

Í januar 2005 vísti landsstýrismaðurin enn einaferð á, at hesi viðurskifti fara at koma í rættlag, tá ein nýggj barnaverndarlóg kemur í gildi. Landsstýrismaðurin harmast um, at tað enn eru kunngerðir, sum ikki eru dagførdar samsvarandi bygnaðar- og lógarbroytingum. Sambært landsstýrismanninum koma hesi viðurskifti í rættlag, tá uppskotið til barnaverndarlóg verður samtykt.

Í § 33 í lógaruppskotinum stendur, at landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um virksemi á stovnum. Sambært viðmerkingunum fevnir greinin eisini um reglur um lummapening o.a.

8.11 Dagpeningaútreiðslur (GL 2000/2 07 3-6)

Vantandi kunngerðir

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at hóast tað í sjúkradagpeningalógini Ll. nr. 74/2001 "um dagpening vegna sjúku v.m." er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur sambært:

- § 2, stk. 2, um dagpening við lutvísum óarbeiðsføri,
- § 15, stk. 2, um sjálvbodnu tryggingina,
- § 21 um gjøld til sjálvbodnu tryggingina,
- § 24, stk. 2, um gjøldini fyri og innihaldið í læknaváttanunum.

vóru ongar reglur ásettar.

Landsstýrismaðurin hevur í K. nr. 9 frá 4. februar 2005 ásett reglur um skerdan dagpening vegna partvíst óarbeiðsføri sambært § 2, stk. 2.

Landsstýrismaðurin hevur í K. nr. 63 frá 16. september 2004 ásett reglur um sjálvbodna trygging og um gjøld til sjálvbodnu tryggingina sambært § 15, stk. 2, og § 21.

Í september 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at oyðubløð til læknaváttan 1. juni 2004 vórðu send til Almannastovuna og Kommunulæknafelagið til endaliga gjøgnumgongd, og fóru at verða tikin í nýtslu eftir avtalu millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Føroya Læknafelag.

Journalviðurskifti

Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at innkomin og útfarin postur á Dagpeningadeildini verður ikki journaliseraður.

Í september 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at síðani mars 2004 eru allar umsóknir, upprit og avgerðir skrásettar í journalskipanini. Játtanarskrivini verða tó ikki skrásett, so leingi sum avgreiðslan fer fram í gomlu EDV-skipanini.

EDV-skipanin

Almannastovan nýtir eina gamla EDV-skipan, ið er lagað til málsviðgerðina. Funktiónsskilnaður vantar í skipanini. Deildarleiðarin tekur sær av at áseta dagpeningahámark o.a. í skipanini. Málsviðgerin skrásetir sjálvur stamdátur, so sum p-tal, kontunummar o.a., og sami málsviðgeri tøppar inn útgjaldingartíðarskeið og inntøkugrundarlag.

Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið 2004 bað Almannastovan um, at Almannamálaráðið yvir 3 ár setti 10 mió.kr. av til EDV, m.a. fyri at dagpeningur kann verða lagdur yvir í VFS-skipanina.

Á løgtingsfíggjarlógunum fyri 2004 og 2005 er eingin peningur játtaður til EDV á Almannastovuni. Sambært álitinum frá Fíggjarnevndini 13. desember 2004 heldur nevndin, at landsstýrismaðurin eigur at gera eina heildarætlan fyri EDV-kervið á Almannastovuni, og síðani koma í Løgtingið við eini verklagslóg.

Á eykajáttanarlógini mars 2005 verður skotið upp at lata Almannastovuni eina eykajáttan 800 t.kr. til at tørvsmeta og kravfesta eina KT-heildarskipan fyri Almannastovuna. Ætlanin er síðani at leggja uppskot til eina verklagslóg fyri Løgtingið á heysti 2005.

Innaneftirlit

Um 1 mió.kr. verða goldnar út um vikuna. Einasta eftirlitið við teimum upplýsingum, ið verða skrásettir í dagpeningaskipanini, er, at fulltrúi á Almannastovuni hvørja viku kannar, um samlaðu útgjaldingarnar liggja um 1 mió.kr. Eftir okkara tykki er tað als ikki nøktandi.

Í september 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við at bøta um innaneftirlitið á dagpeningaøkinum í løtuni verður skipað á Veitingardeildini á Almannastovuni.

8.12 Ansingarsamsýning (GL 2002/2 07 3-7)

Vantandi kunngerð nú ásett

Sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 64 frá 5. juni 1984 "um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", sum broytt við Ll. nr. 52 frá 28. apríl 2000, *"setir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri, hvussu hendan lóg verður umsitin."*

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2003 umrøddu vit, at hóast liðin eru 20 ár, síðan lógin kom í gildi, og tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, hevur landsstýrismaðurin enn ongar reglur sett.

14. september 2004 kom í gildi K. nr. 58. frá 13. september 2004 "um umsiting av lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima".

Um at endurskoða lóggávuna

Í viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", sum varð løgd fyri tingið 4. mars 2000, varð Løgtingið kunnað um, at *"landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001."*

Í september 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði verið noyddur at raðfesta nøkur lógarøki fram um onnur, og lógin um ansingarsamsýning hevði ikki fremstu raðfesting, *"men í sambandi við, at eldraøkið verður lagt út til kommununar at umsita 1. januar 2005, verður øll lóggáva á eldraøkinum endurskoðað, harímillum eisini lógin um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima."*

Lógin er framvegis tann sama, og er okkum kunnugt ikki endurskoðað.

8.13 Forsorgarútreiðslur (GL 2003/2 07 3-9)

Forsorgarútreiðslur verða hildnar við heimild í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg jf. lovbekendtgørelse nr. 100/1988" við seinni broytingum. Eisini er talan um 15 kunngerðir.

Vit hava í 2004 grannskoðað samanlagt 49 forsorgarmál á Almannastovuni í Tórshavn, Runavík, Klaksvík og á Tvøroyri. Talan er um tilvildarliga vald mál, umboðandi allar deildir. Tó eru málini vald út, so tey fevna um ymisk sløg av veitingum og ymiskar málsviðgerar. Vit hava eisini kannað mál, har samlaða veitingin er stór. Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Veitingarstøðið sambært §§ 9 og 13

Sambært § 9 í forsorgarlógini kann fyribilshjálp vanliga í mesta lagi svara til grundupphæddina í fólkapensjónini.

Sambært § 13 verður varandi hjálp veitt við eini upphædd, ið svarar til fólkapensjónina (grundupphædd og viðbót) til ein pensjónist uttan aðrar inntøkur.

Í báðum førum verður ískoyti veitt fyri hvørt barnið, svarandi til barnaviðbótina eftir løgtingslóg um almannapensjónir.

Grundupphæddin til fólkapensjón verður ikki javnað, sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" við seinni broytingum. Uppihaldshjálpin sambært § 9 og varandi veiting sambært § 13 eru tí ikki hækkaðar vegna prísvøkstur o.a. síðani 1. februar 1999. Í februar 2005 hava vit spurt landsstýrismannin, um henda avleiðing er tilætlað.

Mál sambært § 9

Í frágreiðing til landsstýrismannin hava vit m.a. víst á:

- *at* í einum máli, har forsorgarhjálp er veitt vegna arbeiðsloysi, verður veitingin steðgað, vísandi til § 8 í forsorgarlógini, tá viðkomandi fer uttanlands í 3 vikur at ferðast. Vit ivast í, um hetta er rætt.
- *at* í einum máli fær viðkomandi, sum er ógift, men hevur verið samlivandi, játtað forsorgarhjálp vegna samlívsslit. Vit ivast í, um hetta er rætt.
- *at* í tveimum málum átti veitingin helst at verið veitt við afturgjaldsskyldu.

Í februar 2005 bóðu vit landsstýrismannin um viðmerkingar.

Treytir fyri forsorgarhjálp sambært § 10

Sum treyt fyri fyribilshjálp vegna arbeiðsloysi boðar Almannastovan viðskiftafólkunum frá, at tey hvønn mánað skulu geva Almannastovuni skrivligar váttanir frá 3 arbeiðsgevarum um, at tey hava søkt um arbeiði, annars verður veitingin frá Almannastovuni steðgað.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar februar 2002 hildu vit tað vera ivasamt, um Almannastovan hevur heimild sambært § 10 í forsorgarlógini at seta tílíkur treytir

Í november 2004 gjørdi landsstýrismaðurin Almannastovuna varuga við, at tað er umráðandi, at ein verulig meting fer fram í hvørjum máli. Almannastovan kann tí ikki umsita heimildina soleiðis, at bert viðskiftafólk sum prógva at tey hava søkt arbeiði, og vísa á í minsta lagi 3 noktandi svar frá arbeiðsgevarum, kunnu fáa hjálp, tí so verður eingin ítøkilig meting gjørd.

Okkum kunnugt eru innanhýsis leiðbeiningarnar á Almannastovuni ikki broyttar samsvarandi.

Ráðgeving/endurmeting sambært § 12

Sambært § 12 skal eftirmeting/ráðgeving fara fram áðrenn 3 mánaðir.

Vit hava í fleiri frágreiðingum síðani 1993 víst á, at vit undir grannskoðan okkara eru komin fram á fleiri mál, har fólk í áravís hava fingið fyribils hjálp. Eftir øllum at døma var eingin ella nærum eingin eftirmeting gjørd sambært § 12.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Almannastovuni verður ein eftirmeting/ráðgeving nú gjørd áðrenn 3 mánaðir.

Í 2004 eru vit aftur komin fram á fleiri mál, har fólk í áravís, í einstøkum førum í 10-14 ár, hava fingið "fyribils" hjálp. Eftir øllum at døma er eingin ella nærum eingin eftirmeting sambært § 12 farin fram. Sostatt er talan um fólk, sum í áravís "passivt" hava fingið forsorgarhjálp.

Í februar 2005 kunnaði Almannastovan um, at *"Almannastovan í stóran mun hevur betrað málsviðgerðina í mun til uppfylgingar, men at hon enn ikki er nøktandi, og at hetta framvegis í stóran mun er grundað á manglandi orku og raðfesting."*

Almannastovan kunnaði eisini um, at umhugsað verður at gera skrivligar mannagongdir fyri, nær varandi veiting sambært § 13 skal verða veitt, serliga í mun til onnur tiltøk, t.d. arbeiðsmarknaðartiltøk, og eisini sæð í mun til málini sum heild.

Eftir okkara tykki hevur Almannastovan eftir øllum at døma ikki megnað at gera eina nøktandi eftirmeting/ráðgeving fyri hesi viðskiftafólkini.

Í februar 2005 hava vit spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur.

Veiting sambært § 17

Endurgjald fyri inntøkumiss

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 nevndu vit, at útrokningin av mistari arbeiðsinntøku tykist tilvildarlig. Vit eru aftur í 2004 komin fram á dømi um hetta:

- sama veiting verður veitt í áravís
- veitingin verður roknað eftir tørvi eftir § 9
- útrokningarnar taka ikki fyrilit fyri barnafrádrátti í lands- og kommunuskatti
- frítíðarløn/frítíðarsamsýning er ikki goldin
- fyrilit eru ikki tikin fyri spardari barnaansing

Kærunevndin hevur í fleiri førum tikið avgerðir, sum greitt seta til viks siðvenju hjá Almannastovuni í málum viðvíkjandi endurgjaldi fyri inntøkumiss, uttan at Almannastovan hevur broytt praksis í øðrum líknandi málum.

Vantandi lógarásett kunngerð

Við Ll. nr. 82 frá 8. mai 2003 verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur um útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss. Landsstýrismaðurin hevur ongar reglur sett enn.

Vit halda, at tað at lógarásetta kunngerðin ikki er gjørd er orsøkin til, at útrokningin av mistari arbeiðsinntøku tykist tilvildarlig.

Í november 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann í næstum fer at leggja uppskot fyri tingið um at broyta veitingina sambært § 17 frá einari nettoveiting til eina bruttoveiting. Sambært landsstýrismanninum hevur broytingin við sær, at trupulleikarnir við at rokna út nettoendurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku verða loystir.

Vit hava fyrr gjørt vart við, at vit halda ein stóran vanda liggja í, at skiftandi landsstýrismenn ár um ár skáka sær undan at gera lógarásettar kunngerðir.

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin, nær lógarásetta kunngerðin væntandi verður lýst.

Samsýning til stuðulsfólk

Vit eru komin fram á fleiri mál, har Almannastovan hevur gjørt av, at stuðulsfólk fær pleyguløn sambært K. nr. 50 frá 25. mars 1993 "um gjald til fosturforeldur", sum verður nýtt, tá ið barn verður sett í pleygu av barnaverndarnevndini sambært kapittul IV í barnaforsorgarlógini *"børns anbringelse uden for deres hjem."*

Í hesum føri er ikki talan um *"børns anbringelse uden for deres hjem"*, men um stuðulsfólk í heiminum. Sambært § 17, stk. 2, í forsorgarlógini kann Almannastovan játta stuðulsfólk til heimabúgvandi børn við serligum tørvi vegna sálarligt ella likamligt brek. Vit halda tí ikki, at upphæddin fyri fosturløn kann verða nýtt í hesum føri, men at talan er um løn til stuðulsfólk sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Í oktober 2004 boðaði Almannastovan frá, at øll hesi mál eru viðgjørd av nýggjum, og avgjørt er at løna teimum sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Kirkjuskattur

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 umrøddu vit, at kirkjuskattur verður ikki tikin við í útrokningina, tá ið nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið sambært § 9 verður roknað út. Í frágreiðing í februar 2002 umrøddu vit, at kirkjuskattur verður heldur ikki tikin við í útrokningina av nettoendurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 17.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at taka stig til at broyta vegleiðingina, ið ásetir útrokningarháttin, soleiðis at kirkjuskattur fór at verða tikin við í útrokningina frá 1. januar 2003.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki var hent í málinum.

Í november 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ætlanir um at endurskoða alla forsorgarlógina, og verður hetta arbeiðið gjørt í stigum. Ætlanin er at broyta alla forsorgarveiting til eina bruttoveiting. Harvið verður trupulleikin við, at kirkjuskatturin ikki er við í útrokningini, loystur. Landsstýrismaðurin hevur tí ongar ætlanir í løtuni um at gera nakra broyting í verandi útrokning av hámørkunum.

Endurbúgving sambært § 18

Meira enn 10 ár eru liðin, síðani vit fyrstu ferð heittu á Landsstýrið um at áseta reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini, og í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir átalað, at neyvari reglur ikki eru ásettar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum varð samtykt 12. mars 2002, átalaði Løgtingið aftur, at neyvari reglur framvegis ikki vóru gjørdar fyri veitingum eftir § 18 í forsorgarlógini.

Í februar 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at *"orka er ikki til staðar í løtuni til at gera nýggja forsorgarlóg, og tí er ætlanin at gera ávísar broytingar ella vantandi kunngerðir á økinum ístaðin. Kunnast skal eisini um, at ein leiðbeining um vard størv er sett í gildi."*

Í november 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almanna- og Heilsumálaráðið er í ferð við at endurskoða alla forsorgarlógina, og verður arbeiðið gjørt í stigum. Væntandi verða endurbúgvingarreglurnar endurskoðaðar um eitt ár. Ein leiðbeining er tó um at verða liðug, soleiðis at einsháttað viðgerð av endurbúgvingarmálum verður tryggjað øllum borgarum.

Kontering av forsorgarveitingum

Vit hava til fánýtis øll nítiárini vístá, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, helst tí at eingin konteringarleiðbeining finst. Hóast fleiri ætlanir er einki hent.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann tíverri mátti staðfesta, at eingin konteringarleiðbeining var gjørd á forsorgarøkinum; men arbeiðið fór at verða raðfest høgt, so vegleiðingin væntandi fór at verða liðug innanfyri hálvt ár.

Í november 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan er farin undir at gera eina konteringarleiðbeining fyri almenna forsorg, men tað er óvist, nær hon verður liðug.

8.14 Stuðul til heilivág (GL 2003/2 07 3-9)

8.14.1 Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapartøl

Útreiðslur av stuðuli til heilivág verða hildnar sum partur av ymiskum høvuðskontum. Niðanfyri hava vit sett upp roknskapartøl fyri útreiðslur til heilivág seinastu árini:

t.kr.

Høvuðskonta	Navn	2004	2003	2002	2001	2000	1999
12.21.8.01.	Fólkapensjón	7.982	9.492	8.102	6.695	4.895	4.720
12.21.8.05.	Fyritíðarpensjón	4.341	4.035	3.443	2.870	3.190	2.318
12.21.7.01.	Vanlig forsorg: Meirútr.brekað barn § 17	4.150	3.958	3.859	3.875	2.489	2.566
12.21.7.01.	Vanlig forsorg: Hjálparamboð v.m. § 18	6.157	6.244	6.622	3.621	3.823	4.006
	Tilsamans	**22.630**	**23.729**	**22.026**	**17.061**	**14.397**	**13.610**

Sambært roknskapunum hjá føroysku sjúkrakassunum vóru útreiðslur teirra til heilivág í 2003 tilsamans 46,1 mió.kr.

Innaneftirlit

Almannastovan fær rokningar frá teimum fýra apotekunum umframt listar, ið greina hvørja avgreiðslu á p-tal, navn og stuðulsupphædd. Almannastovan hevur ikki skrivligar reglur um eftirlit við rokningum fyri heilivág, og eingin á Almannastovuni kannar við stakroyndum, um t.d. stuðulsmóttakarar eru pensjónistar, ella um Almannastovan hevur játtað heilivágin eftir forsorgarlógini.

Í februar 2005 spurdu vit almannastjóran og landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru um at bøta um innaneftirlitið.

Kontering

Apotekini senda Almannastovuni elektroniskar dátur saman við rokningum fyri stuðul til heilivág. Almannastovan nýtir dáturnar til at greina rokningarnar, so til ber at bóka á rættar kontur fyri fólkapensjón, fyritíðarpensjón, og §§ 17 - 18 í forsorgarlógini. Síðani 1. mai 2004 hevur Almannastovan bókað útreiðslur til heilivág eftir sama lutfalli, sum útreiðslurnar til heilivág í 2003, tí apotekini hava skift apoteksskipan.

Í januar 2005 kunnaði landsapotekarin um, at tey arbeiða við at tillaga nýggju apoteksskipanina, so hon kann lata røttu fílurnar til Almannastovuna.

8.14.2 Umsiting av stuðuli o.a.

Lógargrundarlag

Stuðul til heilivág verður latin eftir:

- § 12 í Ll. nr. 48 frá 10. mai 1999 "um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við Ll. nr. 91 frá 3. desember 2002" (Almannapensjónslógin)

- §§ 17 og 18 í lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 "om offentlig forsorg, sum seinast broytt við Ll. nr. 71 frá 11. november 2004 (Forsorgarlógin)

Nærri reglur um stuðul til heilivág eru ásettar í K. nr. 100 frá 20. desember 1999 "um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini og almannapensjónslógini".

Stuðul sambært pensjónslógini

Sambært § 3 í K. nr. 100/1999 fáa pensjónistar uttan umsókn stuðul til heilivág eftir § 12, stk. 6, í almannapensjónslógini. Egingjaldið, sum er tengt at inntøkuni, er sambært K. 100/1999 ávikavist kr. 200, 400 ella 600 um ársfjórðingin.

Umframt heilivág kunnu pensjónistar, um teir hava læknaávísing, fáa stuðul til vanligar apoteksvørur, sum t.d. kostískoyti, krem, náttúruheilivág, herímillum "Tranebærsaft, Multi-Tabs, Longo-Vital" og aðrar apoteksvørur, ið kunnu fáast í handkeypi.

Í tíðarskeiðinum 1. januar – 30. juni 2004 hevur Almannastovan goldið umleið 640 t.kr. í stuðuli til pensjónistar fyri náttúruheilivág og vanligar apoteksvørur. Møguliga eru læknarnir í so "lætthentir", tá ið teir skriva læknaávísingarnar um heilivág og apoteksvørur, og vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Stuðul sambært forsorgarlógini

Sambært § 2 í K. nr. 100/1999 *"kann Almannastovan, eftir umsókn, veita stuðul til ávísan heilivág, sambært § 18, stk. 5, í forsorgarlógini, til persónar, ið eru avlamnir, varandi sjúkir ella ellisbrekaðir."*

Stuðulin sambært § 18 er ikki tengdur at inntøkuni. Egingjaldið er kr. 400 um ársfjórðingin sambært § 6 í K. 100/1999. Sambært Almannastovuni er stuðulin treytaður av skrivligari umsókn, og av lækna- ella serlæknaváttan. Talan er til dømis um heilivág fyri ov høgt blóðtrýst, ovurviðkvæmi, astma og til bløðarar.

Stuðul til heilivág til foreldur at brekaðum børnum verður latin eftir umsókn vísandi til § 17, stk. 1, í forsorgarlógini. Stuðulin sambært § 17 er ikki tengdur at inntøkuni. Egingjaldið er 0 kr.

Avgreiðslutíðir á Almannastovuni

Í flestu førum kunnu viðskiftafólk ikki bíða eftir, at Almannastovan játtar stuðulin sambært §§ 17-18 í forsorgarlógini, men mega heinta heilivágin beinanvegin. Í slíkum førum rinda viðskiftafólkini sín part umframt stuðulsupphæddina, ið Almannastovan av røttum skuldi goldið. Sambært Apotekinum kunnu ofta ganga 2-3 mánaðir, í onkrum føri 6 mánaðir, áðrenn játtanin til eina umsókn er Apotekinum í hendi.

Tá Almannastovan síðani hevur játtað stuðul til heilivágin, má viðskiftafólkið skrivliga biðja Apotekið um skjalprógv fyri útreiðslunum, sum Almannastovan skuldi havt rindað, og síðani senda Almannastovuni eina aðra umsókn um at fáa peningin goldnan aftur. Talan er um dupult arbeiði.

Í februar 2005 spurdu vit almannastjóran og landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru um at avgreiða umsóknirnar skjótari.

Dátuflutningur frá Almannastovuni til Apoteksverkið

EDV-deildin á Almannastovuni hevur uppgávuna at senda Apoteksverkinum filur um játtanir til heilivág. Flutningurin av dátum hevur ikki verið regluligur síðani í juli 2004, og ongar skrivligar reglur eru um, hvør á Almannastovuni skal senda filurnar, og hvussu ofta tær skulu verða sendar.

Vegna forfall á EDV-deildini á Almannastovuni vóru dátur í november/desember 2004 í meira enn 6 vikur ikki sendar Apotekinum. Starvsfólk á Tjaldurs Apoteki hava tískil skrásett

játtanirnar manuelt í apoteksskipanini, við støði í játtanarskrivunum frá Almannastovuni. Talan er um dupult arbeiði.

Sambært Tjaldurs Apoteki skuldu tey helst fingið dátur sjálvvirkandi einaferð um dagin.

Stór arbeiðsbyrða síðst í hvørjum ársfjórðingi

Sum nevnt frammanfyri rinda viðskiftafólk eitt ávíst egingjald um ársfjórðingin fyri stuðulsheimilaðan heilivág. Apoteksskipanin skrásetir, nær viðskiftafólkið hevur rindað egingjaldið í einum ársfjórðingi.

Sera nógv viðskiftafólk koma síðst í einum ársfjórðingi fyri at "keypa inn undir seg", so teimum ikki nýtist at heinta heilivág komandi ársfjórðing, og harvið sleppa tey undan egingjaldinum í einum ársfjórðingi. Sambært Tjaldurs Apoteki er neyðugt at hava eyka starvsfólk til arbeiðis t.d. millum jól og nýggjár, tí so nógv viðskiftafólk koma eftir heilivági.

Nevnt kann verða, at í Danmark er egingjaldið ásett fyri eitt stuðulsár. Árið byrjar, tá viðkomandi fyrstu ferð fær stuðulsheimilaðan heilivág útflýggjaðan.

8.15 Barnaforsorgarútreiðslur (GL 2004/2 07 3-10)

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at tørvur var á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Útreiðslur hildnar av kommunum

Barnaforsorgarlógin ásetir, at í kommunum við fleiri enn 2.000 íbúgvum tekur býráðið, ella nevnd sett av býráðnum, vegna Landsstýrið avgerð um fyribyrgjandi tiltøk eftir § 22, stk. 2 og 3. Sambært § 43 í barnaforsorgarlógini verða hesar útreiðslur goldnar av landskassanum. Í 2003 var endurgjaldið til kommunur um 19 mió.kr., svarandi til umleið 67% av barnaforsorgarútreiðslunum.

Vit vístu á, at eftir okkara tykki var kontuskipanin á Almannastovuni til barnaforsorgarútreiðslur ikki nóg góð. Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava onga konteringarleiðbeining, og tí er vandi fyri, at konteringin ikki verður einsháttað. Eisini vístu vit á, at roknskapirnir og grannskoðanin hjá Tórshavnar og Klaksvíkar kommunum vóru ikki einsháttað, konteringarnar samsvaraðu ikki við kontuskipanina á Almannastovuni, og ongar reglur vóru fyri umsiting, journalviðurskiftum, roknskapi ella grannskoðan o.a.

Í mai 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlaða lógaruppskotið um barnavernd ásetti, at barnaverndarøkið ikki skuldi vera á Almannastovuni. Tí hevði Almannastovan ikki arbeitt við at broyta kontuskipanina ella tilevna konteringarleiðbeiningar.

Landsgrannskoðanin heldur, at verða fíggjarligar uppgávur á barnaverndarøkinum fluttar kommununum, verður framvegis neyðugt at áseta reglur um roknskaparverkið.

Tørvsmeting sambært § 22, stk. 2-3/útgjald og útrokning av pleyguløunum o.a.

Vit vístu á,

- *at* Almannastovan hevur ongar reglur, ið lýsa, hvørji tiltøk talan kann verða um sambært § 22, stk. 2–3,
- *at* eingin fíggjarlig tørvsmeting var gjørd, áðrenn tiltøk vórðu sett í verk eftir § 22, stk. 2-3,
- *at* eingi skjalprógv vóru fyri fíggjar- og ognarviðurskiftum,
- *at* § 22 ikki heimilar stovnsrakstri,
- *at* nógvar villur vóru í sambandi við, at Almannastovan hevur roknað og goldið út pleyguløunir o.a.,

at skrásetingarnar av fosturfamiljum ikki luku ásetingarnar í § 11 í roknskaparkunngerðini um eftirlitsspor,

at eingin skipað skráseting av hagtølum var fyri virkseminum.

Í mai 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan arbeiðir við at fáa viðurskiftini í rættlag.

8.16 Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin (GL 2004/2 07 4-18)

Vit hava í 2004 grannskoðað roknskapar- og lønarviðurskiftini hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin.

Lógargrundarlag

Sambært § 32b, stk. 1, í forsorgarlógini verður *"Stuðulsfólkaskipan stovnsett at stuðla vaksnum heimabúgvandi frá 18 til og við 66 ár við serligum tørvi, sum eru rørslutarnað ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so at tey hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív."*

Sambært stk. 2 er Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin partur av Heimarøktini og Serforsorgini. Sambært stk. 3 ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um:

1. hvør kann brúka skipanina, og hvussu skipanin skal virka,
2. skilnað millum Heimarøkt og Stuðulsfólkaskipan fyri vaksin,
3. setanarviðurskifti og arbeiðsumstøður hjá stuðulsfólki,
4. tillutan av stuðli og endurskoðan av tillutaðum stuðli.

Hesar reglur eru ásettar í K. nr. 79 frá 14. desember 2004 "um stuðulsfólk til persónar við serligum tørvi, ið búgva heima".

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerð og roknskapargóðkenning

Stjórin fyri Heimarøktini og Serforsorgini hevur 29. juni 2004 góðkent roknskaparreglugerðina hjá Stuðulsfólkaskipanini. Endalig góðkenning vantar enn frá Almannamálaráðnum.

Vit kunnaðu okkum um roknskapar- og góðkenningarmannagongdina, sum vit samanumtikið halda er væl skipað.

EDV-viðurskifti

Stuðulsfólkaskipanin hevur ment ein dátugrunn, har persónsupplýsingar um stuðulsfólk og viðskiftafólk eru skrásettar.

Í roknskaparreglugerðini fyri Stuðulsfólkaskipanina er einki nevnt um EDV-viðurskifti. Vit hava mælt til at endurskoða roknskaparreglugerðina og lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi EDV-viðurskiftunum, og vit hava eisini víst á, at stovnurin ikki lýkur krøvini í løgtingslóg "um viðgerð av persónsupplýsingum", og K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum".

Lønarumsiting

Vit kannaðu mannagongdirnar og mæltu til at taka støðu til, hvørji eftirlit skulu vera við skrásetingini av arbeiðstíð, við lønarútgjaldingum/lønarseðlum, og hvussu eftirlitini skulu verða skjalprógvað.

Gjøgnumgongd av lønarmálum

Vit valdu trý lønarmál og kannaðu, um umsókn, prógv um útbúgving, setanarskriv o.a. vóru í málinum, og um starvsfólkini vóru á røttum lønarstigi. Einki var at viðmerkja.

8.17 Stovnar og sambýli innan eldra- og serforsorgina (GL 2002/2 07 4-14)

Tá ræður um stovnar og sambýli innan eldra- og serforsorg, er lógargrundarlagið ofta ófullfíggjað, og greiðar reglur og ásetingar vanta á fleiri økjum.

Í frágreiðing til landsstýrismannin hava vit víst á fleiri viðurskifti og frábrigdi, ið helst ikki eru tilætlað.

8.17.1 Lógargrundarlag um stovnsetan og rakstur

Ellis- og røktarheim og eldrasambýli

Sambært § 32, stk. 4, í forsorgarlógini *"kann landsstýrismaðurin áseta reglur um stovnsetan og rakstur av stovnum og sambýlum fyri persónar, ið ikki kunnu klára seg í egnum heimi vegna teirra heilsustøðu."*

Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett nakrar reglur um stovnsetan og rakstur av stovnum - t.v.s. ellis- og røktarheimum.

Við K. nr. 71/1998 "um eldrasambýli" ásetti landsstýrismaðurin neyvari reglur um rakstur av eldrasambýlum, men ikki um stovnsetan.

Hugtakið "eldrasambýli" er ikki gamalt. Í viðmerkingunum til fíggjarløgtingslógina fyri 1996 stendur m.a.:

> *"Við atliti til tey búskaparligu viðurskiftini, sum eru í Føroyum í løtuni, verða neyvan bygd fleiri røktarheim hesumegin 2000. Ásannandi at livialdurin sum heild er hækkaður, og ein jøvn tilgongd av pensjónistum sum frálíður krevja størri røkt, verður neyðugt at skipa fyri alternativum tilboðum."*

Í viðmerkingunum verður síðan nomið við, hvat eitt eldrasambýli er:

> *"Almannastovan arbeiðir í løtuni við at seta á stovn eldrasambýli til pensjónistar, ið vegna ellis- og heilsubrek – ella sum búgva einsamøll – ikki eru før fyri at búgva í egnum heimi. Sambýlið skal virka sum eitt vanligt heim, har hjálpin er víðkað til støðuga hjáveru av starvsfólki soleiðis, at húsfólkið/búfólkið kann fáa hjálp eftir tørvi alt samdøgrið og hava tann neyðuga tryggleikan."*

Eftir okkara tykki kundi henda allýsing av einum sambýli eins væl verið ein allýsing av einum ellisheimi.

Sambært fyrra brotinum í viðmerkingunum, var búskaparkreppan ein høvuðsgrundgeving fyri at fara undir skipanina við eldrasambýlum, sum aloftast vóru størri sethús, ið tá kundu fáast bíliga til keyps.

Tó skal verða viðmerkt, at um somu tíð vórðu eldrasambýlini í Skopun og í Skálavík tikin í nýtslu. Bygningarnir í Skopun og Skálavík, sum verða nýttir til eldrasambýli, eru meinlíkir bygninginum heima á Sandi, sum verður nýttur til "ellisheim".

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja ímillum hugtøkini ellisheim og eldrasambýli, og í oktober 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um hann kundi siga okkum, hvørji objektiv eyðkenni við einum bygningi ella búfólki eiga at verða nýtt fyri at skyna á, um talan er um ellisheim ella eldrasambýli.

Í svarskrivi sínum í mars 2005 ásannar landsstýrismaðurin, *"at tað ikki er nakar prinsipiellur munur (objektiv eyðkenni) millum røktarheim, ellisheim og eldrasambýlir. Við hesum verður meint, at ikki er nakar munur á tænastuni fyri búfólkini. Einasta munurin er starvsfólkanormeringin; men tað merkja búfólkini sum so einki til – tí talan er bert um ein játtanarspurning.*

Landsstýrismaður skal annars upplýsa, at nógv av búfólkunum í eldrasambýlum eru so mikið røktarkrevjandi, at tey eins væl kundu verið á røktarheimi. Røktin á eldrasambýlum og røktarheiminum er so at siga eins."

Bústovnar og sambýli innan serforsorgina

Sambært § 32, stk. 1, í forsorgarlógini *"kan landsstyret til brug for personer med særlige behov oprette eller godkende særlige institutioner. Landsstyret kan fastsætte regler for sådanne institutioners drift, herunder om optagelse og betalingsforhold."*

Við K. nr. 3. frá 3. januar 2005 "um skipan av bústovnum" ásetti landsstýrismaðurin neyvari reglur um rakstur og gjald fyri uppihald.

Sambært § 32, stk. 2, *"kan landsstyret til brug for personer med særlige behov oprette eller godkende bofællesskaber. Landsstyret fastsætter regler for bofællesskabernes drift, herunder optagelse og betalingsforhold."*

Hesar reglur eru seinast ásettar í K. nr. 2 frá 3. januar 2005 "um skipan av sambýlum".

Sambært § 1 í kunngerðini *"er endamálið við at stovna ella umskipa stovnar til sambýli at geva fólk við serligum tørvi hóskandi bústaðarumstøður."*

Sambært § 3 *"er búfólkið í sambýlinum persónar, ið hava ein serligan tørv í so stóran mun, at neyðugt er við starvsfólki at hjálpa teimum í dagligu tilveruni."*

Eftir okkara tykki kundi henda lýsing av einum sambýli eins væl verið ein lýsing av einum bústovni.

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja ímillum hugtøkini bústovn og sambýli, og í oktober 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um hann kundi siga okkum, hvørji objektiv eyðkenni við einum bygningi ella búfólki eiga at verða nýtt fyri at skyna á, um talan er um ein bústovn ella eitt sambýli.

Sum neyvari greitt frá frammanfyri ásannar landsstýrismaðurin í svarskrivi sínum í mars 2005, at tað ikki er nakar prinsipellur munur (objektiv eyðkenni) millum bústovn og eldrasambýlir.

8.17.2 Fígging av byggikostnaði

Talvan niðanfyri vísir ymisku fíggingarhættirnar:

Slag av stovni	Fígging frá landinum	Heimild
Ellis- og røktarheim	Studningslán 50%	Ll. nr. 70/2001
Eldrasambýli hjá landinum	Løgujáttan 100%	Fíggjarlógin
Eldrasambýli hjá kommununum	Studningslán: 50.000 pr. búfólk	Siðvenja/ Ll. nr. 70/2001
Eldrarøktin í Sandoynni	Studningur: 90%	Ellis- og røktarheimsgrunnurin /fíggjarlógin
Bústovnar innan serforsorgina	Løgujáttan 100%	Fíggjarlógin
Sambýli innan serforsorgina	Løgujáttan 100%	Fíggjarlógin

Ellis- og røktarheim

Fram til nítiárini vóru løguútreiðslurnar til ellis- og røktarheim ein partur av útreiðslunum til fólka- og avlamispensjón. Skipanin var, at 4% av árligu pensjónsútreiðslunum vórðu settar í Ellis- og røktarheimsgrunnin. Úr hesum grunni rindaði landskassin sín part av íløguni til ellis- og røktarheim.

Landskassin rindaði 90% og kommunan 10% av íløguni. Hetta var ikki grundað á nakra serliga lóg, men var siðvenja. Við Ll. nr. 33 frá 27. mars 1992 "um avtøku av landskassagrunnum" vórðu 91 grunnar undir landinum tiknir av, herímillum Ellis- og røktarheimsgrunnurin.

Eldrasambýli hjá landinum

Árini 1994 – 1998 vórðu 4,5 mió. kr. játtaðar á løgtingsfíggjarlógunum til at keypa og umbyggja ognir til eldrasambýli í Vestmanna og Kollafirði.

Í mars 2005 kunnar landsstýrismaðurin um, at hann í november 2004 hevur sent skriv til Tórshavnar og Vestmanna kommunu um, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at broyta ognarviðurskiftini hjá eldrasambýlunum í Vestmanna og Kollafirði. Ætlanin er, at ognarviðurskiftini viðvíkjandi eldrasambýlum skulu vera eins kring landið. Í skrivinum verður boðað frá, at ætlanirnar fáa fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar og Vestmanna kommunu í fíggjarárinum 2005.

Eldrasambýli hjá kommununum

Árini 1998 - 2002, veitti landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum kommununum kr. 50 t.kr. í studningi pr. búfólk, tó í mesta lagi 500 t.kr. Hetta var ikki grundað á nakra serliga lóg, men var sambært siðvenju. Sambært landsroknskapinum 1998 – 2002 vórðu goldnar 6,9 mió. kr. í stuðuli hesi árini.

Stuðul til Klaksvíkar kommunu

Á fundi 15. juni 1999 millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Klaksvíkar kommunu legði kommunan fram ætlanir um at byggja 20 eldraíbúðir, sum skuldu verða fíggjaðar við lántøku úr Húsaláns- og Íbúðagrunninum. Kostnaðurin varð mettur til 19 – 20 mió.kr. Í sama viðfangi var ætlanin at byggja eitt eldrasambýli við 17 búplássum. Á fundinum gav landsstýrismaðurin munnliga tilsøgn um íløgustuðul til eldrasambýlið, 50 t.kr. pr. búfólk, tilsamans 850 t.kr.

Í skrivi 15. apríl 2002 heitti Klaksvíkar kommuna á landsstýrismannin um at geva skrivliga tilsøgn um íløgustuðul til eldrasambýlið 800 t.kr. (Búfólkatalið var lækkað úr 17 til 16).

Klaksvíkar kommuna fekk svar 10. september 2002, har landsstýrismaðurin skrivliga boðaði frá, at hann hevði gjørt av at veita 800 t.kr. í íløgustuðli, t.v.s. 50 t.kr. pr. búfólk.

Stuðul til Runavíkar kommunu

Runavíkar kommuna søkti 25. mars 2002 um 50% í stuðli av 4 mió.kr. til at keypa Vistarheimið við Toftavatn, sambært Ll. nr. 70 frá 2. mai 2001 "um studningslán til ellis- og røktarheim".

Í tilmæli til landsstýrismannin frá umsitingini í Almanna- og Heilsumálaráðnum 24. apríl 2002 verður greitt frá, at eingin heimild er í lógini at veita stuðul til ætlanina. Um landsstýrismaðurin velur at fylgja galdandi praksis verður stuðulin 400 t.kr. (8 x 50 t.kr.).

Sambært tilmælinum er tó einki til hindurs fyri, at landsstýrismaðurin broytir praksis, og hann kann sjálvur gera av, hvussu stóran íløgustuðul hann vil lata. Um landsstýrismaðurin ynskir at fylgja "andanum" í Ll. nr. 70/2001, mælir umsitingin til at veita 2 mió.kr. í íløgustuðli.

Runavíkar kommuna fekk svar 29. apríl 2002, dagin fyri løgtingsvalið 30. apríl 2002, har landsstýrismaðurin skrivliga boðaði frá, at hann hevði gjørt av at veita Runavíkar kommunu 2 mió.kr. í íløgustuðli, t.v.s. 50% av kostnaðinum.

Viðmerkingar

Vit hava víst á, at eftir okkara tykki eru umsøkjararnir ikki viðgjørdir eins.

Í mars 2005 kann landsstýrismaðurin bert staðfesta, at Klaksvíkar og Runavíkar kommuna fingu ymiskar upphæddir í stuðli. Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at eftirsíðan er lóggáva komin á økinum, sum m.a. tryggjar, at umsøkjarar verða viðgjørdir eins.

Ll. nr. 70 frá 2. mai 2001 "um studningslán til ellis- og røktarheim"

1. januar 2002 kom í gildi Ll. nr. 70 frá 2. mai 2001 "um studningslán til ellis- og røktarheim". Har verður m.a. ásett, at studningslán, rentu og avdráttarfrí, kunnu verða latin úr landskassanum til ný- ella umbygging av ognum, sum skulu verða nýtt til ellis- og røktarheim.

Studningslánini kunnu í mesta lagi vera 500 t.kr., faldað við talinum á íbúgvum, sum heimið er ætlað til, tó ongantíð meira enn helvtina av byggikostnaðinum. Stuðulin er eisini avmarkaður av teirri upphædd, sum til eina og hvørja tíð verður sett av á løgtingsfíggjarlógini til endamálið.

Við Ll. nr. 81 frá mai 2003 " um broyting í løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim" varð Ll. nr. 70/2001 broytt til eisini at fevna um eldrasambýli. Heimilað er landsstýrismanninum at veita studningslán 50 t.kr faldað við talinum á búfólki, sum sambýlið er ætlað til. Samstundis varð nýggj § 2, stk. 2, sett inn: *"Harumframt verður landsstýrismanninum heimilað í 2003 at geva tilsagnir um, at stuðul verður veittur av árligu játtanini í 2004 og 2005. Upphæddin fyri ávikavist 2004 og 2005, sum tilsøgn verður givin um, kann ikki fara upp um játtanina á fíggjarlógini 2003."*

Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið er endamálið at fáa heimild til at veita tilsøgn um studning yvir um fíggjarár. Um avleiðingarnar av uppskotinum stendur m.a.:

> *"Uppskotið hevur við sær, at landsstýrismanninum verður veitt heimild til at binda Løgtingið at veita studningslán til bygging av ellis- og røktarheimi ella sambýli av árligu játtanini á fíggjarlógini, samstundis sum heimilað verður landsstýrismanninum at veita tilsøgn um studningslán tvey fylgjandi fíggjarár á rað aftaná hetta. Fyri at nøkta tørvin, kann verða neyðugt, at játtanin tey komandi fíggjarárini verður størri enn í 2003. Í 2003 eru játtaðar 19 mió.kr. til endamálið.*
>
> *Uppskotið hevur sostatt við sær, at Løgtingið bindur seg til at játta somu upphædd á fíggjarlógunum fyri 2004 og 2005 sum í 2003 til endamálið, ella tilsamans 57 mió.kr. yvir hetta trý ára skeiðið. Løgtingið hevur tó heimild til á fíggjarlógunum 2004 og 2005 at áseta eina størri upphædd til endamálið."*

Talvan niðanfyri vísir tilsagnir og útgoldnan studning í 2002 – 2004:

t.kr.

	Tilsagnir um studning				**Útgoldin studningur**					**Ikki goldnar tilsagnir**
	2002	2003	2004	Til-saman	2001	2002	2003	2004	Til-saman	
Eldrasambýlið á Eiði		250		**250**				250	**250**	**-**
Eldrasambýlið í Gøtu		500		**500**				500	**500**	**-**
Eldrasambýlið á Toftum		800		**800**				800	**800**	**-**
Eldrasambýlið í Leirvík		500		**500**				500	**500**	**-**
Eldrasambýlið í Klaksvík	800			**800**		800			**800**	**-**
Eldrasambýlið í Runavík	2.000			**2.000**		2.000			**2.000**	**-**
Eldrasambýlið í Fuglafirði	350			**350**		350			**350**	**-**
Heim fyri minnisveik í Tórshavn	8.000			**8.000**		2.400	1.073	2.620	**6.093**	**1.907**
Røktarheim í Norðurstreymoy		16.000		**16.000**			1.061	4.958	**6.019**	**9.981**
Ellis- og Røktarheim í Eysturoy		12.000		**12.000**			1.953	4.178	**6.131**	**5.869**
Ellis- og Røktarheim í Tórshavn		3.700		**3.700**			1.506	2.194	**3.700**	**0**
Tilsamans	**11.150**	**33.750**		**44.900**	**-**	**5.550**	**5.593**	**16.000**	**27.143**	**17.757**
Upprunalig játtan á fíggjarlóg					3.000	10.000	19.000	16.000		
Eykajáttanarlóg					-	-4.450	-10.500	-		
Játtan á fíggjarlóg					**3.000**	**5.550**	**8.500**	**16.000**		

Sambært talvuni eru í 2002 veittar tilsagnir 11.150 t.kr. og í 2003 33.750 t.kr. tilsamans 44.900 t.kr. Á talvuni sæst, at ikki goldnar tilsagnir eru 17.757 t.kr. Á løgtingsfíggjarlógini 2005 eru játtaðar 18 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja fram uppskot um at leingja verandi lóggávu, so peningur verður settur av á løgtingsfíggjarlógini í 2006, 2007 og 2008.

8.17.3 Gjald fyri uppihald

Ymiskt er, hvat pensjónistar gjalda fyri uppihald:

Slag av stovni	**Gjald um mð.** kr.	**Heimild**
Ellis- og røktarheim	-	Ll. nr. 108/1999
Eldrasambýli hjá landinum	3.100	K. nr. 71/1998
Eldrasambýli hjá kommununum	3.100	K. nr. 71/1998
Eldrarøktin í Sandoynni	3.100	K. nr. 7/2003
Bústovnar innan serforsorgina	-	Forsorgarlógin
Sambýli innan serforsorgina	húsaleiga	Forsorgarlógin

Pensjónistar, sum hava inntøku umframt pensjónina, skulu sambært Ll. nr. 108/99 rinda eitt gjald, sum er 10 % av allari skattskyldugari inntøku, fyri uppihald á ellis- og røktarheimi.

Fyri hjún, har bæði eru pensjónistar, og annað er á røktarheimi/eldrasambýli, verður gjaldið fyri uppihald á eldrasambýli sett niður til kr. 2.100.

Á bústovnum innan Serforsorgina rinda búfólk yvir 66 ár, sum hava inntøku umframt pensjónina, eitt gjald fyri uppihald, sum er 10 % av allari skattskyldugari inntøku. Búfólk undir 67 ár, ið hevur lønarinntøku, sum er hægri enn 2,5 ferðir hægstu upphædd til persónligan tørv, skal gjalda 50% av muninum millum lønarinntøkuna og 2,5 ferðir hægstu upphædd til persónligan tørv.

Búfólk á sambýlum innan Serforsorgina rinda húsaleigu. Er talan um sambýli, sum landið eigur, rinda búfólkini kr. 2.000 fyri húsaleigu sambært rundskriv frá Almannastovuni 26. august 1994. Er talan um sambýli, sum verða leigað frá privatum, er húsaleigan sambært leigusáttmála. Harafturat rinda búfólkini fyri útreiðslur til hita, ljós, mat o.a.

8.17.4 Gjald fyri umlætting

Ymiskt er, hvat pensjónistar gjalda, eru teir til umlætting á ellisheimi ella á eldrasambýli:

Slag av stovni	**Gjald** (kr.)	**Frá**	**Heimild**
Ellis- og røktarheim	107,99	43. degi	K. nr. 80/2004
Eldrasambýli hjá landinum	90,00	1. degi	K. nr. 71/1998
Eldrasambýli hjá kommunum	100,00	1. degi	Eingin
Eldrarøktin í Sandoynni – sambýli	75,00	1. degi	K. nr. 7/2003
Eldrarøktin í Sandoynni – røktarheim	75,00	1. degi	K. nr. 7/2003

Í § 9 í Ll. nr. 108/1999 "um uppihald á stovni. o.l." er ásett:

> *"Fær pensjónistur fyribils uppihald á einum røktar- ella ellisheimi ella øðrum varandi stað, sum kann sammetast við eitt røktar- ella ellisheim, sum umlætting, skal pensjónisturin* ***rinda eitt gjald fyri uppihaldið um samdøgrið frá 43. degi."***

Í uppruna uppskotinum frá landsstýrismanninum varð ásett, at gjaldast skuldi frá 1. degi. Meirilutin í Trivnaðarnevndini broytti § 9 í uppskotinum til Ll. nr. 108/1999, og javnsetti

gjaldið hjá fyritíðar- og fólkapensjónistum fyri umlætting á øllum almennum stovnum, líka mikið um talan var um ellis- og røktarheim, sambýli hjá landinum ella sambýli hjá kommununum, og skuldi tað vera ókeypis fyrstu 42 dagarnar.

Sambært K. nr. 80/2004 "um áseting og javning av almannaveitingum" skal pensjónistur, er hann á ellisheimi, gjalda kr. 107,99 um samdøgrið frá 43. degi.

Sambært K. nr. 71/1998 "um eldrasambýli" skal pensjónistur, er hann á eldrasambýli, gjalda kr. 90,00 um samdøgrið frá 1. degi. Hetta er ikki í samsvari við § 9 í lógini.

Er pensjónistur til umlættingar á eldrasambýli hjá eini kommunu, rindar hann í flestu førum 100 kr. um samdøgrið frá 1. degi. Hetta er heldur ikki í samsvari við § 9 í lógini.

Í mars 2005 kunnar landsstýrismaðurin um, at eldrasambýlini hava heimild í § 32, stk.4, í forsorgarlógini, og eru ikki fevnd av Ll. nr. 108/1999 "um uppihald á stovni. o.l." Tí ber ikki til at áseta gjaldið fyri umlætting á sambýlum sambært lóg um uppihald á stovni.

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja eitt tílíkt svar, vísandi til, at bæði sambýli innan Serforsorgina, eldrasambýli og ellis- og røktarheim hava heimild (verða stovnsett) sambært § 32 í forsorgarlógini.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at *"heimildin at áseta gjaldstreytir á lands- og kommunalum stovnum liggur fult og heilt hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum. Í K. nr. 71/1998 er einki nevnt um gjald fyri umlætting á kommunalum sambýlum. Ætlanin er at broyta hetta, so at gjald fyri umlætting á kommunalum sambýli eisini verður ásett í kunngerðini um eldrasambýli, eins og tað er fyri sambýlini hjá landinum."*

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja eitt tílikt svar, vísandi til at landsstýrismaðurin í skrivi til Trivnaðarnevndina í desember 1999 kunnaði um, at *"viðvíkjandi eldrasambýlunum hjá kommununum er tað soleiðis, at landið hevur ikki heimild til at áleggja teimum, hvussu stórt gjaldið kann verða."*

1. mars 2005 hevur landsstýrismaðurin lagt fram uppskot til løgtingslóg um at broyta § 9, stk. 1, í løgtingslóg um uppihald á stovni o.l. Broytingin hevur við sær, at *"Fær pensjónistur fyribils uppihald til umlætting á einum ellis- og røktarheimi ella øðrum varandi staði, ið kann sammetast við eitt ellis- og røktarheim, skal pensjónisturin rinda eitt gjald fyri uppihaldið um samdøgrið frá fyrsta degi."*

Í mars 2005 kunnar landsstýrismaðurin um, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur eisini í umbúna at áseta eins treytir fyri gjaldið í eldrasambýlum hjá landinum, kommununum og fyri umlætting í Sandoynni.

8.17.5 Almannapensjón á stovnum

Í § 4, stk. 1-2, í Ll. nr. 108/1999 "um uppihald á stovni. o.l" er ásett:

> *"Hjá pensjónistum, sum fáa varandi uppihald á góðkendum røktar- ella ellisheimum ella øðrum varandi staði, sum kann sammetast við eitt røktar- ella ellisheim, lækkar pensjónin við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, pensjónisturin fær uppihald á viðkomandi heimi.*
> *Stk. 2. Ein upphædd verður varðveitt til rindan av útreiðslum til persónliga tørv pensjónistsins."*

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið "um uppihald á stovni o.l." (Lm. nr. 25/1999) stendur m.a.:

> *"Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir víðari við ætlanini um, at øll fólk skulu varðveita pensjónina. Ætlanin er at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið til støðutakan, so skipanin kann koma at virka frá ár 2001."*

Í oktober 2004 spurdu vit landsstýrismannin, nær lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið.

Í mars 2005 kunnar landsstýrismaðurin um, at *"spurningurin um at varðveita pensjónina, tá ein fær varandi uppihald (meira enn 6 mánaðir) á stovni hevur fyrr verið umrøddur, og er landsstýrismaðurin til reiðar at taka málið uppaftur til politiska støðutakan í samgonguni. Tað er óvist nær eitt uppskot kann leggjast fyri Tingið."*

8.17.6 Gjald fyri umlætting og heimahjálp

Ymiskt er, hvat pensjónistar gjalda fyri heimahjálp eru teir til umlætting á ellisheimi ella á eldrasambýli í 6 vikur:

kr.

Slag av stovni	Umlætting	Heimahjálp	Tilsamans
Ellis- og røktarheim	0	0	0
Eldrasambýli hjá landinum	3.780	1.677	5.457
Eldrasambýli hjá kommunum	4.200	1.677	5.877
Eldrarøktin í Sandoynni - sambýli	3.150	1.677	4.827
Eldrarøktin í Sandoynni - røktarheim	3.150	0	3.150

Fer ein pensjónistur, ið rindar fyri heimahjálp, til umlættingar á eldrasambýli hjá landinum, rindar hann frá 1. degi 90 kr. um samdøgrið, umframt fult tímatal fyri heimahjálp, t.e. 26 tímar um mánaðin, uttan mun til hvussu nógvar tímar hann frammanundan rindaði fyri heimahjálp. Ein pensjónistur, ið t.d. rindar hægsta tímasats (kr. 43) fyri heimahjálp, og er til umlættingar á eldrasambýli í 6 vikur, rindar samanlagt kr. 5.457, sum er:

- kr. 1.677 fyri heimahjálp, og
- kr. 3.780 fyri uppihald.

Fer sami pensjónistur til umlættingar á ellisheimi í 6 vikur rindar hann kr. 0.

Fer ein pensjónistur, ið rindar fyri heimahjálp, til umlættingar á eldrasambýli hjá eini kommunu, rindar hann í flestu førum frá 1. degi 100 kr. um samdøgrið, umframt fult tímatal fyri heimahjálp, t.e. 26 tímar um mánaðin, uttan mun til hvussu nógvar tímar hann frammanundan rindaði fyri heimahjálp. Ein pensjónistur, ið t.d. rindar hægsta tímasats (kr. 43) fyri heimahjálp, og er til umlættingar á eldrasambýli í 6 vikur, rindar samanlagt kr. 5.877, sum er:

- kr. 1.677 fyri heimahjálp, og
- kr. 4.200 fyri uppihald.

Fer sami pensjónistur til umlættingar á ellisheimi í 6 vikur rindar hann kr. 0.

Fer pensjónistur, ið rindar fyri heimahjálp, til umlættingar í einum sambýli í Sandoynni, rindar hann frá 1. degi 75 kr. um samdøgrið, umframt fult tímatal fyri heimahjálp, t.e. 26 tímar um mánaðin, uttan mun til hvussu nógvar tímar hann frammanundan rindaði fyri heimahjálp. Ein pensjónistur, ið t.d. rindar hægsta tímasats (kr. 43) fyri heimahjálp, og er til umlættingar á eldrasambýli í 6 vikur, rindar samanlagt kr. 4.827, sum er:

- kr. 1.677 fyri heimahjálp, og
- kr. 3.150 fyri uppihald.

Fer sami pensjónistur til umlættingar í 6 vikur á røktarheiminum í Sandoynni, rindar hann frá 1. degi 75 kr. um samdøgrið t.v.s. kr. 3.150 fyri uppihald, men ikki fyri heimahjálp. Fer sami pensjónistur til umlættingar í 6 vikur á øðrum røktarheimi í landinum rindar hann kr. 0.

Sum víst á frammanfyri, ætlar landsstýrismaðurin at endurskoða reglurnar á hesum øki.

8.18 Heimarøktin og Eldrarøktin í Sandoynni (GL 2004/2 07 4-15)

Í seinastu frágreiðing okkara í mars 2004 umrøddu vit grannskoðan av Heimarøktini og av Eldrarøktini í Sandoynni. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

8.18.1 Roknskaparviðurskifti og onnur viðurskifti

Vit mæltu til fleiri ábøtur:

- *at* gera serskildar roknskaparreglugerðir fyri øll økini og lýsa arbeiðsuppgávurnar betur,
- *at* lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkum betur,
- *at* greiða frá um journalskipanarreglur, trygdaravrit o.t.,
- *at* stemma fíggjarstøðuna betur av og rætta feilir,
- *at* gjøgnumganga tryggingarviðurskiftini,
- *at* halda ásetingarnar um fíggjarliga langtíðarleigu,
- *at* dagføra og menna ognaryvirlitini.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann tekur tilmælini til eftirtektar.

Vørugoymsla

Sambært stjóranum á Heimarøktini var ætlanin í 2000 at gera eina roynd í Eysturoynni og Sandoynni at finna fram til eina skipan at hava eftirlit við, hvat fer inn og út av goymsluni, og at fáa rætta tilfarið til rætta brúkaran. Tá skipanin var roynd, skuldi hon verða sett í verk í hinum økjunum eisini. Ætlanin varð ongantíð sett í verk.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru á hesum øki. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á frágreiðing okkara, hava vit einki svar fingið.

8.18.2 Gjald fyri heimahjálp

Í K. nr. 101/2000 "um heimahjálp" er ikki ásett, hvørjar inntøkur inntøkugrundarlagið skal fevna um, hvussu gjøldini skulu verða eftirroknað og hvussu gjøldini skulu verða javnað. Í kunngerðini er heldur einki ásett um kærumøguleika.

Vit kannaðu mannagongdina og mæltu til fleiri ábøtur:

- *at* kunna pensjónistin skrivliga um gjaldið/frádráttin fyri heimahjálp, og hvussu tað verður roknað út,
- *at* lýsa mannagongdina, tá gjald fyri heimarøkt skal verða ásett,
- *at* endurskoða mannagongdina í øllum økjunum viðvíkjandi tímaskráseting,
- *at* áseta reglur fyri, hvussu Heimarøktin skal eftirkanna og skjalprógva, um pensjónistarnir hava goldið fyri rætt tímatal,
- *at* endurskoða eftirlitið við, um inntøkugrundarlagið verður broytt, hvussu gjøldini skulu verða eftirroknað, og hvussu tað skal verða skjalprógvað,
- *at* endurskoða allar mannagongdir fyri, hvussu Almannastovan kunnar Meginskrivstovuna, tá inntøkuskrásetingar hjá pensjónistum í VFS-skipanini verða broyttar,
- *at* endurskoða allar mannagongdir fyri samskifti við Almannastovuna, í sambandi við árligar inntøkuinnlesingar í VFS-skipanina, pensjónsásetanir og eftirrokningar eftir almannapensjónslógini,
- *at* kunna pensjónistin skrivliga, verður gjaldið fyri heimahjálp broytt,
- *at* skipa eitt eftirlit við teimum pensjónistum, har ongar inntøkuupplýsingar hjá teimum eru skrásettir í VFS-skipanini, av tí at teir hava biðið um bert at fáa grundupphæddina.

Í mars 2004 mæltu vit landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða kunngerðina og møguliga broyta hana, í sambandi við at umsitingin av brúkaragjøldum verður endurskoðað.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálaráðið og Heimarøktin og Serforsorgin eru í ferð við at endurskoða skipanina um gjald fyri heimahjálp.

Atgongd til VFS-skipanina

Síðani februar 2004 og til í dag hevur málsviðgerin, ið umsitur gjaldið fyri heimahjálp, ikki havt atgongd til VFS-skipanina frá hølunum á Meginskrivstovuni.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálaráðið og Heimarøktin og Serforsorgin eru í ferð við at endurskoða skipanina um gjald fyri heimahjálp.

Aðrar viðmerkingar

Síðani 1994 hava vit í grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at mannagongdin í sambandi við brúkaragjøld er óneyðuga tung og arbeiðskrevjandi. Hon hevur við sær dupultinntøppingar og nógvar vandar fyri feilum av manuellum samanteljingum, útrokningum, yvirflytingum av tølum o.ø.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1995-1998 (Lm. nr. 53/1999), sum varð samtykt 3. mai 2000, átalaðu Løgtingsgrannskoðararnir, at einki var gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini máttu koma uppá pláss so skjótt sum gjørligt. Fyrst mátti kannast, um umsitingin av brúkaragjøldum kundi verða gjørd í nýggju forskipanini til lønarskipanina.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt varð við at fáa forskipanina setta í verk. Landsstýrismaðurin helt tað ikki vera ráðiligt at fara undir spurningin um brúkaragjald, fyrr enn forskipanin varð liðug, og hann vildi tá venda aftur til spurningin.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), sum varð samtykt 18. mai 2004, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð, at landsstýrismaðurin einki hevur gjørt fyri bøta um umsitingina av brúkaragjøldum.

Í mars 2005 hevur landsstýrimaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálaráðið og Heimarøktin og Serforsorgin eru í ferð við at endurskoða skipanina um gjald fyri heimahjálp, eisini við tí fyri eyga at bøta um umsitingina av brúkaragjøldum.

8.18.3 Stevnumið fyri Heimarøktina

Sambært rundskrivinum "um Heimarøktina" 1. september 1997 er álagt landsstýrismanninum at áseta stevnumiðini fyri Heimarøktina. Stevnumiðini eru ikki ásett.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið og Heimarøktin í næstum fóru at umrøða spurningin.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki er hent.

8.18.4 Arbeiðsreglugerð

Rundskrivið "um Heimarøktina" áleggur leiðaranum at skipa fyri arbeiðsreglugerðum, ið skulu lýsa, hvussu dagliga arbeiðið í Heimarøktini skal verður lagt til rættis og útint.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at spurningurin fór at verða tikin upp á vári 2002.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við arbeiðsreglugerðum var farið í gongd og fór at verða liðugt um einar 6 mánaðir.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið datt niður fyri, tá samlaða leiðslan fyri Heimarøktina segði seg úr starvi í januar 2003. Hann ætlar at kanna, um Felagsskrivstovan fyri Heimarøktina hevur gjørt nakað meira við málið.

8.18.5 Ársfrágreiðing

Sambært rundskrivinum "um Heimarøktina" skal leiðarin skriva eina ársfrágreiðing. Eingin ársfrágreiðing er skrivað, síðani rundskrivið kom í gildi 1. september 1997.

Í november 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at orka var ikki at gera frágreiðingar.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at støðan er tann sama sum í 2002. Landsstýrismaðurin ásannar, at tørvur er á einari ársfrágreiðing.

8.18.6 Lønarumsiting

Lønarskipanir

Tvær lønarskipanir verða nýttar. VaktPlan-skipanin er ein forskipan, har økisskrivstovurnar skráseta tímar. Síðani savnar Meginskrivstovan skrásetingarnar og lesur tær inn í eina útgjaldsskipan, ið er á einari HP-3000 teldu í Almannamálaráðnum.

Lønarumsiting í økjunum

Vit kannaðu mannagongdirnar og mæltu til fleiri ábøtur:

- *at* menna ein møguleika at skráseta samlað tímatal í VaktPlan-skipanini. - Av tí at heimahjálpararnir arbeiða skiftandi tíðir, og ofta stutta tíð út í eitt hvønn dag, er ikki gjørligt at nýta ráðleggingarmøguleikarnar í skipanini. Tískil er tað sera tíðarkrevjandi at skráseta tímarnar,
- *at* taka støðu til, um sama fólkið bæði kann skráseta og kanna skrásetingarnar,
- *at* gera skrivligar reglur fyri, hvørjar upplýsingar lønmóttakarar skulu hava hvønn mánað,
- *at* kanna, hvørjar mannagongdir eru hóskandi og góðar, og síðani at samskipa og lýsa tær skrivliga, so øll økini umsita á skilabesta hátt.

Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á frágreiðing okkara, hava vit einki svar fingið.

Lønarumsiting á Meginskrivstovuni

Vit kannaðu mannagongdirnar og mæltu til fleiri ábøtur:

- *at* gera skrivligar mannagongdir um setanir og lønarumsitingina,
- *at* menna mannagongdirnar, so eftirlit verður við, um økini hava kannað og góðkent tímaskrásetingarnar,
- *at* áseta skrivligar reglur fyri, hvussu flytingar millum skipanir skulu verða skjalprógvaðar,
- *at* gjøgnumganga allar lønartalvur í skipanini fyri at tryggja, at satsirnir eru rættir,
- *at* gera skrivligar mannagongdir fyri, hvussu satsir skulu verða broyttir, eftirkannaðir og góðkendir í skipanini,
- *at* savna, journalisera og gera skrivligt yvirlit yvir allar galdandi lønarásetingar, og síðani dagføra málini, so hvørt nýggjar lønarásetingar koma í gildi ella fara úr gildi,
- *at* tryggja, at allir lønmóttakarar eru fluttir á rætt lønarstig 1. mars 1999 og 1. mars 2000,
- *at* menna vegleiðingina fyri at avgreiða endaligu lønarútgjaldingarnar,
- *at* gera skrivligar reglur fyri, hvussu eftirlit við lønargjaldingum skal verða skjalprógvað, váttað og varðveitt.

Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á frágreiðing okkara, hava vit einki svar fingið.

Øll 3 starvsfólkini, ið umsita lønir á Meginskrivstovuni, hava atgongd til at broyta satsir í gomlu lønarskipanini. Vit hava áður í grannskoðanarfrágreiðingum vístá, at funktiónsskilnaður vantar.

Vit mæltu til at kanna viðurskiftini gjøllari og taka støðu til, um mannagongdirnar vóru hóskandi og tryggar. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á frágreiðing okkara, hava vit einki svar fingið.

8.18.7 Serligar viðmerkingar um Eldrarøktina í Sandoynni

Lán til kommunurnar

Byggikostnaðurin fyri bygningarnar í Skálavík, Skopun, og á Sandi var um 40 mió.kr. Landskassin rindaði 90%. Kommunurnar 10%. Tó var ein eftirstøða, ið nakrar kommunur ikki vóru førar fyri at gjalda. Í tí sambandinum veitti landskassin lán 550 t.kr. til kommunurnar í Sandoynni sambært Ll. nr. 52 frá 20 mai 1996 "um ymsar eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996".

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvar lánið er skrásett, og um kommunurnar hava rindað lánið aftur.

Í mars 2005 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at málið verður kannað.

Tryggingarviðurskifti

Bygningarnir í Skálavík, Skopun og á Sandi eru ogn hjá kommununum í Sandoynni. Sambært økisleiðaranum eru húsini/føstu ognirnar tryggjaðar.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um ognirnar koma undir ásetingarnar í rundskrivinum 1. januar 2003 frá Fíggjarmálaráðnum "um tryggingarviðurskifti landsins".

Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á frágreiðing okkara, hava vit einki svar fingið.

Bóking av gjaldi fyri heimahjálp

Inntøkurnar fyri heimahjálp verða ikki inntøkuførdar á kontu undir Eldrarøktina í Sandoynni, men á kontu undir Heimarøktini, hóast stjórin á Heimarøktini í november 2000 kunnaði um, at inntøkurnar fóru at verða inntøkuførdar á røttum stað.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, nær viðurskiftini koma í rættlag.

Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á frágreiðing okkara, hava vit einki svar fingið.

Aðrar viðmerkingar

Í mars 2004 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðingina um Heimarøktina og Eldrarøktina í Sandoynni til viðmerkingar, og vit settu eisini fleiri spurningar. Vit hava síðani fleiri ferðir mint landsstýrismannin á frágreiðingina. Ikki fyrr enn í mars 2005 fingu vit svar uppá nakrar spurningar. Landsstýrismaðurin sigur seg harmast og vísir á, at ein umsitingarligur feilur er hendur í viðgerðini av frágreiðingini, og Almanna- og Heilsumálaráðið ætlar at svara, áðrenn ein mánaður er liðin. Landsgrannskoðanin kann leggja afturat, at vit í hesum máli hava sent 4 áminingarskriv.

8.19 Serforsorgin (GL 2004/2 07 4-16)

Í seinastu frágreiðing okkara í mars 2004 umrøddu vit grannskoðan á Serforsorgini. Vit vístu á, at tørvur var á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

8.19.1 Roknskaparviðurskifti og onnur viðurskifti

Vit umrøddu, at eftir okkara tykki eru roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar ikki væl greinaðar og lýstar í roknskaparreglugerðini. Í fleiri førum er ikki greitt, hvørji starvsfólk hava ábyrgdina av arbeiðsuppgávunum, og í roknskaparreglugerðini eru ikki í nóg stóran mun tikin fyrilit fyri, at roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar hjá stovnunum eru ymiskar. Vit mæltu til:

- *at* gera eina roknskaparreglugerð fyri hvønn bústovn/sambýli/verkstað sær, og at lýsa roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar betur,
- *at* lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkum betur,
- *at* greiða frá um journalskipanarreglur, trygdaravrit o.t.,
- *at* stemma fíggjarstøðuna betur av og rætta fleiri feilir,
- *at* lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi vørugoymslum hjá verkstøðum,
- *at* gjøgnumganga tryggingarviðurskiftini,
- *at* halda ásetingar um fíggjarliga langtíðarleigu,
- *at* dagføra og menna ognaryvirlit.

Í mai 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Felagsskrivstovan á Serforsorgini ætlar at fremja tær ábøtur, vit hava mælt til.

8.19.2 Kunngerðir

Vit hava víst á:

- *at* Almanna- og Heilsumálaráðið í skrivi í mai 1998 til Almannastovuna helt, at lógirnar, kunngerðirnar og reglugerðirnar viðvíkjandi búfólki í sambýlum vóru ógreiðar,
- *at* Almanna- og Heilsumálaráðið síðani 1998 hevur havt ætlanir um gera skipanina greiðari, og áseta neyvari reglur fyri, hvussu peningurin hjá búfólkunum skal verða umsitin,
- *at* í juli 1998 varð Serforsorgin fyrisitingarliga flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið, í kunngerðum verður tó framvegis víst til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika,
- *at* upphæddirnar sambært § 13, í K. nr. 64 frá 1. apríl 1993 "um upphæddir til persónligan tørv og gjald fyri vaksin, sum búgva á stovnum" eru ikki javnaðar í 2003 og 2004.

Við heimild í § 32 í forsorgarlógini varð 3. januar 2005 lýst kunngerð "um skipan av sambýlum". Einki er ásett í kunngerðini um, hvussu peningurin hjá búfólkunum skal verða umsitin. Vit hava í februar 2005 biðið landsstýrismannin um neyvari frágreiðing og spurt, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur.

Við heimild í § 16 í forsorgarlógini varð 3. januar 2005 lýst kunngerð "um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum", og kunngerð "um skipan av bústovnum". Heimarøktin og Serforsorgin er nú eftirlitsmyndugleiki sambært nevndu kunngerðum.

Í §§ 14 – 16 í kunngerð "um skipan av bústovnum" eru ásettar reglur um veiting til persónligan tørv, útrokning av gjaldinum fyri uppihald, og í fylgiskjali til kunngerðina er ásett upphædd til persónligan tørv til persónar yvir 18 ár.

8.19.3 Lønarumsiting

Eftirlit og góðkenning av tímaskrásetingum

Vit mæltu í mars 2004 landsstýrismanninum til at taka støðu til, hvørji eftirlit skulu verða við skráseting av arbeiðstíð og lønarútgjaldingum/lønarseðlum, herímillum hvussu eftirlitini skulu verða skjalprógvað.

Í mai 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heimarøktin og Serforsorgin fer undir at gera fastar mannagongdir bæði viðvíkjandi eftirliti og góðkenning av tímaskrásetingum hjá Serforsorgini.

8.19.4 Vard verkstøð

Vit hava í 2004 grannskoðað roknskapar- og lønarviðurskiftini á vardu verkstøðunum innan Serforsorgina.

Roknskaparviðurskifti

Vit hava fleiri ferðir í frágreiðingum vístá, at á summum stovnum innan Serforsorgina eru ikki allar peningastovnskontur skrásettar í bókhaldinum. Á summum verkstøðum vóru peningastovnskontur og kassapeningur blandað saman, og tí vístu fleiri stovnsroknskapir ikki eina fullfíggjaða mynd av virkseminum.

Vit hava í 2004 enn einaferð staðfest, at ikki allar peningastovnskontur eru skrásettar í bókhaldinum.

Á einum verkstaði varð kassakontan ikki stemmað av mótvegis skrásettu fíggjarstøðuni í bókhaldinum, og hon stemmaði ikki við kassauppgerðina. Tað tykist, sum kontan ikki hevur verið røtt í áravís.

Á tveimum verkstøðum var sølukassin ikki skrásettur í bókhaldinum. Einki mark var sett fyri, hvussu nógvur peningur kundi vera í sølukassanum, áðrenn avroknað varð til Gjaldstovuna, og uppgerðarskjal fyri stovnskassa varð ikki nýtt.

Á einum verkstað var gávukontan ikki skrásett í bókhaldinum. Á tveimum verkstøðum var eingin reglugerð fyri gávukontuna.

Vit hava enn einaferð mælt til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, og at stovnarnir fylgja teimum treytum og mannagongdum, sum Føroya Gjaldstova hevur ásett.

Lønarviðurskifti

Á Felagsskrivstovuni kannaðu vit 15 lønarmál. Vit kannaðu um umsókn, prógv um útbúgving, um setanarskriv finst, og um starvsfólkini er á røttum lønarstigi. Einki var at viðmerkja. Vit vístu á, at tað er ymiskt, hvussu tímauppgerðir verða váttaðar, helst tí eingin føst mannagongd er ásett.

Sum nevnt frammanfyri skulu Heimarøktin og Serforsorgin fara undir at gera fastar mannagongdir um eftirlit og góðkenning av tímaskrásetingum hjá Serforsorgini.

8.20 <u>Føroyingar á stovni í Danmark o.a.</u> (GL 2004/2 07 4-16)

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 umrøddu vit grannskoðanina av útreiðslum viðvíkjandi føroyingum á stovni í Danmark o.a. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Føroyingar á stovnum í Danmark

Útreiðslurnar til føroyingar á stovnum í Danmark vóru 16,8 mió.kr. í 2001, 19 mió.kr. í 2002, og 20,1 mió.kr. í 2003. Landið hevur endurrindað hesar útreiðslur síðani 1988. Talan er um

eini 30 fólk, flest eldri. Lógargrundarlagið er lóg nr. 719/1987 "om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne".

Sambært K. nr. 888/1986 frá "Socialministeren" kann Almannastovan senda fólk *"med vidtgående fysiske eller psykiske handicap"* á stovnar í Danmark.

Serforsorgin varð 1. juli 1998 fyrisitingarliga flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Í januar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann sum skjótast fór at heita á "Socialministeriet" um at broyta kunngerðina.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á fyrispurningin, hava vit einki svar fingið.

Endurgjald av pensjón til føroyingar á stovnum í Danmark

Endurgjaldsútreiðslurnar vóru 1 mió.kr. í 2001, 1,1 mió.kr. í 2002, og 1,2 mió.kr. í 2003. Landið hevur endurrindað hesar útreiðslur síðani 1995. Talan er um 10 fólk, hóast eini 30 fólk eru á stovni í Danmark. Sambært viðmerkingunum til lóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne" endurrindar landskassin donskum kommunum pensjónsútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark.

Í januar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann helt ikki, at viðmerkingar til eitt danskt lógaruppskot var nóg haldgott grundarlag at játta pening á løgtingsfíggjarlógini. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á fyrispurningin, hava vit einki svar fingið.

Sambært § 54 í lóg nr. 217 frá 16. mai 1984 "Lov om social pension" við seinni broytingum:

> *"fastsætter Socialministeren efter aftale med Færøernes landsstyre regler om afholdelse af udgifter til pension efter denne lov til personer, der på foranledning af færøske sociale myndigheder får ophold i Danmark, og om afholdelse af udgifter til pension til personer, der fra Danmark får ophold på Færøerne formidlet af danske sociale myndigheder."*

Reglurnar eru ikki ásettar. Í januar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at samráðingar vóru farnar í gongd millum "Socialministeriet" og Almannamálaráðið um at áseta reglurnar.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á fyrispurningin, hava vit einki svar fingið.

Ferðaútreiðslur til viðskiftafólk og avvarðandi

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin frá 1. januar 1988 rinda ferðaútreiðslur til føroyingar á stovni í Danmark og avvarðandi teirra.

11 fólk fingu í 2001 endurrindað ferðaútreiðslur, 71 t.kr., til og úr Danmark. Í 2002 vóru útreiðslurnar 59 t.kr., og í 2003 44 t.kr.

Ongar reglur eru fyri, hvussu játtanin skal verða umsitin, t.d. um skjalprógv, ella hvussu ofta um árið viðskiftafólk kunnu ferðast. Í mai 2002 mæltu vit Serforsorgini til at seta neyvari reglur.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á fyrispurningin, hava vit einki svar fingið.

Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin frá 1. januar 1988 rinda útreiðslur viðvíkjandi "klienter under ekstern forsorg".

Talan er um viðbót til foreldur, ið heima forsyrgja barni/børnum við víðfevndum likamligum ella sálarligum breki. Viðbótin verður veitt fyri eykaútreiðslur og stríð, ið stendst av brekinum. Almannastovan ger av, hvør skal hava viðbót, og gevur Serforsorgini boð um at rinda upphæddina. Í 2001 var viðbótin kr. 2.000 um mánaðin fyri hvørt barnið. Rindað varð fyri 11 børn, tilsamans 264 t.kr. Í 2002 vóru útreiðslurnar eisini 264 t.kr., og í 2003 198 t.kr.

Sambært § 17 í forsorgarlógini kann hjálp verða veitt til meirútreiðslur hjá foreldrum við brekaðum børnum. Vit duga ikki at síggja, hví viðbótin skal verða rindað foreldrum at júst hesum børnunum, ella um henda veiting sampakkar við § 17.

Í fylgiskjølum til løgtingsfíggjarlógaruppskotið fyri 1992 vísti Almannastovan m.a. á, *"at henda játtan er ein leivd frá tíðini í donsku umsitingini, og finst hon ikki aðrastaðni."* Vit hava víst á, at eingin heimild er í almannalóggávuni at rinda hesar útreiðslur.

Í januar 2003 segði landsstýrismaðurin seg vera samdan við okkum. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á fyrispurningin, hava vit einki svar fingið.

8.21 Hjálpartólamiðstøðin (GL 2004/2 07 4-17)

Í seinastu frágreiðing frá mars 2004 kunnaðu vit um grannskoðan okkara av roknskaparviðurskiftunum á Hjálpartólamiðstøðini, og vístu m.a. á:

at ætlanin var í 2001 at samskipa og endurskoða virksemið hjá Hjálpartólamiðstøðini, serpedagográðgevarunum og § 18-deildini á Almannastovuni fyri m.a. at fáa skjótari málsviðgerð á Hjálpartólamiðstøðini. Hendan ætlan varð av ongum,

at síðani januar 2003 hevði Hjálpartólamiðstøðin sjálv bókað í FSL-skipanini á Gjaldstovuni uttan at hava eina roknskaparreglugerð, sum er góðkend sambært galdandi reglum. Almannastovan var farin undir at endurskoða allar roknskaparreglugerðirnar, og skuldi væntandi verða liðug á vári 2004,

at góðkenningarmannagongdin ikki var nøktandi,

at sakkøn hjálp og flutningsútreiðslur vóru bókaðar sum lógarbundnar útreiðslur. Helst er talan um umsitingarútreiðslur,

at stovnurin hevði leigað eina kopimaskinu, eftir øllum at døma í stríð við ásetingarnar í játtanarskipanini um langtíðarleigu.

Í februar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at:

ad 1. Almannastovan arbeiðir framvegis við bygnaðarbroytingum,

ad 2. roknskaparreglugerðin er góðkend í juli 2004,

ad 3. nýggja roknskaparreglugerðini fer væntandi at bøta góðkenningarmannagongdina,

ad 4. sakkøn hjálp og flutningsútreiðslur eru vanligar rakstrarútreiðslur, ið væntandi verða bókaðar á raksturin frá 2006,

ad 5. sáttmálin um langtíðarleigu gongur út í 2006, og tá eru viðurskiftini komin í rættlag.

Vit mæltu eisini til fleiri ábøtur:

at menna ognaryvirlitið sambært í pkt. 9 í roknskaparrundskrivinum,

at gjøgnumganga tryggingarviðurskiftini í samráð við Almannastovuna og Almannamálaráðið,

at fáa viðurskiftini í rættlag viðv. ferðaforskotskontuni,

at greiða gjøllari frá í roknskaparreglugerðini um KT-skipanir og um KT-trygd,

at dagføra og bøta um mannagongdirnar, frá tí at umsókn kemur inn, til hjálpartól verða keypt og síðani útflýggjað,

at samstarva við Heimarøktina fyri at fáa skrásett hjálpartól, ið eru lænt út.

Í februar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Hjálpartólamiðstøðin ætlar at fremja tær ábøtur, viðmæltu til.

8.21.1 Lán/stuðul til at keypa avlamisbilar

Umsiting

Toll- og Skattstovan, Norðoya øki, skrásetir lánini í einari bókhaldsskipan, og málini verða síðani send til hvørt øki sær, sum taka sær av innkrevjingini.

Inngjaldingar verða bókaðar á høvuðskontu 8.21.7.01. "Vanlig forsorg", undirkontu 06 "Hjálparamboð". Vit vístu á, at Almannastovan fær framvegis ongan lista frá Toll- og Skattstovuni yvir, hvørjar inngjaldingar talan er um, og fær heldur ongan eftirstøðulista.

Vit mæltu til at kanna viðurskiftini og áseta eitt greitt ábyrgdar- og heimildarbýti ímillum Almannastovuna og Toll- og Skattstovuna.

Í februar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at farið er undir at fáa hesi viðurskifti upp á pláss.

Heimildarspurningar

Vit hava fleiri ferðir víst á, at vit halda tað er sera ivasamt, um Hjálpartólamiðstøðin hevur heimild at veita stuðul til hjálpartól (herímillum til bil) við afturgjaldsskyldu.

Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur fyri egingjaldi, ella nær stuðul kann verða veittur sum lán sambært ásetingunum í § 18, stk. 6, í forsorgarlógini.

Kærunevndin tók í mars 2004 avgerð um, at fyrr enn landsstýrismaðurin hevur ásett neyvari reglur um, hvussu nógvur stuðul kann veitast sum lán, kann partur av stuðulin ikki veitast sum billán.

Eftir okkara tykki er spurningurin, um ikki øll billán veitt við afturgjaldsskyldu, vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini, skulu strikast og peningur rindast aftur, eru lánini afturgoldin.

Vit hava í februar 2005 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

8.21.2 Vegskattur

Umsiting

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin studning til vektgjald til størri avlamisbilar (kassabilur). Á Bileftirlitinum verður Hjálpartólamiðstøðin skrásett sum gjaldari av vektgjaldinum, og fær rokningarnar.

Heimildarspurningar

14. mars 2002 samtykti Løgtingið at strika § 12 í Ll. nr. 38/1982, soleiðis at avlamisbilar skuldu gjalda vektgjald. Sambært viðmerkingunum til lógarbroytingina var talan um 21 bilar, men broytingin fór ikki at hava við sær øktar útreiðslur fyri brúkaran, tí Hjálpartólamiðstøðin skuldi rinda vektgjaldið sum stuðul, vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini.

Í skrivi 29. november 2002 boðaði Almannamálaráðið Almannastovuni frá, at *"full heimild er at játta vektgjald í sambandi við játtanina av avlamisbili eftir § 18 í forsorgarlógini."* Eftir okkara tykki finst eingin slík heimild í § 18 í forsorgarlógini, og í februar 2004 bóðu vit landsstýrismannin um grundgevingar fyri sjónarmiðinum hjá Almannamálaráðnum.

Í februar 2005 ásannaði landsstýrismaðurin, at eingin heimild er í forsorgarlógini. Heimildin verður ásett í kunngerð "um stuðul til avlamisbilar", sum væntandi verður liðug á vári 2005.

8.21.3 Lán til bústaðarbroytingar

Umsiting

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Hjálpartólamiðstøðin/Almannastovan stuðul til at broyta bústað, í teimum førum tá tað verður hildið at vera neyðugt, fyri at eldri, brekað, umframt brekað børn kunnu vera verandi í heimunum. Stuðulin verður veittur heilt ella lutvíst við afturgjaldsskyldu.

Er talan um afturgjaldsskyldu, verður í skuldarbrævinum ásett, at veitingin, sum ikki er rentuberandi, skal gjaldast aftur, tá ið Almannastovan krevur tað, tá ið ognin skiftir eigara, tá ið úttøka verður gjørd í ognini, ella tá ið onnur viðurskifti eru, sum ávirka afturgjaldsskylduna sambært §§ 23 og 24 í forsorgarlógini.

Í desember 2003 kunnaði leiðarin um, at á heysti 2000 hevði Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin broytt siðvenju. Upphæddirnar verða ásettar út frá einari meting í hvørjum føri sær, og allur stuðulin verður latin uttan afturgjaldsskyldu.

Í februar 2004 bóðu vit landsstýrismannin grundgeva broyttu siðvenjuna. Vit spurdu eisini, hvørjar ætlanir eru við lánunum, ið longu eru tinglýst, og um talan kann verða um at rinda pening aftur, men vit fingu einki svar.

Hóast vit síðani fleiri ferðir hava mint landsstýrismannin á fyrispurning okkara, hava vit ikki fingið nøktandi svar.

Heimildarspurningar, bústaðarbroytingar til eldri og brekað

Fyri 1. juli 1992 var eingin heimild í føroysku almannalóggávuni at veita afturgjaldsskyldugar veitingar til bústaðarbroytingar. Heimildin varð fingin til vega við lóg nr. 393 frá 20. mai 1992 "Lov om ændringer af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser". Talan var um broyting í forsorgar-, barnaforsorgar-, fólkapensjóns- og avlamispensjónslógini. Við K. nr. 43 24. mars 1993 "um afturgjaldsskyldu viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað" vórðu neyvari reglur settar við heimild í somu lóg.

Tað tykist, sum lógarbroytingin sambært lóg nr. 393/1992 og K. nr. 43/1993 eru einastu heimildir at rinda stuðul til bústaðarbroytingar við afturgjaldsskyldu.

Hesar reglur hava einki við § 18, stk. 5, í forsorgarlógini at gera. Helst hevur ongantíð verið ætlanin, at § 18, stk. 5, skuldi fevna um stuðul til bústaðarbroytingar, eisini vísandi til viðmerkingarnar til "lov nr. 718/1987", tá ið § 18, stk. 5, fekk ta orðing, sum hon nú hevur.

Vit vilja vísa, at í 1988 játtaði Almannastovan einum foreldrum, vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini, 429 t.kr í rentu- og avdráttarfríum láni við afturgjaldsskyldu til bústaðarbroytingar, tí barn teirra sat í koyristóli. Í 1999 gjørdi Hjálpartólamiðstøðin av at endurskoða lánið eftir galdandi reglum, og Hjálpartólamiðstøðin gjørdi av at lækka lánið úr 429 t.kr. til 287 t.kr.

Í 2003 søktu foreldrini um at fáa strikað skuldina og avlýst pantið í ognini. Hjálpartólamiðstøðin noktaði, vísandi til at broytingin hevði økt um virðið á húsinum. Foreldrini kærdu avgerðina til Kærunevndin í almannamálum.

Kærunevndin tók í mars 2004 ikki støðu til, um heimild var í nevndu grein í forsorgarlógini at veita stuðul til bústaðarbroytingar, men avmarkaði viðgerðina til at meta um, hvørt heimild var at veita stuðulin sum lán við afturgjaldsskyldu.

Sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini *"kan Landsstyret fastsætte nærmere regler om ydelse af hjælp efter stk. 1-5."* Kærunevndin heldur tað vera ivasamt, um heimildin í 1988 var nøktandi til at áseta, at stuðulin kundi verða veittur við afturgjaldsskyldu, vísandi til at tað seinni varð hildið vera neyðugt frá 1. januar 1998 at gera uppískoyti til §18, stk. 6: *"...íroknað reglur um egingjald, og nær stuðul til hjálpartól kann veitast sum lán."*. Hesar reglur eru ongantíð ásettar, og tí staðfestir Kærunevndin, at heimild var ikki um játtanarmundi at veita stuðulin sum lán.

Sambært Kærunevndini var ætlanin við broytingini í forsorgarlógini í 1992, at afturgjald av láni til bústað bert skuldi verða kravt í serligum førum. Kærunevndin heldur ikki, at ein virðisøking í sjálvum sær er nóg góð grundgeving fyri at krevja lánið afturgoldið og vísir á, at greið lógarheimild skal til, skal stuðulin veitast sum lán. Kærunevndin heldur, at lánið ikki kann rúmast innanfyri teir karmar, sum komu í gildi í 1992, og at heimildin í øllum førum ikki kann hava verið, áðrenn henda heimild var sett inn. Tí heldur nevndin, at heimild er ikki fyri at krevja lánið afturgoldið.

Eftir okkara tykki er tað ein spurningur, um ikki øll lán veitt við afturgjaldsskyldu, vísandi til § 18, stk. 5, skulu strikast, og peningurin rindast aftur, eru lánini afturgoldin.

Vit hava í februar 2005 spurt landsstýrismannin um hansara sjónarmið, men vit fingu ikki nøktandi svar.

Heimildarspurningar, bústaðarbroytingar til pensjónistar

Sambært § 12, stk. 2, í almannapensjónslógini *"kann avgerð takast um, at persónlig viðbót eftir stk. 1 viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað, skal gjaldast aftur. Afturgjaldskravið kann avskrivast, tá tað innan fyri eitt rímiligt áramál aftaná, at kravið er sett fram, verður mett, at eingin fíggjarligur møguleiki er fyri at fremja kravið."*

Landsstýrismaðurin ásetti í § 7 í K. nr. 8 frá 11. februar 2000 "um persónliga viðbót", at tá ið persónlig viðbót verður veitt til útreiðslur til egnan bústað, verður veitingin treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd.

Vit vístu á, at landsstýrismaðurin ikki við kunngerð kann áseta tílíkar treytir, ið avmarka lógarásett rættindini hjá pensjónistum, uttan við heimild í lóg. Kunngerðin var heldur ikki í tráð við viðmerkingarnar til lógina.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann var vísur í, at heimildin var til staðar. Landsgrannskoðanin var ikki nøgd við svarið, tí landsstýrismaðurin grundgav ikki fyri sínum sjónarmiðum.

Sambært § 7, stk. 3, í K. nr. 8/2000 verða treytirnar fyri afturgjaldi settar í aðrari kunngerð. Hesar treytir eru ongantíð ásettar.

K. nr. 8/2000 fór úr gildi 14. mai 2004, tá K. nr. 19 frá 14. mai 2004 "um persónliga viðbót sambært almannapensjónslógini" kom í gildi. Í § 5 í hesi kunngerð er ásett:

> *Um persónlig viðbót verður veitt til útreiðslu til egnan bústað, kann hendan eftir einari fíggjarligari og sosialari heildarmeting verða treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd.*
>
> *Stk. 2. Afturgjaldsskipanin verður tillagað fíggjarligu orkuni hjá pensjónistinum, soleiðis at stødd og tal á avdráttum avspegla hesa orkuna.*

Sostatt er nýggja kunngerðin í tráð við lógarásetingina í § 12, stk. 2, í almannapensjónslógini.

Heimildarspurningar, bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini hevur Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin síðani 1988 veitt rentufrí lán til bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum. Ein treyt hevur verið, at lánið varð tinglýst í ognini hjá foreldrunum. Lánið er avdráttarfrítt til barnið er 15 ár, og tá verður støða tikin til afturgjaldsskipan, um barnið fær pensjón alla aðra inntøku.

Tá ið barnið hevur fylt 15 ár og hevur fingið avlamispensjón, hevur Almannastovan í fleiri førum hvønn mánað hildið aftur 20% av pensjónini til at rinda aftur lánið til bústaðarbroytingina hjá foreldrunum. Í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í februar 2001 hildu vit tað vera ivasamt, um henda mannagongd var lóglig.

Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann eisini ivaðist í, um mannagongdin var lóglig, og at hann fór at taka spurningin upp við Almannastovuna.

Í februar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann í januar 2005 bað Amannastovuna steðga við at afturhalda lán í pensjónini, til annað verður avgjørt.

8.21.4 Alment um heimildarspurningar

Í februar 2001 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðing um grannskoðan av Hjálpartólamiðstøðini. Saman við frágreiðingini sendu vit eitt notat, har vit neyvari greinaðu út frammanfyri umrøddu heimildarspurningar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsrokskapin fyri fíggjarárið 1999 (Lm. nr. 62/2000), sum varð samtykt 24. apríl 2001, mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at greiða ivamálini um lánsveitingar og umsiting av lánum.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið í samráð við Almannastovuna fór at greiða heimildarspurningarnar, og fór at arbeiða víðari við at fáa vantandi reglugerðir gjørdar.

Í august 2001 spurdu vit, hvat var hent í málinum, og nær arbeiðið fór at verða liðugt. Landsstýrismaðurin svaraði í september 2001, *"at viljin er til staðar, men Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ikki enn fingið fleiri starvsfólk, millum annað til at arbeiða við hesum máli."*

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum varð samtykt 12. mars 2002, vístu løgtingsgrannskoðararnir á, at fleiri av trupulleikunum á almannaøkinum hava verið umrøddir í frágreiðingum í áravís. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at landsstýrismaðurin ár um ár vísti á, at trupulleikarnir væntandi fóru at verða loystir innanfyri stutta tíð, uttan at talið á óloystum málum tó minkaði.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at arbeitt varð við nýggjari lóggávu, har heimildarspurningurin fór at verða viðgjørdur. Landsstýrismaðurin harmaðist um støðuna og staðfesti, at reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini ikki vóru ásettar. Eftir øllum at døma hevði landsstýrismaðurin ikki enn tikið stig til at greiða heimildarspurningarnar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56 - 6/2001), sum varð samtykt 18. mai 2004, heittu løgtingsgrannskoðararnir aftur á landsstýrismannin um sum skjótast at greiða heimildarspurningarnar.

Umrøddu heimildarspurningar eru ikki loystir enn. Hóast vit javnan í meira enn 4 ár hava mint landsstýrismannin á fyrispurning okkara, hava vit ikki fingið nøktandi svar, t.v.s. greitt og neyvt svar uppá allar teir spurningar, vit hava sett.

8.22 Almanna- og Heilsumálaráðið (GL 2003/2 07 1-4)

Ikki nøktandi samskifti

Tað hevur eyðkent samskiftið ímillum Landsgrannskoðanina og Almanna- og Heilsumálaráðið í nógv ár, at alt ov long tíð gongur, áðrenn fyrispurningar verða svaraðir, og svarskrivini hava heldur ikki verið nóg fullfíggjað og greið.

Spurdur, hví henda støða er ikomin, svaraði landsstýrismaðurin í november 2004, at ábyrgdin av at samskipa uppgávuna hevur ligið spjødd í ráðnum. Ein ávísur deildarstjóri hevur nú fingið ábyrgdina av at samskipa samskiftið við Landsgrannskoðanina. Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at í framtíðini verða svørini meira fullfíggjað og greið, og tíðarfreistin fer at verða hildin.

9 FAMILJU- OG HEILSUMÁL

9.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Vísandi til landsroknskapin 2003 er, hóast fleiri eykajáttanir í árinum, meirnýtsla á fleiri kontum. Niðanfyri verða nakrar meirnýtslur umrøddar:

t.kr.

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	*Meirnýtsla*
Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan)	6.560	7.094	*534*
Apoteksverkið (landsfyritøka)	- 3.225	1.808	*5.033*
Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)	262.302	264.295	*1.993*
Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)	53.300	55.335	*2.035*
Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	46.510	46.671	*161*
Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	35.050	35.186	*136*
Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan)	86.050	91.079	*5.029*
Lánsafturgjald, útreiðslur	-	270	*270*
Lánsafturgjald, inntøkur	250	1.247	*-997*
Rentustudningur til húsabygging	850	891	*41*
Lán til Húsalánsgrunnin, útreiðslur	-	830	*830*
Lán til Húsalánsgrunnin, inntøkur	3.300	3.379	*-79*

11.20.2.04. Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6.560 t.kr. Meirnýtslan er 534 t.kr. Sambært landsstýrismanninum verða vikarar nýttir, tí trupult er at fáa sett allar kommunulæknar í fast starv. Vikarar eru dýrari enn fastløntir kommunulæknar. Eisini hevur verið neyðugt at seta vikarar í sambandi við sjúkraskriving.

11.20.2.08. Apoteksverkið (landsfyritøka)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar -3.225 t.kr. Meirnýtslan er 5.033 t.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga játtaðar -225 t.kr. netto. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin til løguverkætlan lækkað úr 4 mió.kr. til 1 mió.kr., vísandi til at íløguætlanin var seinkað.

Landsgrannskoðanin skal viðmerkja, at sambært landsroknskapinum 2003 eru ongar útreiðslur hildnar til løguverkætlanina. Frávikið millum játtan og nýtslu viðvíkjandi vanliga virkseminum er sostatt um 6 mió.kr.

Frágreiðing um meirnýtslu

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan m. a. frá, at neyðugt varð at avskriva debitorar við umleið 1 mió.kr. Rentuinntøkan varð nógv lægri enn mett frammanundan, av tí at rentustøðið lækkaði, og rentuinntøkan frá skuldarum varð minni. Lønarútreiðslurnar vórðu hægri, tí í fíggjarætlanini varð ikki lagt upp fyri lønarhækkingum á arbeiðsmarknaðinum.

Í september 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hví hann ikki, eins og á øðrum økjum, hevði biðið Løgtingið um eykajáttan til hesar útreiðslur. Landsstýrismaðurin vísir í november 2004 á, at *"mett verður, at apoteksraksturin í hesum sambandi hevur eina serstøðu, sum ikki kann samanberast við virksemið hjá vanligum landsstovnum. Talan er um vinnufyritøku, har ringt er at siga, hvat ársúrslitið verður, og tí er talið á fíggjarlógini ein óviss meting av, hvørjar inntøkur og útreiðslur kunnu væntast. Tí er ikki søkt um eykajáttan."* Landsstýrismaðurin vísir eisini til, at *"materiellu heimildirnar hjá Apoteksverkinum til inntøkur og útreiðslur eru í serlóg, Ll. nr. 104 frá 05.09.1988 um apoteksverkið og heilivág. Eftir hesi løgtingslóg § 22, stk. 3, hevur apoteksverkið heimild til inntøku sambært galdandi takstum, og um undirskot er, so er heimild at nýta pening úr apoteksgrunninum, smb. somu lóg § 23 stk. 1, tá tosað er um endamálið við Apoteksgrunninum: "at fíggja apoteksvirksemið"."*

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum fyri ikki at søkja um eykajáttan. At ringt er at meta um útreiðslur og inntøkur, og at materiellar heimildir eru ásettar í serlóg er ikki nakað eindømi, og kann ikki sleppa landsstýrismanninum undan at biðja Løgtingið um eykajáttan.

Sambært stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður. Í hesum førinum eru útreiðslur fyri 5 mió.kr. hildnar í 2003 uttan heimild.

Sambært § 33 í stýrisskipanarlógini býtir løgmaður málsøkini millum landsstýrismenninar, samskipar starv landsstýrismanna og hevur eftirlit við, at hvør landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Sambært § 37 hava landsstýrismenn rættarligu ábyrgdina av fyrisitingini av málsøkjunum, sum eru løgd til teirra. Sambært § 4, stk. 3, í Ll. nr. 90/1996 um ábyrgd landsstýrisins, áliggur landsstýrismonnum í rímiligan mun at hava eftirlit og áseta reglur, og smb. § 5 kann landsstýrismaður ikki skúgva til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.

Trupulleikar við fíggjarætlanini

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at tað er trupult at gera fíggjarætlan, tá arbeitt verður við tveimum ymiskum roknskapum. Spurdur, hvørjar trupulleikar landsstýrismaðurin sipar til, svaraði landsstýrismaðurin at *"Sambært Apoteksverkinum, eru landsroknskapurin og innanhýsis roknskapurin hjá Apoteksverkinum so ymiskir, somuleiðis kontubólkingin. Apoteksverkið hevur tó roynt at tillaga roknskapin hjá Apoteksverkinum til kontuskipan landsins, í tann mun tað letur seg gera. Apoteksverkið vísir til, at sambært grannskoðara teirra, letur tað seg ikki gera at tillaga tær báðar roknskaparskipanirnar fult út, í hvussu so er ikki, um roknskaparfyrisitingin skal vera rationel. Torført er ikki at gera fíggjarætlan; men torført er, um fíggjarstýringin skal fara fram eftir aðrari roknskaparskipan enn teirri, arbeitt verður við dagliga."*

EDV-útreiðslur

Sambært ársfrágreiðingini í ársroknskapinum hjá Apoteksverki Føroya vórðu íløgurnar í innbúgv og EDV 7 mió.kr. í 2002 og 2,7 mió.kr. í 2003. Íløgurnar vóru fyri størsta partin gjørdar á EDV-økinum. Harafturat hevur "EDV-kostnaður" ligið um 2 mió.kr. árliga seinnu árini.

Í september 2004 heittu vit á landsstýrismannin um at greiða gjøllari frá, um hesar íløgur og útreiðslur liggja innanfyri vanliga virksemið, ið inntøkurnar/játtanin er ætlað til. Landsstýrismaðurin vísti í november 2004 til frágreiðing frá Apoteksverkinum, har greitt verður frá, at ein partur av útreiðslunum er farin til at útbyggja og tryggja tað sokallaða AHS-netið, sum er eitt millumstovnanet millum stovnarnar í almanna- og heilsuverkinum. Í frágreiðingini vísir Apoteksverkið m.a. á, at henda útbygging er avtalað við Almanna- og Heilsumálaráðið:

> *"Í skrivi frá Almanna- og heilsumálastýrinum, dagfest 22. november 2001, verður heitt á Landsapotekaran um at átaka sær "uppgávuna at standa fyri KT-økinum, sum hoyrir til Almanna- og heilsumálastýrið". Tí hava vit alla tíðina havt tann yvirordnaða KT-politikkin í huga, tá vit hava*

arbeitt við kunningartøkni, soleiðis at tað eisini skal koma ráðnum til góða. Vit gjørdu eina sonevnda Vision/Scope-verkætlan í 2003 fyri at leggja lunnar undir rationella nýtslu av KT í Almanna- og Heilsumálaráðnum og stovnar undir tí, við atliti til, at Apoteksverkið bert er ein partur av eini størri heild, tá talan er um samlaðu almennu fyrisitingina. Henda verkætlan varð løgd fyri Almanna- og Heilsumálaráðið og KT-forum í 2003."

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina verður víst á, at virksemið hjá Apoteksverkinum er ásett í løgtingslóg um Apoteksverkið og heilivág. Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er, innan karmarnar av játtanini til Apoteksverkið, at gera íløgur og halda lønar- og aðrar útreiðslur til at útbyggja og tryggja AHS-netið, og taka á seg uppgávuna at standa fyri KT-økinum, sum hoyrir undir Almanna- og Heilsumálaráðið. Vit kunnu í tí sambandinum eisini vísa á, at á løgtingsfíggjarlógini undir "Almanna- og Heilsumálaráðið" er ein undirkonta við heitinum "AHS-netið". Har vórðu í 2002 og 2003 nýttar ávikavist 3 og 2,7 mió. kr.

11.20.3.04. Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 262,3 mió.kr. Meirnýtslan er 2 mió.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga játtaðar 259,3 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin hækkað 3 mió.kr. vegna lønarhækkingar.

Sambært landsstýrismanninum stendst meirnýtslan av, at útreiðslur til heilivág og annan rakstrarkostnað vóru hægri, enn mett varð frammanundan.

11.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 53,3 mió.kr. Meirnýtslan er 2 mió.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga 40 mió.kr. játtaðar. Á eykajáttanarlógini mars 2003-2 varð játtanin hækkað 13,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevði Landsverk ræðisrættin á kontuni fyri út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum og hevði sostatt fíggjarligu ábyrgdina av íløguni. Eftir vanligari mannagongd hevði byggileiðslan á arbeiðsplássinum ta dagligu fíggjarligu stýringina av útbyggingini um hendi. Fíggjarstýringin hjá Landsverki er í høvuðsheitum grundað á reglulig fíggjaryvirlit frá byggileiðsluni. Í hesum yvirlitum er eisini ein meting av nýtsluni restina av árinum. Metingarnar av samlaðu ársnýtsluni lógu nøkulunda støðugt um 44 - 45 mió.kr., men seinasta metingin 8. desember 2003 vísti, at nýtslan kom at verða um 48,3 mió.kr., ella 3,3 mió.kr. hægri enn mett mánaðin frammanundan. Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at tær nøgdarmetingar, sum vórðu gjørdar av fyrstan tíð, vóru ikki nóg neyvar, og at fakeftirlit og byggileiðsla ikki hava dagført nøgdirnar so hvørt, og hava harvið ikki røkt sínar uppgávur nøktandi. Eftirsum árið var um at vera liðugt, var ikki gjørligt at seta tiltøk í verk.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at á játtanini fyri 2003 vóru 5 mió.kr. ætlaðar at keypa útgerð og tól fyri, men seinast í árinum kom fram, at tól vóru keypt fyri 6,8 mió.kr.

11.20.3.10. Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 46,5 mió.kr. Meirnýtslan er 161 t.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga játtaðar 45,8 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin hækkað 0,7 mió.kr. vegna lønarhækkingar.

11.20.3.15. Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 35 mió.kr. Meirnýtslan er 136 t.kr. Á fíggjarlógini 2003 vóru upprunaliga játtaðar 33,5 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini mars 2003-2 varð játtanin hækkað 50 t.kr. til at rinda einum serlækna í ortopedi fyri skurðviðgerðir. Á eykajáttanarlógini desember 2003, sum varð løgd fram 19. desember og samtykt 20. desember 2003, varð játtanin hækkað 1,5 mió.kr.

Í uppruna uppskotinum til eykajáttanarlógina desember 2003 varð skotið upp at hækka játtanina við 0,5 mió.kr. vegna lønarhækkingar. Sambært álitinum frá Fíggjarnevndini hevði landsstýrismaðurin, spurdur á fundi 20. desember 2003 við Fíggjarnevndina, svarað, at tølini í uppskotinum vóru ikki røtt. Landsstýrismaðurin hevði mælt til, at eykajáttanin varð hækkað við 1 mió.kr. til 1,5 mió.kr.

Í september 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hví umbønin um eykajáttan varð hækkað úr 0,5 mió. í 1,5 mió.kr. Landsstýrismaðurin greiddi í november 2004 frá, at ikki fyrr enn í november í 2003 varð hann kunnaður um, at tað fór at verða trupult at halda lønarjáttanina fyri fíggjarárið 2003.

Vit hava vísst á, at umbønin um eykajáttan til hesar útreiðslur kom so seint á árinum, at útreiðslurnar, sum játtanin var ætlað til, longu vóru hildnar. Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

11.20.3.20. Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 86 mió.kr. Meirnýtslan er 5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan í veruleikanum 1,4 mió.kr., tí ein tekniskur feilur í roknskaparskipanini ársskiftið 2002/03 gjørdi, at rokningar upp á 3,6 mió.kr., sum viðvíktu 2002, fóru á skeivt fíggjarár, og vórðu útreiðsluførdar í 2003.

Frágreiðing um meirnýtslu

Sambært landsstýrismanninum er ringt at gera eina fíggjarætlan fyri hesa kontuna. Rokningar fyri viðgerðir koma seint og óregluliga, serliga rokningar fyri viðgerð uttanfyri Ríkissjúkrahúsið, og av tí at skilnaður er millum ávísingarheimildina av sjúklingunum og fíggjarligu heimildina, veit Almanna- og Heilsumálaráðið ikki, hvussu stórar rokningarnar koma at verða.

Upprunalig játtan á fíggjarlógini

Á fíggjarlógini 2003 vóru útreiðslurnar settar til 70 mió.kr. Í ummæli frá Trivnaðarnevndini 25. oktober 2002 varð gjørt vart við, at útreiðslurnar til serviðgerð uttanlands í 2002 væntandi fóru at verða 80 mió.kr., men á fíggjarlógaruppskotinum 2003 vórðu einans 70 mió.kr. settar av.

Vit spurdu landsstýrismannin, hvussu komið varð fram til 70 mió.kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2003. Landsstýrismaðurin greiddi í november 2004 frá, at í 2003 vórðu settar av 10 mió.kr. meira enn tað, sum upprunaliga varð sett av árið frammanundan. Sambært landsstýrismanninum hevur hann *"møguliga verið í so góðvarin at vænta at kunna spara fleiri tals milliónir við at seta ymisk tiltøk í verk, men tað var landsstýrismaðurin varugur við, og tískil setti hann nógv tiltøk í verk fyri at røkka málinum."*

Eykajáttan

Á eykajáttanarlógini mars 2003-2 varð játtanin lækkað 50 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003, sum varð løgd fram 19. desember og samtykt 20. desember 2003, varð játtanin hækkað 16,1 mió.kr.

Í uppruna uppskotinum til eykajáttanarlógina desember 2003 varð skotið upp at hækka játtanina við 9 mió.kr., úr 70 mió.kr til 79 mió.kr. Vit spurdu landsstýrismannin, hví søkt varð um 9 mió.kr., tá landsstýrismaðurin 14. oktober 2003 í svari í Lm. nr. 100-2/2003 kunnaði Løgtingið um, at neyðugt fór at verða at søkja um 12 mió.kr. í eykajáttan.

Landsstýrismaðurin greiddi í november 2004 frá, at tá ið hann formliga varð kunnaður um játtanarviðurskiftini fyrst í september 2003, gjørdi hann av, at yvirlæknarnir skuldu fáa at vita, at bert sjúklingar við bráðfeingis sjúku skuldu verða sendir av landinum til viðgerðar. Við

hesum og øðrum tiltøkum, ið ætlanir vóru at seta í verk, vónaði landsstýrismaðurin, at 9 mió kr. fór at verða nóg mikið.

Sambært álitinum frá Fíggjarnevndini hevði landsstýrismaðurin, spurdur á fundi 20. desember 2003 við Fíggjarnevndina, svarað, at tølini í uppskotinum vóru ikki røtt. Landsstýrismaðurin hevði mælt til, at eykajáttanin varð hækkað úr 9 mió.kr. til 16,1 mió.kr.

Í september 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hví umbønin um eykajáttan varð hækkað úr 9 mió. kr. til 16,1 mió.kr.

Í november 2004 svaraði Landsstýrismaðurin m.a., at *"eykajáttanarlógarviðgerðin var rættiliga seint í árinum, beint fyri jól 2003. Hetta gjørdi, at landsstýrismaðurin hevði størri vitan um, hvønn veg tað bar, við tað at fleiri útreiðslur vóru skrásettar tá."*

Landsgrannskoðanin vil vísa á, at sambært innanhýsis frágreiðing 21. oktober 2003 frá umsitingini í Familju- og Heilsumálaráðnum vórðu útreiðslurnar fyri 2003 mettar til 83,7 mió.kr. Sambært innanhýsis frágreiðing 27. november 2003 vórðu útreiðslurnar mettar til 85,2 mió.kr., t.v.s. at tørvur var á einari eykajáttan upp á 15,2 mió.kr.

Hóast hesa vitan varð "einans" søkt um 9 mió.kr. í eykajáttanarlógini desember 2003, sum varð løgd fram 19. desember 2003.

Vit hava vístá, at umbøn um eykajáttan kom seint í árinum, og útreiðslurnar, sum játtanin var ætlað til, vóru tá longu hildnar. Í § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini er ásett, at eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Lønarútreiðslur

Sambært landsroknskapinum 2003 eru 200 t.kr. lønarútreiðslur. Landsstýrismaðurin søkti 17. januar 2003 landsstýrismannin í fíggjarmálum um loyvi at nýta 500 t.kr. til lønir at umsita Serviðgerð uttanlands. Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at seta eitt starvsfólk at samskipa virksemið millum visiterandi yvirlæknarnar og landsstýrismannin, og til at kanna viðurskiftini millum sjúkrahúsini í Føroyum og í Danmark og Sjúklingahotellið Tórshavn. 27. januar 2004 gekk landsstýrismaðurin í fíggjarmálum umsóknini á møti.

Upp á settan spurning frá Trivnaðarnevndini kunnaði landsstýrismaðurin í skrivi 15. oktober 2002 um bygnaðin í Familju- og Heilsumálaráðnum. Viðvíkjandi Fyrisitingardeildini varð m.a. kunnað um, at Fyrisitingardeildin røkti uppgávurnar viðvíkjandi Serviðgerð uttanlands, kautiónum og annað. Landsgrannskoðanin hevur tí ilt við at skilja, at landsstýrismaðurin 17. januar 2003 søkir landsstýrismannin í fíggjarmálum um loyvi at nýta 500 t.kr. av kontuni til Serviðgerð uttanlands til fyrisitingarligar uppgávur.

Sambært landsstýrismanninum var tað eitt ynski, at fulltrúin burturav kom at sita við uppgávum í sambandi við Serviðgerð uttanlands. Fyri at tryggja sær tað varð hildið best, at fulltrúin varð settur undir hesari játtan.

Vit halda talan vera um ein prinsipiellan spurning. Eftir okkara tykki er tað ikki skilagott at býta arbeiðsuppgávurnar á einum stovni/aðalráð við at løna starvsfólkunum av teimum játtanum, tey skulu taka sær av. Á hendan hátt ber til at seta starvsfólk í Ráðnum, uttan at tað ávirkar nettoútreiðslu- og lønarkarmin. Vit vilja eisini vísa á, at Løgtingið, í mun til uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 2003, lækkaði játtanina til Familju- og Heilsumálaráðið við 1,7 mió.kr. Við at útvega sær fyrisitingarliga heimild til lønarútreiðslur á kontuni fyri Serviðgerð uttanlands, hækka fyrisitingarútreiðslurnar í Familju- og Heilsumálaráðnum í roynd og veru óbeinleiðis.

11.20.5.01. Lánsafturgjald

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 250 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2003 eru útreiðslurnar 270 t.kr. og inntøkurnar 1.247 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru inntøkurnar afturgjald frá kommunum fyri lán, sum tær hava fingið í sambandi við bygging av heilsumiðstøðum. Kommunur hava goldið eyka avdráttir av láninum í 2003. Sambært uppskoti til eykajáttanarlóg november 2003 vórðu inntøkurnar hækkaðar. Uppskotið til eykajáttanarlógina datt burtur, av tí at val varð skrivað út.

11.22.1.01. Rentustudningur til húsabygging

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 850 t.kr. Meirnýtslan er 41 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru 1.044 kontur í skipanini, og innistandandi í peningastovnum er tilsamans um 45,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært Húsalánsgrunninum hava 988 kontur fingið rentustuðul. Góðskrivaður rentustuðul í 2003 var 1.056 t.kr., og afturgoldin rentustuðul var 164 t.kr. Tað er ómøguligt at meta um, hvussu nógvur rentustuðul verður goldin aftur í árinum. Rentustuðulstilskrivingarnar eru í juni og desember.

11.22.5.01. Lán til Húsalánsgrunnin

Á fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 3.300 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2003 eru inntøkurnar á standardkontu 86 (afturgjald av lánum v.m.) 3.379 t.kr. Harumframt eru rentuútreiðslur hildnar á standardkontu 82 (útlán v.m.) 830 t.kr., men eingin játtan er til útreiðslurnar, og tískil er talan um eina meirnýtslu. Sambært landsstýrismanninum hevur ikki *"verið lagt upp fyri á fíggjarlógini, at seinasti avdrátturin av láni nummar 4700016 varð goldin í juni í 2003."*

Talan er um afturgjald av láni, sum landið hevur veitt Húsalánsgrunninum sambært Ll. nr. 28 frá 14. februar 1995 "um lán til Húsalánsgrunnin". Vit halda, at tað neyvan kann vera rætt, at rentuútreiðslur verða hildnar á standardkontu 82 á hesi høvuðskontu. Vit hava umrøtt spurningin við Gjaldstovuna, sum hevur greitt frá, at tær 3.379 t.kr. eru rentur (830 t.kr.) og avdráttir (2.549 t.kr.), ið Húsalánsgrunnin hevur goldið landinum. Renturnar eru inntøkuførdar á § 20 (høvuðskontu 20.50.2.04.), og áttu helst at verið "mótroknaðar" á frammanfyri umrøddu standardkontu 86, sum tá hevði víst veruliga avdráttin av láninum, 2.549 t.kr.

Gjaldstovan umhugsar at taka upp spurningin um at broyta verandi konteringarmannagongd, sum eisini verður nýtt á øðrum økjum, soleiðis at betri samsvar verður ímillum játtanar- og roknskapartøl í landsroknskapinum.

Minninýtsla

11.11.1.24. Familju- og Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14.486 t.kr. Minninýtslan er 379 t.kr. Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga settar til 16.336 t.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2003-2 varð játtanin hækkað 700 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin lækkað 2.550 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur.

t.kr.

Undirkonta	F-lóg	EYJ-lóg	Játtan	Roknskapur	Frávik
Vanligt virksemi	10.854	-750	10.104	10.141	+37
Ráð og nevndir	167	-	167	106	-61
AHS-netið	3.700	-900	2.800	2.688	-112
Tilbúgving fyri Føroyar	1.615	-500	1.115	1.172	+57
Trivnaðarkanningar	-	300	300	-	-300
Tilsamans	16.336	-1.850	14.486	14.107	379

11.11.1.38. Familjuøki

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. til stuðul. Minninýtslan er 285 t.kr. Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.700 t.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2003-2 varð játtanin lækkað 700 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin lækkað 500 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fór arbeiðið við familjuøkinum í gongd seint í árinum, og tí komu fáar umsóknir um stuðul til hetta endamál.

11.20.1.10. Koppsetingar (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.751 t.kr. til stuðul. Minninýtslan er 215 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu í 2003 tvær barnakoppsetingar lagdar saman í eina, soleiðis at samsýningin til kommunulæknarnir varð minni, enn roknað var við.

11.20.2.01. Sjúkrakassar

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 29.015 t.kr. Minninýtslan er 459 t.kr. Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 26.897 t.kr. Á eykajáttanarlógini desember 2003 varð játtanin hækkað 2.118 t.kr.

9.2 Sjúkrakassar (GL 2001/2 08 3-1)

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 22, stk. 2 - 4, í sjúkratryggingarlógini kann Landsstýrið áseta neyvari reglur um ávís viðurskifti, og sambært § 25 er álagt Landsstýrinum at seta neyvari reglur fyri eftirlitið við rindan av limagjaldi.

Á hvørjum ári síðani hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at arbeitt varð við nýggjari lóggávu. Eftir hesum at døma vóru ongar ætlanir um at áseta reglur sambært galdandi lóg.

Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin okkum um, at ætlanin er at leggja lógaruppskot um nýggja sjúkrakassaskipan fyri Løgtingið í 2005.

Eftirlit, grannskoðan o.a.

Sambært § 32 í sjúkratryggingarlógini hevur Almannastovan eftirlit við sjúkrakassunum, og sambært § 35, stk. 7, *"skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regnskabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan."*

Vit hava víst á, at Almannastovan regluliga grannskoðar sjúkrakassarnar, men at arbeiðið verður ikki skjalprógvað, og eingin grannskoðanarfrágreiðing verður gjørd. Almannastovan hevur ikki ásett neyvari reglur fyri grannskoðanina smb. § 35, stk. 7.

Tá ið sjúkratryggingarlógin áleggur Almannastovuni at útinna grannskoðan og seta neyvar reglur, er støðan eftir okkara tykki ikki nøktandi.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann ætlar at broyta sjúkratryggingarlógina. Ætlanin er at flyta eftirlitsuppgávuna frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin okkum um, at ætlanin er at leggja lógaruppskot um nýggja sjúkrakassaskipan fyri Løgtingið í 2005.

9.3 Heilbrigdið og Blákrossheimið (GL 1996/2 08 4-1)

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 vístu vit á, at hóast tað í lógini er álagt landsstýrismanninum, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 "um Sjúkrahús-

verk Føroya" at seta reglur fyri, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og tess virki, eru ongar reglur ásettar.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli."*

Í desember 2001 spurdu vit aftur landsstýrismannin, nær reglurnar fóru at verða gjørdar, vísandi til at í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur.

Í februar 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at tað fór at verða tikið upp, men enn var støða ikki tikin til, um Heilbrigdið og Blákrossheimið fóru at verða stovnar, sum komu at hoyra undir sjúkrahúsverkið.

Vit vístu síðani á, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

> *"Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar."*

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann ikki hevði havt møguleika at seta seg inn í júst hetta málið. Hann fór at taka málið sum heild upp, og fór sjálvandi at skipa fyri, at allar lógarásetingar á hansara øki fóru at verða fylgdar, og at vantandi reglugerðir fóru at verða gjørdar. Tó var ilt var siga, hvørt umsitingin megnaði at fáa arbeiðið gjørt í 2002.

Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki nýtt var hent í málinum.

Í desember 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann í tingsetuni 2004/05 ætlar at leggja uppskot fyri Løgtingið til nýggja sjúkrahúslóg, sum ikki fer at fevna um stovnar fyri rúsevnismisnýtarar. Landsstýrismaðurin umhugsar at taka alt málið um avrúsan upp til endurskoðan, møguliga við at seta ein arbeiðsbólk at koma við uppskoti um, hvussu økið skal verða skipað í framtíðini.

Landsstýrismaðurin hevur 4. mars 2005 lagt fram uppskot til løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (Lm. nr. 80/2004).

9.4 Kommunulækna- og skúlalæknaskipanin (GL 2001/2 08 4-2)

Kommunulæknaskipanin

Vantandi ásetan av reglum

Lógargrundarlagið undir kommunulæknaskipanini er Ll. nr. 28 frá 23. apríl 1999 "um kommunulæknaskipan", ið varð sett í gildi 1. juli 1999. Vit hava áður víst á, fyrstu ferð í februar 2002, at hóast tað í lógini smb. § 6, stk. 2, § 7, stk. 2, og § 8, stk. 2, er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, eru ongar reglur gjørdar.

Landsstýrismaðurin hevur síðani á hvørjum ári kunnað um, at arbeitt verður við lógarbroytingum, og hann tí hevur gjørt av at bíða við at áseta reglur.

Málið er endaliga loyst í september 2004. Við heimild í § 7, stk. 2, og § 8, stk. 2, varð K. nr. 64 "um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum" lýst 29. september 2004 við gildiskomu dagin eftir, og við heimild í § 6, stk. 2, varð K. nr. 65 "um hvørjar útreiðslur kommunulæknaavloysarar kunnu fáa endurgoldnar" lýst 29. september 2004 við gildiskomu dagin eftir.

Skúlalæknaskipanin

Vantandi føroysk lóg

Skúlalæknaskipanin var partur av rammuavtaluni við donsku stjórnina frá 1995, og sambært avtaluni hevur Heimastýrið skyldu til at gera føroyska lóg á økinum í seinasta lagi í 1997. Sambært frágreiðing frá Almannamálaráðnum í 1999 "Lýsing og niðurstøða av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum" var ætlanin at gera eina løgtingslóg,

sum líktist tí donsku, um "forebyggende foranstaltninger for børn og unge", og at leggja uppskot fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið skjótast gjørligt.

Lógaruppskot "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" varð lagt fyri tingið 4. mars 2002. Uppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Løgtingið fór heim undan løgtingsvalinum 30. apríl 2002.

Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at endurskoðaða lógaruppskotið var sent til hoyringar í januar 2003 og aftur í oktober 2003. Lógaruppskotið var ikki búgvið at leggja fyri Løgtingið, áðrenn val varð skrivað út 5. desember 2003.

4. mars 2005 hevur landsstýrismaðurin lagt fram uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung (Lm. nr. 53/2004).

Vantandi sáttmáli

Í Føroyum eru 11 læknadømi. Ein skúlalækni eigur at vera í hvørjum læknadømi. Kommunulæknarnir røkja summi av hesum størvum.

Skúlalæknin fær mánaðarløn, ásett við einum gjaldi fyri hvønn næming í 1. til 9. flokki í skúlalæknaøkinum, sum hann hevur umsjón við. Lønar- og setanarviðurskifti hava verið ásett samsvarandi galdandi skúlalæknasáttmála millum "Kommunernes Landsforening" og "Den alm. Danske Lægeforening". Gjøldini eru hækkað samsvarandi broytingum í Danmark.

Í 2000 fingu 6 kommunulæknar, ið høvdu umsjón við umleið 2.300 næmingum, útgjald úr skipanini. 6.900 næmingar vóru í 1.–9. flokki í skúlaárinum 2000/01. Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at skúlalæknaskipanin í løtuni virkar í Vágum, Eysturoy og Suðuroyar norðraru helvt.

Eingin føroyskur sáttmáli er gjørdur, og tí hevur Kommunulæknafelagið noktað limum sínum at taka á seg leys størv í skipanini. Teir fáu kommunulæknar, sum enn eru í skipanini, fáa tó loyvi at halda fram.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at samráðast um lønar- og sáttmálaviðurskiftini, tá ið nýggja lógin varð samtykt.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at henda støða framvegis var galdandi.

Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at av tí at gjørt er av at gera eina nýggja lóg, eru ongar ætlanir um at samráðast eftir galdandi skipan.

10 LØGMÁL

10.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-10)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um frávik. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

14.11.2.07. Lánsafturgjald

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 360 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2003 eru útreiðslurnar 61 t.kr. og inntøkurnar 132 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru útreiðslurnar rentuútreiðslur og reguleringar. Inntøkurnar vóru mettar í hægra lagi, og í 2004 er inntøkujáttanin lækkað.

14.14.3.07. Ítróttavedding

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6.500 t.kr. Minninýtslan er 5.340 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fær Sp/f Ítróttavedding ikki longur eina ávísa lógarfesta upphædd av dansku tipspengunum, men fær tann partin av yvirskotinum, sum kemur frá føroyska spælinum. Áðrenn henda avtala kundi verða skrivað undir, skuldi lógarbroyting verða gjørd í dansku veddingarlógini. Avtalan millum Dansk Tipstjeneste og Føroya Landsstýri varð tí ikki undirskrivað fyrr enn 23. apríl 2004. Tað førdi við sær, at peningurin fyri 2003, 8 mió.kr., varð ikki fluttur Føroya Landsstýri fyrr enn 30. apríl 2004.

10.2 Ítróttavedding (GL 2001/2 02 1-1)

Sambært § 11 í Ll. nr. 34/1999 um "Ítróttavedding v.m." skal Landsstýrið flyta peningin til Sp/f Ítróttavedding. Tá ið sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttaendamál (ÍSF),
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR),
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Í frágreiðingini í februar 2003 vístu vit á, at í nógvum førum verður hesin studningur ikki samskipaður við aðrar studningsjáttanir av sama slag. Burtursæð frá Jólamerkjagrunninum er í flestu førum talan um studningsjáttanir, ið Mentamálaráðið varðar av. Á s. 75-79 í frágreiðingini í februar 2003 vórðu nakrar av hesum játtanum umrøddar.

Samanumtikið var niðurstøða okkara, at á hesum eins og á øðrum málsøkjum kunnu fleiri stovnar/feløg fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum. Í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding. Eftir okkara tykki er tørvur á at bøta um studningsgrundarlagið/-lóggávuna og studningsumsitingina, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði.

Gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan ikki ásettar

Vit hava víst á, at í § 7 B í dansku veddingalógini er ásett, at *"Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision med hensyn til midler, som efter §§ 6 B-6 I fordeles til private organisationer."*

Í Danmark hevur Undervisningsministeriet í Bek. nr. 15/1999 *"om regnskabsaflæggelse for og revision af tilskud til støtte af ungdomsformål"* sett krøv um m.a. fyrisitingargrannskoðan, sum er tann "fíggjarligi kritiski" parturin av grannskoðanini, og fevnir um metingar av, um ein stovnur/felag hevur loyst sínar uppgávur á ein sparnan og virknan hátt, og um úrslitini svara til endamál og fyritreytir fyri játtanunum.

Í Grønlandi hevur heimastýrið í "Landstingslov om fordeling af tips- og lottomidler" ásett, at studningurin skal verða rindaður aftur, um umsøkjarin hevur givið skeivar upplýsingar, og lógin heimilar landsstýrinum at áseta reglur um viðgerð og góðkenning av umsóknum, um treytir fyri studningi, um at útvega upplýsingar, og at áseta reglur um roknskap og grannskoðan.

Løgtingið setti ongar tílíkar reglur í Ll. nr. 34/1999 "um Ítróttavedding v.m.", og heldur ikki er heimilað/álagt landsstýrismanninum at áseta tílíkar reglur. Vanliga áliggur tað landsstýrismanni í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Landsgrannskoðanin hevur vístá, at ein landsstýrismaður hevur mótvegis Løgtinginum ábyrgdina av, at ein játtan á fíggjarlógini, eisini tær sum meginfeløg o.o. umsita, verður umsitin rætt, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt.

Innlendismálaráðið helt í oktober 2004, at slíkar reglur áttu at verið gjørdar fyri Føroyar, men orkan í føroysku fyrisitingini er avmarkað. Innlendismálaráðið heldur, at skulu slíkar reglur gerast í Føroyum, eiga tær at verða gjørdar antin av einum ávísum aðalráð/myndugleika, ella at aðalráðini gera slíkar reglur í felag.

Innlendismálaráðið kunnar samstundis um, at vísandi til stóra skerjing í Innlendismálaráðnum í 2005 hevur verið neyðugt at raðfesta uppgávurnar. Veddingamál eru ikki raðfest í 2005, og tí verður í fyrsta lagi vent aftur til hetta mál í 2006.

Lóg um ítróttavedding hevur virkað í 5-6 ár, og eftir okkara tykki er tað ikki nøktandi, at føroyska heimastýrið ikki hevur ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision"*, og ikki ætlar at taka málið uppaftur fyrr enn í 2006.

10.3 Hin føroyski happadrátturin (GL 2001/2 02 1-1)

Í mong ár hevur nettovinningurin av Happadráttinum í miðal verið um 1,4 mió.kr. og fyrisitingarútreiðslurnar 0,9 mió.kr. Sostatt hevur árliga yvirskotið í miðal ligið um 0,5 mió.kr. Seinastu árini eru færri seðlar seldir, og m.a. tí er yvirskotið minkandi og var í 2000 einans 21 t.kr. Yvirskotið árini 2001 - 2003 var ávikavist 207 t.kr., 171 t.kr. og 101 t.kr. Heldur gongdin fram, er vandi fyri, at Happadrátturin kemur at geva undirskot.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði sett ein arbeiðsbólk at endurskoða veddingarlógina og at evna til uppskot um framtíðar veddingarskipan.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið frá, at arbeiðið hevði ligið stilt, tí umboð Løgmálaráðsins í nevndini var farið í annað starv. Arbeiðið fór at verða tikið upp aftur á vári 2003.

Í desember 2003 greiddi Løgmálaráðið frá, at ráðið hevði fingið fleiri aðrar uppgávur álagdar, tí var arbeiðið ikki tikið uppaftur.

Í apríl 2004 kunnaði Innlendismálaráðið um, at arbeiðið við at endurskoða veddingarlóggávuna fór at verða tikið upp, so skjótt orka var.

10.4 Roknskaparviðurskifti hjá kommununum (GL 1996/2 02 3-1)

Í november 2002 vístu vit á, at sambært § 47 í Ll. nr. 87/2000 "um kommunustýri" kann landsstýrismaðurin *"áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt."* Vit hava spurt, hvørjar reglur eru galdandi, og um landsstýrismaðurin heldur tær vera nøktandi.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið/Innanríkisdeildin frá, at ein leiðbeining frá 1992, um at seta upp kommunalar fíggjarætlanir og roknskapir, var galdandi enn. Innanríkisdeildin helt

ikki viðurskiftini vera nøktandi. Nakrar kommunur hava lagað skipanirnar eftir egnum tørvi, og til ber ikki at samanbera roknskapir ímillum kommunur, og ímillum land og kommunur. Ætlanin var at endurskoða roknskaparverkið hjá kommununum, og við heimild í § 47 í kommunustýrislógini at áseta neyvari og nøktandi reglur á økinum.

Í mars 2004 boðaði Innlendismálaráðið frá, at arbeiðið var ikki byrjað, tí val varð skrivað út. Ætlanin var at taka arbeiðið upp í næstum, tá støða var tikin til arbeiðssetningin.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003) heittu løgtingsgrannskoðararnir í apríl 2004 á landsstýrismannin um at tryggja, at reglurnar um roknskaparviðurskifti o.a. hjá kommununum vórðu endurskoðaðar og dagførdar, og at roknskaparviðurskiftini vórðu samskipað.

Í februar 2005 hevur Innlendismálaráðið kunnað um, at ein arbeiðsbólkur er settur at arbeiða við spurninginum. Ætlanin er við kunngerð at seta í gildi felags reglur fyri allar kommunur viðvíkjandi fíggjarætlan, bókhaldi, ársroknskapi, grannskoðan o.t. Kunngerðin skal eftir ætlan koma í gildi í seinasta lagi 1. januar 2006.

Innlendismálaráðið kunnaði eisini um, at gjørd verður ein felags teknisk loysn. Skipanin skal vera partur av ella tætt knýtt at búskaparskipanum landsins. Kommunurnar skulu fáa í boði antin at bóka beinleiðis, ella at fráboða regluliga til skipanina eftir neyvari ásetingum.